FRÁGREIÐING

latin

LØGTINGSGRANNSKOÐARUNUM

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

MARS 2004

1. INNGANGUR 5

2. FÍGGJARMÁL 7

2.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-9) 7
2.2 FÍGGJARLÓGARMANNAGONGD (GL 1996/1 01-1) 9
2.2.1 TILKNÝTI TIL FÍGGJARLÓG, LANDSROKNSKAP O.A. 9
2.2.2 JÁTTANARSKIPANIN 12
2.3 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI (GL 2000/1 01-9) 12
2.3.1 FRAMLØGA AV LANDSROKNSKAPINUM 12
2.3.2 UM TØRVIN Á AT ENDURSKOÐA ROKNSKAPARKUNNGERÐINA O.A. (1996/1 01 –2) 12
2.3.3 ROKNSKAPARREGLUGERÐIR (GL 1997/1 01-5) 14
2.3.4 OGNARYVIRLIT (GL 2001/1 01-9) 14
2.3.5 TRYGGINGARVIÐURSKIFTI (GL 2001/1 01-9) 14
2.3.6 "EGNAR" BÚSKAPARSKIPANIR - VANTANDI SAMSKIPAN OG STÝRING (GL 2001/1 01-9) 15
2.3.7 TRYGDARKRØV 17
2.3.8 HØLISVIÐURSKIFTI/SMÁAR UMSITINGAREINDIR (GL 2001/1 01-9) 18
2.3.9 LØNARUMSITING Á GJALDSTOVUNI (GL 1998/2 03 1-10) 19
2.3.10 EDV-TRYGD Á GJALDSTOVUNI (GL 1997/2 03 1-6) 20
2.4 FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ (GL 2001/2 03 1-12) 21
2.5 FÍGGJARSTØÐAN 2002 22
2.5.1 GÓÐKENNINGARMANNAGONGDIR 22
2.5.2 AVSTEMMAN AV FÍGGJARSTØÐUNI O.A. 23
2.5.3 HØVUÐSTØL 24
2.5.4 FÍGGJARLIGUR ÚTBÚNAÐUR (GL 2003/3 01 2-4) 27
2.5.5 ÁOGN (GL 2001/3 01 3-6) 29
2.5.6 TØKUR PENINGUR (GL 2001/3 01 4-3) 31
2.5.7 SKULD (GL 2000/3 02 2-2) 33
2.6 UMSITING AV SKATTI, AVGJØLDUM O.A. 34
2.6.1 ROKNSKAPAR- OG TRYGDARREGLUR (GL 1996/2 04 0-2) 34
2.6.2 AVTALA UM KERVISSKOÐAN (GL 1996/2 04 0-2) 35
2.6.3 FRÁGREIÐINGAR UM KERVISSKOÐAN 35
2.6.4 ATGONGD TIL KT-SKIPANIR HJÁ TOLL- OG SKATTSTOVUNI (GL 2000/2 04 1-2) 36
2.6.5 INNKREVJING (GL 2001/2 04 9-1) 36
2.6.6 KASSAEFTIRLIT Á TOLL- OG SKATTSTOVU FØROYA (GL 2003/2 04 0-11) 40
2.6.7 INNFLUTNINGSGJØLD (GL 2001/2 04 5-7) 41
2.6.8 RENTUSKATTUR (GL 2000/2 04 4-2) 41
2.6.9 FRAMLEIÐSLUAVGJALD (GL 1999/2 04 6-6) 42
2.6.10 FERÐAAVGJALD (GL 2002/2 04 6-8) 42
2.6.11 TRYGDARGRUNNURIN (GL 1998/2 09 1-2) 44

3. LØGMANSFYRISITINGIN 45

3.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-9) 45
3.2 SAMSÝNING O.A. TIL LANDSSTÝRISMENN (GL 1998/2 02 9-2) 45
3.3 MENNINGARHJÁLP (GL 2003/2 02 1-2) 46
3.4 NORD ATLANTISK BRYGGE (GL 2003/2 02 1-2) 47
3.5 ALMENT UM STUDNINGSLÓGGÁVU OG STUDNINGSUMSITING (GL 1998/2 02 9-2) 48

4. FISKIVINNA 51

4.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-9) 51
4.2 SKIPAEFTIRLITIÐ (GL 2003/2 14 1-5) 52
4.3 FISKIVEIÐIEFTIRLIT/TYRLUTÆNASTA (GL 2000/2 14 2-2) 53
4.4 FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ (VAKTAR- OG BJARGINGARTÆNASTAN) (GL 2003/2 14 2-3) 55
4.5 LØNJAVNINGARSTOVAN (GL 2000/2 14 4-5) 55
4.5.1 EDV-VIÐURSKIFTI 56
4.5.2 MINSTALØN/DAGSTUDNINGUR 58
4.5.3 MÁNAÐARLIGUR MINSTAFORVINNINGUR 59
4.5.4 SJÚKRATRYGD 59
4.5.5 FLUTNINGSSTUÐUL 60
4.5.6 TELEFONSTUÐUL 61
4.6 STUDNING TIL GRANSKING, MENNING OG ROYNDIR (GL 2003/2 14 4-8) 62
4.6.1 FISKIVINNUROYNDIR 62
4.6.2 VARÐVEITAN AV FJØLBROYTTUM FISKIFLOTA 64
4.6.3 GRANSKINGARÆTLANIR 64
4.6.4 FISKIVINNUMENNING Á LANDI 65
4.6.5 VIÐMERKINGAR 66

5. VINNUMÁL O.A. 67

5.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-9) 67
5.2 VANTANDI STJÓRNAN AV KUNNINGARTRYGD (GL 2001/1 02 0-2) 72
5.3 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (GL 2000/2 03 9-9) 74
5.4 HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN (GL 1997/2 08 2-1) 75
5.5 ARBEIÐSEFTIRLITIÐ (GL 1997/2 09 2-1) 76
5.6 ALMENNAR ROYNDIR OG RÁÐGEVING (GL 1998/2 13 2-1) 78
5.7 FERÐARÁÐ FØROYA (GL 1996/2 15 2-1) 78
5.8 TYRLUTÆNASTAN (GL 1998/2 15 3-2) 79
5.9 ENDURGJALDSGRUNNUR ALIVINNUNNAR (GL 1998/2 15 3-2) 79
5.10 FJARSKIFTISEFTIRLITIÐ (GL 2003/2 16 5-2) 79
5.11 BILEFTIRLITIÐ (GL 2003/2 16 9-6) 79

6. ÚTBÚGVING OG GRANSKING 81

6.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-9) 81
6.2 VANTANDI REGLUR FYRI MANNAGONGDUM Á ROKNSKAPARØKINUM 83
6.3 FÓLKASKÚLIN (GL 1996/2 10 2-1) 83
6.4 MUSIKKSKÚLASKIPANIN (GL 2001/2 10 9-5) 84
6.5 FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING (GL 2001/2 10 9-7) 84
6.6 LANDSMIÐSTØÐIN FYRI UNDIRVÍSINGARAMBOÐ (GL 1999/2 10 6-4) 85
6.7 SKÚLABÓKAGRUNNURIN (GL 2000/2 10 6-5) 85
6.8 BÓKAMIÐSØLAN (GL 2000/2 10 6-5) 86
6.9 EFTIRÚTBÚGVING AV YRKISLÆRDUM (GL 2000/2 10 1-2) 86
6.10 STUDNINGUR TIL LÆRUPLÁSS (GL 2003/2 10 1-3) 87
6.11 ÚTGERÐ TIL YRKISSKÚLAR (GL 2003/2 10 1-4) 88
6.12 FISKIVINNUSKÚLIN (GL 2003/2 10 3-7) 88
6.13 MIÐNÁMSSKÚLIN Í SUÐUROY (GL 2000/2 10 3-5) 88
6.14 YRKISSKÚLAR OG AÐRIR SKÚLAR (GL 2000/2 10 3-4) 88

6.15 KLAKSVÍKAR SJÓMANSSKÚLI OG FØROYA SJÓMANSSKÚLI (GL 2000/2 10 4-5) 89
6.16 MASKINMEISTARASKÚLIN (GL 2003/2 10 4-8) 90
6.17 FØROYA LÆRARASKÚLI (GL 2000/2 10 4-5) 90
6.18 UNDIRVÍSINGARSKYLDA HJÁ SKÚLASTJÓRUM (GL 2000/2 10 4-5) 92
6.19 ÚTBÚGVINGARSTUÐUL OG -LÁN (GL 2000/2 10 9-6) 92
6.20 FØROYA LANDSBÓKASAVN (GL 2003/2 11 2-12) 94
6.21 LISTASAVN FØROYA (GL 2002/2 11 2-8) 94
6.22 MENTANARGRUNNUR LANDSINS (GL 2001/2 11 9-3) 96
6.23 STUÐUL TIL MENTAN OG ÍTRÓTT (GL 2000/2 11 9-1) 97
6.24 LØGTINGSLÓG UM VIÐGERÐ AV PERSÓNSUPPLÝSINGUM (GL 2000/2 10 1-2) 98

7. OLJUMÁL O.A. 99

7.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-9) 99

8. ALMANNAMÁL 101

8.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-9) 101
8.2 ALMANNASTOVAN (GL 2002/2 07 1-2) 106
8.3 EDV-VIÐURSKIFTI Á ALMANNASTOVUNI (GL 2002/2 07 1-2) 108
8.4 ALMANNAPENSJÓNIR (GL 2001/2 07 2 -6) 113
8.4.1 GONGDIN HIGARTIL 113
8.4.2 GRANNSKOÐAN Í 2003 114
8.4.3 SERLIG PERSÓNLIG VIÐBÓT 117
8.4.4 GRANNSKOÐAN AV EINSTØKUM MÁLUM 117
8.4.5 VIÐMERKINGAR FRÁ KÆRUNEVNDINI 118
8.4.6 VIÐMERKINGAR HJÁ ALMANNASTOVUNI 118
8.5 ANSINGARSAMSÝNING (GL 2002/2 07 3-7) 119
8.6 FORSORGARÚTREIÐSLUR 120
8.7 BARNAFORSORGARÚTREIÐSLUR (GL 2002/2 07 3-3) 122
8.8 SAMDØGURSSTOVNURIN RÓKIN (GL 2000/2 07 3-5) 124
8.9 DAGPENINGAÚTREIÐSLUR (GL 2000/2 07 3-6) 125
8.9.1 VANTANDI KUNNGERÐIR OG LEIÐBEININGAR FRÁ ALMANNAMÁLARÁÐNUM 125
8.9.2 JOURNALVIÐURSKIFTI 125
8.9.3 JÁTTANARSKRIV 126
8.9.4 UPPRITABLØÐ OG SKJALPRÓGV FYRI ÚTROKNINGUM 126
8.9.5 INNTØKUGRUNDARLAGIÐ 126
8.9.6 ÚTROKNING AV DAGPENINGI 126
8.9.7 INNTØKUGRUNDARLAGIÐ OG AÐRAR INNTØKUR Í DAGPENINGATÍÐARSKEIÐINUM 126
8.9.8 ÚTROKNINGARGRUNDARLAG SAMBÆRT § 8, STK. 3 127
8.9.9 DAGPENINGAHÁMARK 127
8.9.10 INNKREVJING FRÁ ARBEIÐSGEVARUM 127
8.9.11 MÁLSVIÐGERÐ Í SAMBANDI VIÐ SJÁLVBODNA TRYGGING 127
8.9.12 GJALD TIL SJÁLVBODNU TRYGGINGINA 128
8.9.13 UPPTØKUTREYTIR OG STRIKAN ÚR SKIPANINI 128
8.9.14 EDV-SKIPANIN 128
8.9.15 INNANEFTIRLIT OG INNANHÝSIS REGLUR 129
8.10 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (GL 2000/2 07 2-5) 130
8.11 STUÐUL TIL UPPIHALDSPENING (GL 2001/2 07 5-2) 131
8.12 HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN (GL 2000/2 07 4-8) 132

8.12.1 BYGNAÐUR/STARVSFÓLK 132
8.12.2 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI O.A. 132
8.12.3 UMSITING AV ÚTREIÐSLUM 133
8.12.4 FÍGGJARSTØÐA 133
8.12.5 EDV-SKIPANIR/KT-TRYGD 133
8.12.6 FYRISITING AV VØRUGOYMSLU O.A. 134
8.12.7 LÁN/STUÐUL TIL AT KEYPA AVLAMISBILAR 134
8.12.8 VEKTGJALD (VEGSKATTUR) 135
8.12.9 SKRÁSETINGARGJALD 135
8.12.10 LÁN TIL BÚSTAÐARBROYTINGAR 135
8.12.11 ALMENT UM HEIMILDARSPURNINGAR 137
8.13 HEIMARØKTIN (GL 2002/2 07 4-12) 137
8.13.1 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI OG ONNUR VIÐURSKIFTI 138
8.13.2 GJALD FYRI UMLÆTTING 138
8.13.3 GJALD FYRI HEIMAHJÁLP 139
8.13.4 BÍÐILISTI 140
8.13.5 STEVNUMIÐ FYRI HEIMARØKTINA 140
8.13.6 ARBEIÐSREGLUGERÐ 140
8.13.7 ÁRSFRÁGREIÐING 140
8.13.8 LØNARUMSITING 140
8.13.9 SERLIGAR VIÐMERKINGAR UM VÁGA/NORÐSTREYMOYAR ØKI 142
8.13.10 SERLIGAR VIÐMERKINGAR UM ELDRARØKTINA Í SANDOYNNI 142
8.14 SERFORSORGIN (GL 2002/2 07 4-11) 142
8.14.1 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI OG ONNUR VIÐURSKIFTI 143
8.14.2 KUNNGERÐIR/RUNDSKRIV 143
8.14.3 JAVNAN AV UPPHÆDDUM TIL PERSÓNLIGAN TØRV O.A. 144
8.14.4 STUÐUL FRÁ HAPPADRÁTTARGRUNNINUM 144
8.14.5 LØNARUMSITING 144
8.15 ÚTREIÐSLUR VIÐV. FØROYINGUM Á STOVNI Í DANMARK O.A. (GL 2002/2 07 4-11) 145
8.16 ELLIS- OG RØKTARHEIM O.A. (GL 2004/2 07 4 – 14) 146
8.17 VIÐMERKINGAR 148

9. HEILSU- OG ÍBÚÐARMÁL 151

9.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-9) 151
9.2 BLÁKROSSHEIMIÐ (GL 1996/2 08 4-1) 152
9.3 HEILBRIGDIÐ (GL 1996/2 08 4-1) 153
9.4 KOMMUNULÆKNA- OG SKÚLALÆKNASKIPANIN (GL 2001/2 08 4-2) 154
9.5 SJÚKRAKASSAR (GL 2001/2 08 3-1) 155

10. SJÁLVSTÝRISMÁL/LØGMÁL 159

10.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL (GL 2003/1 04 1-9) 159
10.2 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI HJÁ KOMMUNUNUM (GL 1996/2 02 3-1) 159
10.3 HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTURIN (GL 2001/2 02 1-1) 160
10.4 ÍTRÓTTAVEDDING (GL 2001/2 02 1-1) 160

1. INNGANGUR

Henda frágreiðing verður latin løgtingsgrannskoðarunum vísandi til § 12 í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." Í lógini er ásett, at áðrenn frágreiðingin verður latin løgtingsgrannskoðarunum, skal hon verða løgd fyri landsstýrismannin til viðmerkingar, uttan so at brævaskifti áður hevur verið um tey mál, sum umrødd eru í frágreiðingini. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismanninum um tiltøk og ætlanir, sum frágreiðingin hevur elvt til, skulu verða tiknar við í frágreiðingina.

Sambært lógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

- *at* allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- *at* eingin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,
- *at* roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,
- *at* hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um,
- *at* roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Fyri hvørt málsøki verður í frágreiðingini víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um frávik-/meirnýtslu, og vit hava víst á, har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava eisini tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Í frágreiðingini verður tikið samanum úrslitið av grannskoðanini á stovnum og skipanum á hvørjum málsøki sær. Seinasta frágreiðing, ið varð latin løgtingsgrannskoðarunum, er frá februar 2003. Í frágreiðingini verður eisini víst á, í hvønn mun viðurskifti, ið tá vórðu umrødd, eru komin í rættlag.

Tórshavn, 26. mars 2004

Leivur Harryson

2. FÍGGJARMÁL

2.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-9)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Meirnýtsla

Sambært landsroknskapinum er á hesum málsøki eingin meirnýtsla av týdningi.

Minninýtsla

Á flestu kontum er bert talan um smærri frávik.

Lønarkarmur

Á høvuðskontum niðanfyri vísir roknskapurin, at farið er upp um ásetta lønarkarmin.

(t.kr.)

Konta	Navn	Lønarkarmur	Roknskapur	*Munur*
3.11.1.36.	Sáttmálaviðurskifti (rakstrarjáttan)	0	282	*282*
3.15.1.04.	Toll-& Skattstova Føroya (rakstrarjáttan)	45.297	47.027	*1.730*

Um frávikið í lønarkarminum hjá Toll- og Skattstovu Føroya hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at inntøkur av avgreiðslugjaldi til tolleftirlitsfólk, sum áður vórðu bókaðar undir lønarkarminum, nú verða bókaðar undir rakstrinum. Hetta ger munin í lønarkarminum, men ávirkar ikki samlaða raksturin hjá stovninum. Landsstýrismaðurin hækkaði 13. desember 2002 lønarkarmin, men hækkanin varð ikki skrásett í FSL-skipanini.

Annað

3.35.1.05. FAS-endurgjald

Á eykajáttanarlógini fyri november 2002, sum varð samtykt 19. desember 2002, varð útreiðslujáttanin hækkað 19 mió.kr. og inntøkujáttanin hækkað 5,8 mió.kr., svarandi til eina hækking góð 70% netto.

Vit hava víst á, at tá ið ein so stór umbøn um eykajáttan kemur so seint á árinum, eru nakrar av útreiðslunum, sum játtanin var ætlað til, longu hildnar. Sambært § 43, stk. 2, í stýrisskipanarlógini má eingin útreiðsla verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður.

Í mars 2004 hevur Fíggjarmálaráðið greitt frá, at eitt lutfalsliga stórt skip kom í FAS-skipanina síðst í árinum 2001. Ivi var um, hvørt skipið kom at halda fram í FAS, tí talan var um, at tað longu skuldi úr aftur skipanini í mai 2002; men tað vísti seg ikki at halda. Í september/oktober varð gjørt vart við í Fíggjarmálaráðnum, at játtanin, sum er lógarbundin, ikki kom at halda, men endaliga eykajáttanin náddi ikki at koma við fyrr enn á eykajáttanarlógini í november 2002.

Inntøkur

Talvurnar niðanfyri vísa játtan á fíggjarlóg og roknskapartøl fyri inntøkur í 2002.

(mió.kr.)

	20.52.1 Skattainntøkur	Játtanin	Roknskapur	Meir-/minni
01	Vanligur landsskattur	1.444,0	1.415,3	-28,7
06	Kolvetnisskattur, persónar	6,0	5,8	-0,2
07	Felagsskattur	116,0	116,0	-
08	Kolvetnisskattur, feløg	14,0	14,4	0,4
10	Vinningsbýtisskattur	40,0	48,3	8,3
13	Avgjald av kapitaleftirlønum	10,0	8,8	-1,2
19	Rentuskattur	35,0	33,5	-1,5
25	Arvaavgjald	3,0	4,4	1,4
28	Gjald til barsilsskipan	28,0	28,8	0,8
	Tilsamans	**1.696,0**	**1.675,3**	**-20,7**

Størstu frávikini eru "Vanligur landsskattur" og "Vinningsbýtisskattur", sum eru ávikavist 28,7 mió.kr. lægri og 8,3 mió.kr. hægri enn ætlað. Metti persóns- og felagsskatturin frá kolvetnisvinnuni var á fíggjarlógini lagdur saman við vanliga landsskattinum. Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 vórðu hesir skattir býttir sundur á ávikavist høvuðskontu 20.52.1.06. "Kolvetnisskattur, persónar" og høvuðskontu 20.52.1.08. "Kolvetnisskattur, feløg".

(mió.kr.)

	20.52.2 Avgjøld og tollur	Játtan	Roknskapur	Meir-/minni
01	Meirvirðisgjald	900,0	924,3	24,3
04	Tollavgjald	30,0	30,0	-
07	Punktgjald	160,0	167,9	7,9
10	Lønhæddargjald	11,0	10,7	-0,3
13	Brennioljugjald	65,0	65,1	0,1
16	Framleiðsluavgjald	16,0	17,5	1,5
19	Skrásetingargjald	88,0	80,3	-7,7
22	Vegskattur (vektgjald)	46,0	45,4	-0,6
25	Ferðaavgjald	10,0	10,5	0,5
28	Umhvørvisavgjald á smyrjiolju	2,5	2,1	-0,4
	Tilsamans	**1.328,5**	**1.353,8**	**25,3**

Størstu frávikini eru "Meirvirðisgjald" og "Punktgjald", sum eru ávikavist 24,3 og 7,9 mió.kr. hægri enn ætlað.

(mió.kr.)

	20.52.3 Ymiskar inntøkur	Játtan	Roknskapur	Meir-/minni
01	Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992	47,5	48,5	1,0
04	Útluting frá almennum partafeløgum	3,0	3,0	-
10	Aðrar inntøkur	5,0	6,4	1,4
	Tilsamans	**55,5**	**57,9**	**2,4**

Upprunaliga var eingin játtan á høvuðskontu 20.52.3.04. "Útluting frá almennum partafeløgum." Á eykajáttanarlógini fyri september 2002 varð kontan stovnað við einari játtan 3 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til lógina eigur landið allan partapeningin, 60 mió.kr., í P/F Føroya Tele. Sambært ársroknskapi felagsins fyri 2001 útlutar felagið vinningsbýti 3 mió.kr.

(t.kr.)

	20.52.3.10 Aðrar inntøkur	Játtan	Roknskapur	meir-/minni
01	Loyvisgjald	50	-	-50
02	Skeinkiloyvi, avgjald	65	60	-5
04	Navnaprógv	10	18	8
05	Bøtur	185	691	506
06	Happadrátturin, avgjald	200	-	-200
07	Burturlutingargjald	1.000	941	-59
09	Løggilding av el-innleggjarum, avgjald	70	98	28
10	Avgj. av vinningi v/sølu av virðisbrøvum	1.500	2.259	759
11	Víddargjald	1.920	2.107	187
60	Óvanligar inntøkur	-	238	238
	Tilsamans	**5.000**	**6.412**	**1.412**

Størstu frávikini eru "Avgjald av vinningi v/sølu av virðisbrøvum" og "Bøtur", sum eru ávikavist 759 t.kr. og 506 t.kr. hægri enn ætlað. "Óvanligar inntøkur" verður nýtt til óvanligar inntøkur og útreiðslur, sum ikki kunnu verða bókaðar aðrastaðni.

2.2 Fíggjarlógarmannagongd (GL 1996/1 01-1)

2.2.1 Tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap o.a.

Síðani fyrst í nítiárunum hava Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir gjørt vart við, at virksemið hjá fleiri almennum stovnum/grunnum er ikki við á fíggjarlógini, og at grundleggjandi ásetingar í stýrisskipanarlógini um fíggjarlóg, roknskap og grannskoðan eru ikki hildnar. Niðanfyri verður í stuttum kunnað um gongdina í málinum seinastu árini.

Í 1998 tók eisini løgmaður málið upp, og í mars 1999 heitti hann á landsstýrismannin í fíggjarmálum um at seta ein arbeiðsbólk at greiða ivaspurningarnar. Arbeiðsbólkurin skuldi verða liðugur fyri árslok 1999.

Í februar 2000 boðaði landsstýrismaðurin frá, at tað hevði ikki eydnast honum at manna arbeiðsbólkin. Í samráð við løgmann hevði landsstýrismaðurin tí gjørt av at biðja fólk í umsitingini gera arbeiðið.

Í februar 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið var ikki liðugt. Ein arbeiðs- og tíðarætlan var gjørd, og eftir ætlan skuldi arbeiðið verða liðugt fyri summarfrítíðina 2001. Teir grunnar/stovnar, ið áttu við á fíggjarlógini, skuldu verða settir á fíggjarlógina fyri 2002.

Arbeiðið varð nakað seinkað, men í november 2001 læt Fíggjarmálaráðið úr hondum eitt álit "um landsstovnar og –grunnar, tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti".

Niðurstøðan í álitinum er, at tað er í stríð við stýrisskipanarlógina, tá ið fleiri landsstovnar og –grunnar ikki verða tiknir við á fíggjarlóg og í landsroknskapin, og eisini er tað í stríð við stýrisskipanarlógina, tá ið roknskapirnir hjá hesum grunnum/stovnum ikki verða lagdir fyri Løgtingið.

Álitið vísir á, hvussu trupulleikarnir kunnu verða loystir. Fyri flestu landsstovnar og –grunnar merkir tað, at alt virksemið verður at taka við á fíggjarlógina og í landsroknskapin. Tó er møguligt í heilt serligum førum at hava landsvirksemi uttanfyri fíggjarlógina. Í teimum førum skal roknskapurin tó altíð verða lagdur fyri Løgtingið sambært § 45, stk. 4, í stýrisskipanarlógini.

Í uppskoti til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001) vórðu niðurstøðurnar í álitinum frá Fíggjarmálaráðnum umrøddar, og Løgtingið samtykti 12. mars 2002 at heita á løgmann um at síggja til, at stýrisskipanarlógin í framtíðini fór at verða hildin, soleiðis:

at allir stovnar/grunnar, sum skuldu við á fíggjarlógina, koma við í fíggjarlógina 2003,

at allir almennir roknskapir, sum koma undir § 45, stk. 4, verða lagdir fyri tingið fyri 1. juli 2002, galdandi fyri roknskapir frá fíggjarárinum 2001.

Í juni 2002 kunnaði løgmaður um, at álitið frá Fíggjarmálaráðnum varð lagt fram og gjøgnumgingið á landsstýrisfundi 11. desember 2001. Har varð avrátt at gera neyðugar broytingar samsvarandi álitinum. Løgmaður vísti eisini til eitt yvirlit yvir stovnar/grunnar, sum skuldu við á fíggjarlógina 2003.

Í skrivi til løgmann 15. november 2002 gjørdu vit vart við, at eingin av stovnunum/-grunnunum, sum vórðu nevndir í yvirlitinum, vóru við í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003, og at heldur eingin lógarbroyting var samtykt, sum heimilaði, at virksemið hjá teimum varð hildið uttanfyri fíggjarlógina. Vit vístu á, at okkum kunnugt vórðu ikki allir roknskapir lagdir fyri tingið samsvarandi ásetingunum í stýrisskipanarlógini. Heitt varð á løgmann um at kunna seg neyvari um hesi viðurskifti.

Í svari 12. desember 2002 helt løgmaður, at støðan als ikki var nøktandi. Tað var serliga harmiligt, tá ið Fíggjarmálaráðið sjálvt longu í november 2001 hevði gjørt vart við, at mannagongdirnar vóru í stríð við stýrisskipanarlógina. Fyri at hetta álvarsmál ikki skuldi fara aftur við borðinum, hevði tað, sum áður greitt frá, verið fyri á landsstýrisfundi í desember 2001. Har varð gjørt av, at hvør landsstýrismaður beinanvegin skuldi gjøgnumganga landsstovnar á sínum øki, gera neyðugu broytingarnar samsvarandi álitinum og greiða møguligar ivaspurningar í samráð við Fíggjarmálaráðið. Og tá ið løgmaður í juni 2002 skrivliga hevði mint landsstýrismenn á málið, helt hann seg hava alla grund til at halda, at teir fóru at greiða viðurskiftini uttan drál.

Við skrivinum 12. desember 2002 var eitt yvirlit yvir, hvussu arbeitt varð við at finna fram til, um landsstovnar/-grunnar skuldu við á fíggjarlógina, ella um teir skuldu hava lógarheimild at liggja uttanfyri. Arbeiðsbólkar arbeiddu við heimildarspurningunum. Sambært Løgmálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum miðaðu arbeiðsbólkarnir ímóti at fáa viðurskiftini hjá summum grunnum endaliga avgreidd í tingsetuni. Viðurskiftini hjá øðrum grunnum fóru eftir ætlan at verða liðug at avgreiða á ólavsøku 2003. Løgmaður hevði tikið hesa arbeiðsætlan til eftirtektar. Vísandi til tey serliga truplu viðurskifti, tá ið talan er um grunnar, sum eisini arbeiðsmarknaðurin varðar av, helt løgmaður seg hava tikið stig til at loysa hetta álvarsmál forsvarliga.

Málið varð eisini viðgjørt á fundi við løgtingsgrannskoðararnar 31. januar 2003, har løgmaður m.a. vísti á:

> *"at ymiskir arbeiðsbólkar arbeiða við at greiða heimildarspurningarnar. Sambært Løgmálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum verður miðað ímóti at viðurskiftini viðv. nøkrum av grunnunum verða endaliga avgreidd í hesi tingsetuni. Aðrir arbeiðsbólkar verða ætlandi lidnir at greiða heimildarspurningarnar til ólavsøku 2003. Løgmaður helt, at tað var umráðandi, at arbeiðið ikki steðgaði upp, hóast løgtingsgrannskoðararnir valdu at bíða við at leggja uppskotini til samtyktar fyri tingið. Løgmaður helt, at í seinasta lagi 1. september 2003 mátti landsstýrið taka endaliga støðu til ognarrætt og framtíðar tilknýti til fíggjarlóg og landsroknskap, soleiðis at neyðugar broytingar í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004 og aðrar lógarbroytingar kunnu verða framdar fyri árslok 2003".*

Henda tíðarætlan helt ikki, og Landsgrannskoðanin heitti á Løgmansskrivstovuna um at greiða frá gongdini í málinum. Í januar 2004 kunnaði Løgmansskrivstovan um, at miðfyrisitingin hevur arbeitt við málinum í 2003. Arbeiðið hevur verið skipað í samstarvi millum stjórnarráðini, har Løgmálaráðið og Fíggjarmálaráðið, hvør á sínum fakøki, hava ráðgivið um møguligar loysnir. Uppskot til loysnir vórðu løgd fyri á landsstýrisfundi 17., 18. og 26. november 2003.

Niðurstøðurnar frá hesum landsstýrisfundum er lýstar í talvuni niðanfyri. Málið kom tó ikki víðari, av tí at val varð útskrivað 5. desember 2003.

STØÐAN FYRI ÁVÍSAR LANDSSTOVNAR/GRUNNAR ULTIMO NOVEMBER 2003

	Landsstovnur/grunnur	**Niðurstøða frá landsstýrisfundum 17. & 18. november 2003**
Heilsumál	– Húsalánsgrunnurin – Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin – Íbúðagrunnurin	Verða uttanfyri fíggjarlógina, men partar av landsroknskapinum. Landsstýrismaðurin verður alt fyri eitt at gera uppskot til neyðuga lógarbroyting hesum viðvíkjandi, áðrenn farið verður undir at endurskoða hesar grunnar í síni heild.
	– Apoteksgrunnurin	Verður varðveittur á fíggjarlógini. Landsstýrismaðurin verður alt fyri eitt at broyta lógina um apoteksverkið, so hon samsvarar við lógina um alment roknskaparhald.
Almannamál	– Sjálvsognarstovnurin Sambýli	Verður niðurlagdur sambært næstu eykajáttanarlóg.
	– Grunnurin ætlaður brekaðum (Happadráttargrunnurin)	Verður niðurlagdur sambært næstu eykajáttanarlóg. Landsstýrismaðurin í løgmálum verður alt fyri eitt at broyta lógina, so at avlopið frá Happadráttinum verður latið ÍSF (1/3) og MBF (2/3).
Fíggjarmál	– Føroya Realkreditstovnur – Landsbanki Føroya	Verða uttanfyri fíggjarlógina, men partar av landsroknskapinum. Lógaruppskot eru send til politiskt ummæli.
	– Trygdargrunnur fyri avreiðingar og lønir	Málið er loyst. Hevur verið á fíggjarlógini síðani 2003.
Fiskivinnumál	– Forskotsgrunnur fiskiflotans	Verður uttanfyri fíggjarlógina, men partur av landsroknskapinum. Lógaruppskot er sent til politiskt ummæli.
Vinnumál	– Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin – Frítíðargrunnurin – Arbeiðsloysistryggingin	Arbeiðið at fáa greiðu á formligu viðurskiftunum, ið skuldi verða liðugt á ólavsøku 2003, verður ikki liðugt fyrr enn fyrst í desember 2003. Landsstýrismaðurin verður at taka neyðug stig til tess at loysa heimildartrupulleikarnar alt fyri eitt.
	– Jólamerkjagrunnurin	Verður skipaður á privatrættarligum grundarlagi – púra uttan fyri almenna høpi.
	– Jarðargrunnurin – Grunnurin f. vakstrarhús og grønmetisframleiðslu	Lógaruppskot um Búnaðargrunn er lagt fyri Løgtingið. Hann kemur í staðin fyri Jarðargrunnin og Grunnin fyri Vakstrarhús og grønmetisframleiðslu.
	– Vinnuframagrunnurin	Verður uttanfyri fíggjarlógina, men partur av landsroknskapinum. Landsstýrismaðurin verður alt fyri eitt at evna til hóskandi lógaruppskot hesum viðvíkjandi.
	– Endurgjaldsgrunnur alivinnunnar	Verður niðurlagdur, tá sakarmál móti honum eru avgreidd.
Mentamál	– Føroya Brandskúli – Mentanargrunnur Landsins – Granskingargrunnurin	Verða verandi sum partur av fíggjarlógini. Landsstýrismaðurin fekk ikki undirtøku fyri at leggja teir uttanfyri fíggjarlógina.
	– Fróðskaparsetur Føroya	Lógin verður alt fyri eitt at broyta, so at Fróðskaparsetur Føroya verður vanligur stovnur á fíggjarlógini. Sjálvsognarstovnsparturin av virkseminum hjá Setrinum verður skipaður á privatrættarligum grundarlagi – púra uttan fyri almenna høpi.
	– Bókamiðsølan	Landsstýrismaðurin verður at skipa grunnin sum alment partafelag. Hóskandi lógaruppskot verður at gera alt fyri eitt.

2.2.2 Játtanarskipanin

Á heysti 1999 var nógv samskifti millum Landsgrannskoðanina, umsitingina hjá Løgtinginum og Fíggjarmálaráðið um fleiri grundleggjandi ivamál við verandi játtanarskipan. Semja var um, at tað var bráðneyðugt at broyta játtanarskipanina á ávísum økjum, soleiðis at endurskoðaðar reglur kundu koma í gildi frá 2000. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum handaði síðani Fíggjarnevndini bráðfeingis endurskoðaðu reglurnar at viðgera. Fíggjarnevndin tók undir við teimum, og tær vórðu tiknar við í "dagførdu" fíggjarlógina.

Í januar 2000 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Fíggjarmálaráðið ætlaði í 2000 enn einaferð at fara ígjøgnum skipanina, fyri at gera sítt til at fáa greiðu á ivaspurningunum, sum Landsgrannskoðanin og umsitingin hjá Løgtinginum høvdu víst á.

Í februar 2001 segði landsstýrismaðurin, at Fíggjarmálaráðið hevði ikki í 2000 gjøgnumgingið játtanarskipanina úr enda í annan, men hevði á fundi saman við løgfrøðingum hjá Løgtinginum viðgjørt, um rættari hevði verið at gjørt játtanarskipanina til lóg. Komið varð ikki til nakra niðurstøðu, og løgfrøðingarnir vóru heldur ikki á einum máli, men vístu á, at tað var upp til landsumsitingina at gera av. Í játtanarskipanini í fíggjarlógaruppskotinum 2002 vórðu smærri broytingar gjørdar.

Í januar 2002 greiddi Fíggjarmálaráðið frá, at arbeitt fór at verða í 2002 við at dagføra játtanarskipanina og loysa ivamálini, ið eftir vóru.

Í desember 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at tíðarætlanin fór ikki at halda, og at eitt forum umboðandi fíggjarfulltrúarnar í aðalráðunum arbeiddi við at dagføra játtanarskipanina. Miðað varð ímóti, at arbeiðið skuldi verða liðugt á vári 2003.

Í januar 2004 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at tíðarætlanin helt ikki, av tí at tey høvdu arbeitt við øðrum verkætlanum og fíggjarlógini. Á heysti 2003 varð tó ferð sett á arbeiðið í Fíggjarmálaráðnum og á Føroya Gjaldstovu, og í desember 2003 varð uppskot sent Løgmálaráðnum til viðmerkingar. Síðani er ætlanin at senda uppskotið til hoyringar hjá øllum aðalráðum. Málið var, at dagførda játtanarskipanin skuldi verða løgd fram saman við nýggja uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2004. Landsgrannskoðanini kunnugt, helt henda tíðarætlan heldur ikki.

2.3 <u>Roknskaparviðurskifti</u> (GL 2000/1 01-9)

2.3.1 Framløga av landsroknskapinum

Sambært § 45, stk. 1, í stýrisskipanarlógini og sambært § 1, stk. 1, í Ll. nr. 33/1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." skal Landsstýrið, innan juni mánaður er liðin, leggja fyri Løgtingið samlaða landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár. Landsroknskapurin fyri fíggjarárið 2002 varð lagdur fyri Løgtingið 1. mai 2003.

Sambært § 45, stk. 4, í stýrisskipanarlógini skulu reglurnar í stk. 1-3 eisini verða nýttar fyri roknskapir hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap.

2.3.2 Um tørvin á at endurskoða roknskaparkunngerðina o.a. (1996/1 01 –2)

Vit hava áður í frágreiðingum mælt Fíggjarmálaráðnum til at endurskoða roknskaparkunngerðina. Í 2003 hava vit aftur haft eitt ávíst samskifti við Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovuna um spurningin. Vit hava m.a. vístá:

at í ummælisskrivi okkara til Fíggjar- og Búskapardeildina 14. mai 1996, um uppskotið til roknskaparkunngerð, høvdu vit viðmerkingar/spurningar í 39 punktum. Nakrir ógreidleikar, sum vit vístu á, vórðu ikki greiddir í endaligu kunngerðini. Summar ógreiðar orðingar vórðu standandi. Í øðrum førum vórðu stykki ella heilar greinar strikaðar - í summum førum, tí stundir vóru ikki at taka endaliga støðu til viðurskifti, m.a. tí bygnaðurin í landsumsitingini tá var ógreiður - í øðrum førum, tí ásetingar ikki tóktust viðkomandi,

at vit óformliga umrøddu broytingar í kunngerðini, m.a. tá uppskotið til rundskriv um roknskaparreglugerðir varð evnað til,

at danska kunngerðin, sum var fyrimynd fyri føroysku kunngerðini, og eisini danska lógin/kunngerðin um bókhald á vinnuliga økinum seinni eru broyttar ávikavist í 2001 og í 1998/1999,

at umboð fyri Fíggjarmálaráðið hava umrøtt at broyta roknskaparkunngerðina, so hon kom at hóska betur til m.a. landsstovnar/-grunnar við leysari tilknýti til fíggjarlóg/landsroknskap,

at í § 7 í roknskaparkunngerðini eru ásetingar um "innanhýsis roknskapir", sum skulu geva grundarlag fyri at lýsa endamál, virksemi, framleiðslu, produktivitet o.a. Í tí sambandinum skulu í hóskandi mun verða skrásettar nøgdarupplýsingar um tað, stovnurin avrikar og um tilfeingisnýtslu (t.d. tíðarnýtslu hjá starvsfólkum) o.a.

Fíggjarmálaráðið hevur heimild at áleggja stovnum at nýta innanhýsis roknskapir og at tilskila, hvat tílíkir roknskapir skulu fevna um. Tað hevur Fíggjarmálaráðið ongantíð gjørt, og í roknskaparrundskrivinum er einki ásett um "innanhýsis roknskapir".

Er ætlanin við einari játtan, endamálið, uppgávan, virksemið o.a. lýst, hevur tað við sær, at raksturin á stovninum verður málsøkin og effektivur. Ofta eru hesi viðurskifti ikki nóg væl lýst. Vit hava víst á, at undir viðmerkingum til fíggjarlógina er stórur tørvur á at allýsa fleiri hugtøk, ikki minst "virksemisyvirlit",

at eftir okkara tykki er á flestu stovnum tørvur á einum virknari innaneftirliti (í víðari merking), sum umframt at tryggja, at roknskapurin er rættur og álítandi, eisini skal hava til endamáls at tryggja, at virksemið/raksturin er málsøkin og effektivur, og at lógir og reglur verða hildnar. Her kundi COSO-frágreiðingin/INTOSAI-vegleiðingin givið okkum íblástur og vegleiðing, eins og hon hevur givið øðrum, t.d. norska fíggjarmálaráðnum, ið hevur endurskoðað sítt "reglement for økonomistyring". Ein dagførd/broytt roknskaparkunngerð kundi verið nýtt bæði sum kveikari og koyril til at seta í verk eitt tílíkt átak,

at støða má verða tikin til, hvussu regluverkið um KT-trygd skal verða sett í verk, t.d. um tað skal vera sum kunngerð ella sum rundskriv, og hvør landsstýrismaður/aðalráð skal hava ábyrgdina av reglunum um KT-trygd. Tað kundi verið Fíggjarmálaráðið og ikki Vinnumálaráðið, ið formliga setti út í kortið. Frammanundan, í § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini, hevur Fíggjarmálaráðið fingið heimild at loyva stovnum at hava egnar búskaparskipanir og skal áseta, hvørji krøv hesir stovnar skulu lúka í tí sambandinum. Nógvar búskaparskipanir eru samantvinnaðar við skipanir, sum eru fevndar av lógini um viðgerð av persónsupplýsingum og í tí sambandinum eisini av K. nr. 28/2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum". Tað hevði tí verið vert at umhugsa at lagt Dátueftirlitið undir Fíggjarmálaráðið fyri at miðsavna kørgu almennu servitanina á økinum,

at í kunngerðini og í rundskrivinum eru ásetingar um KT-trygd. Eitt nýtt regluverk um KT-trygd er ein týðandi partur av innaneftirlitinum, og í sambandi við, at regluverkið verður sett í verk, verður helst neyðugt/ynskiligt at broyta/dagføra roknskaparkunngerðina og roknskaparrundskrivið.

Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovan halda eisini tørv vera á at dagføra roknskaparkunngerðina og rundskrivið. Gjaldstovan miðar ímóti, at arbeiðið at endurskoða kunngerðina skal verða liðugt móti sumri 2004. Fíggjarmálaráðið ásannar, at krøv ongantíð er sett til skrásetingar av t.d. framleiðslu og tíðarnýtslu í innanvirkis roknskapum samsvarandi § 7 í kunngerðini. Fíggjarmálaráðið ætlar, at skrásetingar av hesum slag skulu verða raðfestar høgt í rationaliseringunum á almenna økinum komandi árini.

2.3.3 Roknskaparreglugerðir (GL 1997/1 01-5)

Í seinastu frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2003 vístu vit m.a. á, at í § 5, stk. 1, í Ll. nr. 33/1994 og í § 4, stk. 2, í K. nr. 114/1996 er álagt landsumsitingini og landsstovnunum at gera og dagføra ein reglugerð fyri sínum roknskaparhaldi. Í februar 2001 sendi Fíggjarmálaráðið út rundskriv við vegleiðing til roknskaparreglugerðir. Sambært rundskrivinum skulu allar roknskaparreglugerðirnar vera góðkendar í seinasta lagi 31. desember 2001. Ikki allir stovnar hava fingið viðurskifti síni í rættlag.

Sambært punkti 1.1 í rundskrivinum skal stovnsleiðarin lata Føroya Gjaldstovu og roknskapargrannskoðanini reglugerðina til kunningar. Fleiri aðalráð hava ikki enn góðkent allar reglugerðirnar.

Vit hava heitt á Gjaldstovuna um at gera upp 31. desember 2003:

1. hvussu nógvar roknskaparreglugerðir (stovnsnummur) skulu verða gjørdar
2. hvussu nógvar roknskaparreglugerðir (stovnsnummur) Gjaldstovan hevur fingið til kunningar.

Gjaldstovan hevur kunnað um, at hon hevur fingið 54 av umleið 117 roknskaparreglugerðum.

2.3.4 Ognaryvirlit (GL 2001/1 01-9)

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal á stovnunum vera eitt yvirlit yvir ognir og útbúnað. Í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum 6. februar 2001 um roknskaparreglugerðir er ásett, at ognaryvirlit skulu verða gjørd fyri innbúgv, maskinur, bøkur og annan virðismiklan útbúnað við støði í roknskaparskjølum, og skulu m.a. fevna um slag, útveganarvirði, livitíð, og hvar ognin er. Vit hava fleiri ferðir vístá, at bert fáir stovnar hava dagførd yvirlit.

Í desember 2002 sendi Fíggjarmálaráðið skriv til allar stovnsleiðarar um at skráseta almennar ognir. Í skrivinum stóð, at sjøtul nú fór at verða settur á verkætlanina at fáa skrásett ognirnar hjá landinum.

Í februar 2004 hevur Gjaldstovan greitt frá, at verkætlanin var seinkað umleið eitt ár, men at EDV-skipanin, sum er partur av búskaparskipanum landsins, er liðug. Skipanin er roynd, undirvíst er í skipanini og gjørdar eru konteringarreglur og skrásetingarreglur. Ætlanin er at byrja at skráseta í mars 2004, og at taka upplýsingar úr ognaryvirlitinum við í roknskapin fyri 2004.

2.3.5 Tryggingarviðurskifti (GL 2001/1 01-9)

Í frágreiðing okkara í februar 2002 vístu vit á, at tryggingarviðurskiftini hjá almennum stovnum vóru ógreið, og at ymiskt var, hvat tryggjað varð, hvat tryggjað varð ímóti, tryggingarupphæddir o.a. Talan er um eitt mál, sum Landsgrannskoðanin hevur gjørt vart við síðani 1992. Í uppskoti til samtyktar at góðkenna landsroknskapin fyri 1999 (Lm. nr. 62/2000) átalaði Løgtingið 24. apríl 2001, at málið hevði drigið út í næstan 10 ár.

6. desember 2002 varð "Rundskriv um tryggingarviðurskifti landsins" sent øllum aðalráðunum. Rundskrivið fevnir um stovnar o.o., sum koma undir játtanarsløgini rakstrarjáttan,

løgujáttan og landsfyritøka. Í rundskrivinum er m.a. ásett, at tryggingar bert eiga at verða teknaðar:

- um tað er ásett í lóggávu, t.d. í ferðslulógini
- fyri starvsfólk, ið eru í arbeiðsørindum uttanlands
- um trygging er kravd í sambandi við leigu-, byggi- og arbeiðssáttmálar
- fyri fasta ogn við sjálvsábyrgd

Rundskrivið ásetir eisini, at Fíggjarmálaráðið ger heildarsáttmálar við tryggingarfeløg um tær tryggingar, sum landið fer at tekna hjá tryggingarfeløgum. Rundskrivið kom í gildi 1. januar 2003.

Í skrivi 24. november 2003 vísir Fíggjarmálaráðið á, at trupulleikar hava verið við at seta nakrar av ásetingunum í rundskrivinum í verk, og tí er eitt nýtt tryggingarrundskriv sent út. Sambært skrivinum er ein høvuðsbroyting í nýggja rundskrivinum, at tað ikki verður Fíggjarmálaráðið, sum fer at gera heildarsáttmála við tryggingarfeløg um tær tryggingar, sum skulu verða teknaðar hjá tryggingarfelag. Hvør stovnsleiðari fær ábyrgdina av hesum, herímillum at tryggingarnar verða bodnar út millum tryggingarfeløgini. Stovnsleiðarin hevur ábyrgdina av, at reglurnar verða hildnar. Sambært rundskrivunum verða verandi tryggingarsáttmálar sagdir upp skjótast gjørligt.

Í pkt. 6 í nýggja rundskrivinum verður vístá, at landið ikki hevur skyldu at lata váðan í sambandi við arbeiðsskaðar til tryggingarfelag, og tí teknar landið ikki longur vanlukku-tryggingar ella arbeiðsskaðatryggingar hjá tryggingarfelag.

2.3.6 "Egnar" búskaparskipanir - vantandi samskipan og stýring (GL 2001/1 01-9)

Høvuðsendamálið við løgtingslóg nr. 33 frá 24. mars 1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." var, at Landsstýrið við lóg útvegaði sær heimildir at áseta reglur og krøv at loysa teir mongu trupulleikar á roknskaparøkinum, ið tá vóru.

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið var m.a. vístá, at stóru rembingarnar í føroysku umsitingini í sjeyti og áttati árunum fórdu til EDV-umleggingar, bygnaðarbroytingar, broytt roknskaparhald o.a. Trupulleikin var, at nógvu broytingarnar fóru fram uttan grundleggjandi meginreglur um bygnað, dátustreymar, ábyrgd, heimild o.s.fr. Úrslitið av hesi gongd uttan mál og mið vóru trupulleikar sum:

- vantandi felags kontuskipan,
- desentralar roknskaparskipanir/lønarskipanir uttan allýst tilknýti mótvegis Gjaldstovuni/landsroknskapinum,
- spjaðing av almennum gjaldføri,
- ymisk fíggjarlógarviðgerð fyri almennar stovnar. T.d. skulu nakrir flýggja yvirskotið til landskassan, meðan aðrir uttan ásetingar kunnu gera nýtslu av yvirskotinum,
- ógreið uppsetan av landsroknskapinum,
- ógreidleikar um, hvørjir stovnar/grunnar skulu við á landsroknskapin og á fíggjarlógina,
- ógreidleikar viðvíkjandi heimildum og ávísingum viðvíkjandi útgjalding úr landskassanum.

Við heimild í § 3 í lógini lýsti Landsstýrið 22. august 1996 kunngerð nr. 114 "um roknskaparhald landsins o.a." Roknskaparkunngerðin, og eisini játtanarskipanin, leggja upp til, at Fíggjarmálaráðið skal vera ein virkin, leiðandi og samskipandi myndugleiki, sum tryggjar, at búskaparskipanirnar eru tryggar, at neyvar játtanar- og roknskaparreglur verða ásettar, at ivamál um játtanar- og roknskaparviðurskifti verða loyst o.s.fr.

Sambært § 4, stk. 3, í roknskaparkunngerðini hava allir stovnar skyldu at nýta búskaparskipanir landsins. Sambært § 4, stk. 4, skal Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovan gera eina ætlan fyri, hvussu teir stovnar verða tiknir við, sum tann dagin, kunngerðin kemur í gildi (1. januar 1997), liggja uttanfyri búskaparskipanum landsins. Sambært § 4, stk. 5, kann Fíggjarmálaráðið eftir umsókn loyva stovnum við serligum tørvi at nýta sína egnu búskaparskipan heilt ella lutvíst. Loyvið er tó treytað av, at skipanin lýkur tey kunningar-, trygdar-, eftirlits- og tíðarkrøv, sum til eina og hvørja tíð eru galdandi fyri búskaparskipan landsins, og at ein skrivlig rakstraravtala verður gjørd millum Føroya Gjaldstovu og viðkomandi stovn, sum neyvari útgreinar treytirnar fyri dátusamskifti o.ø.

Vit hava áður vísst á, at hesar reglur verða als ikki hildnar, hóast talan er um stórar og umfatandi skipanir. Vantandi samskipan og stýring hava helst fört til ov nógvar "egnar búskaparskipanir", m.a. tí at stovnar ofta halda seg hava ein heilt serligan tørv. Fleiri broytingar og tillagingar verða gjørdar í EDV-skipanunum, uttan at Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovan frammanundan fær nakað at vita.

Sambært landsroknskapinum 2002 vórðu um 74 mió.kr. nýttar til KT-útgerð og –tænastur. Ein stórur partur av hesum útreiðslum fer til at menna, halda viðlíka og røkja "egnar búskaparskipanir", t.d. hjá Toll- og Skattstovu Føroya, Postverkinum, Apoteksverkinum, Almanna- og Heilsumálaráðnum, Almannastovuni og Fiskimálaráðnum/Lønjavningarstovuni. Landsgrannskoðanin hevur tí eisini spurt Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovuna, í hvønn mun allar mannagongdir í dag verða hildnar, sum eru ásettar í § 4, stk. 4-6, í roknskaparkunngerðini.

Gjaldstovan veit bara um eina búskaparskipan, Barsilsskipanina, sum er formliga góðkend sambært § 4, stk. 5, í kunngerðini. Eingin skrivlig rakstraravtala er gjørd við Gjaldstovuna, heldur ikki fyri Barsilsskipanina. Við tí manning tey hava, er tað sambært Gjaldstovuni óveruligt at koma afturumaftur at góðkenna stórar fjøltáttaðar KT-loysnir, sum ikki eru mentar og skjalfestar við atliti at § 4 í kunngerðini.

Annars hevur Gjaldstovan fört fram hesar yvirskipaðu viðmerkingarnar:

"Tá ið havt verður í huga, hvussu lítið landið er, er kanska tann einasta veruliga loysnin á hesum máli, at landið/Fíggjarmálaráðið setur sum mál tey næstu árini at savna allar "egnar" búskaparskipanir í eitt felags rakstrarumhvørvi, sum verður fyrisitið av einum stovni. Stovnurin skal hava t.d. kervisfyrisiting um hendi, førleika at seta krøv til EDV-útvegara um, hvussu tann útlisiteraði parturin skal verða fyrisitin, og førleika at fyrisita EDV-trygd og at stýra menningarætlanum. Týdningarmestu viðurskiftini í hesum føri er at fáa sett fólk við førleika til at umsita uppgávurnar og at halda uppá serfrøðina. Týðandi tættir í hesum er at skapa eitt mennandi umhvørvi og at kunna bjóða eina løn, sum ikki er minni enn privatir EDV-útbjóðarar bjóða. Hetta at stovnseta eitt stabilt rakstrarumhvørvi er ein fyritreyt og eisini tað mest kritiska í hesum máli."

10 ár eru liðin, síðani roknskaparlógin varð lýst, og skjótt 8 ár eru liðin, síðani roknskaparkunngerðin varð lýst. Landsgrannskoðanin heldur, at umrøddu trupulleikar, sum Landsstýrið í 1994 vísti á í viðmerkingunum til lógaruppskotið, ikki eru loystir. Trupulleikarnir eru kanska meira álvarsligir í dag. Krøvini til KT-, lønar- og roknskaparskipanir eru munandi herd, tí váðin er munandi størri. Tí er tað í dag munandi dýrari, og tað bindur størri arbeiðsorku, at tryggja allar tær mongu "óneyðugu" búskaparskipanirnar móti tí vaksandi váðunum.

Í seinastu frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar vístu vit m.a. á:

"Í dag eru nógvar og fløktar skipanir, sum ikki hanga nóg væl saman. Fleiri stovnar/grunnar umsita uppgávur, sum helst í størri mun kundu verið samskipaðar. T.d. er eitt ótal av stovnum, grunnum, deildum o.l., sum hvør sær umsita lønir. 4 fyrisitingarligar eindir umsita dagpening vegna sjúku og barnsburð: Lønjavningarstovan, Almannastovan, Vanlukkutryggingin og ALS. Almannastovan, ALS og Lønjavningarstovan umsita veitingar vegna vantandi arbeiðsinntøku. Almannastovan og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin umsita pensjónir, og harafturat umsita Fíggjarmálaráðið, Mentamálaráðið, Almannamálaráðið, Sjúkrahúsverkið og Postverkið tænastumannapensjónir. Hóast talan er um lutfalsliga smáar eindir, nýta almennir stovnar/grunnar nógvar ymiskar EDV-skipanir til at gjalda út, føra bókhald, umsita lønir, lán, debitorar o.a. Tá ið

uppgávurnar eru so spjaddar, er ofta torført at manna størv við fólki, sum hevur førleika og neyðugar royndir, "soðið verður ov tunt".

Landsgrannskoðanin heldur ikki, at tilgongdin seinnu árini hevur effektiviserað samlaðu almennu umsitingina, t.v.s. gjørt hana bíligari og betri. Tørvur er á at endurnýggja fleiri búskaparskipanir. Fer hetta arbeiði ikki fram sum liður í einari yvirskipaðari heildarætlan, har eisini bygnaðurin verður endurskoðaður, verður peningur og starvsfólkaorka ikki nýtt á skynsaman hátt."

Higartil hevur Fíggjarmálaráðið ikki megnað ella havt neyðuga orku og stuðul til at átaka sær tann virkna, leiðandi og samskipandi leiklut, ið roknskaparlógin/-kunngerðin leggur upp til. Landsgrannskoðanin heldur, at er ætlanin at umsitingin skal verða gjørd bíligari og betri, er tað ein fortreyt, at óskipaða gongdin verður steðgað.

Tað hevur tó eydnast at byggja upp nakrar væl virkandi búskaparskipanir á Gjaldstovuni, men trupulleikin er, at tær verða ikki gagnnýttar í tann mun, ætlanin var. Við einari skynsamari langtíðar ráðlegging ber helst til at umleggja ella niðurleggja fleiri av teimum smærru búskaparskipanunum, og í staðin fyri nýta búskaparskipanir landsins í størri mun. Tað krevur tó, at ein myndugleiki setur út í kortið.

2.3.7 Trygdarkrøv

Sambært løgmanni hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum ábyrgdina av, at tað almenna hevur ein yvirskipaðan kunningartøkni- og trygdarpolitikk. Stovnar og landsstýrismenn skulu tí ikki hvør í sínum lag seta yvirskipað krøv til KT-trygd, men taka stig til og tryggja, at teirra skipanir liggja innan fyri teir karmar, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur sett.

Sambært løgmanni skal landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hava eftirlit við, at krøvini verða hildin, tá ið talan er um búskaparskipanir landsins. Lúka brúkarar ikki krøvini, antin tí teir ikki gera neyðugar íløgur í útgerð/forrit, ella tí teir ikki fylgja ásettum mannagongdum, eigur Fíggjarmálaráðið at nokta teimum atgongd til búskaparskipanir landsins.

1. mars 2002 sendi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum øllum aðalráðum skriv um tey krøv um KT-trygd og -tøkni, sum galda á hansara øki. Landsstýrismaðurin vísir til eitt skjal, har Gjaldstovan hevur greinað út krøvini, sum galda fyri búskaparskipanir landsins. Eisini hevur landsstýrismaðurin givið Gjaldstovuni heimild at boða frá neyðugum broytingum.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vísir á, at av tí at yvirskipaðu krøvini ikki eru orðað, kann Fíggjarmálaráðið ikki svara fyri, at krøvini í skrivinum liggja innan fyri yvirskipaðu trygdarkarmarnar. Fíggjarmálaráðið hevur eitt umboð í KT-forum, sum í august 2003 sendi til hoyringar "uppskot til felags regluverk fyri KT-trygd í landsfyrisitingini". Í januar 2004 varð uppskotið handað landsstýrismanninum í vinnumálum saman við uppriti um KT-bygnaðin hjá landsfyrisitingini.

2.3.8 Hølisviðurskifti/smáar umsitingareindir (GL 2001/1 01-9)

Í seinastu frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar vístu vit á, at landsumsitingin, landsstovnar og grunnar húsast ymsastaðni í landinum. Landið eigur summar bygningar, men nógv høli verða leigað. Ofta verða høli útvegað, sum ikki hóska. Í nógvum førum umbyggir landið hølini fyri nógvan pening, uttan tó at fáa bestu loysnina. Í summum førum hava aðalráð og stovnar samskipað eina loysn á hølistørvinum, men í nógvum førum hevur tilvildin rátt.

Skal ein almennur stovnur virka, eru ávís umsitingarlig minstukrøv. Stovnurin skal hava samskiftismøguleikar bæði innanhýsis og uttanhýsis, og tí er neyðugt at hava telefon, telefax, teldur, net, printarar, kopimaskinu, teldupostsamskifti, firewall, journalskipan o.s.fr. Stovnurin má tí hava starvsfólk, sum hevur ávísan kunnleika til at keypa, halda viðlíka, reka og menna telduskipanir, umsita net, KT-trygd o.t. Stovnurin má eisini hava starvsfólk, sum hava kunnleika til innanhýsis játtanar-, roknskapar-, journal-, starvsfólkaviðurskifti o.a.m. Smærri stovnar, sum húsast einsamallir og hava sína egnu fyrisiting, eru tí sera dýrir at umsita, og binda óneyðuga nógva starvsfólkaorku til at loysa lutfalsliga sera smáar umsitingaruppgávur.

Táið eindirnar eru so smáar, verða stovnarnir ofta hart raktir, táið starvsfólk skifta arbeiði. Tað kann hava við sær vantandi siðvenju og vantandi upplæring av nýggjum starvsfólkum, sum tí ikki verða nóg dugnalig. Nýtir ein slíkur stovnur dugnalig/yvirkvalifiserað fólk at loysa smáar/óneyðugar umsitingaruppgávur, er tað, sæð frá einum heildarsjónarmiði, uppaftur verri, tí hesi starvsfólk høvdu kunnað gjørt stóra nyttu, har veruligur tørvur var á teirra evnum og dugnaskapi.

Samanumtikið helt Landsgrannskoðanin, at tað hevði verið vert at kanna, um tað ikki hevði loyst seg at savna stovnar/grunnar og fyrisitingar í størri eindir í nýmótans umsitingarbygningum, møguliga saman við kommunalum fyrisitingum, fyri at effektivisera umsitingaruppgávurnar og loysa starvsfólkaorku til tær grundleggjandi uppgávurnar.

Í seinasta uppskoti til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum um at góðkenna landsroknskapin 2001 mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at kanna hesi viðurskifti nærri.

Samskifti við Fíggjarmálaráðið um spurningin

Landsgrannskoðanin hevur spurt Fíggjarmálaráðið, um tey hava kannað viðurskiftini, og hvørja støðu Fíggjarmálaráðið hevur til umrøddu spurningar. Sambært skrivi 22. januar 2004 heldur Fíggjarmálaráðið,

> *"at tað ikki er neyðugt við nakrari størri kanning, um tað loysir seg at savna stovnar/grunnar og fyrisitingar í størri eindir í nýmótans umsitingarbygningum. Ráðið metir fyrimunirnar so eyðsýndar, at ikki skuldi verið neyðugt við nakrari kanning, fyri at fáa hetta staðfest.*
>
> *Fíggjarmálaráðið hevur sjálvt sera góðar royndir av at savna fleiri stovnar í bygninginum á Argjum. Hetta, sjálvt um stovnarnir framvegis virka sum sjálvstøðugir stovnar. Umframt húsaviðurskifti, eru stovnarnir felags um KT, móttøku o.a. Eisini eru stórir fyrimunir av at samskiftið gongur lættari og skjótari, tá umsitingar, ið annars hava nógv at samskifta um, verða savnaðar í sama bygningi. Somuleiðis eru fyrimunir av at fáa størri faklig umhvørvi.*
>
> *Omanfyrinevndu viðurskifti vóru eisini orsøkin til, at Fíggjarmálaráðið tók stig til at savna almenna virksemið í Norðuroyggjum í ein bygning. Í hesum sambandi heitti landsstýrismaðurin í fíggjarmálum eisini á hinar landsstýrismenninar um at taka líknandi stig. Hetta gjørdi hann við einum uppriti um samskipan av umsitingarligum virksemi úti um landið. Hetta upprit var til viðgerðar á landsstýrisfundi 23. januar 2002.*
>
> *Nevnast skal eisini, at góðar royndir eru av bygnaðarligum samanleggingum, og kann Fíggjarmálaráðið her t.d. vísa á samanleggingina av Líkningarráð Føroya og Føroya Tollstovu í 1992.*
>
> *Fíggjarmálaráðið leggur eisini dent á, at tað er neyðugt at skapa størri EDV-umsitingareindir, bæði út frá einum effektivitets- og trygdarsjónarmiði. Hesin spurningur er viðgjørdur í KT-forum, har Fíggjarmálaráðið hevur eitt umboð. KT-forum hevur skrivað eitt álit, sum verður lagt fram fyri aðalstjórarnar í einum av teimum komandi døgunum, har mælt verður til fleiri tiltøk á EDV-*

trygdarøkinum. M.a. verður mælt til, at EDV-netini hjá almennum stovnum verða umsitin í einari felags umsitingareind. Fíggjarmálaráðið hevur viðgjørt teir spurningar, sum standa í álitinum og hevur tikið undir við hesum."

Samskifti við Løgmansskrivstovuna um spurningin

Í viðmerkingum sínum til spurningarnar førdi løgmaður í februar 2003 fram:

"Løgmaður er púra samdur í, at tilvildin ofta ræður, tá tað snýr seg um at útvega hølir til almennu umsitingina. Løgmaður tók stig til at leggja alla byggi- og bygningsumsiting á ein og sama tøkniliga stovn at røkja fyri alla almennu umsitingina. Hesin stovnur skuldi bæði virka sum byggiharri í byggimálum, útvega leigusáttmálar og hava yvirskipaðu ábyrgdina av at útvega stovnum hóskandi hølisviðurskifti. Farið varð í gongd við at fáa hesa ætlan at virka. Men orsakað av manglandi politiskari undirtøku bæði í landsstýrinum og í Løgtinginum, varð henda ætlan slept. Løgmaður hevur síðani umhugsað, hvørjar aðrar skipanir kundu verið hóskandi fyri at fáa betur skil á hesum økinum. Enn er tó ikki komið á mál hesum viðvíkjandi."

"Landsgrannskoðanin hevur rætt í, at vaksandi krøvini til almennu umsitingina gerast verri at lúka, tá umsitingareindirnar gerast minni. Eitt av málunum við bygnaðarbroytingunum á sinni var júst at integrera myndugleikar á einstøkum økjum vertikalt, júst fyri at fáa meira tyngd og dygd í einstaka myndugleikan. Hetta hevur tó bert partvíst eydnast, og tá trý ráð nú eru sett á stovn aftrat, gerast eindirnar, alt annað líka, upp aftur smærri."

2.3.9 Lønarumsiting á Gjaldstovuni (GL 1998/2 03 1-10)

Lønarstovan á Gjaldstovuni umsitur og rindar út lønir hjá nógvum landsstovnum. Í sambandi við lønargrannskoðan, sum vit hava gjørt á stovnunum, hava vit eisini kannað, um lønirnar vóru samsvarandi galdandi sáttmálum, flokking, stigum o.ø. í lønarskipanini á Gjaldstovuni. Hesar stakroyndir bendu á, at lønarsatsir, útrokningar o.a. í lønarskipanini vóru rættar.

Góðkenning av lønargrundarkortum

Eina ferð um árið sendir lønarstovan á Gjaldstovuni øllum stovnsleiðarum lønargrundarkortini hjá starvsfólkunum at góðkenna. Stovnsleiðarin skal kanna, um samsvar er millum formligu setanarviðurskiftini og tær í lønarskipanini skrásettu upplýsingar, herímillum starvsbólk, lønartalvu, aldursviðbót og lønarbrøk. 20 stovnsleiðarar góðkendu ikki lønargrundarkortini í 2001. Vit mæltu tá Gjaldstovuni til at seta í verk eina mannagongd, sum tryggjaði, at viðurskiftini verða kannað so hvørt, og at avvarðandi aðalráð verða kunnað um úrslitið.

Í mars 2002 vórðu grundarkortini aftur send út. Sambært Gjaldstovan eru flestu grundarkortini komin innaftur góðkend.

Í mars 2003 vórðu grundarkortini ikki send út. Sambært Gjaldstovuni er tað tí, at farið er yvir til nýggja lønarskipan. Landsgrannskoðanin heldur, at skipanin við at stovnsleiðarar við millumbili skulu góðkenna lønargrundarkortini er ein týðandi eftirlitsskipan, sum hevur stórt prógvirði.

Í mars 2004 hevur Gjaldstovan boðað frá, at hon í næstum fer at skriva út nýggj lønargrundarkort. Gjaldstovan umhugsar at gera eina meira sjálvvirkandi mannagongd, sum ikki er so tíðarkrevjandi.

Lønarútreiðslur stemmaðar av við Toll- og Skattstovu Føroya

Eina ferð um árið rindar Gjaldstovan Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum og Trygdargrunninum kravdu gjøldini. Tá stemmar Lønarstovan lønarútgjaldingarnar av við yvirlit frá Toll- og Skattstovu Føroya. Í juni 2003 var avstemmanin fyri 2002 liðug. Lønarstovan skjalprógvar avstemmanirnar.

Nýggj lønarskipan

Í juni 2001 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ein felags lønarskipan fór at verða tikin í nýtslu um ársskiftið 2001/2002, og á vári 2004 skuldu allar almennar lønir, og aðrar gjaldingar, ið verða handfarnar sum lønir, uttan undantak fara um hesa skipan. Í ávísum førum kunnu egnar forskipanir verða nýttar, t.d. í sambandi við útbúgvingarstuðul o.l. Gjaldstovan skal ikki skráseta lønir; tað skulu aðalráðini/stovnarnir gera. Í seinastu frágreiðing gjørdu vit vart við, at vit ivaðust í, um tað var skilagott at miðfirra lønarumsitingina. Vit mæltu til at kanna fyrimunir og vansar við einari felags umsiting av lønum o.t. hjá øllum landsstovnum/-grunnum, og hjá sjálvsognarstovnum o.ø., sum fáa studning ella inntøkur sambært lóg.

Landsstýrismaður kunnaði í august 2002 um, at lønarverkætlanin var nógv seinkað, m.a. tí at hon stoytti saman við arbeiðið við nýggju FSL-skipanini, sum varð tikin í nýtslu um ársskiftið 2001/02. Øll fólkini, sum byrjaðu í verkætlanini, vóru eisini farin í onnur størv, bæði tey á Føroya Gjaldstovu og hjá Sam-Teld. Landsstýrismaðurin vísti á, at lønarverkætlanin var dømi um, hvussu nógv kravdist at menna nýggjar skipanir, og hvussu viðbrekin ein stovnur, sum Gjaldstovan er.

Í desember 2002 varð nýggja felags lønarskipanin so smátt tikin í nýtslu. Ætlanin var, at allir skrásettir løntakarar í gomlu lønarskipanini skuldu verða stovnaðir í nýggju skipanini í mars/apríl 2003, og síðani skuldi Gjaldstovan fara undir at leggja tær miðfirraðu EDV-lønarskipanirnar um til felags lønarskipanina.

Arbeiðið at flyta løntakarar úr gomlu lønarskipanini yvir í nýggju skipanina var ikki liðugt fyrr enn í januar 2004. Gjaldstovan vísir í februar 2004 á, at skipanin er ikki liðug enn, og at tað krevur nógva orku at víðka skipanina við nýggjum brúkarum/stovnum. Gjaldstovan ætlar í næstum at leggja eina ætlan fyri, hvussu komið verður víðari við málinum at leggja tær miðfirraðu EDV-lønarskipanirnar um til felags lønarskipanina.

2.3.10 EDV-trygd á Gjaldstovuni (GL 1997/2 03 1-6)

Í 1997 fóru Landsgrannskoðanin og Gjaldstovan, saman við serkønari grannskoðarahjálp, undir at gjøgnumganga EDV-trygdina á Gjaldstovuni, við støði í grannskoðanarvegleiðingum.

Í juli 1998 vístu vit á, at EDV-trygdin á fleiri týðandi økjum var ikki nøktandi. Vit mæltu til at seta í verk tiltøk fyri at bøta um trygdina, og at seta í verk ein skjalprógvaðan trygdarpolitikk, sum skuldi verða útgreinaður og skipaður við nágreiniligum trygdarreglugerðum.

Í mars 2000 gjørdu vit vart við, at komið var ikki á mál við trygdarpolitikkinum, í tann mun mælt varð til. Leiðslan á Gjaldstovuni gjørdi vart við, at uppgávan varð raðfest høgt innanfyri teir fíggjarligu karmar, stovnurin hevði.

Í 2001 gjøgnumgingu vit aftur saman við serkønari grannskoðarahjálp EDV-trygdina, m.a. við støði í frágreiðingini í 1998. Í september 2001 varð ein fyribils frágreiðing latin Gjaldstovuni. Niðurstøðan var, at hóast ábøtur, var EDV-trygdin samanumtikið ikki nóg góð. Henda niðurstøða var serliga grundað á ta hóttan, sum kemur frá opna alnetinum. Í juli 2002 varð ein endaliga frágreiðing latin landsstýrismanninum.

Í september 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Gjaldstovan hevði tikið í nýtslu eina nýggja útgávu av Oracle Applications og ein nýggjan Oracle-dátugrunn, og hevði harafturat sett í verk fleiri tiltøk, sum skuldu loysa teir vansar, frágreiðingin hevði peikað á.

Landsstýrismaður segði seg taka spurningin um EDV-trygd í sera stórum álvara. Gjaldstovan fór í eina skipaða tilgongd, og saman við serfrøðingum fór hon undir at gera eina váðameting. Síðani var ætlanin at halda fram at greina allan EDV-trygdarspurningin. Ætlanin var eisini at keypa eina nýggja EDV-maskinu, so Gjaldstovan m.a. fór at verða før fyri at skilja sundur nároyndar- og framleiðsluumhvørvið.

Í februar 2004 hevur Gjaldstovan greitt frá, at dagligu uppgávurnar á EDV-trygdarsíðuni eru skipaðar í einum EDV-trygdarráði. M.a. verða broytingar, feilir, hóttanir o.a. tiknar upp í ráðnum.

Avbjóðingin er at gera eina effektiva trygdarstýringarskipan, har alt verður savnað. Gjaldstovan er í holt við at menna eina skipan, sum bindur alt saman, m.a.:

- váðagreining,
- EDV-trygdarreglur við almennum og greinaðum ásetingum,
- stýring av eftirlitum,
- feilfráboðanarskipan,
- trygdarráðsfundir,
- persónsdátulógina, ISO 17799 og roknskaparkunngerðina.

Gjaldstovan hevur fingið serkøna grannskoðarahjálp til at gera ein trygdarpolitikk o.a. Ætlanin er at seta trygdarpolitikkin formliga í verk í mai 2004, og síðani er ætlanin at seta í verk eina eftirlitsskipan at fylgja við, um trygdarásetingarnar verða hildnar.

Síðsta vár tók Gjaldstovan í nýtslu nýggjar maskinur, sum standa hjá P/F Elektron. Nýggju maskinurnar hava nógv størri orku enn tær gomlu maskinurnar.

Við stuttum millumbilum verða allar broytingar í búskaparskipan landsins avritaðar til eina eyka maskinu, sum stendur í einum øðrum bygningi. Nároyndarumhvørvið er stovnað á einari sjálvstøðugari maskinu.

Trygdin á Gjaldstovuni er nógv treytað av trygdini aðrastaðni. Sambært Gjaldstovuni er høvuðstrupulleikin hugburðurin til trygdina, vantandi vitan og vantandi manning í allari fyrisitingini.

2.4 Fíggjarmálaráðið (GL 2001/2 03 1-12)

Í frágreiðingum okkara í februar 2002 og februar 2003 kunnaðu vit um grannskoðan okkara av roknskaparviðurskiftum, ið Fíggjarmálaráðið varðar av. Í tí sambandinum umrøddu vit eisini inntøkurnar, sum stava frá leigu av hangari á flogvøllinum. Ivasamt var, um landið kundi krevja leigu fyri øll árini, tí ein sáttmáli fyrstu árini var ikki undirskrivaður. Niðanfyri verður gjøllari greitt frá um gongdina í málinum.

Fíggjarmálaráðið umsitur m.a. høvuðskontu nr. 3.11.1.23. "Landsins ognir", sum fevnir um 3 undirkontur. Ein av teimum er undirkonta 22 "Leiga av økjum, uppisitaraavgjald o.a.", sum fevnir um leigu av hangarinum á flogvøllinum, sum landið bygdi síðst í áttatiárunum fyri slakar 60 mió.kr.

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í apríl 1994 umrøddu vit m.a. grunnin til flogferðslu, sum "fíggjaði" hangarin. Vit vístu eisini á, at hangarurin varð leigaður út, og at ætlanin var, at leigan skuldi fara í grunnin, men tað tyktist ikki, sum nakað leigugjald varð kravt inn.

Í mai 1998 gjørdi Fíggjarmálaráðið nýggjan leigusáttmála við flogfelagið, galdandi frá 1. januar 1997, um at rinda 200 t.kr. um árið fyri at leiga hangarin. Leigugjøld fyri árini 1997 og 1998 vórðu ikki goldin fyrr enn í 2001.

Árini 1990 til 1996 er eingin leiga goldin, og vit bóðu landsstýrismannin um eina frágreiðing. Landsstýrismaðurin hevur sent Landsgrannskoðanini avrit av 10 ára sáttmála millum landsstýrið og flogfelagið um at leiga hangarin frá 1. januar 1990, har hálvárliga leigan í einum fylgiskjali er sett til kr. 100.000.

Landsstýrismaðurin vísti á eitt skriv frá Landsverkfrøðinginum, sum bendir á, at sáttmálin ongantíð varð undirskrivaður. Talan er um skriv 30. mai 1997 til Vinnumálaráðið, í sambandi við, at Landsverkfrøðingurin hevur fingið uppskotið til nýggjan leigusáttmála til ummælis. Landsverkfrøðingurin skrivar m.a.

> *"Á fundi hjá tygum 23. í h. um fíggjarlógaruppskotið fyri 1998 varð latið mær uppskot til leigusáttmála fyri hangarin á flogvøllinum í Vágunum til ummælis.*
>
> *Um hangarin kann stutt sigast, at vit eftir ynski frá landsstýrinum stóðu fyri, at hann kom upp*

at standa í árunum 1988/89, og hevur hann síðani verið nýttur av Atlantsflog og tyrlutænastuni í felag.

16. mai 1990 varð sent landsstýrinum uppskot til leigusáttmála millum Føroya Landsstýri og Atlantsflog og framleigusáttmála millum Atlantsflog og Strandferðsluna, og tá Atlantsflog seinni yvirtók raksturin av tyrlunum, varð sáttmálauppskotið tillagað samsvarandi.

Tolin trívst. Hesi 7 árini, ið bíða hevur verið eftir svari, hava vit saman við Atlantsflog/Strandferðsluni loyst smátrupulleikarnar, ið altíð koma fyri, uttan hóvasták.

Tað uppskotið, ið nú er afturí aftur komið, er ikki nógv at siga til, burtursæð frá at tað er flutt eitt sindur runt uppá setningarnar, er meiningin tann sama."

Vísandi til, at sáttmálin ongantíð varð undirskrivaður, heldur Fíggjarmálaráðið í februar 2004, at Landsstýrið hevur ikki nakað rættarkrav móti flogfelagnum fyri hesa leigu, og at grundarlag er ikki fyri at gera meira við henda spurning.

Í § 6 í nýggja sáttmálanum við flogfelagið um at leiga hangarin stendur, at leigarin hevur alla ábyrgd av útbúnaði og viðlíkahaldi av bygningum uttan og innan og ber kostnaðin. Í § 7 stendur, at leigarin bruna-, storm-, og vatnskaðatryggjar húsini og útbúnað.

Í februar 2002 vístu vit á, at Landsverkfrøðingurin av játtanini "Flogferðsla" hevði goldið trygging fyri hangarin fyri árini 1997, 1998 og 1999 tilsamans kr. 437.936.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at flogfelagið hevði endurgoldið landskassanum tryggingargjøldini fyri árini 1998 og 1999. Fekk felagið krav um at rinda tryggingargjaldið fyri 1997, sum er kr. 149.978, vildi felagið hava eina løgfrøðiliga staðfesting av kravinum. Fíggjarmálaráðið ætlaði at viðgera spurningin saman við Løgmálaráðnum.

Í februar 2004 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at ráðið roynir framvegis at fáa felagið at gjalda, og at flogfelagið hevur boðað frá, at teir ætla at gjalda rokningina. Vit hava síðani fingið eina fráboðan frá Gjaldstovuni um, at flogfelagið í februar 2004 hevur goldið tryggingarupphæddina fyri 1997.

2.5 Fíggjarstøðan 2002

2.5.1 Góðkenningarmannagongdir

Mánaðarroknskapurin

Sambært § 9 í roknskaparkunngerðini er álagt stovnsleiðarum mánaðarliga at góðkenna játtanarroknskapin mótvegis aðalráðunum. Á serligum góðkenningarskjali skal stovnsleiðarin sambært pkt. 2.1 í roknskaparrundskrivinum m.a. vátta:

"at allar saldur á fíggjarstøðuni eru rætt tiknar við, herímillum at allar peningastovnskontur, sum stovnurin hevur ræði á, eru skrásettar á fíggjarstøðuni og stemma við kontuavrit frá peningastovnunum; at ogn, skuld og nýtsla eru gjørd rætt upp; at samsvar er millum búskaparskipan landsins og egnar búskaparskipanir, at alt er stemmað av, sum ásett í roknskaparreglugerðini, og at ásettu mannagongdirnar í roknskaparreglugerðini eru hildnar. Harafturat skal verða kannað, at allar áognir, frammanundan goldnar og skyldugar upphæddir, veittar trygdir o.a. eru skrásettar í roknskapinum, so hann gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og somuleiðis av ogn og skuld við fíggjarárslok. Í átekningini skal verða kunnað um møgulig viðurskifti, sum ikki eru í lagi. Tá ið játtanarroknskapurin fyri síðsta roknskaparliga ískoytisskeiðið (ársroknskapurin) er góðkendur, skal Gjaldstovan hava avrit av góðkenningarskrivinum."

Greinaroknskapurin

Galdandi frá mars mánaði 2001 er álagt aðalstjórunum í seinasta lagi 10. í øðrum mánaði eftir mánaðarlok á serligum góðkenningarskjali at góðkenna greinaroknskapin mótvegis Fíggjarmálaráðnum.

Greinaroknskapurin er ein samandráttur av játtanar/mánaðarroknskapunum undir einari grein. Aðalstjórarnir skulu vegna landsstýrismannin m.a. vátta, at játtanarroknskapirnir, ið

liggja undir greinaroknskapinum, allir eru góðkendir av stovnsleiðarum sambært galdandi reglum.

Á góðkenningarskjalinum skulu aðalstjórarnir kunna Fíggjarmálaráðið um viðurskifti, sum ikki eru í lagi. Gjaldstovan skal hava avrit av øllum góðkenningarskjølum og møguligum fylgiskjølum. Henda skipan er eisini við til at tryggja, at gjørt verður vart við møguligar feilir og munir, og at teir verða rættaðir so hvørt.

Aðalráðini halda ásettu reglurnar, men fleiri halda ikki tíðarfreistina. Í 2003 hevur Mentamálaráðið ikki hildið reglurnar, men hevur tó góðkent greinaroknskapin einstakar mánaðir.

Ársroknskapurin

Seinasti mánaðarroknskapurin er at rokna sum ársroknskapurin, og stovnsleiðarin skal góðkenna ársroknskapin á serstøkum góðkenningaroyðublað. Eru viðurskifti, sum ikki eru í lagi, skal vera kunnað um tey á góðkenningarskjalinum.

Gjaldstovan skal hava avrit av øllum góðkenningaroyðubløðum og møguligum fylgiskjølum og skrásetir, so hvørt stovnarnir hava sent inn oyðubløðini. Sambært yvirliti hjá Gjaldstovuni eru 583 stovnsnummur í landsroknskapinum 2002, harav vóru 44 stovnsnummur ikki virkin. Góðkenningarskjøl fyri 55 stovnsnummur eru ikki send inn, Trivnaðarmálaráðið (Familju- og heilsumál og Almannamál) varðaði av 30 teirra.

Á umleið 60 góðkenningarskjølum eru viðmerkingar. Sambært Gjaldstovuni eru flestu viðmerkingarnar um mál av lítlum týdningi. Í onkrum føri er talan um tíðaravmarkanarfeilir, tí Gjaldstovan og stovnar við egnari búskaparskipan nýta ymiskan uppgerðarhátt. Í flestu førum er talan um smávegis rættingar og vantandi skrásetingar. Gjaldstovan ger í tílíkum førum eina viðmerking á góðkenningarskjalið um, at rættingarnar verða framdar.

Onnur viðurskifti

Í oktober 2002 tók Gjaldstovan nýggja "sjálvvirkandi telefongjaldsskipan" í nýtslu. Skipanin er ment í samstarvi við Føroya Tele. Gjaldstovan gevur Føroya Tele boð um teir telefonfelagar/kundanummur, sum skulu verða við í "skipanini". Eina ferð um mánaðin sendir Føroya Tele Gjaldstovuni eina fílu við fakturunum hjá teimum tilmeldaðu feløgunum. Í fíluni eru upplýsingar um telefonnummar, stovnsheiti, rokningarupphædd og hvussu rokningin verður konterað/bókað í landsbókhaldinum. Stovnarnir fáa framvegis telefonrokningarnar frá Føroya Tele, tó bert til kunningar.

Fílan verður lisin inn í búskaparskipan landsins; møguligar rættingar verða skrásettar, áðrenn fílan verður "góðkend" og gjaldið flutt Føroya Tele. Gjaldstovan heldur, at nýggja skipanin hevur spart eini 3 ársverk í almennu fyrisitingini. Arbeitt verður við at viðgera telefonrokningar hjá Kalli eftir somu skipan.

Gjaldstovan ætlar í mars 2004 at fara undir at ljóslesa (skanna) kreditorfakturar inn í búskaparskipan landsins, t.v.s. at handliga skrásetingin av fakturum fellur burtur. Í fyrsta umfari verður talan um at ljóslesa kreditorfakturarnar hjá Gjaldstovuni. Síðani er ætlanin at víðka skipanina fyrst til stovnarnar í Fíggjarmálaráðnum og síðani til aðrar stovnar. Kreditorfakturar skulu tá ikki longur verða sendir stovnunum, men skulu í staðin verða sendir beinleiðis til Gjaldstovuna, við tilvísing til stovnin, ið varðar av útreiðsluni.

Í tí sambandinum hevur Gjaldstovan skotið upp, at Gjaldstovan konterar kreditorfakturarnar fyri stovnarnar, t.d. niður á útgreiningarkontustøði, fyri at lætta um hjá stovnunum og fyri at tryggja, at rættar kontur verða brúktar.

2.5.2 Avstemman av fíggjarstøðuni o.a.

Í 2001 menti Gjaldstovan eina skipan við kekklistum, ið verða fyltir út í sambandi við at mánaðarroknskapirnir verða gjørdir. Ein kekklisti er fyri roknskaparhaldið og ein er fyri

EDV-økið. Ábyrgdarfólk á økjunum vátta, at avstemmanir/eftirlit eru gjørdar. Liggja mál óavgreidd, skal verða víst á, hvat verður gjørt fyri at fáa viðurskiftini í rættlag, og nær tey fara at koma í rættlag.

Áðrenn mánaðarroknskapirnir verða sendir stovnunum, gjøgnumgongur Gjaldstovan allar kekklistar og fíggjarstøður viðvíkjandi stovnunum. Stovnsleiðslurnar verða gjørdar varugar við viðurskifti, ið skulu verða fingin í rættlag. Við hesi mannagongd er "ruddað upp" í nógvum gomlum munum, og skipanin við kekklistum hevur havt við sær, at nógvar feilbókingar og munir verða rættaðar so hvørt. Avstemmanararbeiðið er miðvíst og væl skipað, og leiðslan raðfestir arbeiðið høgt. Í sambandi við gjøgnumgongdina í landsroknskapinum av roknskaparpostum í fíggjarstøðuni, hava vit í stóran mun bygt á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

Við árslok 2002 vóru fleiri fíggjarpostar, sum ikki stemmaðu. Vit hava kannað tær avstemmanir, sum vórðu gjørdar fram til november mánað í 2003 og hava staðfest, at í flestu førum eru viðurskiftini eftirsíðan rættað. Gjaldstovan vísir tó á nøkur viðurskifti, sum ikki eru komin í rættlag:

- millumrokningarkontur hjá "Stuðul til rentuútreiðslur" og "Stuðul til flutning og dupult húsarhald" hava ikki stemmað í 2003,
- persónsskatta- og felagsskattaskipanirnar hava í áravís ikki stemmað við landsbókhaldið. Sum greitt frá seinni í frágreiðingini, hevur Toll- og Skattstova Føroya, saman við Elektron, gjørt eitt stórt arbeiði við at stemma av, og Toll- og Skattstovan heldur, at trupulleikarnir við at stemma av eru um at verða loystir,
- millumrokningar á fíggjarstøðuni hjá innkrevjingarskipanini hava ikki stemmað, síðani henda skipan varð sett í verk. Í landsroknskapinum á s. 334 undir "Serligar viðmerkingar til roknskapin fyri 2002" hevur Gjaldstovan víst á, at sambært Toll- og Skattstovu Føroya stemmar saldan ikki millum innkrevjingarskipanina og búskaparskipanir landsins, og 31. desember 2002 vóru 10,2 mió.kr. bókaðar á millumrokning. Serliga er talan um inngjøld til sjúkrakassakrøv, sum skulu verða avroknað til kommunurnar. Toll- og Skattstovan er í 2003 farin undir at avrokna inngjøldini til kommunurnar. Við árslok 2003 eru 4,3 mió.kr. bókaðar á millumrokning,
- ósemja var millum Fíggjarmálaráðið og Landsbanka Føroya um uppskot Landsbankans um býti av yvirskoti bankans fyri roknskaparárið 2001. Fíggjarmálaráðið gav Landsbankanum boð um at rinda landskassanum um 11,1 mió.kr. av yvirskotinum. Landsbankin rindaði um 5,5 mió.kr. Restin varð skrásett sum tíðaravmarkað áogn í landsroknskapinum 2002. Í januar 2003 gav Fíggjarmálaráðið Gjaldstovuni boð um at rykkja eftir peninginum. Landsbankin boðaði í skrivi 29. januar 2003 Gjaldstovuni frá, at Landsbankin viðurkendi seg ikki at skylda peningin, tí bankin helt, at sambært landsbankalógini hevði Fíggjarmálaráðið ikki einsamalt heimild at áseta býtið av yvirskotinum. Í juni 2003 hevur Landsbankin tó goldið restina av upphæddini, umframt landskassans part av yvirskotinum fyri roknskaparárið 2002.

2.5.3 Høvuðstøl

Fleiri landsstovnar/grunnar eru ikki við í fíggjarstøðuni. Tað hevur verið ávísur ivi um, hvørjir stovnar/grunnar eru at rokna sum ogn landskassans, og hvørjir eru sjálvsognarstovnar.

Í áliti frá Fíggjarmálaráðnum í november 2001 "um landsstovnar og –grunnar, tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti" hevur Fíggjarmálaráðið víst á, at fíggjarstøðan í landsroknskapinum eigur at fevna um eginogn/ogn og skuld hjá øllum landsstovnum/-grunnum, eisini um virksemið liggur uttanfyri fíggjarlógina.

Í fylgiskjølunum til álitið frá Fíggjarmálaráðnum verður víst á 13 landsstovnar/-grunnar, sum eiga at verða tiknir við í landsroknskapin og í fíggjarstøðuna. Fíggjarmálaráðið hevur síðani víst á, at 3 aðrir grunnar/stovnar eisini eru fevndir av niðurstøðunum í álitinum.

Fyri at kunna um, hvørjir grunnar/stovnar talan er um, hava vit í talvuni niðanfyri tikið samanum høvuðstølini í fíggjarstøðuni hjá hesum 16 stovnum/grunnum. Harafturat eru 6 sokallaðir "eksternir grunnar", sum eru við í landsroknskapinum sum fylgiskjøl, men eru ikki taldir við í fíggjarstøðuni:

(mió.kr.)

	Aktiv					Passiv		
	Virðis-brøv	Útlán	Áogn o.a.	Tøkur pen-ingur	Til-sam-ans	Skuld	Egin-ogn	Til-sam-ans
Eksternir grunnar:								
Vinnuframagrunnurin	-	-	-	46	46	4	42	46
Forskotsgrunnur Fiskiflotans	-	-	16	7	23	-	23	23
Endurgjaldsgrunnur Alivinnunnar	-	-	-	15	15	-	15	15
Mentanargrunnur Landsins	-	-	-	5	5	-	5	5
Granskingargrunnurin	-	-	4	-	4	-	4	4
Grunnur ætlaður brekaðum	-	-	-	1	1	-	1	1
Eksternir grunnar, tilsamans	**-**	**-**	**20**	**74**	**94**	**4**	**90**	**94**
Aðrir grunnar/stovnar:								
Føroya Realkreditstovnur	121	494	17	1	633	81	552	633
Arbeiðsloysisskipanin (2001)	285	-	3	95	383	8	375	383
Húsalánsgrunnurin	-	260	41	110	411	23	388	411
Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin	190	-	36	58	284	1	283	284
Jarðargrunnurin	-	100	-	88	188	1	187	188
Landsbankin, netto	-	-	-	127	127	-	127	127
Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin	-	62	-	5	67	1	66	67
Trygdargrunnurin	-	-	1	69	70	-	70	70
Íbúðagrunnurin	-	6	10	7	23	11	12	23
Frítíðargrunnurin (2001)	-	-	-	13	13	-	13	13
Sjálvsognarstovnurin Sambýlir	-	-	11	2	13	9	4	13
Fróðskaparsetur Føroya	-	-	4	1	5	2	3	5
Grunnur f. Vakstrarhús/grønmetisfr.	-	-	-	5	5	-	5	5
Bókamiðsølan	-	-	1	3	4	3	1	4
Brandskúlin	-	-	1	-	1	-	1	1
Jólamerkjagrunnurin	-	-	-	1	1	1	0	1
Aðrir grunnar/stovnar, tilsamans	**596**	**922**	**125**	**585**	**2.228**	**141**	**2.087**	**2.228**
Grunnar/stovnar, tilsamans	**596**	**922**	**145**	**659**	**2.322**	**145**	**2.177**	**2.322**

Av talvuni sæst, at grunnarnir tilsamans hava eina eginogn 2.177 mió. Av hesum eru 596 mió.kr. í virðisbrøvum, og 659 mió.kr. er tøkur peningur. Útlán eru 922 mió.kr.

Á talvuni niðanfyri hava vit í 1. talraði ein samandrátt av fíggjarstøðuni við árslok 2002, soleiðis sum hon er sett upp á s. 8 og 9 í landsroknskapinum. Í 2. talraði er ein samanteljing av fíggjarstøðuni hjá frammanfyri nevndu grunnum/stovnum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

(mió.kr.)

	Fíggjarstøðan í landsroknskapinum	Grunnar/stovnar, sum ikki eru við í landsroknskapinum	Tilsamans
Aktiv			
Kapitalinnskot	1.492	-	1.492
Virðisbrøv	328	596	924
Útlán	347	922	1.269
Áogn o.a.	458	145	602
Tøkur peningur	2.763	659	3.422
Aktiv, tilsamans	**5.388**	**2.322**	**7.710**
Passiv			
Skuld	5.001	145	5.146
Útjavnanarkonta/eginogn	387	2.177	2.564
Passiv, tilsamans	**5.388**	**2.322**	**7.710**

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum er ein samandráttur av fíggjarstøðuni hjá øllum "vanligum" landsstovnum, sum eru við á fíggjarlógini. Harafturat eru nakrir postar, sum eru felags, t.d. størsti parturin av tøka peninginum og av skuldini. Fíggingargrunnurin frá 1992 er við undir "kapitalinnskot", og partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við undir "virðisbrøv".

Av 2. talraði sæst, at grunnar/stovnar, sum ikki eru við í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum, hava eina "eginogn" um 2,3 mia.kr. Um 1,2 mia.kr. er tøkur peningur/virðisbrøv, og um 0,9 mia.kr. er útlán.

Umboð fyri fleiri av teimum 16 grunnunum/stovnunum, ið ikki eru við í landsroknskapinum, hava boðað frá, at tey eru ikki samd í niðurstøðunum í álitinum hjá Fíggjarmálaráðnum. Eftir teirra áskoðan eru fleiri grunnar/stovnar sjálvsognarstovnar og tí ikki ogn landskassans. Sum víst á frammanfyri arbeiða Løgmálaráðið, Fíggjarmálaráðið og fleiri arbeiðsbólkar framvegis við at greiða ivaspurningarnar, m.a. um ognarrætt og tilknýtið til landsroknskapin í framtíðini.

2.5.4 Fíggjarligur útbúnaður (GL 2003/3 01 2-4)

Kapitalogn í landsfyritøkum (t.kr.)

Ár	2002	2001	2000
Sambært roknskapinum	1.492.390	1.451.833	1.266.788

Roknskaparposturin fevnir um 2 grunnar; Fíggingargrunnin frá 1992 og Byggi- og rakstrargrunn Postverksins. Kapitalognin svarar til "eginognina" hjá hesum grunnum (t.kr.):

Fíggingargrunnurin frá 1992	1.492.127
Byggi- og rakstrargrunnur Postverksins	263
	1.492.390

Sambært endaliga roknskapinum hjá Fíggingargrunninum er eginognin um 17,7 mió.kr. hægri, enn roknað varð við í landsroknskapinum.

Til 1998 var samsvar millum "eginognina" í ársroknskapinum hjá Postverki Føroya og í landsroknskapinum. Í 1999 varð Postverkið tikið við á fíggjarlógina sum landsfyritøka. Í landsroknskapinum verða íløgur útreiðsluførdar, men í eksterna roknskapinum hjá Postverki Føroya verða tær aktiveraðar og avskrivaðar yvir nøkur ár. Tí er munur á hesum báðum roknskapunum. Byggi- og Rakstrargrunnur Postverksins er skrásettur sum "internur grunnur". Á s. 331 í landsroknskapinum verður kunnað um, at av tí at Gjaldstovan ov seint hevði tølini hjá Postverkinum viðvíkjandi aktivum og passivum, er fíggjarstøðan hjá Postverkinum ikki tikin við í landsroknskapin 2002, men er víst á s. 334 undir "serligum viðmerkingum". Fíggjarstøðan verður tikin við í 2003.

Vit hava áður víst á, at tað er torført at síggja, um kapitalognin hjá øllum landsfyritøkum er við í roknskaparpostinum "kapitalinnskot í landsfyritøkum". Eingin allýsing finst av hugtakinum "landsfyritøka", og at júst hesir báðir grunnar eru eftir í roknskaparpostinum, er helst ein søgulig tilvild. Í uppskotum til samtyktar hevur Løgtingið í nógv ár mælt landsstýrismanninum til at fáa greiðu á hesum roknskaparposti.

Landsstýrismaðurin hevur víst á, at við støði í álitinum frá Fíggjarmálaráðnum í november 2001 um landsstovnar og –grunnar, verður arbeitt við at greiða ivaspurningarnar um framtíðar tilknýtið hjá fleiri landsstovnum/-grunnum til landsroknskapin. Í februar 2003 helt landsstýrismaðurin, at ivamálini skuldu verið greidd í landsroknskapinum 2003. Eftir øllum at døma heldur henda tíðarfreist ikki.

Virðisbrøv (t.kr.)

Ár	2002	2001	2000
Sambært roknskapinum	328.411	271.701	221.701

Vøksturin frá 2000 til 2001 stavar frá partapeningi, sum Landsstýrið setti í p/f Vágatunnilin, 20 mió.kr., og í p/f Norðoyatunnilin, 30 mió.kr. Vøksturin frá 2001 til 2002 stavar frá partapeningi, sum Landsstýrið setti í p/f Vágatunnilin, 20 mió.kr., p/f Norðoyatunnilin, 32,5 mió.kr., og í p/f Virðisbrævamarknað Føroya, 4,2 mió.kr.

Yvirlit yvir partabrøv, sum eru skrásett í landsroknskapinum

Skrásett í landsroknskapinum (t.kr.)	2002 Upphædd	2001 Upphædd	2000 Upphædd	Til skjals á Gjaldstovuni	Ikki til skjals
P/f Skipafelagið Føroyar	70	70	70	x	
P/f Føroya Banki	1	1	1	x	
P/f Flogsamband	1.521	1.511	1.511	x	
P/f Fiskaaling	175	175	175	x	
P/f Tvøroyrar Flakavirki	820	820	820	x	
Sp/f Vedding	20	20	20		x
L/f Skopunar Útróðrarfelag	50	50	50		x
P/f Føroya Dátusavn	200	200	200	x	
P/f Føroya Lívstrygging	500	500	500	x	
P/f Smyril Line	2.760	2.760	2.760	x	
P/f Elektron	2.347	2.347	2.347	x	
P/f Atlantic Airways	75.000	75.000	75.000	x	
P/f Føroya Tele	77.948	77.948	77.948	x	
P/f Norðoyatunnilin	62.500	30.000	0	x	
P/f Virðisbrævamarknaður Føroya	4.200	-	-	x	
P/f Vágatunnilin	100.300	80.300	60.300	x	
Partabrøv tilsamans	**328.411**	**271.701**	**221.701**		

Gjaldstovan hevur sett reglur fyri, hvussu partabrøv eiga at verða goymd. Tá ið tey eru keypt, skulu tey verða latin Gjaldstovuni. Sama er galdandi fyri onnur virðisbrøv. Reglurnar viðgera tó ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

Í landsroknskapinum er partapeningurin skrásettur við keypsvirðinum, og gevur sostatt onga ábending um aktuella virðið á feløgunum.

Landið eigur allan partapeningin í 5 feløgum: p/f Atlantic Airways, p/f Føroya Tele, p/f Vágatunnilin, p/f Norðoyatunnilin og p/f Fiskaaling.

Av teimum feløgum, landið hevur sett partapening í, er tað bert p/f Føroya Tele, sum hevur goldið út vinningsbýti. Fyri roknskaparárið 2002 rindaði p/f Føroya Tele 3 mió.kr.

Ultimo 2002 átti Landsstýrið sambært landsroknskapinum 175 t.kr. í partabrøvum í p/f Fiskaaling. Sambært roknskapinum hjá p/f Fiskaaling er partapeningurin í felagnum 500 t.kr. Vit hava fleiri ferðir heitt á Vinnumálaráðið um at greina hesi viðurskifti.

Ultimo 2002 átti Landsstýrið sambært landsroknskapinum 820 t.kr. í partabrøvum í p/f Tvøroyrar Flakavirki. Fiskimálaráðið gjørdi í september 2003 vart við, at felagið er strikað í partafelagsskrásetingini. Vit hava mælt Fiskimálaráðnum til at bóka burtur partabrøvini, sum eru skrásett í landsroknskapinum.

Ultimo 2002 átti Landsstýrið sambært landsroknskapinum 50 t.kr. í partabrøvum í L/f Skopunar Útróðrarfelag. Roknskapur felagsins fyri 2002 hevur onga fíggjarstøðu, men við árslok 2002 átti felagið um 17 t.kr. á bók. Fiskimálaráðið kunnaði í september 2003 um, at peningurin upprunaliga varð settur í felagið í 1968, og at felagið varð umskipað/endurreist í 1993, eftir at virksemið í felagnum var steðgað upp. Vit hava mælt Fiskimálaráðnum til at fáa greiðu á, um innskotið er mist.

Rentu- og avdráttarfrí lán (t.kr.)

Ár	2002	2001	2000
Sambært roknskapinum	170.573	178.411	186.182

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, til sjálvsognarstovnar og studningslán sambært Ll. nr. 34/1993, Ll. nr. 48/1964, Ll. nr. 42/1976 og Ll. nr. 26/1997.

Minkingin frá 2001 til 2002 stavar frá niðurskrivingum av studningslánum til útróðrarflotan og umlegging av lánum til fjarfiskiflotan.

Í sambandi við góðkenningina av greinaroknskapinum fyri september 2003 gjørdi Mentamálaráðið vart við, at saldan "lán til sjálvsognarstovnar" ikki er rætt. Um 35,1 mió.kr. eru veittar stovnum undir Mentamálaráðnum í rentu- og avdráttarfríum lánum, men hesi lán eru ikki skrásett í fíggjarstøðu landsins.

Útlán (t.kr.)

Ár	2002	2001	2000
Áogn landskassans	441.524	448.800	471.202
Sett av	-265.233	-262.060	-279.272
Sambært roknskapinum	176.291	186.740	191.930

Talan er m.a. um veðhaldsútlegg, lestrarlán, lán til Húsalánsgrunnin, ymisk lán innan fyri vinnumál, serlán, kurslán og studningslán, umframt likviditetslán, sum verða umsitin av Realinum.

Sett er av ímóti tapi. Virðið á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og studningslánum sambært roknskapinum er sett til kr. 0. Í sambandi við at hesi lán í 1999 vórðu løgd inn í eina nýggja lánsskipan, kannaði Gjaldstovan tey av nýggjum og avskrivaði um 400 mió.kr. Talan er um lán, har fyrr er sett av ímóti tapi. Lánini vórðu avskrivað, tí tað er endaliga staðfest, at ikki er gjørligt at heinta peningin inn, m.a. tí feløg eru strikað.

2.5.5 Áogn (GL 2001/3 01 3-6)

Goymslur (t.kr.)

Ár	2002	2001	2000
Sambært roknskapinum	27.961	24.564	27.312

Talan er um vørugoymsluna hjá Rúsdrekkasølu Landsins, Apoteksverkinum og Strandfaraskipum Landsins.

Skatta-, toll- o.t. skuldarar (t.kr.)

Ár	2002	2001	2000
Áogn landskassans	292.554	345.097	320.467
Sett av	-111.421	-108.017	-155.410
Sambært roknskapinum	181.133	237.080	165.057

Seinastu mongu árini hava vit víst á, at samsvar er ikki millum skattadebitorarnar hjá persónum og feløgum sambært skattaskipanunum og høvuðsbókhaldið/landsroknskapin. Talan er um munir, sum ikki eru støðugir.

Í sambandi við avstemman av fíggjarstøðuni hvønn mánað hevur Gjaldstovan aftur í 2003 víst á, at skattadebitorarnir, sambært teimum listum sum Gjaldstovan fær frá Elektron,

stemma ikki við høvuðsbókhaldið/landsroknskapin, at munir eru øll árini frá 1984 til 2002, og at grundarlagið fyri at stemma av framvegis ikki er nóg gott.

Í seinastu frágreiðing vísti Toll- og Skattstovan á, at hon kendist ikki við teir listar, sum Gjaldstovan nýtti at stemma av við, og hon fór at kanna, um Gjaldstovan nýtti røttu listarnar. Somuleiðis fór Toll- og Skattstovan, við hjálp frá Elektron, at stemma av og lýsa sambandið millum "GB-skipanina" og FSL fyri at greina, hví skattabókhaldið ikki stemmaði mótvegis FSL.

Í skrivi í februar 2004 fingu vit fráboðan um úrslitið av kanningini, og niðanfyri hava vit tikið samanum.

Partafelagsskattur

Partafelagsskatturin verður umsitin í tí partinum av skattaskipanini, sum verður nevndur Jurs-skráin. Úr hesi skránni verða upplýsingar latnar einari aðrari skrá (DK-skráin), sum býtir skattin millum land og kommunu. Jurs-skráin letur umvegis "GB-skipanina", sum er millumlið millum skattaskipanirnar og fíggjarstýringarskipan landsins (FSL), landsbókhaldinum upplýsingar um álíknaðan og goldnan skatt o.a.

Munir í skattaskipanini

Tá Toll- og Skattstovan í 2003 stemmaði Jurs- og DK-skráirnar av, funnu tey ein mun 4,5 mió.kr. viðvíkjandi skattaárunum 1985-2001. Talan var um ein programmfeil í DK-skránni, sum er rættaður. Í desember 2003 var munurin um 15 t.kr.

Munir millum skattaskipanina og landsbókhaldið

Tá ið Toll- og Skattstovan í 2003 stemmaði Jurs-skránna av mótvegis landsbókhaldinum, vísti avstemmanin ein mun um 3,7 mió.kr. Sambært Toll- og Skattstovuni vórðu inngjøld fyri bæði skatt og rentur fram til 1999 góðskrivað skattadebitorunum í landsbókhaldinum, hóast skattadebitorarnir í landsbókhaldinum eru uttan rentur. Tí eru skattadebitorarnir í landsbókhaldinum ov nógv niðurskrivaðir við minst 3,7 mió.kr.

Toll- og Skattstovan heldur seg hava tamarhald á viðurskiftunum millum skipanirnar, og eingir nýggir munir eru íkomnir, sum tey ikki vita, hvaðani teir koma. Toll- og Skattstovan hevur boðað frá, at hon í mars 2004 fer at gjøgnumganga avstemmanina av partafelagsskatti saman við Gjaldstovuni.

Persónsskattur

Í seinastu frágreiðing greiddi landsstýrismaðurin frá, at Toll- og Skattstovan í 2002 var komin á mál við at stemma persónsskattaskipanina av innanhýsis. Smærri munir vóru rættaðir, og Toll- og Skattstovan hevði staðfest, at partsskattaskráirnar í persónsskattaskipanini stemmaðu sínámillum, og at tær stemmaðu mótvegis "GB-skipanini", sum er millumliðið millum skattaskipanirnar og fíggjarstýringarskipan landsins (FSL).

Toll- og Skattstovan hevur valt partsskránna, DK-skránna, sum grundarlag í avstemmanini millum skattaskipanina og fíggjarstýringarskipan landsins (FSL). Toll- og Skattstovan staðfestir,

at álíkningin av persónsskatti stemmar millum DK-skránna og FSL árini 1997 til 2002, og at munirnir í álíkningini stava frá árunum 1983-1992,

at munir hava verið ímillum DK-skránna og FSL í "goldnum skatti" øll skattaárini 1983-2002, tí avlopsskatturin verður ikki tíðaravmarkaður eins í DK-skránni og FSL,

at konteringin av gjaldinum til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin (AM-gjaldið) hevur verið skeiv í FSL, soleiðis at skattadebitorarnir eru ov nógv niðurskrivaðir, og skattainntøkurnar av óróttum eru lækkaðar. Hetta varð rættað í juni 2003, tilsamans 6,7

mió.kr. Í framtíðini verður AM-gjaldið tikið burtur úr inngjaldinum til skattadebitorarnar,

at útgoldin avlopsskattur kemur retur, er móttakarin fluttur av landinum og bústaðurin ókendur. DK-skráin viðger peningin sum goldnan út, men sambært FSL er hann ikki goldin út. Í desember 2003 var talan um 128 t.kr.

Samanumtikið heldur Toll- og Skattstovan, at tá fyrilit verða tikin fyri hesum nevndu viðurskiftum, stemmar persónsskatturin. Persónsskatturin er stemmaður av allar mánaðirnar í 2003, og eingin nýggjur munur er staðfestur.

Toll- og Skattstovan er komin fram til, at Gjaldstovan skal niðurskriva skattadebitorarnar í landsbókhaldinum 1,2 mió.kr.

Í dag er avstemmanin skipað soleiðis, at Toll- og Skattstovan hvønn mánað stemmar persónsskattin av við at samanbera DK-skránna við "GB-skipanina". Gjaldstovan stemmar hvønn mánað DK-skránna av við FSL. Toll- og Skattstovan heldur hesa mannagongd veita trygd fyri, at "GB-skipanin" og FSL bóka somu upphæddir. Koma partarnir fram á munir, boða teir hvør øðrum frá, og feilirnir verða rættaðir beinanvegin.

Tíðaravmarkan

Gjaldstovan hevur aftur í 2003 víst á trupulleikan, at skipanirnar hjá Toll- og Skattstovu Føroya ikki kunnu handfara tíðaravmarkanir. Trupult er at fáa ein rættan landsroknskap, tá ið inntøkurnar verða tiknar við í landsroknskapin alt eftir, hvussu "a jour" Toll- og Skattstovan er við bókingum. Í januar 2003 boðaði Toll- og Skattstovan frá, at ongar ætlanir vóru um tøkniligar broytingar av bókhaldsskipanini, men dentur varð lagdur á at vera "a jour" við árslok.

Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar (t.kr.)

Ár	**2002**	**2001**	**2000**
Sambært roknskapinum	248.439	306.543	208.988

Talan er um skuldarar hjá Landsverkfrøðinginum, Strandferðsluni, sjúkrahúsunum og øðrum stovnum, sum lata vørur og tænastur. "Aðrir skuldarar" er m.a. renta av inniogn í Landsbankanum, ikki avroknað yvirskot (føroyski parturin) frá danska Tjóðbankanum, endalig uppgerð av ríkisstuðli umframt aðrar inntøkur ella endurgjøld, sum vanliga verða tíðaravmarkað, fyri at geva eina rætta mynd.

Eisini er talan um millumrokningar við landsstovnar, lønarútgjaldsskipanir, skipanir hjá Toll- og Skattstovu Føroya, kommunum o.a.

2.5.6 Tøkur peningur (GL 2001/3 01 4-3)

Inniogn í Landsbankanum (t.kr.)

Ár	**2002**	**2001**	**2000**
Sambært roknskapinum	2.412.372	2.320.902	1.789.619

Í seinastu frágreiðing í februar 2002 vístu vit á, at sambært § 6 í Ll. nr. 57/1978 "um Landsbanka Føroya" er Landsbankin bankasamband landskassans. Landsstovnar kunnu eisini nýta bankan sum bankasamband. Sambært § 2 í Ll. nr. 31/1995 "um landskassans innlán og lán í Landsbankanum", skulu innlánini í Landsbankanum í minsta lagi svara til 15% av bruttotjóðarúrtøkuni árið frammanundan. Vit hava fleiri ferðir áður víst á, at hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" ikki eru nóg greitt lýst, hvørki í lógunum ella í viðmerkingunum.

Vit hava eisini gjørt vart við, at fleiri landsstovnar/-grunnar, ofta við leysum tilknýti til fíggjarlóg og/ella landsbókhaldið, høvdu fleiri hundrað milliónir krónur standandi á banka- og girokontum, sum ikki vóru við í landsroknskapinum.

Í fleiri uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapirnar seinastu árini hava løgtingsgrannskoðararnir vístá, at útrokningin av bruttotjóðarúrtøkuni byggir á eitt leyst grundarlag, og at hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" í lógini "um Landsbankan" og í lógini "um landskassans innlán og lán í Landsbankanum" eru ógreið. Løgtingsgrannskoðararnir mæltu aftur landsstýrismanninum til at fáa greiðu á hesum viðurskiftum.

Í januar og september 2002 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" fóru at verða lýst neyvari í uppskoti til broyting í lóg "um Landsbankan", sum fór at verða lagt fyri Løgtingið á heysti 2002.

Í februar 2003 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at arbeitt varð við at seta ein óheftan arbeiðsbólk at endurskoða alla lóggávuna viðvíkjandi Landsbankanum og at koma við tilmæli um framtíðar bygnað. Landsgrannskoðanini kunnugt, er eingin arbeiðsbólkur settur.

Í einum uppriti um, hvussu bøtt kann verða um stýringina av landsins gjaldføri, vísir Gjaldstovan í mars 2004 m.a. á, at hóast tað er ásett í § 15 í roknskaparkunngerðini, at allar útgjaldingar skulu fara gjøgnum búskaparskipanir landsins, fara um 3 mia.kr., útivið helvtin av øllum útreiðslum o.ø., sum eru heimilaðar á fíggjarlógini, uttanum búskaparskipanir landsins.

Gjaldstovan vísir eisini á, at tað er ógreitt, hvat átti at staðið í Landsbankanum, og tí er eisini ógreitt, hvussu nógv Landsstýrið kann brúka av almennum gjaldføri, uttan at fara út á lánimarknaðin ella broyta lógina.

Gjaldstovan mælir m.a. til

at seta tiltøk í verk, so at stovnar ikki sjálvir liggja við gjaldføri, men flyta tað í Landsbankan, sum so kann hava gjaldførið standandi í peningastovnunum, verður tað neyðugt,

at staðfesta eitt nógv greiðari ábyrgdar- og myndugleikabýti millum landsstovnar, Gjaldstovuna og Landsbankan,

at seta í verk eina virknari, nútímans gjaldførisstýring, sum hevði fört til hægri rentuinntøkur,

at útgjaldsskipanin hjá Gjaldstovuni verður ein miðdepil í almennu gjaldførisstýringini, so sum ætlanin var upprunaliga.

Banka-, giro- og kassapeningur (t.kr.)

Ár	**2002**	**2001**	**2000**
Sambært roknskapinum	350.112	318.097	286.587

Sambært landsroknskapinum er "banka-, giro- og kassapeningur", sum við árslok stendur á bók ella er í kassa, støðugt vaksin, frá um 183 mió.kr. í 1999, til 350 mió.kr. í 2002. Tað kundi bent á, at gjaldførisstýringin hjá landskassanum og teimum stovnum, ið hava egnan likviditet, ikki er nóg neyv.

Í sambandi við avstemman av fíggjarstøðuni hevur Gjaldstovan í áravís vístá, at landsstovnar/-fyritøkur (t.d. Útvarp Føroya, Apoteksgrunnurin, Húsalánsgrunnurin, Trygdargrunnurin og Rúsdrekkasøla Landsins) hava nógvan pening standandi á kontum í øðrum peningastovnum. Gjaldstovan hevur sett spurningin, um ikki hesin peningur átti at staðið í Landsbankanum.

Gjaldstovan hevur eisini vístá, at Strandfaraskip Landsins hevur havt yvirtrekk á sínum peningastovnskontum, samstundis sum landskassin hevur nógvan likviditet. Hesin trupulleiki er loystur í 2003.

Fleiri landsstovnar hava egnar banka- og girokontur. Síðani roknskaparkunngerðin kom í gildi, er talið á banka- og girokontum, sum liggja uttanfyri landsbókhaldið, nógv minkað. Vit hava áður víst á, at nakrir smáir stovnar stemmaðu ikki sínar kassa- og peningastovnskontur regluliga av við landsbókhaldið, og at fleiri kassa- og peningastovnskontur vóru skrásettar við negativari saldu í landsbókhaldinum. Í dag eru viðurskiftini so at siga komin í rættlag.

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv "landið" tilsamans hevur standandi á banka- og girokontum. Sum víst á, hava fleiri landsstovnar/-grunnar, við leysum/ivasomum tilknýti til fíggjarlóg og/ella landsbókhaldið, fleiri hundrað milliónir krónur standandi á banka- og girokontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

2.5.7 Skuld (GL 2000/3 02 2-2)

Innanlandsskuld, langfreistað (t.kr.)

Ár	**2002**	**2001**	**2000**
Sambært roknskapinum	401.318	405.834	412.295

Størstu upphæddirnar í 2002 eru brævalán, tilsamans navnvirði 300 mió.kr., og lán úr Íleggingargrunninum 99 mió.kr. Harafturat er talan um íløgugrunnar og bundna uppsparing.

Landsbanki Føroya umsitur lánsskuld landskassans og ger á hvørjum ári upp tíðaravmarkaðu rentuna. Broytingin frá 2001 til 2002 stavar frá, at í 2002 vórðu brævalán frá 2001, tilsamans 300 mió.kr., goldin aftur, og nýggj brævalán 300 mió.kr. vórðu seld.

Í seinastu frágreiðing mælti Landsgrannskoðanin til at viðgera spurningin, um tað er skilagott at nýta orku og pening at skriva út brævalán, samstundis sum landið hevur tøkt gjaldføri.

Uttanlandsskuld, langfreistað (t.kr.)

Ár	**2002**	**2001**	**2000**
Sambært roknskapinum	4.098.148	4.242.923	4.380.805

Talan er um 2 lán, sum stava frá avtaluni 10. juni 1998 ímillum donsku stjórnina og Landsstýrið. Annað lánið er 4.024 mió.kr. Hitt lánið er 500 mió.kr., og er sambært avtaluni rentu- og avdráttarfrítt við teimum treytum, sum standa í lánsavtaluni: *"Afviklingen af lånet aftales i takt med eventuelle indtægter fra fremtidig råstofudvinding. Dog afskrives gælden efter 20 år, såfremt der ikke på det tidspunkt er startet udvinding af råstoffer."* Lánini samsvara við lánsavtalur og onnur uttanhýsis skjøl.

Í november 2003 boðaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum frá, at Landsstýrið fór at umfíggja skuldina til danska statin, við at rinda ein eykaavdrátt 1,7 mia.kr. av "4 milliardláninum". Umleggingin skuldi verða fíggjað við 0,5 mia.kr. av gjaldføri Landsbankans, og við at Landsstýrið skrivaði út 1,2 mia.kr. í lánsbrøvum.

Harafturat kemur eitt studningslán frá Hypotekbankanum til Spesialskúlan. Lánið kr. 1.865.561 er ikki niðurskrivað ella goldið aftur seinastu nógvu árini. Sambært landsroknskapinum er eingin renta tilskrivað. Gjaldstovan hevur sett seg í samband við Hypotekbankan og spurt, hvat lán talan er um, og hvørjar treytir eru. Hypotekbankin hevur í skrivi í juli 2002 boðað Gjaldstovuni frá, at bankin kennist ikki við lánið, og Gjaldstovan hevur biðið Sernámsdepilin (Spesialskúlan) um eina frágreiðing. Gjaldstovan hevur í februar 2004 boðað frá, at "Socialministeriet" hevur slept kravinum, og tinglýsingin hevur avlýst pantini. Lánið verður tí avskrivað í landsroknskapinum fyri 2003.

Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar innanfyri komandi árið (t.kr.)

Ár	2002	2001	2000
Sambært roknskapinum	447.906	440.863	434.155

Talan er um brævalánið 300 mió.kr. og árliga avdráttin av láninum til donsku ríkisstjórnina.

Stuttfreistað skuld (onnur skuld) (t.kr.)

Ár	2002	2001	2000
Sambært roknskapinum	501.646	520.856	393.336

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, millumrokningar við kommunur, tíðaravmarkanir og skuld, sum er greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við sundurgreiningar, sum liggja aftanfyri.

Útjavnanarkonta (t.kr.)

Ár	2002	2001	2000
Salda 1. januar	121.964	-841.342	-1.583.304
RLÚ-úrslit	190.656	697.166	601.762
Ymiskar broytingar	73.953	270.435	139.271
Salda 31. desember	**386.572**	**126.258**	**-842.272**

"Ymiskar broytingar" fevna um broytingar á fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er m.a. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskaparmeginreglum, rættingar av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøka av grunnum, úrslit hjá internum grunnum, broytingar í avsetingum, mótbókingar til útlánsroknskap og mótbókingar til kapitalinnskot. Vit hava við stakroyndum kannað grundarlagið undir bókingunum; einki var at viðmerkja.

Útjavnanarkontan líkist ikki "Kontu fyri eginpening" í einum privatum virki. Aktivini í landsroknskapinum verða virðismett øðrvísi, og materiell støðisogn, t.d. bygningar, skip, vegir o.t., verða ikki virðismett í roknskapinum. Útjavnanarkontan hevur tí so at siga bert eitt tøkniligt endamál.

2.6 Umsiting av skatti, avgjøldum o.a.

2.6.1 Roknskapar- og trygdarreglur (GL 1996/2 04 0-2)

Í seinastu frágreiðingum okkara umrøddu vit, at roknskapar- og trygdarreglurnar vóru ógreiðar, og vit mæltu til at endurskoða reglurnar.

Í desember 2002 varð ein samlað roknskaparreglugerð, galdandi frá 2003 fyri Stýrið og øll økini, løgd út á intranetið. Roknskaparreglugerðin er enn ikki formliga er góðkend av Fíggjarmálaráðnum, tí trygdarpolitikkur stovnsins ikki er nøktandi greinaður í roknskaparreglugerðini. Toll- og Skattstovan hevur fingið álagt at greina trygdarpolitikkin, áðrenn roknskaparreglugerðin verður góðkend av Fíggjarmálaráðnum. Sambært landsstýrismanninum í mars 2004 miðar Toll- og Skattstovan ímóti, at roknskaparreglugerðin skal verða liðug 1. juli 2004.

Ásett er, at í roknskaparreglugerðini skal verða greitt frá um skipanina av roknskaparverkinum og fyriskipan av roknskaparuppgávunum á stovninum, herímillum upplýsingar um ábyrgdar- og heimildarbýti og tær reglur, sum skulu verða fylgdar í sambandi við útinnan av roknskaparuppgávunum. Harafturat eru reglur fyri, hvørji innanhýsis eftirlit skulu verða gjørd, og hvussu tey skulu verða skjalprógvað.

Í 2003 fóru vit undir, saman við sakkønari hjálp, at kunna okkum neyvari um m.a. mannagongdir, roknskaparreglugerðir, umsiting av persónsskatti, felagsskatti, meirvirðisgjaldi og innkrevjing. Við árslok 2003 hava vit gjøgnumgingið persónsskatt og felagsskatt, og arbeiðið heldur fram í 2004.

Vit hava fylgt vanligu málsgongdini fyri at staðfesta, hvørji innanhýsis eftirlit (manuell og maskinell) tryggja, at øll gildig krøv verða skrásett rætt og í røttum tíðarskeiði. Vit hava við stakroyndum valt út broytingar av persónsdáta, fyribilsskrásetingum og av álíkningum, bæði hjá persónum og feløgum. Vit hava síðani kannað, um mannagongdir í roknskaparreglugerðini og aðrar ásetingar verða fylgdar, og í hvønn mun innanhýsis eftirlit eru gjørd og skjalprógvað, sum ásett.

Í arbeiði okkara eru vit, eins og í undanfarnum kanningum av roknskapar- og trygdarreglum, komin fram á, at fleiri týðandi eftirlitslistar verða ikki skrivaðir út, og at mannagongdir og innanhýsis eftirlit eru ikki nóg væl lýst í roknskaparreglugerðini.

Ætlanin er í fyrsta umfari at kunna økini gjøllari um úrslitið av arbeiði okkara, og síðani kunna Stýrið um úrslitið. Tað er okkara vón, at arbeiði okkara kann verða við til at menna innaneftirlitið.

Í februar 2004 kunnaði stjórnin á Toll- og Skattstovuni um, at ætlanin er at fara runt til øll økini og gjøgnumganga allar arbeiðsuppgávur á økisskrivstovunum, fyri at kanna samsvarið ímillum roknskaparreglugerðina og arbeiðsuppgávurnar, og hvussu ábyrgdir og heimildir, ið eru áløgd starvsfólkunum sambært roknskaparreglugerðini, verða røktar.

2.6.2 Avtala um kervisskoðan (GL 1996/2 04 0-2)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit aftur áheitan okkara á Toll- og Skattstovuna um at kanna, í hvønn mun kervisskoðanin á Elektron fevndi um skipanirnar hjá Toll- og Skattstovuni. Á fundi í mai 1997 hevur leiðslan á Elektron boðað frá, at tað ikki var nakar trupulleiki, at Toll- og Skattstovan eisini fekk eina váttan frá kervisskoðanini um, at generellu EDV-kontrollirnir vóru í lagi. Tó varð hildið, at serligar ásetingar/avtalur máttu verða gjørdar viðvíkjandi skoðanini, bæði tá ráddi um Toll- og Skattstovu Føroya og aðrar almennar EDV-skipanir, herímillum hvør skuldi bera kostnaðin. Elektron skuldi koma við uppskoti um eina skipan.

Ætlanin var, at viðurskiftini skuldu vera komin í rættlag í seinasta lagi 1. september 1997, men av fleiri grundum helt henda tíðarfreist ikki.

Í oktober 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at arbeitt varð við at gera uppskot um, hvussu kervisskoðanin skuldi verða løgd til rættis. Formligu leiðreglurnar fyri at fremja kervisskoðanina av skipanum og skipanarumhvørvinum hjá Toll- og Skattstovu Føroya á Elektron skuldu eftir ætlan verða lidnar við árslok 2002.

Í desember 2003 sendi Elektron Toll- og Skattstovu Føroya uppskot til avtalu um kervisskoðan, og verður hon nú viðgjørd.

2.6.3 Frágreiðingar um kervisskoðan

Landsstýrismaðurin boðaði í februar 2002 frá, at við árslok 2000 hevði kervisskoðarin hjá Elektron gjørt eina frágreiðing um tær telduskipanir, sum landið hevði á Elektron, herímillum skipanirnar hjá Toll- og Skattstovuni. Landsstýrismaðurin kunnaði í 2002 um, at forritararnir í framtíðini bert skuldu fáa lesirættindi til dáta. Ein veikleiki var, at skjalfestingin av skattaskipanina ikki var nøktandi, tí hon ikki var á einum slíkum støði, at hon *"gevur fólki við rímiligum EDV-kunnleika møguleika fyri at finna útav, hvussu skipanin er bygd upp"*. Víst varð eisini á, at bert tvey vóru eftir í starvi, sum høvdu verið við til at gera skipanina, og *"um størri broytingar í framtíðini skulu verða gjørdar í skipanini, og hesi tvey ikki longri eru í starvi á Elektron, verður sera trupult at gera slíkar broytingar, tí onnur hava lítlan møguleika til at fáa neyðuga vitan til vega um skipanina við at gjøgnumganga dokumentatiónina"*.

Í januar 2004 lat kervisskoðanin Toll- og Skattstovuni eina nýggja frágreiðing um kervisskoðan. Kervisskoðanin er farin fram soleiðis, sum lagt er upp til í uppskoti til avtalu um kervisskoðan.

Niðurstøðan í frágreiðingini um generellu EDV-kontrollirnar er, at tað sum heild er fyriskipað eitt nøktandi trygdar- og eftirlitsstøðið á Elektron, men tað eru staðfestir týðandi manglar og veikleikar á fleiri økjum, og nakrar viðmerkingar eru enn ikki loystar, m.a. at skjalfestanin av skattaskipanini ikki er nøktandi.

Í oktober 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at skjalfestanin av skattaskipanini skuldi bíða, til farið varð undir at umleggja skattaskipanina frá DL1 til relatiónsdátabasuna DB2, eftir ætlan fyrst í 2004, og tað fór væntandi at taka 2-3 ár. Vit mæla til at fara undir at skjalfesta skattaskipanina sum skjótast, tí tað er ikki ráðiligt at bíða, til farið verður undir at gera nýggja skattaskipan.

2.6.4 Atgongd til KT-skipanir hjá Toll- og Skattstovuni (GL 2000/2 04 1-2)

Í frágreiðingum okkara frá mars 2001 og í februar 2002 vístu vit á, at í fleiri førum hava starvsfólk atgongd til økir í telduskipanini á Toll- og Skattstovu Føroya, sum tey ikki skuldu havt atgongd til. Tí mæltu vit til ábøtur, og stjórnin tók fult undir við tilmælinum og boðaði frá, at menningardeildin var biðin um at seta mannagongdir í verk.

Í august 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, hvørjar trygdarfyriskipanir vóru settar í verk í sambandi við EDV-atgongd. Trygdarfyriskipanin, sum er ein leiðbeining og arbeiðsreglugerð hjá Toll- og Skattstovu Føroya, ásetir, at tað er stjórnin, sum hevur ábyrgdina av EDV-trygdarskipanini, men at dagliga umsitingin er hjá KT-trygdarvørðinum. Í trygdarskipanini stendur m.a.:

- hvussu farið skal verða fram, tá ið brúkari verður stovnaður ella strikaður,
- at fráboðanir um stovnan og broytan skulu verða gjørdar á serstakt fráboðanarskjal,
- reglur um sign-on, logg-listar og telduútskriftir.

Ásett er, at deildarstjórarnir/økisstjórarnir hava ábyrgdina av, at starvsfólk bert hava atgongd til tað, tey skulu, fyri at røkja sítt arbeiði. Stýrið sendir deildar- og økisstjórunum yvirlit, sum vísa, hvørji rættindi teirra starvsfólk hava í EDV-skipanini. Teir vátta yvirlitini og senda tey aftur til Stýrið. Landsstýrismaðurin boðaði frá, at hann helt skipanina vera nøktandi.

Vit hava fingið at vita frá KT-trygdarvørðinum, at í mars 2002 og oktober 2003 sendi Stýrið yvirlit til økisstjórarnar at vátta, og økini hava sent yvirlitini aftur við rættingum. Nøvnini eru tikin frá Hagtalsskipanini, og tí er eingin vissa fyri, at allir teldubrúkarar eru við í yvirlitinum.

Vit hava kunnað okkum um, hvør hevur heimildir á kassaøkinum. Fleiri brúkarar hava heimildir, sum ikki samsvara við ásettar reglur. Greitt verður frá hesum undir "kassaeftirliti".

2.6.5 Innkrevjing (GL 2001/2 04 9-1)

Í frágreiðingum okkara í februar 2002 og februar 2003 vístu vit á, at nýggja innkrevjingarskipanin (IK-skipanin), sum kom í 2000, fekst at virka væl fyri tey krøv, sum Toll- og Skattstovan frammanundan varðaði av og kendi til, og sum heild var innkrevjingin helst munandi betri, enn hon var í 1994, tá ið eingin innkrevjingarskipan var. Tó eru trupulleikarnar teir somu á fleiri økjum.

Í Stýrinum er tað eftirlits- og innheintingardeildin, sum hevur ábyrgd av innheintanini. Økisstjórarnir á Toll- og Skattstovuni hava ábyrgd av at heinta inn eftirstøður frá borgarum, sum búgva í teirra øki. Á økisskrivstovunum eru pantifútar, sum greiða øll innkrevjingarmál, sum eru í IK-skipanini. Vága Øki heintar inn krøv til og frá útlondum, Eysturoyar Øki heintar inn krøv vegna Almannastovuna, og Norðoya Øki heintar inn krøv vegna sjúkrakassarnar.

Tað eru bert torgreidd mál, ið verða send Stýrinum. Menningardeildin í Stýrinum hevur ábyrgdina av at menna IK-skipanina. Roknskapar- og bókhaldsleiðarin hevur, saman við menningardeildini, ábyrgdina av roknskapinum og ábyrgdina av at stemma av millum skipanirnar.

Í fylgiskjølunum til fíggjarlógaruppskotið 1995 vísti landsstýrismaðurin á aktuella tørvin á einari innkrevjingarskipan, í sambandi við at arbeitt varð við einari nýggjari fíggjarstýringarskipan við tilknýttum debitorskipanum. Víst varð á, at:

1. innkrevjingarviðurskiftini hjá sama borgara vórðu viðgjørd í fleiri skipanum, sum ikki vóru samanbundnar,
2. markamótið millum Toll- og Skattstovuna og Gjaldstovuna var ógreitt,
3. innkrevjingin varð ikki loyst sum ein sergrein,
4. arbeitt varð við einari lóg um innkrevjing av øllum almennum krøvum,
5. innkrevjingin má verða samskipað við høvuðsbókhaldið, so tað slepst undan óneyðugum bókingum, feilum og millumrokningum.

Frammanfyri nevndu trupulleikar eru ikki loystir enn:

1. Framvegis verða innkrevjingarviðurskiftini hjá sama borgara loyst í ymiskum skipanum. Fallin krøv í debitor- og lánsskipanini á Gjaldstovuni og í debitor- og lánsskipanum hjá landsstovnum, sum liggja uttanfyri Gjaldstovuna, verða í flestu førum send beinleiðis til sakførara, uttanum innheintingina á Toll- og Skattstovuni.
2. Markamótið millum Toll- og Skattstovuna og Gjaldstovuna er framvegis ógreitt. Í tann mun markamótið er vorðið greiðari, er tað tí, at einki markamót er millum skuldarar í skipanunum hjá teimum báðum stovnunum.
3. Innkrevjingin verður ikki loyst sum ein sergrein. Tí mega landsstovnar hvør í sínum lag stíla fyri innkrevjing.
4. Eingin lóg er gjørd um innkrevjing av almennum krøvum.
5. Innkrevjingin er ikki samskipað við høvuðsbókhaldið, og sloppið er ikki undan nógvum óneyðugum bókingum, feilum og millumrokningum.

Toll- og Skattstovan arbeiðir við at bøta um IK-skipanina, og í februar 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann hevði sett sær sum mál, at øll ógreið viðurskifti ímillum IK- og FSL-skipanirnar skuldu verða komin í rættlag fyri 1. november 2002, og skuldi IK-skipanin tá lúka øll krøv í roknskaparkunngerðini. Landsstýrismaðurin vísti í tí sambandinum eisini á:

a) Gjaldstovan skuldi hava ein samskipandi og góðkennandi leiklut, tá ið nýggj markamót vórðu skapað millum IK-skipanina og aðrar stovnar, t.d. Almannastovuna og Stuðulsstovnin,
b) Skrivlig rakstraravtala skuldi verða gjørd millum Toll- og Skattstovuna og Gjaldstovuna um, hvussu farið skuldi verða kvalifiserað fram, um mótroknað varð í FSL-útgjaldingum.

Í mars 2004, hevur Toll og Skattstovan greitt okkum frá, at:

a) Gjaldstovan hevur nú góðkennandi leiklut, tá nýggj markamót verða skapt millum IK-skipanina og aðrar stovnar. Víst varð til samskiftið millum Stuðulsstovnin og Innkrevjingarskipanina,
b) innkrevjingardeildin á Toll og Skattstovuni mótroknar einki í FSL-skipanini, og eingi krøv verða send frá FSL-skipanini til Toll- og Skattstovuna.

Tað tykist, sum skipanin við innkrevjing fyri Stuðulsstovnin, sum byrjaði í november 2003, gongur væl. Eftir drúgt arbeiði, skrivaðu Stuðulsstovnurin og Toll- og Skattstovan á sumri 2003 undir eina reglugerð um, hvussu Toll- og Skattstovan skuldi krevja inn falna skuld fyri Stuðulsstovnin. Henda reglugerð er hin fyrsta útgreinaða avtalan við aðrar stovnar, og eftir hvat Toll- og Skattstovan hevur greitt frá, eru teir komnir fram til eina góða skipan.

Í "reglugerðini um innheinting av eftirstøðu", sum varð góðkend av Fíggjarmálaráðnum 2. apríl 2003, verður leikluturin hjá Gjaldstovuni ikki nevndur. Føroya Gjaldstova hevur greitt frá, at ongar mótrokningar verða gjørdar í teirra skipan.

Framvegis er tað so, at innkrevjingin verður ikki til fulnar loyst sum ein sergrein. Landsstovnar, sum hava sínar debitorar á Føroya Gjaldstovu, mega sjálvir stíla fyri innheintanini, og skylda fólk pening til stovn, sum ikki hevur bókhald á Gjaldstovuni, t.d. Útvarpið, Sjónvarpið, Strandferðsluna o.s.fr., verður heldur ikki mótroknað í t.d. avlopsskatti, negativum mvg o.a., tí hesir stovnar/grunnar heinta sjálvir inn síni krøv.

Brúkaraleiðbeiningar

Í seinastu frágreiðing vístu vit eisini á, at brúkaravegleiðingarnar o.t. vóru ikki nøktandi, og brúkararnir høvdu ikki neyðugan kunnleika til teir møguleikar, sum eru í IK-skipanini. Fyri at bøta um hetta fór menningardeildin á heysti 2001 undir at skriva eina nágreiniliga brúkaravegleiðing, umframt eina vegleiðing um innkrevjingarmannagongdir mótvegis brúkarum og stovnum. Roknskaparreglugerðin hjá Toll- og Skattstovuni er løgd út á intranetið hjá Toll- og Skattstovuni, og "Leiðbeining til IK-skipanina" er fylgiskjal til roknskaparreglugerðina.

Stjórin á menningardeildini hevur kunnað um, at nú eru fleiri hentleikar tøkir í IK-skipanini, m.a. eru gjørdar áminningarskipanir um fyrning og panting umframt aðrar ábøtur, sum lætta um arbeiðsgongdirnar. Hesar mannagongdir eru lýstar í roknskaparreglugerðini.

Innkrevjing av vinnulánum

Í 1997 varð ábyrgdin av innkrevjingini flutt frá Fíggjar- og Búskapardeildini til Gjaldstovuna, og í apríl 1998 varð innkrevjingin flutt til Toll- og Skattstovu Føroya. Í juli 1999 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Toll- og Skattstova Føroya var í ferð við gjølla at gjøgnumganga vinnulánini við tí fyri eyga at krevja inn tað, sum bar til. Steðgur kom í, og í februar 2002 fór framvegis eingin skipað mótrokning fram. Kunnað varð eisini um, at Toll- og Skattstova Føroya ansar eftir, at lánini ikki verða fyrnað.

Í februar 2002 boðaði Toll- og Skattstovan frá, at í samráð við Fiskimálaráðið, sum "eigur" flest øll vinnulánini, vórðu øll málini send sakførara í desember 2001, so hann kundi ætla um, hvørt tað var møguligt at fáa nakað aftur av lánunum. Sakførarin lat í januar 2002 Toll- og Skattstovuni eina samlaða meting. Hann vísti á, at millum skuldararnar vóru flestu partafeløgini strikað, og í øðrum førum vantaðu neyðug skjøl. Viðvíkjandi teimum málum, sum vóru til innheintingar, var niðurstøðan, *"at nakað kann væntast at koma inn afturat, partvíst tí vit umsita avdráttarskipanir, og partvíst tí trygd er fingin. Viðvíkjandi teimum málum, sum ikki eru komin til innheintingar, verður nokk eisini møguligt at fáa nakað inn. Men størsti parturin fer uttan iva at enda úrslitaleyst og verður ongantíð goldin."* Toll- og Skattstovan mælti landsstýrismanninum til at krevja inn tað, sum á nakran hátt var møguligt.

Í juli 2002 bóðu vit landsstýrismannin kunna okkum um gongdina í málinum. Landsstýrismaðurin boðaði í september 2002 frá, at:

1. ein skrivari í Stýrinum hjá Toll- og Skattstovu Føroya nýtir part av síni arbeiðstíð til at finna øll neyðug skjøl fram í hvørjum máli. Hetta vísir seg ofta at vera trupult, tí summi lán hava fleiri aðalráð/landsstýrismenn havt "undir hond".
2. lánini verða gjøgnumgingin, og í hvørjum føri sær verða krøvini gjørd upp av nýggjum, men arbeiðið gongur spakuliga, tí eingin arbeiðir burturav við at taka sær av hesum lánum.
3. Toll- og Skattstovan skipar fyri, at lánini verða løgd í IK-skipanina so hvørt, sum tey verða fráboðað móttakaranum. Fundur er avtalaður við Føroya Gjaldstovu og menningardeildina á Toll- og Skattstovuni um at finna eina fasta mannagongd.
4. viðvíkjandi mótrokning hevur Toll- og Skattstovan biðið landsstýrismannin um loyvi til at lata vera við at mótrokna í vanligum útgjaldingum (sivilrættarligum) frá tí almenna, tó undantikið avlopsskatti, negativum mvg o.a. Atvoldin er, at løgfrøðingar halda tað vera ivasamt, um mótroknað kann verða í slíkum krøvum, uttan at málini verða veruliga málsviðgjørd. T.v.s. at skuldarin frammanundan fær boð um, at mótrokning fer at verða gjørd; og skuldarin skal somuleiðis hava møguleika at kæra. Gjaldstovan ger útgjaldingar eina ferð um dagin, so tað verður trupult at hava eina manuella mannagongd. Skal slík mótrokning virka væl, og ikki darva peningaflytingum óneyðuga, má ein automatisk EDV-skipan verða gjørd, *"sum helst ikki verður bílig."* Tá ið so kemur afturat, at løgfrøðingar halda málsviðgerð skal til í hvørjum føri, heldur Toll- og Skattstovan tað verða trupult at nýta eina automatiska skipan.

Á fundi við Toll- og Skattstovuna í mars 2004 eru vit kunnað um,

at innheintingin hevur trupult við at finna fram skjøl, tí tey kunnu verða send til sakførara til innheintingar ella eru í varðveitslu hjá øðrum aðalráðum. Einki samlað yvirlit er, sum vísir, hvussu nógv vinnulán eru send til innheintingar hjá sakførarum, og innheintingin veit ikki, um aðalráð hava sent vinnulán til innheintingar hjá sakførara,

at eingin skipað gjøgnumgongd er av vinnulánum. Gjaldstovan sendir saldulista mánaðarliga til Toll- og Skattstovuna. Á seinasta saldulista frá mars 2004, eru 400 vinnulán, sum innkrevjingin skal taka sær av. Málsviðgerðin tekur tíð, og eingin er burturav settur til at taka sær av vinnulánum,

at eingi vinnulán eru løgd í IK-skipanina. Eingin fundur hevur verið millum Gjaldstovuna og Toll- og Skattstovuna um at skipa mannagongdir um innkrevjing,

at Gjaldstovan mótroknar ikki í útgjøldum. Okkum kunnugt hevur landsstýrismaðurin ikki tikið støðu til mótrokning í vanligum útgjøldum,

at einki skipað eftirlit er við fyrning.

Eftirlits- og innheintingardeildin í Stýrinum hevur ábyrgd av at heinta inn vinnulán, og síðani uppgávan varð flutt til Toll- og Skattstovuna í apríl 1998, hava ætlanir verið um at seta í verk eina skipaða innheintan av vinnulánum, men tað er ikki gjørt. Arbeiðið er merkt av, at innheintan av vinnulánum ikki er raðfest serliga høgt.

2.6.6 Kassaeftirlit á Toll- og Skattstovu Føroya (GL 2003/2 04 0-11)

Eins og árini frammanundan hava vit verið ófráboðað á kassaeftirliti í øllum økjunum á Toll- og Skattstovu Føroya.

Eftirlitsdagin kannaðu vit, um samsvar var ímillum upptalda kassapeningin og kassabókhaldið. Í øllum økjunum var samsvar ímillum upptalda kassapeningin og bókhaldið. Eisini kannaðu vit, um samsvar var ímillum peningastovnskonturnar í bókhaldinum og kontuavrit frá peningastovnunum. Samsvar var á øllum kontum. Í sambandi við kassaeftirlitini hava vit kannað, hvussu mannagongdirnar eru á kassaøkinum, og hvussu tær samsvara við roknskaparreglugerðina hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

Vantandi skilnaður ímillum skráseting og gjalding

Í roknskaparreglugerðini eru fleiri ásetingar um skilnað ímillum kassa og bókhald. Í fýra økjum er lagt upp til skilnað ímillum kassa og bókhald, í tveimum økjum bókar tann, sum situr við kassan. Vit hava kannað telduatgongdirnar, og tað vísir seg, at flest allir kassameistarar ella avloysarar eisini hava atgongd til at bóka, og tí er í roynd og veru eingin skilnaður.

At kalla somu trupulleikar, viðvíkjandi vantandi skilnað millum kassa og bókhald, eru í øllum økjunum. Vit hava mælt til at taka henda felags trupulleika til viðgerðar.

Skráseting av gjaldingum

Í roknskaparreglugerðini eru fleiri ásetingar um at skráseta gjaldingar við kassan, soleiðis at hvør avgreiðsluupphædd sær kann verða funnin fram aftur, gerst tað neyðugt, tá kassin verður stemmaður av.

Ymiskt er, hvussu økini skilja reglurnar. Eisini er ymiskt, hvussu tey umsita reglurnar. Vit hava mælt til at gera roknskaparreglugerðina so greiða, at starvsfólkini skilja hana.

Kvittanir

Í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum stendur, at inntøkur skulu verða skjalprógvaðar við rokningum, kvittanum o.t. til kundan, og at hesi skjalprógv skulu vera í talrøð.

Í roknskaparreglugerðini stendur, at kvittanin fyri gjaldingar við kassan skal vera talmerkt og í tvítaki, at standardoyðubløð frá Toll- og Skattstovu Føroya skulu verða nýtt, og at menningardeildin ger standardoyðubløðini. Í roknskaparreglugerðini er einki greitt orðað um kvittanir.

Kvittanir fyri toll, skrásetingargjald og toll-depositum eru eins í øllum økjunum. Í øllum økjunum verða ymiskar kvittanir brúktar til onnur gjøld, í tveimum økjum verða kvittanir skrivaðar út við serligum printara. Kvittanirnar eru í ymiskum litum, ymiskum støddum, venda ymiskar vegir, nakrar “in duplo”, aðrar “in triplo”, og onkur vísir til kassastempul, sum ikki finst longur. Ikki allar eru at finna í goymsluni yvir oyðubløð, sum Stýrið hevur.

Vit hava mælt til at orða roknskaparreglugerðina greiðari og mælt til at taka støðu til, hvørjar kvittanir økini skulu brúka til tey ymisku inngjøldini og at skipa fyri eftirliti við óbrúktum kvittanum.

Ógreiðar reglur um fulltrúir til peningastovnskontur

Í roknskaparreglugerðini er eitt hámark fyri, hvat kann standa á peningastovns- og girokontum. Eisini er greitt frá, hvør kann hava fulltrú til peningastovnskontur. Vit hava víst á, at reglurnar eru í andsøgn við hvørja aðra. Vit hava mælt stjórnini á Toll- og Skattstovu Føroya til at umhugsa av nýggjum, hvør skal hava peningastovnsfulltrú, og um tað er neyðugt, at so nógv fólk hava bankafulltrú. Mælt er eisini til at hugsa um at gera sjálvvirkandi flytingar frá peningastovnskontum til Landsbankan, hvørja ferð kontur fara upp um hámarkið.

Reglur um at seta kassapening í bankan

Í roknskaparreglugerðini er greitt frá, at peningurin, sum fer upp um fasta kassapeningin, skal verða settur í bankan beint eftir arbeiðstíð, og er bankin stongdur, skal peningurin verða koyrdur í náttarboksina hjá bankanum. Í einum øki var henda áseting ikki fylgd, tann dagin vit vóru á kassaeftirliti.

Vit hava mælt til, at roknskaparreglugerðin verður fylgd, ella verður endurskoðað út frá einari váðameting.

Lyklar til kassan

Í roknskaparreglugerðini er ásett, at tveir lyklar skulu vera til kassaboksina, og at kassameistarin skal hava annan. Hin skal verða deponeraður í bankanum. Í einum øki var ásetingin ikki fylgd tann dagin, vit vóru á kassaeftirliti.

Ásetingar um kassaeftirlit

Sambært roknskaparkunngerðini áliggur tað stovnsleiðaranum at gera ófráboðað kassaeftirlit, fyri at vissa seg um, at virðini eru til staðar, og at kassavirksemið verður forsvarliga umsitið. Í roknskaparreglugerðini stendur, at økisstjórin skal hava kassaeftirlit minst seks ferðir um árið, og at stjórnin skal gera ófráboðað kassaeftirlit minst eina ferð um árið.

Økisstjórarnir hava greitt frá, at teir ikki hava gjørt nakað kassaeftirlit í økjunum. Økisstjórarnir skuldu fáa upplæring um, hvussu kassaeftirlitið skuldi verða gjørt. Hana hava teir ikki fingið. Stjórnin hevur heldur ikki hildið ásetingina um kassaeftirlit.

Vit hava mælt til at eftirmeta tað, sum eru ásett í roknskaparreglugerðini um kassaeftirlit, og síðani at fylgja ásetingunum.

2.6.7 Innflutningsgjøld (GL 2001/2 04 5-7)

Eins og undanfarin ár hava vit gjørt ávísar teldukanningar (QMF) av tollskrásetingum, har vit av royndum vita, at stórir feilir kunnu koma fyri. Í seinastu frágreiðing vístu vit, at nú innflytarar sjálvir eru farnir at tollavgreiða, eigur Toll- og Skattstova Føroya at gera tílíkar teldukanningar javnan. Í februar 2004 hava vit aftur mælt Toll- og Skattstovu Føroya til at gera tílíkar kanningar javnan, og vit hava havt samskifti við Streymoyar øki um, hvussu kanningarnar kunnu verða gjørdar.

Væntandi koma vinnuligir kontantkundar við í skipanina at tollavgreiða sjálvir á sumri 2004. Tá kunnu teir tollavgreiða og avgreiða sínar gjaldingar á serligan hátt. Vit hava mælt til, at Toll- og Skattstova Føroya vendir sær til Gjaldstovuna, m.a. vísandi til § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini, fyri at tryggja, at broytta skipanin frá byrjan lýkur tey krøv, ið eru ásett viðvíkjandi trygd, gjaldingum og bókhaldi.

2.6.8 Rentuskattur (GL 2000/2 04 4-2)

Í frágreiðingunum í februar 2002 og í februar 2003 varð víst á, at í nógv ár hevur umsitingin av rentuskatti ikki verið nøktandi. Ábyrgdarviðurskiftini hava ikki verið nóg greið, nøktandi eftirlit hevur ikki verið við, um allur rentuskattur í peningastovnum og grunnum verður kravdur inn, avroknaður rættstundis ella bókaður rætt, og eingin renta hevur verið roknað av ov seint goldnum rentuskatti. Vit bóðu Toll- og Skattstovu Føroya um eina neyva útgreining av øllum bókingum av rentuskatti síðani 1995, serliga hvør peningastovnur og grunnur tað er, sum hevur goldið, nær teir hava goldið, og hvat tíðarskeið goldið er fyri. Nøktandi svar kom ikki. Stjórnin á Toll- og Skattstovu Føroya boðaði í februar 2003 frá, at arbeitt varð við at greiða málið saman við Føroya Gjaldstovu.

Í februar 2004 boðaði stjórnin frá, at bókingarskjølini vóru ikki kannað. Av tí at so long tíð var fráliðin, og møguligar morarentur í flestu førum vóru fyrnaðar, varð avrátt í staðin fyri við stakroyndum at kanna ávís bókingarskjøl.

Í skrivi í mars 2004 kunnaði stjórnin á Toll- og Skattstovuna um úrslitið av kanningini. Sum heild er Toll- og Skattstova Føroya av tí fatan, at allur skyldugar rentuskattur fyri árini 1995 - 2000 er goldin, men ikki altíð til tíðina. Eingin morarenta er kravd ella goldin. Av misgáum er rentuskattur í summum førum bókaður sum fíggjarognaravgjald ella sum rentuinntøka. Síðani 2001 hevur Toll- og Skattstova Føroya havt eina mannagongd, sum tryggjar, at renta verður roknað, verður ikki goldið til tíðina.

2.6.9 Framleiðsluavgjald (GL 1999/2 04 6-6)

Í frágreiðingum í februar 2002 og í februar 2003 varð umrøtt, at eftirlitið við framleiðslugjaldinum er ikki nóg væl greinað í roknskaparreglugerðini.

Stýrið fer saman við økisskrivstovunum at kanna framleiðslugongdina neyvari, og fer eftirsíðan at áseta reglur í roknskaparreglugerðini.

2.6.10 Ferðaavgjald (GL 2002/2 04 6-8)

Í september 2002 og fyrst í 2003 hava vit grannskoðað "Ferðaavgjald".

Lógargrundarlag

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 37 frá 26. mai 1988 "um ferðagjald" við seinni broytingum.

Sambært § 1, stk. 1, í lógini skulu 120 kr. verða goldnar fyri hvørt ferðafólk, sum verður flutt úr Føroyum. Sambært stk. 2 stendur flutningsfyritøkan og umboðsfólk hennara í Føroyum til svars fyri, at avgjaldið verður goldið landskassanum.

Í stk. 3 og stk. 4 stendur, at ferðaavgjald, ið er kravt inn í einum mánaði, skal verða goldið Toll- og Skattstovu Føroya í seinasta lagi 22. í øðrum mánaði eftir. Í seinasta lagi 10. í øðrum mánaði eftir, at kravt er inn, skal flutningsfyritøkan senda Toll- og Skattstovu Føroya uppgerð yvir flutt ferðafólk. Verður goldið ov seint, skal verða rindað 1,5% í mánaðarligari rentu. 1. januar 2004 varð rentan lækkað til 0,7%.

Sambært stk. 5 kann ferðaavgjald og renta, ið er fallin til gjaldingar, verða heintað inn við panting.

Sambært § 2 skal landsstýrismaðurin áseta neyvari reglur viðvíkjandi inngjøldum. Landsstýrismaðurin hevur í mars 2004 boðað frá, at hann um stutta tíð fer at áseta reglurnar í kunngerð.

Roknskaparreglugerð um ferðaavgjald

Í roknskaparreglugerðini eru ongar reglur viðvíkjandi ferðaavgjaldi. Partar av lógini um ferðaavgjald eru endurgivnir, og í kap. 4 í roknskaparreglugerðini stendur um inntøkur: *"Inntøkurnar verða álíknaðar/tilskrivaðar sambært teimum reglum, sum eru ásettar í tí einstøku skatta-/avgjaldslógini, og verður inntøkan bókað samstundis ella skjótast gjørligt aftaná. .....Harumframt hevur Toll- og Skattstova Føroya eitt skipað eftirlit, sum við stakroyndum kannar, um gjørt/givið er upp sambært avvarðandi lóg".*

Í desember 2003 mæltu vit Stýrinum til at endurskoða roknskaparreglugerðina.

Roknskapargóðkenning

Vit mæltu til, at serliga góðkenningarskjalið (EK 76.0) verður nýtt, tá mánaðarroknskapurin verður váttaður mótvegis Fíggjarmálaráðnum. Hetta fyri at tryggja, at allir partar eru greiðir yvir, hvat ein góðkenning merkir.

Umsitingin í Streymoyar øki

Eingin ávísur hevði ábyrgdina av ferðaavgjaldinum ella fylgdi við, um uppgerðirnar komu inn, ella um goldið varð. Tað var komið fyri, at økisstjórin hevði ringt til flutningsfyritøkur, fyri at minna tær á ferðaavgjald, men tað hevði ikki verið nøkur føst mannagongd. Lógarheimildin í § 1, stk. 5, um panting og í § 4 a um at kanna roknskapartilfar var ongantíð brúkt. Renta av ov seint goldnum ferðaavgjaldi var ongantíð roknað ella kravd, og flutningsfyritøkurnar høvdu ongantíð goldið morarentu.

Einki skipað eftirlit hevði verið, sum ásett í roknskaparreglugerðini. Í september 2002 komu vit fram á, at ein flutningsfyritøka hevði ikki goldið ferðaavgjald í 2002 og ikki goldið øll gjøldini viðvíkjandi 2001. Flutningsfyritøkan rindaði síðani peningin, slakar 2 mió.kr., í november 2002. Í januar 2003 fór Streymoyar øki undir at skuldskriva rentu fyri ov seint goldið ferðaavgjald. Fyri 2002 var rentan 112 t.kr., fyri 2001 15 t.kr. og fyri 2000 30 t.kr.

Í apríl 2003 boðaði økisstjórin frá, at arbeiðið viðvíkjandi eftirliti o.ø. av ferðaavgjaldi fór at verða lagt í fasta legu, soleiðis at eitt starvsfólk kom at taka sær av tí.

Umsitingin í Vága øki

Eitt starvsfólk umsitur ferðaavgjald í Vága øki. Starvsfólkið roknaði eftir uppgerðir, men tað varð ikki váttað á uppgerðirnar. Í mai 2003 boðaði økið frá, at tað nú verður váttað.

Fylgt varð við, um flutningsfyritøkur lótu inn uppgerðir til ásetta tíð, og um tær rindaðu rættstundis. Kom uppgerðin ikki rættstundis, fekk flutningsfyritøkan áminning. Samskiftið var ikki skrásett. Í mai 2003 boðaði Vága øki frá, at áminningar nú verða journaliseraðir.

Einki skipað eftirlit hevði verið, sum ásett í roknskaparreglugerðini, men fleiri stakroyndir vóru gjørdar.

Lógarheimildin í § 4 a, um at kanna roknskapartilfar og brævaskifti o.a. hjá flutningsfyritøkum og umboðsfólki teirra í Føroyum, hevur ongantíð verið brúkt. Vága økið hevði tó av og á samanborið "dagbøkurnar" hjá flutningsfyritøkunum og hagtølini hjá Statens Luftfartsvæsen við uppgerðirnar frá flutningsfyritøkunum. Komið varð fram á munir í uppgerðunum, og teir vórðu rættaðir.

Morarenta av ferðaavgjaldi varð bókað á skeiva kontu fram til februar 2000. Eingin renta var roknað síðani februar 2000. Í apríl 2003 varð renta aftur roknað, fyri 2002 5 t.kr. og fyri 2001 21 t.kr. Rentan varð bókað á rætta kontu, ið var stovnað til endamálið.

Uppgerðir hjá flutningsfyritøkunum

Stórur munur var á uppgerðunum frá flutningsfyritøkunum. Summar vóru ikki dagfestar, aðrar vóru ikki váttaðar ella undirskrivaðar, og ikki sást á øllum, hvaðani tær komu. Vit mæltu Toll- og Skattstovuni til at seta krøv til, hvussu uppgerðirnar skuldu síggja út. Stýrið hevur boðað frá, at oyðubløð nú eru gjørd til endamálið.

Aðrar viðmerkingar/tilmæli

Rykkjaramannagongdir eru manuellar, og eru ikki greinaðar í roknskaparreglugerðini. Vit mæltu til at áseta reglur fyri, hvussu farast skal fram, koma uppgerðir ikki inn til tíðina, og hvussu farast skal fram viðvíkjandi morarentu. Í februar 2004 boðaði Stýrið frá, at tey fóru at bøta um viðurskiftini.

Flutningsfyritøkurnar kunnu sigast at vera partur av umsitingini av lógini um ferðaavgjald. Vit hava tí mælt Toll- og Skattstovu Føroya til at umhugsa eina skipan, har t.d. grannskoðarin hjá flutningsfyritøkuni árliga váttar, at mannagongdir og bókhald eru hóskandi skipað við atliti at útrokning og avrokning av ferðaavgjaldinum, og at uppgerðirnar, ið eru latnar Toll- og Skattstovu Føroya, eru rættar.

Sambært Stýrinum er ætlanin at kanna hvussu ferðaavgjaldið verður handfarið í flutningsfyritøkunum. Síðani verður støða tikin til, hvussu eftirlitið skal verða skipað.

2.6.11 Trygdargrunnurin (GL 1998/2 09 1-2)

Í 2002 grannskoðaðu vit roknskaparviðurskiftini hjá Trygdargrunninum fyri avreiðingar og lønir. Vit vístu á fleiri veikleikar og mæltu til at bøta um roknskaparreglugerðina, áseta neyvar roknskaparmeginreglur, bøta um kontuskipanina, m.a. við at tillaga hana til kontuskipan landsins, og at bøta um EDV- og journalviðurskiftini.

Í juni 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at umsitingin av Trygdargrunninum varð flutt til Toll- og Skattstovu Føroya, Suðuroyar Øki. Í sambandi við kassaeftirlit í Suðuroyar øki í februar 2004 hava vit kunna okkum um, í hvønn mun bøtt er um viðurskiftini:

1. Trygdargrunnurin hevur onga roknskaparreglugerð, men umsitingin hevur brúkt roknskaparreglugerðina hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum, tí mannagongdirnar líkjast nógv. Økið arbeiðir við at tillaga roknskaparreglugerðina til Trygdargrunnin.
2. Kontuskipanin er ikki tillagað kontuskipan landsins og útgjøldini fara ikki um nýggju lønarskipanina. Arbeitt verður við hesum.
3. Toll- og Skattstovan hevur bøtt um journalviðurskiftini. Journalskipanin DocuLive er tikin í nýtslu.

Virksemið hjá grunninum varð tikið við á fíggjarlógina 2003, og roknskapur grunsins verður lagaður til og tikin við í landsroknskapin 2003.

3. LØGMANSFYRISITINGIN

3.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-9)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Meirnýtsla

2.11.1.21. Umbygging í Tinganesi (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2.300 t.kr. Meirnýtslan er 72 t.kr. Løgmaður vísir á, at *"Ræðisrætturin á hesi kontu lá hjá Landsverkfrøðinginum, men varð fluttur aftur til Løgmansskrivstovuna seint í árinum. Tá gjørt varð upp fyri gjørt arbeiði, vísti tað seg at vera ein meirnýtsla á góðar 70 t.kr."*

2.13.1.07. Søla av umboðsmanshúsinum í Aberdeen (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3,3 mió.kr. Meirnýtslan er 173 t.kr. Sambært løgmanni, vórðu tænastumannahúsini hjá umboðsmanninum seld fyri 281.000 £ - hægsta tilboð í august/september, men endalig staðfesting av søluni bíðaði eftir eykajáttanarlógini oktober/november. Eykajáttanarlógin dró út, og kursurin lækkaði sama tíðarbil. Hetta, saman við søluútreiðslum/ómaksløn til sakførara, gevur munin um 170 t.kr.

Minninýtsla

2.11.1.12. Viðlíkahald (Rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.162 t.kr. Minninýtslan er 301 t.kr. Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin hækkað 300 t.kr. Sambært løgmanni var ætlanin at gera ymiskar ábøtur í Bakkapakkhúsinum og í Leigubúðini, og Løgmansskrivstovan bað um 300.000 kr. í eykajáttan til bygging. Uppskotið til eykajáttan dró út í nakrar mánaðir, og eykajáttanarlógin varð ikki samtykt fyrr enn 19. desember 2002. Tí varð arbeiðið ikki sett í verk.

Lønarkarmur

Á høvuðskontum niðanfyri vísir roknskapurin, at farið er upp um ásetta lønarkarmin.

(t.kr.)

Konta	Navn	Lønarkarmur	Roknskapur	*Munur*
2.12.3.01.	Løgmaður og landsstýrið (rakstrarjáttan)	4.500	4.596	*96*
2.13.1.04.	Viðskiftastovur (rakstrarjáttan)	1.728	1.853	*125*

3.2 Samsýning o.a. til landsstýrismenn (GL 1998/2 02 9-2)

Sambært § 32, stk. 2, í stýrisskipanarlógini verða neyvari reglur um setanarviðurskifti løgmans og landsstýrismanna ásettar í løgtingslóg. Tað er gjørt í Ll. nr. 10/1993 "um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m." við seinni broytingum. Í lógini er neyvari ásett um løn, eftirløn umframt skattafrítt borðfæ og kostnaðarendurgjøld. Í 2000 grannskoðaðu vit veitingar til landsstýrismenn í 1999 og 2000. Lønarútreiðslur o.t. samsvaraðu ásetingunum í lógini, men vit mæltu løgmanni til at greiða fleiri ivaspurningar; m.a. um heimildina at veita onnur kostnaðarendurgjøld enn tey, sum eru ásett í lógini; hvussu nógv skal verða rindað/endurrindað fyri heimatelefon/fartelefon; hvat skal verða givið upp skattliga o.a.

Í mars 2001 tók løgmaður stig til at greiða heimildarspurningin um kostnaðarendurgjald fyri telefon o.a., tá ið løgmaður legði fyri tingið uppskot um at broyta lógina "um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m." Eftir uppskotinum skuldi løgmaður/landsstýrismaður fáa skattafrítt endurgjald fyri samskiftisútreiðslur, kr. 2.000 um mánaðin. Broytingaruppskotið, sum annars snúði seg um at hækka eftirlønirnar, varð samtykt við gildi frá 1. januar 2002. M.a. tí at nógv fólk mótmæltu, at lógarbroytingin viðvíkjandi eftirlønum hevði afturvirkandi gildi til 1951, samtykti Løgtingið í desember 2001 at seta broytingarlógina úr gildi aftur. Eftirsíðan feldi Løgtingið eitt nýtt broytingaruppskot frá løgmanni, og sostatt er "gamla" lógin framvegis í gildi.

Í februar 2002 vísti løgmaður á, at tíverri var støðan viðvíkjandi samskiftisútreiðslum óbroytt. Tí mátti verða umhugsað, hvørji stig skuldu verða tikin, vórðu endurgjald fyri samskiftiskostnað ikki ásett í løgtingslóg.

Í mai 2003 samtykti Løgtingið Ll. nr. 77/2003 "um nevnd at geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna v.m." Sambært lógini velur løgmaður eina nevnd við trimum fólkum at geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna v.m. Í nevndini, ið skal verða vald fyri hvørt valskeið, skal vera ein løgfrøðingur, ein kønur í lógarmálum og ein roknskaparkønur. Nevndin skal lata løgmanni tilmæli í seinasta lagi í aðru tingsetu í hvørjum valskeiði.

Í februar 2004 hevur løgmansskrivstovan kunnað um, at nevndin er ikki sett enn.

3.3 Menningarhjálp (GL 2003/2 02 1-2)

Tað einasta, ið er ásett um endamálið við játtanini, er ein regla í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið um, at "játtanin er ætlað til tiltøk, sum kunnu gagna menningarlondum, ella vera til hjálp í øðrum londum, um okkurt óvanligt er á vási".

Tá ið stuðul verður latin, er mannagongdin í høvuðsheitum, sambært Løgmansskrivstovuni, soleiðis:

1. Felagsskapir og einstaklingar søkja um stuðul til virksemi sítt uttanlands, antin sum menningarhjálp ella sum neyðhjálp.
2. Umsóknirnar verða viðgjørdar, og treytirnar, sum settar verða, eru:
   at hjálpin, ið latin verður, er viðkomandi, og at talan er um lond, ið verða hildin at vera menningarlond ella lond, ið hava verið fyri stórum skaða – antin av náttúruvanlukku ella av kríggi,
   at ein greið og álítandi verkætlan er til skjals, og
   at ein frágreiðing verður latin, tá ið verkætlanin er lokin.
3. Upprit verður síðan gjørt. Tekur løgmaður undir við uppritinum, verður umsóknin avgreidd.

Upprunaliga vóru 300 t.kr. játtaðar í 2002. Á eykajáttanarlógini fyri februar 2002 varð játtanin hækkað 2,7 mió.kr. til menningarhjálp til Afghanistan. Útgjøldini í 2002 eru:

- 2,8 mió.kr. eru veittar World Food Programme undir ST til bráðfeingis neyðhjálp í Afghanistan
- 150 t.kr. eru veittar Sjeyndadags Adventistasamkomuni. Endamálið er at gera tað møguligt hjá afghanskum børnum at fáa atgongd til hægri lærustovnar o.a.
- 50 t.kr. eru veittar til "Hjálp til Eysturevropa" til at flyta 40 sjúkrahússengur o.a. til Rumenia og til at keypa madrassur til sengurnar.

Vit hava kannað, um skjalprógv eru fyri útgjøldunum, um tey eru váttað, ávíst og konterað sambært galdandi reglum, og um ásetta mannagongdin er fylgd. Einki var at finnast at.

Játtanin til World Food Programme lýkur ikki til fulnar treytirnar um, at "ein greið og álítandi verkætlan er til skjals frammanundan", og at "ein frágreiðing verður latin, tá ið verkætlanin er lokin". Sambært Løgmansskrivstovuni hava Føroyar vent sær til World Food Programme um bráðfeingishjálp og ikki øvugt. Stovnurin hevur síðani keypt neyðsynjarvørur í grannalondunum hjá neyðstadda landinum, m.a. tí at vørurnar har eru bíligari, og eru tær somu, sum tey neyðstøddu eru von við. Løgmansskrivstovan helt, at í hesum føri var frægasti máti at veita bráðfeingisneyðhjálp, at veita stuðulin til ein væl skipaðan hjálparstovn við einum skjalprógvaðum endamáli og arbeiðshátti. Á heimasíðuni hjá World Food Programme er yvirlit yvir gevaralondini, og har ber til at síggja, hvussu nógv londini hava latið.

Landsgrannskoðanin heldur, at endamál, stuðulstreytir, málsviðgerð o.a. kundu verið væl betur lýst, og hevur mælt til at bøta um viðurskiftini.

Í mars 2004 hevur løgmaður kunnað um, at hann ætlar at leggja lýsing av ymiskum spurningum viðvíkjandi menningarhjálp fyri Løgtingið til aðalorðaskiftis. Løgmaður vónar, at tað fer at skapa nýggjar karmar um, hvussu fyrisitingin í framtíðini kemur at leggja slíkt arbeiði best til rættis.

3.4 Nord Atlantisk Brygge (GL 2003/2 02 1-2)

Fyrstu ferð, peningur varð játtaður til "Nord Atlantisk Brygge", vóru 3 mió.kr. á fíggjarlógini 2001. Í viðmerkingunum varð greitt frá, at: *"Í 2001 verður farið undir umvæling og høvuðsinnrætting av nevnda bygningi, ið væntandi verður liðugur at taka í nýtslu ár 2002. Umframt høvuðsinnrættingina, skulu serligar innrættingar gerast av tí økinum, ið Føroyar ráða yvir til føroyskt virksemi burturav. Viðmerkjast skal, at endalig kostnaðarmeting ikki er tøk enn."* Sambært viðmerkingunum vórðu 3 mió.kr. settar undir "Ætlan 2002". Eftirsum bygningurin væntandi fór at verða liðugur at taka í nýtslu í 2002, kundu viðmerkingarnar bent á, at væntaða játtanin fór at verða 6 mió.kr. tilsamans.

Vísandi til viðmerkingarnar til uppskotini til fíggjarlógir, eru metingarnar av samlaða kostnaðinum av verkætlanini hækkaðar til um 20 mió.kr. Vit hava biðið Løgmansskrivstovuna um eina frágreiðing.

Løgmansskrivstovan vísir m.a. til eina verkætlanarlýsing frá februar 2000. Sambært henni var talan um eitt prosjekt upp á 102 mió.kr. Danski staturin læt bygningin (pakkhúsið), mett virði 40 mió.kr. Norðuratlantisku londini skuldu lata 22,5 mió.kr. (Føroyar 4,5 mió.kr.) Ætlanin var at læna 22,5 mió.kr. (Seinni varð gjørt av ikki at taka lán. Føroyar skuldu rinda 1/3 svarandi til 5,7 mió.kr.) Restupphæddin 22,5 mió.kr. skuldu gávugrunnar fíggja. Av hesum hevði A. P. Møller og Hustru Chastine Mc-Kinney Møllers Fond í januar 2000 latið 20 mió.kr.

Eftir hesum at døma skuldi føroyski parturin av verkætlanini verða 10,2 mió.kr. Í hesum tali er tó ikki roknaður við tann partur av verkætlanini, ið m.a. fevnir um serinnrætting av føroysku hæddini, og rakstrarískoytið, ið londini Ísland, Grønland og Føroyar lótu grunninum í byggitíðarskeiðinum.

Løgmansskrivstovan vísir á, at tað var ikki vist tá, nær verkætlanin fór í gongd, og hvussu nógv hon fór at kosta. Trupult var at síggja frammanundan, hvat skuldi til, fyri at fáa henda aldargamla bygning í nýtiligan stand, og verkætlanin var ikki bjóðað út.

Biðið hevur verið um tann pening, ið Løgmansskrivstovan tá hevur vitað um. Løgmansskrivstovan vísir eisini á, at landsverkfrøðingurin hevur verið teirra ráðgevi og limur í bygginevndini, frá tí grunnurin Norðurbryggjan varð skipaður.

Á fíggjarlógini 2002 vóru játtaðar 5,7 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin hækkað 8 mió.kr. til 13,7 mió.kr. Sambært landsroknskapinum 2002 vórðu brúktar um 13,6 mió.kr.

Í viðmerkingunum til eykajáttanarlógina stendur m.a.: *"Um 8 mió.kr. fáast til vega afturat í ár, verður mett, at tørvur er á 2 mió.kr. til verkætlanina næsta ár. Umbyggingin fór í gongd í august í*

ár (2002) og verður væntandi liðug november-desember næsta ár (2003)". Landsgrannskoðanin vil vísa á, at søkt varð um eykajáttan í 2002, hóast meginparturin av útreiðslunum til verkætlanina fullu í 2003. Vit hava tí spurt, hvørji átrokandi viðurskifti gjørdu tað neyðugt við einari eykajáttan 8 mió.kr., ið varð samtykt 19. desember 2002.

Løgmansskrivstovan svaraði ikki spurninginum beinleiðis, men kunnaði um, at í samráð við Fíggjarmálaráðið varð eina eyka upphædd sett á eykajáttanarlógina seinast í 2002, so at meginparturin av tí upphædd, sum verkætlanin varð mett at kosta, kundi verða goldin.

Sambært landsroknskapinum 2002 vórðu útreiðslurnar til Nord Atlantisk Brygge 13,6 mió.kr. Peningurin sæst ikki aftur í ársroknskapinum 2002 hjá "Fonden Den Nordatlantiske Brygge", sum er undirskrivaður 22. mai 2003, hóast grunnurin og landskassin hava sama fíggjarár/roknskaparár (álmanakkaárið), og vit hava biðið Løgmansskrivstovuna um frágreiðing. Løgmansskrivstovan hevur í januar 2004 greitt frá, at peningurin er goldin Norðurbryggjuni tað árið, ið peningurin hevur verið játtaður. Sum er, er Løgmansskrivstovan ikki før fyri at greina roknskapin hjá grunninum øðrvísi enn tað, ið gongur fram av sjálvum roknskapinum. Landsgrannskoðanin heldur, at helst er talan um ymiska tíðaravmarkan, og fer at taka spurningin upp aftur við Løgmansskrivstovuna, tá ið roknskapurin fyri 2003 hjá grunninum er liðugur. Tá er ætlanin eisini at gjøgnumganga játtanar- og roknskaparviðurskiftini gjøllari.

3.5 Alment um studningslóggávu og studningsumsiting (GL 1998/2 02 9-2)

Nógvar studningsjáttanir verða bert lýstar við fáum orðum í viðmerkingum til fíggjarlógina. Stovnar/feløg kunnu fáa studning til somu endamál frá fleiri studningsjáttanum, og í ávísan mun er talan um fleirfaldaða málsviðgerð av somu umsóknum til sama endamál. Umsitingin av studningi er fløkt, óskipað og merkt av tvørrandi heimild at áseta greið og einsháttað krøv til málsviðgerð og útgjalding. Vit hava í fleiri frágreiðingum vísst á, at tørvur er á at bøta um studningsgrundarlagið/-lóggávuna og studningsumsitingina, so at endamál og treytir o.a. verða greiðari, og fyri at sleppa undan dupultarbeiði.

Viðvíkjandi studningsskipanum, sum venda sær til ein breiðan umsøkjaraskara, hava vit eisini vísst á, at tað er góður lóggávusiður, at neyvari reglur verða ásettar í serstakari lóg. Í lógini skal m.a. vera:

- Neyvari áseting um endamál. Í viðmerkingunum: ítøkiligar ásetanir fyri, hvørji úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt, sum mát fyri, um endamálið er rokkið.
- Lýsing/avmarkan av, hvør kann fáa studning, hvussu studningurin verður roknaður út, og hvussu stór samlaða studningsupphæddin er, vísandi til fíggjarlóg.
- Reglur fyri, hvussu og nær studningurin verður goldin út.
- Heimild at áseta reglur fyri viðgerð og góðkenning av umsóknum, krøv til skjalprógv og treytir fyri at játta og nýta studning.
- Heimild at krevja at einstaklingar, feløg ella viðtøkur fyri sjálvsognarstovnar o.t. skulu lúka ávís krøv/vera góðkend, sum treyt fyri at fáa studning.
- Heimild at áseta neyvari treytir og reglur viðvíkjandi fíggjarætlan, eftirliti, roknskapum og grannskoðan.
- Ásetingar um, at ein tilsøgn um studning fellur burtur, ella at studningurin skal verða rindaður aftur, lýkur móttakarin ikki longur settar treytir, ella megnar hann ikki at fullføra eina ætlan fyri ásetta tíðina.
- Krav um upplýsingarskyldu og atgongd til kanningar á staðnum.
- Møguligar revsireglur.

Trupulleikarnir eru á øllum málsøkjum, og tí tók Landsgrannskoðanin í september 2001 á seg, í samráð við fleiri aðalráð, at skipa fyri skeiði í "umsiting av stuðulsjáttanum o.a." Niðurstøðan á skeiðinum var, at stórur tørvur er á at bøta um studningslóggávu og studningsumsiting.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001) samtykti Løgtingið 12. mars 2002 at mæla til, at Løgmansskrivstovan átók sær ein virknan og samskipandi leiklut í arbeiðinum at bøta um verandi studningslóggávu.

Í desember 2002 tók løgmaður stig til fund við umboðum frá Fíggjarmálaráðnum, Løgmansskrivstovuna og Landsgrannskoðanina at lýsa málið. Niðurstøðan á fundinum var, at ein bólkur við starvsfólki úr miðfyrisitingini skuldi verða settur at arbeiða við málinum. Varð tað hildið at vera skilagott, skuldi bólkurin evna til eina almenna lóg um studning, sum skal áseta reglur fyri og krøv um roknskap, eftirlit, grannskoðan o.a. Harafturat skuldi bólkurin gera uppskot til eina skipan, sum skal tryggja, at verandi og nýggj studningslóggáva og viðmerkingar til studningsjáttanir á fíggjarlógini verða á fullgóðum støði.

Í januar 2003 heitti løgmaður á Fíggjarmálaráðið um at taka á seg ábyrgdina og leiðsluna av hesi verkætlan og at samskipa hana við arbeiðið hjá Fíggjarmálaráðnum at broyta játtanarskipanina. Løgmaður bað landsstýrismannin í fíggjarmálum boða Løgmansskrivstovuni frá fyri 1. mars 2003 "hvussu arbeiðið verður skipað, og hvør tíðarætlan er fyri verkætlanini".

Í september 2003 bóðu vit um avrit av hesi fráboðan og spurdu, um verkætlanin hevði gingið sum ætlað, og um/nær hon fór at verða liðug.

Í november 2003 ásannar løgmaður, at Fíggjarmálaráðið hevur ikki gjørt tað, ið løgmaður bað um í brævi sínum 21. januar 2003. Løgmaður vísir til skriv 28. oktober 2003, har landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vísir á, at Fíggjarmálaráðið hevur arbeitt við øðrum tíðarkrevjandi verkætlanum, so sum at endurskoðað játtanarskipanina og gjørt nýggja budgetskipan. Landsstýrismaðurin heldur tað ikki vera ráðiligt at hava fleiri bóltar í luftini, enn til ber at lofta. Sambært skrivinum frá landsstýrismanninum er ætlanin at áseta leiðreglur fyri studningsjáttanir í dagførdu játtanarskipanini, sum eftir ætlan skuldi verða liðug fyri árslok 2003. Síðani skal Fíggjarmálaráðið fara undir eina verkætlan fyri at fáa staðfest, um ein generell studningslóg skal verða gjørd, ella um farast skal undir eina miðvísa gjøgnumgongd av studningsøkinum og av tí studningslóggávu, ið finst í dag.

4. FISKIVINNA

4.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-9)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Meirnýtsla:

5.34.2.01. Fiskiveiðieftirlit, Vaktar- og bjargingartænastan (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 38,6 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin hækkað 750 t.kr. Meirnýtslan er 424 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stavar meirnýtslan frá høgu oljuprísunum og óvæntaðum útreiðslum til Tjaldrið. Harafturat fekk stovnurin boð um at skriva Føroya Sjómansskúla eina kreditnotu, um 309 t.kr., tí Mentamálaráðið vildi ikki góðtaka rokningina frá 2001. Grundgevingin hjá Mentamálaráðnum var, at eingin avtala var millum aðalráðini, hvussu nógv Sjómansskúlin skuldi rinda fyri siglingartíðina umborð á "Brimli". Sambært landsstýrismanninum er avtala gjørd við Mentamálaráðið við gildi frá 1. januar 2002.

5.34.4.22. Flutningsstuðul (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3,5 mió.kr. Meirnýtslan er 176 t.kr.

5.35.1.01. Sjóvinnufyrisitingin og Skráseting Føroya (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4,7 mió.kr. Meirnýtslan er 377 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er fyrisitingin av FAS skipanini økt, og inntøkurnar hjá Trygdarmiðstøðini yvirmettar.

Minninýtsla:

Flest allir stovnar/høvuðskontur á grein 5 "Fiskivinna" hava eina minninýtslu. Niðanfyri verður greitt frá summum teirra.

5.11.1.05. Fiskimálaráðið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 15,87 mió.kr. Minninýtslan er 2,57 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum vóru bygnaðurin og skipanin av tilbúgvingini (á undirkontu 22) ikki liðug í 2002, og tí er minni brúkt.

5.11.1.34. Granskingarætlanir (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 5 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin lækkað 2 mió.kr. Minninýtslan er 554 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð á sumri 2002 lýst eftir tveimum granskingarleiðarum, men teir vórðu ikki settir fyrr enn í 2003. Peningurin í 2002 er í høvuðsheitum farin til lønarútreiðslur til samskiparan á "Fiskivinnuroyndum", um 481 t.kr., og til verkætlanir, um 1.820 t.kr. Minninýtslan í 2001 var 3,5 mió.kr.

5.34.1.10. Lønjavningarstovan (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3.972 t.kr. Minninýtslan er 1.757 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vóru 2 størv ósett í 2002, og ætlaða EDV-verkætlanin varð ikki framd.

5.34.3.07. Fiskivinnuroyndir (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 8,24 mió.kr. Minninýtslan er 2,26 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum eru játtanir til verkætlanir truplar at umsita, m.a. tí at summar verkætlanir ikki koma í gongd.

5.34.4.16. Fiskivinnumenning á landi

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 8 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin lækkað við 1,8 mió.kr. Minninýtslan er 2,8 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum var nøgdin á innfluttum fiski minni enn mett frammanundan. Minninýtslan í 2001 var um 6,5 mió.kr.

5.35.1.02. Skipaeftirlitið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 10 mió.kr. Minninýtslan er 4,9 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum kom Skipaeftirlitið, sum varð yvirtikið 1. januar 2002, ikki at virka heilt eftir ætlan í 2002.

Annað:

5.34.5.01. Útlán

Á fíggjarlógini var eingin játtan til útlán. Sambært landsroknskapinum eru útreiðslurnar "Stuðul til vinnu" og "útlán v.m." um 8,9 mió.kr. og inntøkurnar "Afturgjald av útlánum v.m." um 15,6 mió.kr. Avskrivingar av vinnulánum verða tiknar við bæði sum studningur til vinnu og sum afturgjald av lánum. Tí koma stóru frávikini. Sambært landsstýrismanninum hevur hann onga ávirkan á viðurskiftini á hesi kontu.

5.34.5.07. Effektivar veðhaldsútreiðslur

Á fíggjarlógini var játtanin til útlán 1 mió.kr. og játtanin til afturgjald av lánum 3 mió.kr. Sambært landsroknskapinum eru útreiðslurnar "Stuðul til vinnu" og "útlán v.m." 306 t.kr. og inntøkurnar "Afturgjald av útlánum v.m." um 1,4 mió.kr. Stóru frávikini koma av, at avskrivingar av vinnulánum verða í landsroknskapinum tiknar við bæði sum studningur og sum lánsafturgjald.

Lønarkarmur

Høvuðskonturnar niðanfyri vísa roknskapir, har farið er upp um ásetta lønarkarmin.

(t.kr)

Konta	Navn	Lønarkarmur	Roknskapur	*Munur*
5.34.1.04.	Upplýsing um grind (rakstrarjáttan)	0	68	*68*
5.34.3.04.	Magnus Heinason (rakstrarjáttan)	5.832	6.225	*393*

4.2 Skipaeftirlitið (GL 2003/2 14 1-5)

Vit hava í 2003 kannað, um roknskaparviðurskiftini á Skipaeftirlitinum eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á stovninum er gott, og at leiðslan vísir tí stóran ans. Vit hava tó mælt til einstakar ábøtur:

- *at* lýsa/greina hugtøk og mannagongdir á fleiri økjum í roknskaparreglugerðini
- *at* varðveita fullfíggjað starvsfólkamál á einum staði

Í november 2003 kunnaði stjórin okkum um, at stovnurin fer at arbeiða við at náa ISO-góðkenning, og at roknskaparreglugerðin verður dagførd í tí sambandinum. Landsstýrismaðurin

hevur í mars 2004 kunnað um, at starvsfólkamál hjá Skipaeftirlitinum, sum í løtuni verða goymd í Fiskimálaráðnum, í næstum verða flutt stovninum.

4.3 Fiskiveiðieftirlit/tyrlutænasta (GL 2000/2 14 2-2)

Í seinastu frágreiðing í februar 2003 varð grannskoðanin av Fiskiveiðieftirlitinum/Tyrlutænastuni umrødd.

Roknskaparligt úrslit

Í februar 2001 skrivaðu Fiskimálaráðið og Atlantsflog undir 10 ára sáttmála galdandi frá 1. januar 2001.

Árliga samsýningin byggir á fyritreytirnar í einari rakstrarætlan, sum Atlantsflog hevði sett upp fyri nýútvegaðu tyrluna og tyrluna, sum landið eigur.

Sambært § 7, stk. 3, í sáttmálanum hevur Fiskimálaráðið rætt til helvtina av staðfestum roknskaparligum vinningi yvir eina millión, eftir grannskoðaðum partsroknskapi. Atlantsflog hevur rætt til at fáa eitt staðfest roknskaparligt hall goldið av Fiskimálaráðnum, tó so, at Atlantsflog ber tær fyrstu 250 t.kr. av einum møguligum halli. Harafturat hevur Atlantsflog rætt til at fáa árligu samsýningina hækkaða, vísir partsroknskapurin hall, sum kemur av vøkstri í útreiðslum til starvsfólk, brennievni og viðlíkahald.

Sambært roknskapinum fyri 2002 vóru inntøkurnar um 3.773 t.kr. hægri, og útreiðslurnar um 4.498 t.kr. hægri, enn roknað varð við í rakstrarætlanini fyri 2001. Úrslitið var sostatt eitt hall 725 t.kr. Fiskimálaráðið hevur í februar 2004 boðað frá, at tað hevur ikki goldið Atlantsflogi tann partin av hallinum, sum fer "upp um" 250 t.kr.

Uppsetan av roknskapi

Sambært § 7, stk. 2, í sáttmálanum skal Atlantsflog seta upp partsroknskap fyri samlaðu tyrlutænastuna eftir reglunum í ársroknskaparlógini.

Í sambandi við gjøgnumgongd av "tyrluroknskapinum" fyri 2001 vístu vit m.a. á:

at rakstrarroknskapurin var ikki settur upp eftir sama leisti, sum rakstrarætlanin, og at tað tí var trupult at samanbera ætlan við roknskap,

at rakstrarroknskapurin eftir okkara tykki var ov lítið greinaður,

at vit ikki í roknskapinum dugdu at síggja, hvussu býtislyklar fyri felagskostnað, herímillum fyrisitingar- og hølisútreiðslur og ávísar lønarútreiðslur, vóru ásettir, og hvussu komið er fram til avskrivingar/avdráttir, rentuútreiðslur, viðlíkahaldsútreiðslur o.a.

Í februar 2003 mæltu vit Fiskimálaráðnum til at útvega neyvari upplýsingar um hesi viðurskifti, og í tí sambandinum at útvega samsvarandi upplýsingar viðvíkjandi 2002.

Atlantsflog hevur sett ein partsroknskap upp fyri 2002, sum eisini vísir fíggjarstøðuna hjá "tyrlutænastuni" í 2002 og samanberingartøl fyri 2001. Partsroknskapurin er tó ikki settur upp sambært ársroknskaparlógini, sum ásett í § 7, stk. 2, í sáttmálanum. Vit mæltu Fiskimálaráðnum til at áleggja Atlantsflog at seta noturnar til aktivini "rakstrargøgn" og "viðlíkahaldsavsetingar" upp sambært ásetingunum í § 6 í "Anordning om opstilling af årsregnskab m.m." Landsstýrismaðurin hevur í mars 2004 boðað frá, at Fiskimálaráðið hevur givið Atlantsflog boð um at seta "tyrluroknskapin" upp soleiðis, at hann vísir eina rætta mynd og lýkur krøvini í ársroknskaparlógini og "Anordning om opstilling af årsregnskab m.m."

Í februar 2004 mæltu vit Fiskimálaráðnum til at útvega eina váttan frá grannskoðaranum hjá Atlantsflogi um, at býtið av felagskostnaðinum, roknskaparárini 2001 og 2002, er farið fram eftir allýstum framferðarhátti og við støði í dokumenteraðum býtislyklum. Fiskimálaráðið hevur í februar 2004 útvegað eina váttan, har grannskoðarin boðar frá, at *"Vit skulu vátta, at*

okkara kanningar av prosentbýtunum hava givið okkum tað fatan, at býtini eru á einum rímiligum støði."

Ognarrættur til serútgerðina

Sambært § 8 í sáttmálanum millum Atlantsflog og Fiskimálaráðið skal Fiskimálaráðið útvega serútgerð til nýggju tyrluna, og Fiskimálaráðið eigur hesa útgerð. Vit vístu í frágreiðingini í februar 2003 á, at Fiskimálaráðið hevur ikki tryggjað sín ognarrætt mótvegis møguligum panthavarum í tyrluni.

Í november 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at málið var um at verða avgreitt, soleiðis at serútgerðin verður skrásett hjá "Luftfartsregistret".

Fiskimálaráðið hevur í februar 2004 kunnað um, at báðir veðhavararnir í skaðaloysisbrøvunum hava fráskrivað sær pantirætt í serútgerðini. Aðrir møguligir kravánarar nýtast ikki at virða ognarrættin, og Fiskimálaráðið fer tí at gera eitt veðbræv, sum eftir ætlan verður skrásett sum 2. veðrættur í tyrluni.

Fyrireiking av SAR (search and rescue) tænastu

Í skrivi 11. februar 2003 til landsstýrismannin vístu vit á, at hóast sáttmáli varð skrivaður undir millum Fiskimálaráðið og Atlantsflog 7. februar 2001, vórðu m.a. t.kr. 1.287 rindaðar Atlantsflogi av høvuðskontu 5.34.2.05 "Fiskiveiðieftirlit" og bókaðar í fíggjarárinum 2000. Talan var um fyrireikingar av SAR tænastu:

1.	konsulenttænastur	kr. 430.000
2.	fyrireikandi útbúgving: pilotar/mekanikarar	kr. 306.600
3.	fyrireikingararbeiði	kr. 550.000
Tilsamans		kr. 1.286.600

Ongar útgreinandi grundgevingar vóru fyri, hví Fiskimálaráðið hevði goldið Atlantsflog hesa upphædd, og vit heittu tí á landsstýrismannin um at greiða okkum frá:

1. hvørjar konsulenttænastur talan var um, hvør hevur útint tær. Biðið varð um avrit av skjølum, ið sannaðu útreiðslurnar,
2. hvørja fyrireikandi útbúgving av pilotum og mekanikarum talan var um. Biðið varð um avrit av skjølum, ið sannaðu útreiðslurnar,
3. hvat fyrireikingararbeiði talan var um, hvør hevur útint tað. Biðið varð um avrit av skjølum, ið sannaðu útreiðslurnar.

Ad. konsulenttænastur

Landsstýrismaðurin hevur í november 2003 greitt frá, at talan var um norskt ráðgevingarfelag, við stórum royndum í tyrluvinnu og SAR tænastu, sum hevur virkað sum ráðgevi í allari fyrireikingini hjá Atlantsflogi at taka á seg tyrlutænastuna. Harafturat var talan um konsulenttænastur frá sakførara og grannskoðara í sambandi við, at tyrlutænastan varð fyrireikað.

Ad. fyrireikandi útbúgving av flogmonnum og mekanikarum

Sambært landsstýrismanninum fór Atlantsflog longu í 1999 undir at útbúgva fólk at taka sær av SAR tænastuni. Flogmenn og mekanikarar, sum vóru í starvi, skuldu sertifiserast til at flúgva og viðlíkahalda nýggju Bell 412 tyrluna.

Ad. fyrireikingararbeiði

Sambært landsstýrismanninum var talan um 216 t.kr., sum vóru lønarútreiðslur hjá flogmonnum og mekanikarum, meðan teir "sertifiseraðu" seg til nýggju Bell 412 tyrluna.

Harafturat var talan um 334 t.kr. í endurgjaldi til Atlantsflog fyri útreiðslur, felagið heldur seg hava havt av at lýsa og fyrireika tyrlutænastuna.

Vit hava ikki fingið avrit av skjølum, ið sanna útreiðslurnar.

Viðmerkingar

Allar útreiðslur, eisini tær Atlantsflog heldur seg hava havt av at lýsa og fyrireika tyrlutænastuna, vórðu hildnar, áðrenn sáttmáli varð gjørdur millum partarnar. Vit halda talan vera um útreiðslur, ið Atlantsflog hevur havt í royndini at gera seg skikkaðan at átaka sær eina uppgávu, í kapping við aðrar tænastuveitarar. Eftir okkara tykki er talan um útreiðslur, sum ikki eru tengdar at, hvørt felagið fekk sáttmálan við Fiskimálaráðið. Vit ivast tí í, um tað er rætt, at Fiskimálaráðið endurrindar Atlantsflogi útreiðslur av konsulenttænastum, útbúgvingum og øðrum fyrireikingum. Vit hava biðið landsstýrismannin um viðmerkingar. Vit hava einki svar fingið.

4.4 Fiskiveiðieftirlitið (Vaktar- og bjargingartænastan) (GL 2003/2 14 2-3)

Vit hava í 2003 kannað, um roknskaparviðurskiftini á Fiskiveiðieftirlitinum eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og gjøgnumgingið umsitingina av inntøkum. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á stovninum er gott, men vit hava mælt til fleiri ábøtur:

- *at* taka støðu til, um ásetingar í roknskaparreglugerðini, sum ikki verða fylgdar, skulu verða fylgdar ella um tær skulu verða strikaðar
- *at* á fleiri økjum í roknskaparreglugerðini lýsa/greina mannagongdir, t.d. lýsa mannagongdina um roknskapargóðkenning og meira ítøkiliga at lýsa mannagongdina um inntøkur
- *at* avstemman og góðkenning av mánaðarroknskapi verða skjalfest
- *at* fíggjarstøðan verður stemmað av og støða tikin til, um verandi mannagongd viðv. mvg-avrokning skal verða tikin av
- *at* staðfesta, hvørjum lønarflokki "navigatørar" skulu verða løntir eftir, tá "Brimil" virkar sum skúlaskip, og nær "ein sjómansskúlalærari verður spardur umborð"

Stjórin hevur í februar 2004 boðað frá, at viðmerkingar okkara eru tiknar til eftirtektar, og farið verður undir at dagføra reglugerðina í næstum. Mannagongdir á inntøkuøkinum verða lýstar meira ítøkiliga, og tryggjað verður, at reglugerðin verður í samsvari við galdandi mannagongdir. Harafturat hevur stjórin boðað frá, at í framtíðini verða avstemman og góðkenning av mánaðarroknskapinum skjalfest. Fiskimálaráðið hevur í mars 2004 boðað frá, at mannagongdin viðvíkjandi mvg-avrokning verður broytt.

4.5 Lønjavningarstovan (GL 2000/2 14 4-5)

Lógargrundarlag

Í frágreiðing í juli 1999 vístu vit m.a. á, at hóast tað í § 2, stk. 3, í Ll. nr. 73/1997 "um Lønjavningargrunn" er álagt landsstýrismanninum í kunngerð at áseta neyvari reglur fyri mannagongdum í sambandi við útgjøld frá Lønjavningarstovuni, eru tær ikki settar. Landsstýrismaðurin hevur í áravís boðað frá, at arbeitt verður við málinum. Tó eru viðurskiftini ikki komin í rættlag.

Í september 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið at gera kunngerð og áseta neyvari reglur fór at verða gjørt, samstundis sum roknskaparreglurnar fyri økið fóru at verða gjørdar. Landsgrannskoðanini kunnugt, er framvegis eingin kunngerð.

Í dag eru reglur, sum eru felags fyri allar landsstovnar, ásettar í roknskaparkunngerðini, roknskaparrundskrivinum og kontuskipan landsins. Serstakar reglur, sum eru fyri ávísar studningsskipanir, verða vanliga ásettar í studningslógunum. Tí er tað ein spurningur, um nøkur meining er í at hava eina lóg um Lønjavningarstovu.

Roknskaparreglur

Í 2001 varð roknskaparreglugerð gjørd fyri Lønjavningarstovuna. Fiskimálaráðið boðaði í februar 2002 frá, at neyðugt varð at kanna allar mannagongdir, í sambandi við at veitingar verða rindaðar, og at fáa tær allýstar og gjørdar til reglugerðir. Tí varð játtan sett av til eitt roknskaparfólk, og arbeiðið skuldi eftir ætlan byrja, tá ið roknskaparfólkið var sett. Deildarstjórin á Lønjavningarstovuni kunnaði í februar 2004 um, at roknskaparfólkið er ikki sett.

Landsstýrismaðurin hevur í mars 2004 kunnað um, at Lønjavningarstovan, saman við fíggjarstápinum í Fiskimálaráðnum, fer at lýsa mannagongdirnar fyri útgjaldingum neyvari.

Innaneftirlit

Lønjavningarstovan umsitur fleiri studningsskipanir. Í juli 1999 mæltu vit til við stakroyndum á ein skipaðan hátt at eftirkanna mongu útrokningarnar. Landsstýrismaðurin hevur í áravís boðað frá, at innaneftirlit verður sett í verk, og at viðurskiftini fara at verða raðfest hægri í framtíðini.

Í september 2002 kunnaði Fiskimálaráðið um, at roknskaparfólk fór væntandi at verða sett í oktober 2002, og tá skuldi verða farið undir at skipa innaneftirlitið.

Í februar 2004 kunnaði deildarstjórin á Lønjavningarstovuni um, at roknskaparfólkið er framvegis ikki sett, og at ætlaða innaneftirlitið er ikki sett í verk. Landsstýrismaðurin hevur í mars 2004 boðað frá, at fíggjarstápurin í Fiskimálaráðnum á ein skipaðan hátt við stakroyndum fer at kanna útrokningarnar.

4.5.1 EDV-viðurskifti

Lønjavningarstovan umsitur fleiri studningsskipanir hjá fiskivinnuni. Talan er um fleiri serskildar EDV-skipanir, t.d. er ein skipan til minstuløn/dagstudning, ein er til minstaforvinning og ein til telefonstuðul. Í frágreiðing í juli 1999 vístu vit á, at eingin vegleiðing ella dokumentatión finst til skipanirnar. Skipanirnar eru framvegis ikki dokumenteraðar, og tær samskifta ikki elektróniskt við útgjaldsskipanina/bektflytingarskipanina á Gjaldstovuni.

Fiskimálaráðið boðaði í februar 2002 frá, at á fíggjarlógini 2002 varð 1 mió.kr. sett av til EDV-íløgur í sambandi við ábøtur og dagføringar av verandi skipanum, herímillum ein automatiseran av roknskaparligu viðurskiftunum mótvegis skipanunum hjá Føroya Gjaldstovu. Í september 2002 kunnaði Fiskimálaráðið um, at í staðin fyri at gera meira við verandi skipanir var semja í Fiskimálaráðnum um at leggja skipanirnar um, nútímansgera og betra tær, herímillum at tryggja eina automatiseran av roknskaparligu viðurskiftunum mótvegis útgjaldsskipanunum hjá Føroya Gjaldstovu. Heitt var á eina føroyska EDV-fyritøku um at átaka sær uppgávuna, og eisini at gera vegleiðingar og dokumentatión av skipanunum. Hetta arbeiði fór í gongd í 2002.

Sum partur av verkætlanini "KT-veiðihagtøl", sum varð fíggjað av "Fiskivinnuroyndum", varð í 2002 ein nýggj "avreiðingarskipan" ment og tikin í nýtslu. Avreiðingarseðlarnir frá Fiskamarknaðinum verða lisnir inn í "avreiðingarskipanina", sum verður nýtt til at rokna út minstuløn/dagstudning og mánaðarligan minstaforvinning. Ætlanin er at endurnýggja skipanirnar til minstuløn/dagstudning, til minstaforvinning, til telefonstuðul og mynstringarskipanina. Harafturat umhugsar Lønjavningarstovan at menna eina skipan til sjúkratrygdina. Skipanin til flutningsstuðul er frá 2000. Hon verður neyvan endurnýggjað.

"Mynstringarskipanin" er fyrsta skipan, sum verður endurnýggjað. EDV-fyritøkan, sum forritar skipanina, ger skipanardokumentatión so hvørt. Væntandi fær Lønjavningarstovan í mars 2004 eitt uppskot frá EDV-fyritøkuni at nároyna.

Lønjavningarstovan hevur í mars 2004 kunnað um, at tær ábøtur og dagføringar, sum í løtuni verða framdar á mynstringarskipanina, ikki hava samband við eina møguliga automatiseran mótvegis útgjaldsskipanunum hjá Føroya Gjaldstovu. Verður peningur játtaður til at endurnýggja útgjaldsskipanirnar til "inntøkutrygd", fer Lønjavningarstovan/Fiskimálaráðið at tosa við Gjaldstovuna um, hvussu samskiftið skal verða millum EDV-skipanirnar hjá stovninum og búskaparskipanir landsins.

Sambært Lønjavningarstovuni varð ein stýrisbólkur settur í sambandi við, at nýggjar EDV-skipanir skuldu verða gjørdar. Stýrisbólkurin hevði umboð úr øllum deildum í Fiskimálaráðnum, umframt umboð frá Lønjavningarstovuni. Stýrisbólkurin virkaði bert í stutta tíð. Hann hevði fundir við EDV-fyritøkuna, sum mennir nýggju EDV-skipanirnar, men bólkurin gjørdi onga kravfesting, og legði einki skrivligt tilfar eftir seg. Sama fyritøka, sum gjørdi tær gomlu skipanirnar, ger eisini nýggju skipanirnar, av tí at "teir kenna tær best", og tær verða bygdar upp á sama hátt, sum tær gomlu.

Vit halda tað vera óheppið, at stýrisbólkurin ikki gjørdi nakrar kravfestingar, og at Fiskimálaráðið hevur latið EDV-fyritøkuni leiðsluna av EDV-verkætlanini.

Sambært roknskaparkunngerðini hava allir stovnar skyldu at nýta búskaparskipanir landsins. Sambært § 4, stk. 5, kann Fíggjar- og búskapardeildin (Fíggjarmálaráðið), eftir umsókn, loyva stovnum við serligum tørvi at nýta sína egnu búskaparskipan heilt ella lutvíst. Loyvið er tó treytað av, at skipanin lýkur tey kunningar-, trygdar-, eftirlits- og tíðarkrøv, sum til eina og hvørja tíð eru galdandi fyri búskaparskipanir landsins, og harafturat skal ein skrivlig rakstraravtala verða gjørd millum Føroya Gjaldstovu og stovnin, sum útgreinar neyvari treytirnar fyri dátusamskifti o.ø.

Síðani vit kunnaðu okkum um EDV-viðurskiftini í 1999, eru krøvini til kunningartrygd herd.

6. februar 2001 var roknskaparrundskrivið frá Fíggjarmálaráðnum sett í gildi. Sambært roknskaparrundskrivinum skal verða greitt frá í roknskaparreglugerðini, "hvussu og hvar EDV verður nýtt, og hvussu henda uppgáva er skipað". Víst skal vera til viðkomandi skjøl (kervisfrágreiðing og brúkarahandbók), hvussu skipanin verður nýtt, og hvørji eftirlit eru. Harafturat skal verða víst til skjalatilfar, ið vísir tøkniliga bygnaðin av EDV-skipanini, og hvør hevur atgongd til EDV-útgerð, forrit og skráir.

1. januar 2002 kom í gildi Ll. nr. 73 frá 8. mai 2001 "um viðgerð av persónsupplýsingum" og 27. februar 2003 kom í gildi K. nr. 28/2003 "um trygd í samband við viðgerð av persónsupplýsingum" (trygdarkunngerðin). Sambært § 17, stk. 1, í kunngerðini skulu upplýsingarkerv, sum eru fevnd av lógini um viðgerð av persónsupplýsingum, fyri 1. september 2004 lúka treytirnar í kunngerðini. Vit halda tað verða lítið sannlíkt, at stovnurin lýkur øll hesi mongu krøv.

Vit hava áður víst á, at í landsfyrisitingini eru nógvar og fløktar skipanir, sum ikki hanga nóg væl saman. Fleiri stovnar/grunnar umsita uppgávur, sum helst í størri mun kundu verið samskipaðar. T.d. umsita 4 fyrisitingarligar eindir dagpening vegna sjúku og barnsburð: Lønjavningarstovan, Almannastovan, Vanlukkutryggingin og ALS. Lønjavningarstovan, Almannastovan og ALS umsita veitingar í sambandi við vantandi arbeiðsinntøku. Hóast talan er um lutfalsliga smáar eindir, nýta almennir stovnar/grunnar nógvar ymiskar EDV-skipanir til at gjalda út, føra bókhald o.a.

Tørvur er á at endurnýggja fleiri búskaparskipanir. Fer hetta arbeiði ikki fram sum liður í einari yvirskipaðari heildarætlan, har eisini bygnaðurin verður endurskoðaður, verður peningur og starvsfólkaorka ikki nýtt á skynsaman hátt.

Eftir okkara áskoðan vanta felags skrivligar langtíðarætlanir og EDV-stevnumið, sum fevna um allar týðandi útgjaldsskipanir hjá øllum aðalráðunum, og vit mæla til, at uppgávan at dagføra EDV-skipanirnar hjá Lønjavningarstovuni fer fram sum liður í yvirskipaðari heildarætlan.

4.5.2 Minstaløn/dagstudningur

Lógargrundarlag

Reglur um minstuløn/dagstudning eru ásettar í Ll. nr. 112 frá 29. desember 1998 "um minstuløn og dagstudning" seinast broytt við Ll. nr. 73 frá 6. mai 2003. Sambært § 1 verður minstaløn veitt fiskimonnum búsitandi í Føroyum, sum eru mynstraðir við fiskiskipi, sum er 30 tons ella størri og skrásett í Føroyum, og fiskimonnum, sum eru mynstraðir við fiskiskipi minni enn 30 tons, skrásett í Føroyum, og sum rekur fiskiskap uttanfyri føroysku landleiðirnar.

Sambært § 2, stk. 1, er minstalønin 60% av 8 vanligum tímalønum, eftir sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Minstaløn verður ikki veitt fyri teir dagar, fiskimaðurin er heima. T.v.s. at eftir sáttmálanum, sum var galdandi 1. mai 2003, er mesta minstaløn:

60% x (96,5 x 8) = 463,20 kr. um dagin.

Sambært § 3, stk. 2, er dagstudningurin munurin millum 8 tímalønir, eftir sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag, og minstuløninа + manningarpartin. T.v.s. at eftir sáttmálanum, sum var galdandi 1. mai 2003 er hægsti dagstudningur:

(96,50 x 8) - 463,20 = 308,80 kr. um dagin.

Sambært § 3, stk. 3, verður dagstudningurin lækkaður við 0,65 oyrum fyri hvørja krónu, sum manningarparturin um dagin fer upp um minstuløninа um dagin.

Yvirlit yvir minstuløn/dagstudning: um dagin

Manningarpartur	Minstaløn	Dagstudningur	Tilsamans
0	463,20	308,80	772,00
100	363,20	308,80	772,00
200	263,20	308,80	772,00
300	163,20	308,80	772,00
400	63,20	308,80	772,00
463,20	0	308,80	772,00
500	0	284,88	784,88
600	0	219,88	819,88
700	0	154,88	854,88
938,28	0	0	938,28

Sum sæst á yvirlitinum frammanfyri, kann fiskimaður, eftir sáttmálanum 1. mai 2003, í mesta lagi fáa 772 kr. um dagin ella kr. 23.160 um mánaðin í minstuløn og dagstudningi.

Fiskimaður fær dagstudning, so leingi manningarparturin er minni enn 938,28 kr. um dagin. Er hann burtur í ein mánað, kann hann sostatt forvinna 28.148,40 kr. (30 x 938,28), áðrenn dagstudningur dettur heilt burtur.

Sambært § 4 hevur fiskimaðurin rætt til frítíðarløn av minstuløn og dagstudningi, og Lønjavningarstovan roknar eisini hana út.

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið mannagongdirnar í sambandi við umsitingina av lógini um minstuløn og dagstudning, og hevur í tí sambandinum eisini gjøgnumgingið

nakrar tilvildarliga valdar útgjaldingar í 2002 og 2003. Niðurstøðan var, at útgjaldingarnar vóru rætt roknaðar.

4.5.3 Mánaðarligur minstaforvinningur

Vit hava áður vístá, at tørvur var á greiðari reglum á fleiri økjum, og vit hava mælt til fleiri ábøtur. Nøkur viðurskifti eru rættað, men framvegis er talan um fleiri veikleikar við skipanini:

- Maður ikki við allar túrar: Vit hava mælt til, at neyvari reglur verða ásettar í kunngerð.
- Bert A-inntøka verður roknað sum onnur inntøka: Útróðrarmaður kann hava stórar B-inntøkur, uttan at tað minkar um minstaforvinningin.
- Inntøkutreytir: Í sambandi við grannskoðanina komu vit fram á fleiri dømi um bátar, sum ikki høvdu verið nakran túr í einum mánaði. Sostatt var manningarparturin 0 kr, men manningin fekk fullan minstaforvinning. Tað kundi lata seg gera, tí báturin 6 undanfarnu mánaðirnar hevði avreitt fyri so mikið, at hann leyk treytirnar í § 2, stk. 1, í lógini um minstaforvinning. Nevnt varð sum dømi, at avreiddi einsamallur maður fyri 54 t.kr. í einum mánaði, leyk hann treytirnar fyri at fáa minstaforvinning komandi 5 mánaðirnar uttan at fara á flot. Teoretiskt nýttist honum sostatt bert at rógva út 6. hvønn mánað fyri at fáa minstaforvinning.

Fiskimálaráðið hevur áður kunnað um, at teir vistu um trupulleikarnar viðvíkjandi skipanini við minstaforvinningi, men at ringt var at koma fram til eina skipan, sum virkaði nóg væl. Tí vóru framvegis viðurskifti, sum gjørdu, at lóggávan ikki kundi verða umsitin til lítar. Í januar 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann fór støðugt at bøta um skipanina.

Í februar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ein arbeiðsbólkur við umboðum frá Fiskimálaráðnum og vinnuni hevði arbeitt við at tillaga lóggávuna, men eingin endalig niðurstøða varð gjørd. Fiskimálaráðið helt, at skipanin var politiskt tilætlað av Løgtinginum. Landsstýrismaðurin hevði roynt at broyta løgtingslógina, men politisk undirtøka fekst ikki. Tí varð uppskotið tikið aftur undir viðgerðini í Løgtinginum.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001) mælti Løgtingið 12. mars 2002 landsstýrismanninum til at endurskoða skipanina.

Í september 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann fór at seta eina nevnd seinni um heystið at endurskoða alla skipanina. Nevndin varð ikki sett, og í mars 2003 legði landsstýrismaðurin uppskot, sum Fiskimálaráðið hevði orðað, fyri tingið um at broyta løgtingslógina um minstaforvinning. Uppskotið fall.

Í desember 2003 legði landsstýrismaðurin enn eitt uppskot fyri tingið um at broyta løgtingslógina um minstaforvinning. Av tí at løgtingsval varð skrivað út 5. desember 2003, fall uppskotið burtur.

4.5.4 Sjúkratrygd

Í frágreiðing í juli 1999 vístu vit á, at lógin um sjúkratrygd er ófullfíggjað, og als ikki er samskipað við lógarásetingarnar um sjúkradagpening frá Almannastovuni og Vanlukkutryggingini. Í november 2001 grannskoðaðu vit 20 mál og staðfestu, at støðan var óbroytt:

1. Til ber at fáa sjúkratrygd og samstundis fáa dagpening frá Føroya Vanlukkutrygging
2. Eingin umsóknarfreist er ásett
3. Til ber at fáa sjúkratrygd og samstundis hava aðra inntøku
4. Frítíðarløn verður goldin út, hóast eingin heimild er í lógini
5. Lógin er ikki samskipað við lógirnar um dagpening frá Almannastovuni og frá Vanlukkutryggingini

Í uppskotum til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum um at góðkenna landsroknskapin hevur Løgtingið fleiri ferðir samtykt at mæla landsstýrismanninum til sum skjótast at broyta lógina um sjúkratrygd í samráð við landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum.

Landsstýrismaðurin kunnaði í februar 2002 um, at umsitingin í Fiskimálaráðnum hevði latið honum eitt notat, har mælt varð til, at politisk støða varð tikin til hesar tríggjar møguleikar í sambandi við lógina um sjúkratrygd:

- uppskot verður lagt fyri Løgtingið um at taka av lógina um sjúkratrygd, tí hildið verður, at lógin ikki longur hevur sjálvstøðugan týdning. Er talan um sjúku ella skaða, kemur fiskimaður undir dagpeningalógina.
- uppskot verður lagt fyri Løgtingið um at broyta løgtingslógina um sjúkratrygd, har hædd verður tikin fyri teimum viðurskiftum, sum Landsgrannskoðanin heldur vera óheppin.
- málsøkið "sjúkratrygd" verður flutt til Almanna- og Heilsumálaráðið. Hesin møguleiki er ikki umrøddur við Almanna- og Heilsumálaráðið.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001) átalaði Løgtingið 12. mars 2002, at landsstýrismaðurin ikki hevði loyst hetta mál. Í september 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann hevur tikið málið upp til politiska viðgerð, og at eitt "upprit til landsstýrisfund" varð latið hinum landsstýrismonnunum til landsstýrisfundin 24. september 2002.

Í mars 2004 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at nýtt lógaruppskot varð lagt fram á landsstýrisfundi 23. mars 2004. Í uppskotinum verður m.a. ásett:

- at frítíðarløn verður goldin av sjúkratrygdini
- umsóknarfreist
- at veitingin av sjúkratrygd heldur uppat, tekur fiskimaður upp annað arbeiði, áðrenn hann er "mettur arbeiðsførur" (sum fiskimaður)

Sum víst á frammanfyri eru 4 fyrisitingarligar eindir, sum rinda út dagpening vegna sjúku og barnsburð: Lønjavningarstovan, Almannastovan, Vanlukkutryggingin og ALS.

Almannastovan umsitur Ll. nr. 74 frá 8. mai 2001 "um dagpening vegna sjúku v.m." við seinni broytingum. Sambært § 3, stk. 1, kann dagpeningur verða veittur løntakarum, herímillum sjómonnum, sum hava hýru ella skulu hava hýru við føroyskum ella útlendskum fari. Sambært § 3, stk. 2, pkt. 1, kann dagpeningur eisini verða veittur útróðrarmonnum, sum rógva út við egnum fiskifari ella eru við fiskifari hjá øðrum.

Sum fyrr sagt, so kunnaði landsstýrismaðurin í februar 2002 um, at umsitingin hevði latið honum notat, har eitt av trimum tilmælum var at leggja fyri Løgtingið uppskot um at taka av lógina um sjúkratrygd, tí hon ikki longur hevði sjálvstøðugan týdning.

Vit hava ikki sað nakra grundgeving fyri, at tað skal vera neyðugt at dagføra lógina um sjúkratrygd, tá fiskimenn og útróðrarmenn eru fevndir av lógini um "sjúkradagpengar".

4.5.5 Flutningsstuðul

Lógargrundarlag o.a.

Lógargrundarlagið undir flutningsstuðuli er Ll. nr. 14 frá 3. mars 1999 "um stuðul til flutning av fiski" broytt við Ll. nr. 175 frá 21. desember 2001. Neyvari reglur eru ásettar í K. nr. 95 frá 12. juni 2003 "um stuðul til flutning av fiski".

Í 2002 eru rindaðar um 3,7 mió.kr. í flutningsstuðuli og í 2003 um 2 mió.kr.

Endurskoðan av studningsskipanini

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum setti í oktober 2002 ein arbeiðsbólk, sum skuldi endurskoða studningsskipanina til flutning av fiski. Arbeiðsbólkurin var mannaður við umboðum frá Fiskimálaráðnum, Føroya Ráfiskakeyparafelag og Føroya Ráfiskaseljarafelag.

Í februar 2003 legði arbeiðsbólkurin álit fyri landsstýrismannin. Samlaða niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum um verandi studningsskipan er:

at talan er um rakstrarstudning.

at verandi flutningsskipan ikki í longdini vil betra um kappingarførið hjá fiskaframleiðarum, sum hava rætt til flutningsstuðul.

at vandi er fyri, at fiskaframleiðari, ið fær flutningsstuðul, fer bert at leggja seg eftir fiskaframleiðslu, sum fær flutningsstuðul.

at almennur flutningsstuðul er við til at fremja ávísar fiskaframleiðslur, og er samstundis avlagandi fyri aðrar framleiðslur, ið ongan studning fáa.

Harafturat helt arbeiðsbólkurin, at verandi flutningsstuðulsskipan er ein fyrimunur fyri flutningsfeløg í Føroyum, at flutningsstuðulsskipanin hevur hækkað flutningskostnaðin, og at studningsmóttakarar soleiðis ikki fáa fullan ágóða av studninginum.

Arbeiðsbólkurin mælti til, at verandi studningsskipan til flutning av fiski, har studningur verður latin eftir, hvussu nógv kilo verða flutt, verður tikin av. Okkum kunnugt, er studningsskipanin til flutning av fiski ikki broytt.

4.5.6 Telefonstuðul

Lógargrundarlag

Lógargrundarlagið undir telefonstuðlinum er Ll. nr. 96 frá 6. juni 1997, broytt við Ll. nr. 70 frá 18. august 1998. Neyvari reglur eru ásettar í K. nr. 6 frá 21. januar 1998.

Í 2002 eru rindaðar um 3,6 mió.kr. í telefonstuðuli og í 2003 um 3,5 mió.kr.

Studningurin, 17,50 um dagin, verður sambært § 1 bert veittur, er túrurin minst 30 dagar.

Sambært § 3, stk. 3, í Ll. nr. 96/1997 við seinni broytingum verður telefonstuðulin goldin út eina ferð um árið, men sambært § 3 í K. nr. 6/1998, verður studningurin goldin út 2 ferðir um árið, í juni og desember. Sostatt samsvarar kunngerðin ikki við lógina.

Mannagongdin viðvíkjandi telefonstuðuli

Fyri at fáa telefonstuðul skal langfarasjómaður fylla út umsóknarblað, sum so verður sent Lønjavningarstovuni. Á umsóknarblaðnum skal standa navn, bústaður, navn á skipinum og hvussu langir túrarnir hava verið. Umsøkjarin skrivar undir, at upplýsingarnar eru rættar, at hann er undir fullari skattskyldu í Føroyum, og at hann ikki á annan hátt fær endurgjald fyri telefonútreiðslur. Lønjavningarstovan kannar ikki, um umsøkjari fær annað telefonendurgjald.

Málsviðgeri kannar, um upplýsingarnar, eru rættar, t.v.s. um dagatalið er rætt. Tað verður gjørt við at hyggja eftir skjalprógvunum, sum eru løgd við umsóknini. Hoyrir skipið heima í Føroyum, skal umsøkjarin vera mynstraður, og tá nýtist honum ikki at senda nøkur skjalprógv við. Lønjavningarstovan kann tá sjálv kanna, hvussu leingi umsøkjarin hevur verið burtur.

Í sambandi við málsgjøgnumgongdina komu vit fram á dømi um, at útlendskir reiðarar einans vátta, at umsøkjarin hevur verið umborð á bátinum eitt ávíst samlað dagatal um árið. Tað gongur ikki fram av váttanini, um umsøkjarin lýkur krøvini í § 1 í lógini um at hava verið burtur við fiski- ella handilsskipi í minst 30 dagar.

Eingin umsóknarfreist

Eingin umsóknarfreist er ásett í lógini. Lønjavningarstovan kunnaði í desember 2003 um, at umsøkjarar kunnu fáa studning afturvirkandi upp til 2 ár, eftirsum eingin umsóknarfreist er ásett. Eftir okkara tykki lýkur lógin ikki fleiri grundleggjandi krøv til eina "góða" studningslóg.

4.6 Studning til gransking, menning og royndir (GL 2003/2 14 4-8)

Fiskimálaráðið umsitur 4 játtanir, sum veita studning til gransking, menning og royndir:

(t.kr.)

	Játtan 2002	Roknskapur 2002	Munur
Fiskivinnuroyndir	8.240	5.981	2.259
Varðveitan av fjølbroyttum fiskiflota	1.500	1.500	-
Granskingarætlanir	3.000	2.446	554
Fiskivinnumenning á landi	6.200	3.398	2.802
	18.940	**13.325**	**5.615**

4.6.1 Fiskivinnuroyndir

Lógargrundarlag

Heimildin fyri studningsskipanini er fíggjarlógin. Tað einasta, ið er ásett um endamálið við játtanini, er ein setningur í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið:

> *"Játtanin er til fiskiroyndir og kanningar, herímillum vørumenning, og hvussu sum mest fæst burtur úr øðrum fiskasløgum."*

Um umsitingina av studningsskipanini stendur í viðmerkingunum:

> *"Fiskimálaráðið umsitur fiskivinnuroyndir, sum verða fyriskipaðar í samstarvi millum Fiskirannsóknarstovuna, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og Menningarstovuna. Vinnan luttekur eisini í hesum arbeiði."*

Í frágreiðing í september 1998 til landsstýrismannin í fiskivinnumálum vístu vit m.a. á, at fíggjarlógin, og tær fáu viðmerkingarnar í fíggjarlógaruppskotinum frá Landsstýrinum, eru einasta heimild fyri hesi lutfalsliga stóru studningsskipan. Vit hildu hetta ikki vera nøktandi, og heittu á Fiskimálaráðið um at viðgera spurningin.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at játtanin í fíggjarlógaruppskotinum 2003 var greinað á fleiri standardkontur enn áður, og viðmerkingarnar vóru broyttar, soleiðis at endamálið við játtanini var meira týðiligt.

Í 2002 varð samskipari settur til Fiskivinnuroyndir. Saman við Fiskimálaráðnum hevur hann endurskoðað mannagongdirnar í sambandi við at játta umsóknir til "Fiskivinnuroyndir v.m." Gjørdar eru gjølligar ásetingar, mannagongdir, vegleiðingar og umsóknarbløð. Samskiparin hevur orðað uppskot til "verkætlanarsáttmála", sum fer at koma í staðin fyri tað játtanarskriv, brúkt verður í dag. Verkætlanarsáttmálin skal verða skrivaður undir í seinasta lagi 2 vikur eftir, at tilsøgn er givin.

Fiskimálaráðið greiddi í februar 2004 frá, at umsitingin av "Fiskivinnuroyndum" nú er bygd upp, og eftir er at gera eina studningslóg. Uppskot um lóg um "fiskivinnugransking" er orðað, og uppskotið er sent til hoyringar. Uppskotið byggir á lógina um "granskingargrunn". Ætlanin er, at játtanirnar til "Fiskivinnuroyndir", "Granskingarætlanir" og møguliga aðrar studningsjáttanir skulu verða fevndar av lógini. Eftir okkara tykki er lógin um "granskingargrunn" ikki ein fyrimyndarlig studningslóg, og lýkur ikki fleiri av krøvunum, sett verða til eina "góða" studningslóg.

Kontering

Sambært roknskapinum 2002 er studningur goldin einstaklingum og virkjum umframt almennum stovnum (Fiskirannsóknarstovuni, Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og Menningarstovuni). Studningurin til einstaklingar og virkir verður skrásettur sum "stuðul til vinnu", men studningur til almennu stovnarnar verður ikki skrásettur einsháttað. Útreiðslurnar av verkætlanum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og "Varðveitan av fjølbroyttum fiskiflota" verða skrásettar á standardroknskaparkontu 7110 "Innanhýsisflytingar millum almennar stovnar, útreiðslur". Útreiðslurnar av verkætlanunum hjá Fiskirannsóknarstovuni verða fluttar á somu standardroknskaparkontur hjá Fiskivinnuroyndum, sum tær eru fluttar av. Tað merkir m.a., at lønarkarmurin hjá Fiskirannsóknarstovuni óbeinleiðis verður øktur við salduni, sum verður flutt yvir á lønarkonturnar hjá Fiskivinnuroyndum.

Fiskimálaráðið hevur í februar 2004 greitt frá, at frá og við fíggjarárinum 2004 verður studningur til verkætlanirnar hjá Fiskirannsóknarstovuni eisini skrásettur sum "Innanhýsisflytingar millum almennar stovnar".

Gjøgnumgongd av verkætlanum

Verkætlanin "KT-veiðihagtøl"

Fiskivinnustovan, Lønjavningarstovan og Fiskiveiðieftirlitið tóku lut í verkætlanini, og Fiskimálaráðið var sjálvt "verkætlanarleiðari". Samlaður studningur til verkætlanina var um 980 t.kr. Talan var um at menna eina KT-skipan, har avreiðingar, innviging og eftirlit við fiskidøgum verða skrásettar. Servari og dátugrunnur vórðu keypt, og EDV-skipan varð ment.

Vit hava víst á, at tílíkar útreiðslur vanliga eru at rokna sum umsitingarútreiðslur, ið vanligi raksturin eigur "at fíggja".

Verkætlanin "Rækjuroyndir við Flemish Cap"

Tvær verkætlanir bera heiti "Rækjuroyndir við Flemish Cap". Fyrra verkætlanin vardi frá 1997 til 2001 og fekk tilsamans 3.228 t.kr. í studningi. Í 2002 byrjaði nýggj verkætlan við sama heiti.

Báðar verkætlanirnar snúgva seg um sama virksemi. Ein sáttmáli er ímillum Fiskirannsóknarstovuna og eitt reiðaravirki um royndarfiskiskap. Fiskirannsóknarstovan hevur ein fiskifrøðing og ein biologassistent við rækjuskipinum. Útreiðslurnar, sum Fiskirannsóknarstovan hevur av royndarfiskiskapinum, verða bókaðar á verkætlanina. Peningurin, sum reiðaravirkið fær fyri at taka lut í royndarfiskiskapinum, verður bókaður á eina aðra høvuðskontu, "varðveitan av fjølbroyttum flota".

Í játtanarskrivinum fyri 2001 boðaði Fiskivinnustovan frá, at *"Rækjuroyndir við Flemish Cap halda fram hetta árið afturat, og tá eigur verkætlanin at vera liðug. Uppfylging og framhald av hesi kanning eigur framyvir at vera ein partur av arbeiðsuppgávunum hjá Fiskirannsóknarstovuni."* Fiskimálaráðið hevur í februar 2004 greitt frá, at politisk undirtøka fekst ikki fyri at flyta verkætlanina til vanliga virksemið hjá Fiskirannsóknarstovuni.

Sambært ásetingunum fyri málsviðgerð av Fiskivinnuroyndum eigur ein roynd/verkætlan ikki at taka longri tíð enn 3 ár, og eigur ikki at fáa størri fígging enn 10 % av samlaðu játtanini. Verkætlanin "Rækjuroyndir við Flemish Cap" hevur vart í 7 ár. Í 2003 fekk verkætlanin 1,1 mió.kr. av samlaðu játtanini 7,3 mió.kr., ella umleið 15%.

Í 2002 eru bruttoútreiðslurnar av verkætlanini 1.029 t.kr. Henda upphædd er sambært bókhaldinum minkað 552 t.kr., sum er peningur sum stavar frá játtanini "Varðveitan av fjølbroyttum fiskiflota". Sostatt vísir roknskapurin "bert" 497 t.kr. Vit halda tað vera skeivt at tvinna tvær játtanir saman á henda hátt.

Fiskimálaráðið hevur í februar 2004 greitt frá, at verkætlanin "Rækjuroyndir við Flemish Cap" ikki verður viðgjørd eins og hinar verkætlanirnar, ið eru fíggjaðar av Fiskivinnuroyndum, men at tað er politiskt tilætlað, at verkætlanin verður fíggjað av Fiskivinnuroyndum.

4.6.2 Varðveitan av fjølbroyttum fiskiflota

Lógargrundarlag

Heimildin fyri studningsskipanini er Ll. nr. 72 frá 20. mai 1996 "um varðveiting av fjølbroyttum fiskiflota". Neyvari reglur eru ikki ásettar í kunngerð.

Sambært § 1 í Ll. nr. 72/1996 "um varðveiting av fjølbroyttum fiskiflota" verður studningur latin til rakstur, veðhald fyri part av útgerðarláni og til at gjalda fyri eygleiðaraskipanir uttanfyri føroysku landleiðirnar.

Umsiting av játtan

Sáttmáli er millum Fiskirannsóknarstovuna og eitt reiðaravirki. Reiðaravirkið sendir eina rokning um árið, sum Fiskirannsóknarstovan váttar, og Fiskimálaráðið ávísir til útgjaldingar. Fiskirannsóknarstovan hevur ein fiskifrøðing og ein biologassistent við rækjuskipinum.

Í 2002 var játtanin 1,5 mió.kr. Rokningin frá reiðaravirkinum var 948 t.kr. Ikki brúkt játtan í 2002, 552 t.kr. varð flutt verkætlanini "Rækjuroyndir við Flemish Cap" undir játtanini til "Fiskivinnuroyndir". Einasta endamál við umbókingini tykist vera at brúka alla játtanina til "Varðveitan av fjølbroyttum fiskiflota".

4.6.3 Granskingarætlanir

Lógargrundarlag

Heimildin fyri studningsskipanini er fíggjarlógin og viðmerkingarnar frá landsstýrinum í fíggjarlógaruppskotinum:

> *"Áhaldandi granskingin í fiskivinnuni fær miðvíst skipaðar karmar at virka undir í komandi tíðum. Fiskimálaráðið hevur lagt stóran dent á at styrkja og menna gransking og menning í føroysku fiskivinnuni. Í ár 2002 eru 3 granskingarkjarnar stovnsettir innan ávís fakøki. Henda skipan skal menna føroyska granskingarstøðið ástøðiliga og granskingarumhvørvið sum heild. Málið er at bjóða fiskivinnuni og fiskiídnaðinum munadygga gransking. Arbeitt verður miðvíst við at skapa teir røttu karmarnar, soleiðis at menningin kann gerast áhaldandi á enn fleiri økjum."*

Umsiting av játtanini

Játtanarslagið "onnur játtan" verður vanliga nýtt, tá endamálið við játtanini er ætlað at verða rokkið við at veita studning, serliga til ítøkiligar studningsjáttanir, veita lán o.a. Sambært fíggjarlógini er játtanin "Granskingarætlanir" ein "rakstrarjáttan". Hóast tað, er størsti parturin av játtanini studningur til feløg, einstaklingar og stovnar. Sambært roknskapinum fyri 2002 eru 1.555 t.kr. fluttar einstaklingum, og 462 t.kr. eru fluttar verkætlanum á øðrum almennum stovnum.

Fiskimálaráðið hevur í februar 2004 greitt frá, at talan var um umsøkjarar, sum høvdu sent umsóknirnar til Fiskivinnuroyndir. Eftirsum at játtanin til "Granskingarætlanir" ikki varð brúkt, gjørdi Fiskimálaráðið av at rinda studning haðani.

4.6.4 Fiskivinnumenning á landi

Lógargrundarlag o.a.

Heimildin fyri studningsskipanini er Ll. nr. 84 frá 28. mai 1996 "um stuðul til menning av fiskivinnu á landi", broytt við Ll. nr. 110 frá 13. juni 1997. Neyvari reglur eru ásettar í K. nr. 113 frá 12. august 1996 "um stuðul til menning av fiskivinnu á landi", broytt við K. nr. 121 frá 23. oktober 1996.

Í 2002 vóru rindaðar um 3,3 mió.kr. til fiskivinnumenning og um 100 t.kr. til heilsuváttanir til starvsfólk á fiskavirkjum. Vit duga ikki at síggja í lógini ella í kunngerðini, at endamálið við studninginum er at rinda útreiðslur til heilsuváttanir.

Í 2003 eru um 130 t.kr. rindaðar til heilsuváttanir til starvsfólk á fiskavirkjum. Um 880 t.kr., av teimum 35 t.kr. í sakføraraútreiðslum, eru rindaðar í sambandi við, at Fiskimálaráðið gjørdi semju í einum rættarmáli. Fiskimálastýrið tók tilsøgn aftur um studning til vørumenning, tí verkætlanin fór fram í Danmark. Rætturin vísir á, tað ikki er treytað í lóg, kunngerð ella tilsagnarskrivi, at verkætlanin skal verða framd í Føroyum. Tí heldur rætturin ikki grundarlag vera fyri, at Fiskimálaráðið kallaði tilsøgnina aftur. Vit halda, at rættarmálið kundi bent á, at endamálið við játtanini er ikki nóg greitt, og at nóg greið heimild er ikki at áseta treytir, sum skulu tryggja, at peningurin verður nýttur til rætt endamál.

Kilostuðul til virking av vørum úr innfluttum fiski (kapittul 1)

Sambært viðmerkingunum er endamálið við stuðlinum:

- At bøta um møguleikarnar at gera royndir við at virka innfluttan fisk
- Í eitt avmarkað tíðarskeið at fáa rávøru til landið, av tí at veiðimongdir undir Føroyum eru í minking
- At skapa arbeiðspláss í einari tíð við stórum arbeiðsloysi

Vit hava áður vístá, at studningsskipanin upprunaliga er frá 1990, og tí er ikki longur talan um eina royndarskipan, men heldur um ein varandi kilostudning til rakstur.

Fiskimálaráðið hevur í februar 2004 greitt frá, at ætlanin var at leggja fyri tingið uppskot um lóg um førleikamenning í fiskivinnuni og samstundis at taka av lógina um studning til menning av fiskivinnu á landi. Lógin um førleikamenning í fiskivinnuni heimilar ikki, at studningur verður veittur til at virka vørur úr innfluttum fiski. Av tí at val varð skrivað út 5. desember 2003, fall uppskotið burtur.

Stuðul til vørumenning o.a. á fiskavirkjum (Kapittul 2 og 2a)

Vit hava áður vístá manglandi reglur fyri málsviðgerð, í sambandi við studning til vørumenning á fiskavirkjum. Í lógini og kunngerðini er kravt, at nógvar ymiskar upplýsingar skulu fylgja við umsóknini, tí eru krøvini til eina neyva og einsháttaða málsviðgerð stór.

Í 1998 kunnaði Fiskimálaráðið um, at 3 fulltrúar arbeiddu við at gera mannagongdir fyri, hvussu umsóknir skulu vera viðgjørdar í sambandi við játtan og útgjald. Miðað varð ímóti, at mannagongdirnar skuldu vera greiðar, niðurskrivaðar og dokumenteraðar. Í mars 1999 hevði umsitingin gjørt ítøkiligt uppskot um, hvussu § 6, stk. 1, í kunngerðini skuldi verða umsitin. Fiskimálaráðið greiddi frá, at vegna sjúku og aðrar umstøður, var arbeiðið við at bøta um mannagongdirnar tarnað, men at eitt fólk var sett í starv at gera arbeiðið. Fiskimálaráðið kunnaði í februar 2004 um, at reglur fyri málsviðgerð framvegis ikki eru ásettar.

Fiskimálaráðið hevur í februar 2004 greitt frá, at ætlanin var at leggja fyri tingið uppskot um lóg um førleikamenning í fiskivinnuni og samstundis at taka av lógina um studning til menning av fiskivinnu á landi. Lógin um førleikamenning í fiskivinnuni heimilar ikki, at studningur verður veittur til vørumenning o.a. Av tí at val varð skrivað út í desember 2003, varð uppskotið ikki lagt fyri tingið.

4.6.5 Viðmerkingar

Sum vit áður hava gjørt vart við, er í fleiri førum trupult at meta um, hvørt peningurin á studningsjáttanunum, sum eru umrøddar frammanfyri, er rætt umsitin, og er nýttur til ætlaða endamálið. Í nøkrum førum er eingin neyvari endamálsáseting, og ítøkiligar ásetingar eru ikki, sum kunnu geva eina ábending um, hvørt endamálið er rokkið.

Undir Løgmansfyrisitingini, "Alment um studningslóggávu og studningsumsiting", hava vit meira alment viðgjørt spurningin um góða studningslóggávu. Vit halda, at studningsjáttanirnar undir Fiskimálaráðnum vanta fleiri lógarásetingar, sum kunnu verða við til at bøta um umsitingina, t.d. avmarka, hvør kann fáa studning, áseta, hvussu umsóknir skulu verða viðgjørdar og góðkendar, hvussu studningurin skal verða roknaður út, heimilað er at áseta krøv til skjalprógv, fíggjarætlan, eftirlit, roknskap, grannskoðan, møguliga afturrindan o.s.fr.

5. VINNUMÁL o.a.

5.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-9)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Meirnýtsla:

6.37.5.04. Heilsufrøðiliga Starvsstovan (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 12,4 mió.kr.

Á eykajáttanarlógini fyri november 2002, sum varð samtykt 19. desember 2002, varð játtanin hækkað 1 mió.kr. til 13,4 mió.kr. Meirnýtslan er um 1,6 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum var meirnýtsla, tí:

at "inntøkufíggjað virksemi" (kanningarstovur og verkætlanir) hevði størri undirskot enn væntað,

at viðlíkahaldið og keyp av vørum og tænastum var hægri enn ætlað. Tað mesta vóru óvæntaðar útreiðslur í sambandi við nýstovnaðu "Fiska- og djórasjúkudeildina".

Sambært landsstýrismanninum vórðu avleiðingarnar:

at landsstýrismaðurin gav stjóranum eina átalu fyri, at fíggjarstýringin í 2002 ikki hevði verið nóg neyv,

at stjórin skuldi gera eina ítøkiliga spariætlan fyri stovnin fyri 2003, soleiðis at landsstýrismaðurin kundi tryggja sær, at játtanin fór at halda. Nýggj fíggjarætlan varð gjørd,

at í framtíðini skuldu ongar flytingar verða millum undirkontur hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Verkætlanin "Umhvørviseftiransing", sum verður fíggjað av § 9. Oljumál, skal í framtíðini verða bókað á undirkontu 20. vanligt virksemi. Virksemisyvirlitini skulu eisini vísa samlaðu útreiðslurnar hjá stovninum (ikki bert lønarútreiðslurnar). Fyrst í september á hvørjum ári skal stovnurin skrivliga greiða frá fíggjargongdini og útlitunum fyri restina av árinum.

Landsstýrismaðurin heldur, at hesi tiltøk fara at hava við sær, at mánaðarroknskapirnir og leiðslukunningarskipanin fara at geva eina enn betri mynd av fíggjargongdini, og at Vinnumálaráðið fer at verða kunnað um fíggjarútlitini í góðari tíð.

6.38.2.01. Strandfaraskip Landsins (landsfyritøka)

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 70,7 mió.kr.

Á eykajáttanarlógini fyri august 2002 varð játtanin hækkað 1,5 mió.kr. Peningurin var ætlaður til at økja um túratalið um Lorvíksfjørð.

Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin aftur hækkað 5,9 mió.kr. Av teimum vóru 3 mió.kr. lógarfest endurgjald til Vestmanna kommunu, og 2,9 mió.kr. til onnur endamál so sum sáttmálabundnar lønarhækkingar, inntøkumiss av verkfallinum, avloysaraskip o.t. Samlaða játtanin á fíggjarlógini var sostatt 78,1 mió.kr. Meirnýtslan er 1,4 mió.kr.

Landsstýrismaðurin vísir á, at seinast í november mánaði gjørdi leiðslan á Strandferðsluni Vinnumálaráðnum greitt, at neyðugt varð við einari eykajáttan 1,7 mió.kr. afturat teimum 5,9 mió.kr., tilsamans 7,6 mió.kr. Landsstýrismaðurin legði beinanvegin málið fyri á landsstýris-

fundi, men undirtøka var ikki fyri umbønini. Eykajáttanarlógin fyri november 2002, sum veitti eina eykajáttan 5,9 mió.kr., varð samtykt í tinginum 19. desember 2002.

Yvirlit yvir játtanar- og roknskapartøl 2002 (t.kr.)

	Játtan	Nýtsla	Munur
Lønir v.m.	66.908	71.960	-5.052
Keyp av vørum og tænastum	70.178	71.483	-1.305
Keyp av útbúnaði, netto	2.460	-1.336	3.796
Leiga, viðlíkahald og skattur	23.934	31.188	-7.254
Avskrivingar o.a.	0	893	-893
Ymiskar rakstrarútreiðslur	540	593	-53
Útvegan av løgu	1.490	5.338	-3.848
Útreiðslur tilsamans	165.510	180.119	-14.609
Søla av vørum og tænastum	-87.410	-100.588	13.178
Nettorakstur	78.100	79.531	-1.431

Landsstýrismaðurin vísir á, at sambært yvirlitinum hevur Strandferðslan undirbudgetterað bæði inntøkur og útreiðslur. Sambært landsstýrismanninum er frávik millum fíggjarætlan og roknskap m.a. tí, at:

- Strandfaraskip Landsins hava sett av 900 t.kr. til tap av skuldarum. Avsetingin var ikki við í fíggjarætlanini,
- umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslurnar vórðu 5,3 mió.kr. hægri enn væntað,
- leiga av avloysaraferju gjørdist um 1,0 mió.kr. dýrari enn ætlað, hóast eykajáttan 1,1 mió.kr. varð veitt til avloysaraferju,
- í 2002 varð avtalað gjørd við Tvøroyrar kommunu um at rinda 500 t.kr. fyri at hava leigað bilbásar á Drelnesi í tíðarskeiðinum 1999-2001,
- nýggju sáttmálarnir hjá Bygdaleiðum gjørdust dýrari enn mett var,
- útreiðslurnar til at nøkta flutningstørvin hjá ítróttafólki vuksu væl meira, enn roknað var við.

Viðvíkjandi fíggjarárinum 2003 hevur landsstýrismaðurin sent Strandfaraskipum Landsins tillutanarbræv, har boðað verður frá, at fyritøkan skal halda játtanirnar.

Høvuðskonta 6.38.2.02. Strandfaraskip Landsins (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 90,0 mió.kr. til nýtt suðuroyarskip. Meirnýtslan er 2,4 mió.kr.

Yvirlit yvir løguútreiðslur í 2002

Undirkontur:	Játtan 2002	Roknskapur 2002	Meirnýtsla
1. Sandoyarskip	0	767.692	767.692
2. Suðuroyarskip	90.000.000	90.807.652	807.652
3. Rýmingarskipan	0	897.258	897.258
4. Trygdarkrøv til Dúgvuna	0	-87.004	-87.004
Tilsamans	90.000.000	92.385.598	2.385.598

Landsstýrismaðurin vísir á, at bara ein triðingur, um 800 t.kr., er meirnýtsla, sum stavar frá virksemi í 2002. Meirnýtslan er í sambandi við "Suðuroyarskip". Restin, um 1,6 mió.kr., eru útreiðslur hildnar í 2001 og árini frammanundan. Talan er um útreiðslur til "Sandoyarskipið", "Rýmingarskipan" og "Trygdarkrøv til M/F Dúgvuna".

Sambært landsstýrismanninum setti táverandi stovnsleiðsla, t.v.s. stjórin og fíggjarleiðarin, sær fyri við árslok 2001, at bæði rakstrarjáttan og løgujáttan fyri fíggjarárið 2001 skuldu halda. Leiðslan valdi at bóka meirútreiðslurnar í 2001 til "Sandoyarskip", sum onga serstaka játtan hevði, á rakstrarjáttanina. Samstundis varð avlopið á løgujáttanini umbókað til rakstrarjáttanina, so hon kundi halda.

Í 2002 komu 2 rokningar aftrat, sum áttu at verið bókaðar undir løgujáttanini í 2001. Fyri at løgujáttanin í 2001 skuldi halda, valdi leiðslan at bóka útreiðslurnar á rakstrarjáttanina í 2002.

Landsstýrismaðurin vísir á, at nýggi stjórin varð settur í starv 1. januar 2003 og nýggi fíggjarleiðarin 1. mai 2002. Tí fær meirnýtslan og fíggjarstýringin í 2002 ongar avleiðingar fyri nýggju leiðsluna, av tí fyrrverandi stjórin og lutvíst fyrrverandi fíggjarleiðarin hava ábyrgdina av fíggjarárinum 2002. Landsstýrismaðurin heldur, at nýggi fíggjarleiðarin hevur roynt at rudda allar skeivleikar, sum undanfarna leiðsla framdi, av vegnum.

Landsstýrismaðurin hevur tó sent Strandfaraskipum Landsins skriv, har m.a. verður víst á:

- at meirnýtslan, sum varð staðfest í 2002, ikki má endurtaka seg,
- at fyritøkan í framtíðini skal gera meira realistiskar fíggjarætlanir viðvíkjandi útreiðslum og inntøkum,
- at fyritøkan á hvørjum árið - fyrst í september mánað - skrivar nágreiniliga frágreiðing um fíggjarligu gongdina og um útlitini fyri restina av árinum, so landsstýrismaðurin verður kunnaður í góðari tíð.

6.38.2.10. Flogferðsla (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 0,8 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin hækkað 200 t.kr. Meirnýtslan er 47 t.kr. Sambært landsstýrismanninum fekk Landsverkfrøðingsstovnurin seinastu rokningarnar frá Statens Luftfartsvæsen eftir árslok, og tá var ov seint at fáa eykajáttan.

Minninýtsla:

Flest allir stovnar/høvuðskontur hava eina minninýtslu. Niðanfyri verður greitt frá summum teirra.

6.11.1.16. Viðlíkahald (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1,5 mió.kr. Minninýtslan er 520 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð farið so seint undir viðlíkahaldsarbeiðið á Bileftirliti Føroya, at tað eydnaðist ikki at halda tíðarætlanina.

6.36.1.04. Havbúnaðarroyndir

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 11 mió.kr. Minninýtslan er 1 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum var 1 mió.kr. sett av í 2002 til royndir við nýggjum aliøkjum. Av tí at henda verkætlan hjá P/F Fiskaaling var lokin í 2001, var ikki tørvur á peninginum.

6.36.1.07. Fiskasjúkutænastur (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1,5 mió.kr. Minninýtslan er 618 t.kr. Sambært landsstýrismanninum var raksturin av fiskasjúkutænastuni bíligari í 2002, enn roknað var við.

6.37.2.04. Endurgjald til skipasmíð

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 5 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin lækkað 1 mió.kr. Minninýtslan er 291 t.kr.

6.37.5.05. Umbygging av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 6,5 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin lækkað til 0,5 mió.kr. vísandi til, at umbyggingin ikki fór at verða framd tað árið. Minninýtslan er 146 t.kr. Sambært landsstýrismanninum var endalig støða ikki tikin til, um tað var betri at byggja um/víðka verandi starvsstovu fyri ímillum 13 og 30 mió.kr. ella byggja nýggja starvsstovu fyri millum 50 og 80 mió.kr.

6.38.1.02. Landsverkfrøðingsstovnurin (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 69,1 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin hækkað 966 t.kr. Minninýtslan er 1,4 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum hevði undirkonta 30 "Hald av landsvegum" meirinntøkur av stóru søluni av skervi og asfalti til P/F Vágatunnilin, og útreiðslurnar til kavarudding vóru eisini lægri enn fyri eitt miðalár. Harafturat var peningur settur av á undirkontu 38 "Flogferðsla" til at gera kanningar av flogvallarviðurskiftunum í Føroyum. Farið varð tó ikki undir hesar kanningar.

6.38.1.18. Stuðul til infrakervið á útoyggjum

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3,5 mió.kr. Minninýtslan er 720 t.kr. Høvuðskontan varð stovnað í 2002. Sambært landsstýrismanninum var komið væl inn í árið, áðrenn tað var greitt, hvørjar verkætlanir vóru hóskandi at stuðla, og hvussu játtanin skuldi verða býtt millum verkætlanirnar.

6.38.1.21. Stuðul til havnir

Upprunaliga var eingin peningur játtaður. Við eykajáttanarlógini fyri august 2002 vóru 500 t.kr. játtaðar til at prosjektera, í sambandi við ætlaða útbygging av havnini í Vági. Minninýtslan er 390 t.kr. Sambært landsstýrismanninum kom stígur í arbeiðið, m.a. tí tað var ógreitt, hvussu umfatandi verkætlanin skuldi verða.

6.38.3.10. Útvarps- og sjónvarpssendistøðir (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1 mió.kr. Minninýtslan er 667 t.kr. Sambært landsstýrismanninum gjørdi Vinnumálaráðið tíðliga í 2002 Føroya Tele greitt, at eingin peningur varð fluttur fyritøkuni, fyrr enn ein avtala varð gjørd millum partarnar, sum ásetti, hvussu játtanin skuldi verða umsitin. M.a. skuldi fyritøkan binda seg til at halda játtanirnar og at lata Vinnumálaráðnum roknskap fyri virksemið. Avtalan varð skrivað undir 20. november 2002, og Føroya Tele segði seg tessvegna ikki hava havt stundir til at fremja allar tær íløguætlanir, felagið hevði fyri árið. Vinnumálaráðið heldur, at játtanin kundi verið nýtt til at keypa útbúnað til sendinetið.

6.39.4.01. Barsilsskipan (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 71 mió.kr. Við eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin lækkað 3 mió.kr. Minninýtslan er 2,4 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum var 2002 fyrsta árið, ið skipanin virkaði alt árið, og tí bygdi játtanin at kalla bert á metingar. Harafturat var ávís óvissa knýtt at øllum fyritreytunum fyri játtanini. (Tal á børnum, tal á mammum og

pápum, sum eru knýtt at arbeiðsmarknaðinum og sum fara í farloyvi, vikutal í farloyvi, lønarútrokningargrundarlagið o.a.)

6.39.4.04. Umsiting av barsilsskipan (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1,8 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri mars 2002 varð játtanin hækkað 1 mió.kr. Minninýtslan er 628 t.kr. Sambært landsstýrismanninum skuldi ein stórur partur av játtanini verða nýttur til at menna telduskráir í sambandi við fyrisitingina av Barsilsskipanini. Telduskráirnar vóru tó ikki liðugt mentar fyri árslok.

Lønarkarmur

Allir stovnar/høvuðskontur hava sambært landsroknskapinum hildið seg innanfyri ásetta lønarkarmin.

Annað

6.38.2.19. Norðoyatunnilin

Upprunaliga var eingin játtan á fíggjarlógini 2002. Á eykajáttanarlógini fyri november 2002, sum varð samtykt 19. desember 2002, vórðu játtaðar 32,5 mió.kr. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur m.a.:

> *"Biðið verður um eina eykajáttan upp á 32,5 mió.kr., sum skal nýtast til at fáa til vega fast samband millum Eysturoynna og Borðoynna. Ein játtan upp á 30 mió.kr. varð veitt til endamálið í 2001....*
>
> *.....Sambært galdandi verklagslóg skulu 32,5 mió.kr. játtast árliga í tíðarskeiðinum 2003-2008. Tað er tó vorðið greitt, at karmarnir á fíggjarlógunum fyri 2003 og 2004 eru trongir. Tí verður skotið upp, at (verklags)lógin verður broytt soleiðis, at fyrsti partur av játtanini, kr. 32,5 mió.kr., verður játtaður í ár (2002), meðan restin verður játtað í tíðarskeiðinum 2005-2009 við kr. 32,5 mió.kr. árliga fyrstu fýra árini og 42,5 mió.kr. í 2009. Hetta fer tó væntandi ikki at seinka verkætlanini, og arbeitt verður framvegis við neyðugu fyrireikingunum."*

Ætlaða broytingin av verklagslógini, sum sipað verður til í viðmerkingunum, er uppskot til løgtingslóg frá 12. november 2002 "um broyting í løgtingslóg um fast samband um Lorvíksfjørð" (Lm. nr. 24/2002). Um fíggjarligu avleiðingarnar stendur í viðmerkingunum, at samlaða upphæddin, sum landið skal játta sum innskot í P/f Norðoyatunnilin, verður 10 mió.kr. hægri, av tí at gjaldið í 2004 verður útsett til 2009, og hevur tað við sær øktar rentuútreiðslur fyri partafelagið. Hinvegin fær landið rentuinntøkur, av tí at gjaldið verður goldið 5 ár seinni.

Sambært viðmerkingunum, bæði í uppskotinum til eykajáttanarlóg fyri november 2002 og í uppskotinum til løgtingslóg "um broyting í løgtingslóg um fast samband um Lorvíksfjørð", stendur, at *"karmarnir á fíggjarlógunum fyri 2003 og 2004 eru trongir"*, tí verður skotið upp at framskunda gjaldið í 2003 til 2002 og at útseta gjaldið 2004 til 2009.

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at endamálið við hesi eykajáttan/lógarbroyting í veruleikanum er at biðja Løgtingið um heimild til ávikavist at framskunda og útseta 2 peningaflytingar av peningastovnskontu hjá landinum til peningastovnskontu hjá einum partafelag, sum landið eigur, uttan at tað skal framskunda, seinka ella á annan hátt ávirka ætlaða tunnilsvirksemið, sum partafelagið stendur fyri. Um ársskiftið 2002/2003 hevði landið um 2,8 mia.kr. standandi inni í peningastovnum/Landsbankanum. Landsgrannskoðanin spurdi landsstýrismannin í vinnumálum:

1. hvørjir "trongir fíggjarkarmar" førdu til, at ein ætlað peningaflyting í 2003 varð framskundað til 2002,
2. og hvørji átrokandi viðurskifti gjørdu tað neyðugt við hesi eykajáttan, ið varð samtykt 19. desember 2002.

Í mars 2004 greiddi landsstýrismaðurin frá, at talan var um eina politiska avgerð at framskunda játtanina til P/F Norðoyatunnilin, tí Landsstýrið ynskti, at fíggjarløgtingslógin fyri 2003 skuldi geva eitt so gott úrslit sum møguligt. Harafturat vísir landsstýrismaðurin á, at á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð samlaða játtanin til íløgur lækkað 34,7 mió.kr., og tað var við til at fíggja eykajáttanina til P/F Norðoyatunnilin.

Fíggjarmálaráðið hevur eisini greitt frá, at tað var ein politisk avgerð, at peningur ikki skuldi verða játtaður til Norðoyatunnilin í 2003 og 2004, tí nýggja "suðuroyarskipið", saman við nýggjari samferðsluhavn í Suðuroy, tók sera stóran part av løguætlanini hjá Landsstýrinum hesi árini.

5.2 Vantandi stjórnan av kunningartrygd (GL 2001/1 02 0-2)

Samskifti við løgmann

Í skrivi til løgmann í august 2001, sum eisini varð sent landsstýrismonnunum til kunningar, vístu vit m.a. á :

- *at* arbeiðið at tryggja elektroniska partin av kunningarkervinum fer óskipað fram í landsumsitingini. Fólk sita hvør sær og stríðast við somu trupulleikum uttan at halda seg til viðurkendar standardar,
- *at* tað lættliga kann fáa sera óhepnar fylgjur,
- *at* vandi er fyri, at peningur og starvsfólkaorka verða ikki nýtt á skynsaman hátt,
- *at* KT-forum so at siga ikki er til longur,
- *at* DNL-ráðið ikki hevur ásett felags trygdarreglur,
- *at* tað er ógreitt, hvørja ábyrgd og hvønn myndugleika KT-forum, DNL-ráðið og onnur stýri og stovnar hava, og hvørjar avleiðingarnar verða, verða boð ikki fylgd.

Ábyrgdarøkið hjá landsstýrismanninum í vinnumálum

Løgmaður ásannaði í skrivi í oktober 2001, at tað almenna ikki hevur ein yvirskipaðan kunningartøkni- og trygdarpolitikk. Tað er ábyrgdin hjá landsstýrismanninum í vinnumálum, og hon fevnir eisini um samskipanina millum aðalráðini t.v.s.:

- *at* kunningartøknin í fyrisitingini verður á einum nøktandi og rímiliga einsháttaðum støði,
- *at* samlaði fakligi førleikin á økinum verður mentur og fullnýttur,
- *at* stuðla undir implementeringina av felags tvørgangandi KT-loysnum í almennu umsitingini.

Sambært skrivinum frá løgmanni skuldi Vinnumálaráðið, við hjálp frá einum tvørgangandi KT-forum, m.a. gera uppskot til ein KT-trygdarpolitikk, ið skuldi taka støði í altjóða standardum í stjórnan av KT-trygd.

Arbeiðsætlan hjá landsstýrismanninum í vinnumálum

Landsstýrismaðurin í vinnumálum boðaði í februar 2002 frá, at endurskipaða KT-forum í seinasta lagi 1. mai 2002 eftir ætlan fór at lata løgmanni og landsstýrismonnunum eitt tilmæli um ein KT-trygdarpolitikk fyri landsfyrisitingina.

Í august 2002 ásannaði landsstýrismaðurin, at arbeiðið við at orða ein KT-trygdarpolitikk var munandi meira víðtøkið og tíðarkrevjandi. Hann helt tá, at arbeiðið í fyrsta lagi kundi verða liðugt í seinnu hálvu av 2003.

Í mars 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at KT-forum í august 2003 sendi út eitt uppskot til hoyringar um "Felags regluverk fyri KT-trygd í landsfyrisitingini".

Í januar 2004 varð uppskotið handað landsstýrismanninum í vinnumálum. KT-forum mælir til, at arbeiðið við KT-trygd verður grundað á ISO 17799 standardin, m.a. tí at hann er mest brúkti standardur í heiminum fyri KT-trygd, og tí at K. nr. 28/2003 "um persónsupplýsingartrygd" í stóran mun byggir á ISO 17799. Uppskotið fevnir m.a. um:

- uppskot til KT-trygdarpolitikk í landsfyrisitingini,
- tilmæli um, hvussu regluverkið fyri KT-trygd í landsfyrisitingini verður sett í verk,
- bólking av krøvunum í IS0 17799 standardinum,
- upprit um KT-bygnaðin hjá landsfyrisitingini,
- tilmæli um skipan av KT-depli.

Vinnumálaráðið vísir til, at KT-forum heldur ein broyttan KT-bygnað vera fortreytin fyri, at uppskotið um KT-trygdarpolitikk kann verða sett í verk. Í uppritinum um broyttan KT-bygnað verður skotið upp at miðsavna partar av KT-virkseminum hjá landinum. Endamálið við miðsavnanini er m.a.:

at komandi KT-skipanir byggja á felags KT-arkitekturloysnir,

at betra um førleikan hjá landsfyrisitingini at fremja KT-verkætlanir,

at betra um møguleikan hjá landsfyrisitingini at fáa og halda fast við skikkaða KT-arbeiðsmegi,

at tryggja eitt mennandi og kvalifiserað KT-umhvørvi, sum kann verða drívmegi í ráðlegging av framtíðar KT-nýtslu.

KT-forum skjýtur upp:

at savna KT-infrastrukturin hjá tí almenna í einari ella tveimum "teldumiðstøðum", sum umsita tólbúnað (t.e. ambætarar, net, dátugoymslur o.a.) og ritbúnað (t.e. stýriskipanir, dátugrunnar o.a.). Teldumiðstøðin kann taka sær av at taka trygdaravrit, umsita postservarar o.a.

at savna raksturin av teimum týdningarmestu nýtsluskipanunum hjá tí almenna, t.e. journalskipanir, búskaparskipanir, nýggja felags lønarskipanin, standard skrivstovuforrit o.a.

Viðmerkingar

Í seinastu frágreiðing í februar 2003 vísti Landsgrannskoðanin m.a. á, at ein fyritreyt fyri at gagnnýta menningina í KT til at effektivisera umsitingina, t.d. at digitalisera/talgilda, er, at grundleggjandi trygdarviðurskifti eru í lagi. Tá ræður um KT-trygd, heldur Landsgrannskoðanin, at verandi KT-bygnaður er eitt tað størsta vandamálið. Í dag hevur landsumsitingin eitt ótal av KT-skipanum, og tíðum hava alt ov smáar umsitingarligar eindir ábyrgd av at keypa, broyta, halda viðlíka, menna og reka skipanir, umsita net, trygd o.s.fr. Almenni KT-bygnaðurin kundi verið væl betur skipaður/samskipaður, men hann er í stóran mun ein spegilsmynd av einum undirliggjandi bygnaði. Trygdartiltøkini verða sera dýr fyri landið, skal hvør stovnur í sínum lag lúka krøvini, ásett eru í t.d. kunngerðini um persónsupplýsingar og í ISO 17799. Tí verður helst neyðugt at miðsavna fleiri uppgávur fyri at bøta um trygdina. Annars er vandi fyri, at kunningartøkni gerst eitt haft um beinið á landsumsitingini. Landsgrannskoðanin heldur tí, at ein yvirskipaður KT-politikkur/KT-trygdarpolitikkur ikki kann verða framdur í verki, uttan at almenni bygnaðurin samstundis verður endurskoðaður við tí endamáli at effektivisera umsitingina, t.v.s. gera hana bíligari og betri.

Sum víst á í skrivi okkara til løgmans hevur kunningartrygd í landsumsitingini verið merkt av, at eingin myndugleiki er á økinum. Tað nyttar lítið, at KT-forum hevur uppskot um nógv skilagóð tiltøk, um eingin myndugleiki hevur ábyrgd og heimild at broyta KT-bygnaðir og seta trygdarpolitikkin í verk.

Sum eisini víst á aðrastaðni í frágreiðingini, má støða verða tikin til, hvussu regluverkið um KT-trygd skal verða sett í verk, t.d. um tað skal vera sum lóg, kunngerð ella sum rundskriv, og hvør landsstýrismaður/aðalráð skal hava ábyrgdina av reglunum um KT-trygd. Tað kundi verið Fíggjarmálaráðið og ikki Vinnumálaráðið, ið formliga setti út í kortið. Frammanundan, í § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini, hevur Fíggjarmálaráðið fingið heimild at loyva stovnum at hava egnar búskaparskipanir og skal áseta, hvørji krøv hesir stovnar skulu lúka í tí sambandinum. Nógvar búskaparskipanir eru samantvinnaðar við skipanir, sum eru fevndar av lógini um viðgerð av persónsupplýsingum og í tí sambandinum eisini av K. nr. 28/2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum". Tað hevði tí verið vert at umhugsa at lagt Dátueftirlitið undir Fíggjarmálaráðið fyri at miðsavna kørgu almennu servitanina á økinum.

5.3 Rúsdrekkasøla Landsins (GL 2000/2 03 9-9)

Vit hava verið ófráboðað á kassa- og goymslueftirlitum á deildunum, og vørugoymslurnar eru grannskoðaðar eftir árslok. Vit hava eisini kannað, um samsvar er ímillum bókhaldið hjá Rúsdrekkasøluni og skrásettu roknskapartølini í landsroknskapinum.

Roknskaparreglugerð

Vit hava áður víst á, at roknskaparreglugerðin ikki var góðkend. Vinnumálaráðið hevur 8. mai 2003 góðkent roknskaparreglugerðina.

Gjaldføri/útgjaldsskipanir

Í seinastu frágreiðing í februar 2003 vístu vit aftur á, at stovnurin ofta hevur nógvan tøkan pening á vanligum peningastovnskontum, ið lata 0,75% og minni í rentu, m.a. tí at Rúsdrekkasølan bert einaferð um árið rindar Gjaldstovuni avlopið. M.a. vísandi til rentumiss hava vit fyrr mælt til, at avlopið verður avroknað javnan. Landsstýrismaðurin er samdur við okkum og hevur skotið upp, at Rúsdrekkasølan avroknar hvønn mánað ella hvønn ársfjórðing.

Stovnurin avroknar framvegis bert eina ferð um árið við Gjaldstovuna. Sjónarmiðini hjá Rúsdrekkasøluni eru, at verður avlopið hjá stovninum avroknað so hvørt, versnar gjaldførið, tí sølan er ójøvn og er størst seinastu mánaðirnar í árinum. Vit halda ikki, at tað skuldi verið nakar trupulleiki, tí eins og aðrir landsstovnar hevur Rúsdrekkasølan møguleika fyri at fáa neyðugt gjaldføri frá Gjaldstovuni.

Gjaldstovan hevur eisini víst á, at tað er skeivt, at landsstovnar/-fyritøkur sum t.d. Rúsdrekkasøla Landsins hava nógvan pening standandi á kontum í øðrum peningastovnum og hevur reist spurningin, um ikki hesin peningur átti at staðið í Landsbankanum.

Sambært Vinnumálaráðnum er tað í grundregluni ikki nakað, sum forðar fyri, at Rúsdrekkasøla Landsins sum frálíður verður partur av búskaparskipanum landsins, har allar peningaflytingar fara umvegis "landskassan". Vinnumálaráðið hevur tó ongar ítøkiligar ætlanir um tað.

Lønarskipan

Stovnurin hevur egna lønarskipan. Sambært skrivi 12. juni 2001 frá Fíggjarmálaráðnum skulu allar almennar lønir og aðrar gjaldingar, ið verða handfarnar sum løn, verða avgreiddar um nýggju lønarskipanina hjá Gjaldstovuni. Í ávísum førum kunnu egnar forskipanir verða nýttar. Í oktober 2002 spurdu vit landsstýrismannin, hvørjar ætlanir eru um at brúka nýggju felags

lønarskipanina. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2003 boðað frá, at hann heldur, at Rúsdrekkasølan eigur at nýta nýggju felags lønarskipanina.

Rúsdrekkasølan hevur í februar 2004 kunnað um, at ongi stig eru tikin til at nýta nýggju felags lønarskipanina.

EDV-viðurskifti

Í gjøgnumgongd okkara av EDV-viðurskiftunum hava vit víst á, at Rúsdrekkasøla Landsins lýkur ikki fleiri grundleggjandi krøv, sum verða ásett í roknskaparrundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum. Í februar 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Rúsdrekkasølan skal fylgja ásetingunum í roknskaparrundskrivinum.

Í februar 2004 hevur stjórin á Rúsdrekkasøluni kunnað um, at nøkur av viðurskiftunum eru komin í rættlag. Samanumtikið halda vit, at stórvegis broytingar eru ikki í EDV-viðurskiftunum hjá stovninum.

Rúsdrekkasølan hevur í februar 2004 boðað frá, at í februar 2004 er ein "trygdarbólkur" settur við 3 umboðum frá stovninum og 1 frá EDV-veitara stovnsins. Rúsdrekkasølan hevur boðið seg til at verða partur av "pilotverkætlanunum", sum KT-forum hevur mælt til í sambandi við, at uppskotið um almennan KT-trygdarpolitikk/regluverk verður sett í verk.

5.4 Heilsufrøðiliga Starvsstovan (GL 1997/2 08 2-1)

Vantandi kunngerð

Sambært § 1, stk. 2, í Ll. nr. 23/1986 "um Heilsufrøðiliga Starvsstovu" er álagt Landsstýrinum við kunngerð at áseta neyvari reglur um arbeiðsøki, samskipanarviðurskifti og starvsfólkaviðurskifti. Vit vístu í frágreiðing okkara í februar 2002 á, at hóast mong ár eru liðin, eru ongar reglur ásettar.

Landsstýrismaðurin vísti í januar 2002 á, at við støði í einum arbeiðsskjali frá august 2000 var ætlanin í næstum at gera kunngerðina. Í februar 2003 greiddi landsstýrismaðurin frá, at kunngerðin var liðugt orðað, og at hon var send Løgmálaráðnum at kanna. Eftirsum uppskotið til kunngerð ikki viðgjørdi viðurskifti millum borgarar ella millum borgarar og myndugleikar, og ikki ásetti gjøld, helt Løgmálaráðið, at reglurnar í staðin kundu verið ásettar í rundskrivi ella reglugerð. Í mars 2003 gjørdi Vinnumálaráðið eina reglugerð fyri virksemi stovnsins ístaðin fyri at áseta reglurnar í kunngerð.

Kanningarstovur/kappingaravlagandi virksemi

Prísirnir á tænastunum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni verða ásettir ájavnt prísum hjá kanningarstovum í øðrum londum. Í summum førum hava kanningarstovurnar á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni roynt at rokna út veruliga kostnaðin, men tað verður ikki skrásett, hvussu nógv hvør tænasta kostar. Vit hava víst á, at kanningarstovurnar lúka ikki treytirnar í játtanarskipanini um "inntøkufíggjað virksemi", og at virksemið kann vera kappingaravlagandi. Landsstýrismaðurin var samdur við Landsgrannskoðanini og ásannaði, at gjøldini ikki svaraðu til kostnaðin á tænastunum.

Landsstýrismaðurin kunnaði í september 2002 um, at Vinnumálaráðið hevði umrøtt við stjóran á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at skilja "vanligt virksemi" á kanningarstovunum frá "vinnuligum virksemi", soleiðis at myndugleikauppgávurnar vórðu fluttar til undirkontu 20, vanligt virksemi. Vinnuliga virksemið skal lúka treytirnar fyri inntøkufíggjaðum virksemi.

Frá fíggjarárinum 2003 er virksemið á kanningarstovunum ikki longur "inntøkufíggjað virksemi". Í staðin fyri verður virksemið rikið sum "vanligt virksemi", á egnari undirkontu, soleiðis at virksemið framhaldandi gongur greitt fram á fíggjarlógini, og fyri at Heilsufrøðiliga Starvsstovan og Vinnumálaráðið kunnu verða eggjað til at fáa raksturin at bera seg.

Verkætlanir/"inntøkufíggjað virksemi"

Sum nevnt, eru játtanarreglurnar um "inntøkufíggjað virksemi" ætlaðar til vinnuliga sølu av vørum og tænastum.

Verkætlanirnar á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni kunnu í flestu førum ikki haldast at vera vanligt vinnuligt virksemi. Talan er um granskingar- og menningarverkætlanir, sum stovnurin í flestu førum tekur stig til, í framhaldi av vanliga virkseminum. Hesar verkætlanir verða fyri ein stóran part fíggjaðar av árligu játtanini til "Fiskivinnuroyndir", og úrslitið av verkætlanunum kemur stovninum og ofta eisini vinnulívinum til góðar. Í øðrum førum er talan um verkætlanir, sum fara fram í samstarvi við m.a. norðurlendskar stovnar og grunnar.

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at verkætlanirnar á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eru ikki nakað eindømi. Á øllum málsøkjum er tørvur á einum greiðum skilnaði á undirkontustøði ímillum "inntøkufíggjað virksemi" og annað "studningsfíggjað virksemi", sum ikki er vinnuligt, men sum heilt ella lutvíst verður fíggjað av øðrum. Hesin tørvur gerst meira viðkomandi, nú tað verður alt meira vanligt, at privat feløg, grunnar o.o. eru við til at fíggja m.a. ymiskar granskingarverkætlanir. Í tí sambandinum er eisini avgerandi at staðfesta, at talan skal verða um granskingarvirksemi, sum stovnurin sjálvur hevur áhuga í at fremja, og at tað er stovnurin, sum hevur "ognarrættin" til úrslitini, sum kunnu verða almannakunngjørd.

Ætlanin var, at Fíggjarmálaráðið skuldi broyta játtanarskipanina, so heimild eisini varð at hava ikki-vinnuligt "studningsfíggjað virksemi" á serstakari undirkontu. Arbeiðið er ikki liðugt.

5.5 Arbeiðseftirlitið (GL 1997/2 09 2-1)

Vit hava í 2003 verið á ófráboðaðum kassaeftirliti á Arbeiðseftirlitinum. Harafturat hava vit kannað inntøkur, prísáseting og umsiting av skuldarum.

Kassaeftirlit

Arbeiðseftirlitið hevur skrivstovukassa og girokontu, sum so at siga ikki verða brúkt. Vit mæltu stovninum til at taka kassan av og strika girokontuna. Stjórin hevur í februar 2004 boðað frá, at tað verður gjørt.

Inntøkur

Í 2002 hevði stovnurin um 1,4 mió.kr. í inntøkum. Inntøkurnar av skeiðsvirksemi vóru um 0,8 mió.kr., herímillum trukk-skeið, krana-skeið og trygdar-skeið.

Stovnurin hevði um 0,4 mió.kr. í inntøkum av at løggilda fyri Force Instituttet. Harafturat er talan um onnur eftirlits- og sýnsgjøld.

Prísáseting

Í roknskaparreglugerðini, sum er góðkend av Vinnumálaráðnum, er ásett:

1. at gjøld fyri tænastur, skeið o.a. verða roknað til beinleiðis kostnað umframt part av umsiting, og at 50 % verða løgd omaná í vinningi fyri ikki at vera kappingaravlagandi,
2. at stjórin "fylgir prísásetingini upp",
3. at í framtíðini verður "príslistin" kunngjørdur í Kunngerðarblaðnum.

Ad. 1 Prísáseting

Í prísásetingini eru einans "beinleiðis útreiðslur". Prísásetingin lýkur tí ikki yvirskipaðu ásetingarnar í játtanarskipanini um, at langtíðar miðalkostnaðurin skal verða figgjaður. Landsstýrismaðurin hevur í mars 2004 kunnað um, at Vinnumálaráðið fer at heita á stovnin um at viðgera av nýggjum uppskot til kunngerð um gjøld fyri eftirlit o.t. og uppskot til príslista fyri aðrar tænastur fyri at tryggja, at ásetingarnar í játtanarskipanini verða hildnar.

Sambært yvirlitinum yvir prísútrokningarnar verður 50% í vinningi bert lagt omaná mettu tíðarnýtsluna í skeiðsinntøkum. Spurdur, hví 50 % í vinningi verða løgd omaná júst hesar inntøkurnar, hevur stjórin í februar 2004 greitt frá, at tað er fyri, at prísirnir á skeiðum ikki skulu verða kappingaravlagandi.

Ad. 2 og 3 Uppfylging av prísáseting og príslisti

Í § 56 í Ll. nr. 70/2000 "um arbeiðsumhvørvi" er ásett, at Arbeiðseftirlitið krevur inn gjøld fyri tænastur sínar, og at gjøldini skulu verða góðkend av landsstýrismanninum.

Stovnurin nýtir framvegis príslistan, sum varð góðkendur av landsstýrismanninum 1. november 1998. Stjórin kunnaði í september 2003 um, at hann hevur ikki "fylgt prísásetingini upp", sum ásett í roknskaparreglugerðini, tí uppskot til nýggjan príslista, framvegis ikki er góðkent av landsstýrismanninum, og tí heldur ikki kunngjørt í Kunngerðarblaðnum.

Sambært stjóranum eru ikki allar tænastur stovnsins lógarfestar. Arbeiðseftirlitið hevur tikið tær vørur og tænastur, sum ikki eru lógarfestar, burturúr príslistanum og gjørt tveir príslistar: ein, sum skal verða kunngjørdur í Kunngerðarblaðnum og ein, sum skal verða góðkendur av landsstýrismanninum.

Stjórin hevur í mars 2004 kunnað um, at nýggjur, dagførdur príslisti fyri tænastur, sum eru lógarfestar, verður latin Vinnumálaráðnum seinni í mánaðinum. Landsstýrismaðurin hevur í mars 2004 boðað frá, at príslistin verður góðkendur og kunngerðin lýst áðrenn summarfrítíðina í 2004.

Príslistin fyri tænastur, sum ikki eru lógarfestar, verður eisini latin Vinnumálaráðnum seinni í mars 2004 at góðkenna. Landsstýrismaðurin hevur í mars 2004 boðað frá, at príslistin verður góðkendur fyri summarfrítíðina í 2004.

Yvirskipaðar reglur um prísáseting

Í sambandi við prísásetingina hava vit m.a. víst á, at um ein almennur stovnur tekur "ov lágan" prís, tí stovnurin er á figgjarlógini, og ikki skal svara hvørjum sítt, kann tað vera kappingaravlagandi/-avmarkandi og í stríð við kappingarlógina og játtanarskipanina.

Er eitt gjald ikki ásett í lógini, má gjaldið ikki verða sett "ov høgt", tí so kann talan verða um ein skatt. Sambært stýrisskipanarlógini má eingin skattur verða álagdur uttan við løgtingslóg.

Vit hava mælt til at taka allan spurningin um prísáseting upp av nýggjum fyri at tryggja, at stovnurin heldur seg innanfyri galdandi lógir og reglur. Landsstýrismaðurin hevur í mars 2004 víst á, at Vinnumálaráðið og løgfrøðingur stovnsins javnan umrøða og viðgera rættarreglur stovnsins.

Innkrevjing av eftirstøðum

Stjórin hevur kunnað okkum um, at stovnurin kann ikki nokta at sýna, hóast gomul krøv ikki eru goldin, og tí kann eftirstøðan hjá summum skuldarum vaksa. Sambært stjóranum arbeiðir stovnurin við at minka áogn/eftirstøður mest møguligt.

Samsvar var ikki millum avsetingar móti tapi av debitorum, sum eru skrásettar í landsbókhaldinum, og yvirlitið hjá stovninum yvir avsetingar. Viðurskiftini eru eftirsíðan komin í rættlag.

Í februar 2004 hevur stovnurin sent Gjaldstovuni yvirlit yvir eftirstøður, sum skulu verða strikaðar, tí hildið verður nyttuleyst at heinta tær inn.

Mvg-avrokning

Mvg-konturnar á fíggjarstøðuni stemma ikki. Stjórin hevur í februar 2004 kunnað okkum um, at viðurskiftini fara at verða fingin í rættlag í landsroknskapinum 2003.

5.6 Almennar royndir og ráðgeving (GL 1998/2 13 2-1)

Vit hava í 2003 kannað, um roknskaparviðurskiftini á "Almennum royndum og ráðgeving" (Royndarstøðin) eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á stovninum er gott, men vit hava mælt til fleiri ábøtur:

- *at* endurskoða reglugerðina og á flestu økjum at lýsa mannagongdirnar,
- *at* skipa fyri hóskandi tíðarskráseting,
- *at* kanna hvussu royndarúrslit kunnu verða goymd trygt fyri eftirtíðina, og at taka upp samband við Landsskjalasavnið,
- *at* taka støðu til endurgjaldið fyri seyðahús (um 0,4 mió.kr.), sum hevur staðið á fíggjarstøðuni í eini 10 ár,
- *at* sett verður eitt hóskandi kassahámark.

Landsstýrismaðurin hevur í mars 2004 boðað frá, at hann fer at heita á Royndarstøðina um at endurskoða roknskaparreglugerðina og lýsa mannagongdirnar neyvari, herímillum eisini at áseta eitt kassahámark.

Vinnumálaráðið er av teirri fatan, at Royndarstøðin hevur eina nøktandi tíðarskráseting. Stovnurin nýtir TRM-skipanina, har starvsfólkið skrásetir arbeiði, sjúku, avspákan o.a.

Vinnumálaráðið hevur í mars 2004 boðað frá, at stovnurin hevur útvegað sær nýggja skipan at taka trygdaravrit við, og at stovnurin hevur samband við Landsskjalasavnið um at goyma royndarúrslit.

Vinnumálaráðið hevur í mars 2004 greitt frá, at Royndarstøðin hevur havt ætlanir um at byggja nýtt seyðahús, men av tí at stovnurin ikki hevur neyðuga játtan til seyðaráðgeving og seyðaroyndir, er ætlanin skotin út. Vinnumálaráðið heldur, at tær 0,4 mió.kr. á fíggarstøðuni skuldu verið inntøkuførdar, og at Løgtingið kann játta peningin, tá tørvur er á tí.

5.7 Ferðaráð Føroya (GL 1996/2 15 2-1)

Vit hava í 2003 verið ófráboðað á kassaeftirliti á Ferðaráði Føroya. Ferðaráðið hevur ein skrivstovukassa og ein sølukassa í kunningarstovuni "Alduni". Vit taldu kassapeningin og samanbóru hann við landsbókhaldið. Vit mæltu til at greina og bóka munirnar. Viðurskiftini eru eftirsíðan komin í rættlag.

Kassauppgerðarskjølini hava higartil verið bókað 2 ferðir árliga. Vit mæltu til, at tey verða bókað regluliga og skjótast til ber, og at stovnurin í framtíðini nýtir kassauppgerðarskjalið "hjá Gjaldstovuni", tá hann ger sølukassan upp, fyri m.a. at tryggja at møguligir kassamunir verða skrásettir so hvørt.

Í november 2003 hevur stjórin 2003 boðað frá, at mannagongdirnar eru broyttar.

Vit mæltu til at stemma av "kassa- og millumrokningarkontur" mótvegis skrásettu fíggjarstøðuni í landsbókhaldinum. Stjórin hevur í november 2003 boðað frá, at tað nú verður gjørt.

5.8 Tyrlutænastan (GL 1998/2 15 3-2)

Landsstýrið/Vinnumálaráðið hevur síðani 1996 rindað Atlantic Airways (Atlantsflog) 5 mió.kr. á høvuðskontu 6.38.2.04. "Tyrlutænastan" fyri at flúgva millum oyggjarnar við Bell 212 tyrluni, sum Landsstýrið eigur.

Sambært § 1 í sáttmálanum tekur Atlantsflog á seg at reka tyrluna hjá Landsstýrinum, og Landsstýrið letur Atlantsflog tyrluna at nýta, umframt eykalutir, vørugoymslu o.a. Í § 3 stendur, at Atlantsflog veitir Landsstýrinum tyrlutænastu sambært galdandi ferðaætlan, umframt SAR (Search and Rescue). Veitingin fevnir um operativa og tekniska raksturin/viðlíkahaldið. Í § 4 er ásett, at árliga samsýningin er 5 mió.kr. Sambært § 6 kann sáttmálin verða sagdur upp til ein 1. mars við 6 mánaða skrivligari freist. Sáttmálin kann verða sagdur upp uttan freist, um annar parturin misheldur hann.

Í oktober 2002 kunnaði Vinnumálaráðið um, at Strandfaraskip Landsins, sum umsitur "tyrlusáttmálan" vegna landsstýrismannin, hevði boðað Atlantsflog frá, at sáttmálin frá 1996 fór úr gildi 1. mars 2003. Endamálið við uppsøgnini var at dagføra sáttmálan, og Vinnumálaráðið gjørdi Strandfaraskipum Landsins greitt, at SAR-uppgávurnar ikki skuldu verða partur av endurskoðaða sáttmálanum, tí tað málsøkið var flutt til Fiskimálaráðið.

Í mars 2004 boðaði Strandfaraskip Landsins frá, at sáttmálin frá 1996 framvegis er í gildi. Partarnir hava í 2003 samráðst um nýggjan sáttmála, men samráðingarnar hava ligið stillar, síðani løgtingsval varð skrivað út í desember 2003.

5.9 Endurgjaldsgrunnur alivinnunnar (GL 1998/2 15 3-2)

Í frágreiðing frá februar 2002 umrøddu vit í stuttum Endurgjaldsgrunn alivinnunnar. Har varð m.a. kunnað um, at í sambandi við at ILA-sjúkan í 2000 rakti eitt alibrúk, varð eitt endurgjaldskrav reist ímóti grunninum. Tað hendi, áðrenn Ll. nr. 26/1987 "um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum" varð tikin av. Í 2001 vóru um 2,9 mió.kr. goldnar út til felagið. Kravið var munandi størri, og málið fór í rættin.

Í oktober 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at úrskurður enn ikki var gjørdur í rættarmálinum, men at lóg og grunnur fóru at verða tikin av, tá rættarmálið var avgreitt.

Í mars 2004 kunnaði Vinnumálaráðið um, at saksøkjarin hevur tikið málið aftur. Eftir er at avgreiða, hvussu sakarmálskostnaðurin verður býttur millum partarnar. Síðani verða lóg og grunnur tikin av.

5.10 Fjarskiftiseftirlitið (GL 2003/2 16 5-2)

Vit hava í 2003 kannað, um roknskaparviðurskiftini á Fjarskiftiseftirlitinum, Kappingarráðnum, Posteftirlitinum og Tryggingareftirlitinum eru í tráð við ásetingar í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á roknskaparøkinum er gott. Vit hava tó mælt til ávísar ábøtur, m.a.:

at endurskoða reglugerðina og á nøkrum økjum at lýsa mannagongdirnar,

at taka spurningin um langtíðarleigu upp við Vinnumálaráðið.

Í februar 2004 boðaði stjórin á Fjarskiftiseftirlitinum frá, at í næstum verða stig tikin til at gera tær ábøtur/broytingar, sum mælt verður til í frágreiðingini.

5.11 Bileftirlitið (GL 2003/2 16 9-6)

Kassaeftirlit

Vit hava í 2003 verið ófráboðað á kassaeftirliti á Bileftirlitinum. Niðurstøðan var, at allir kassar og bankakontur stemmaðu við landsbókhaldið. Vit halda samanumtikið, at økið er væl umsitið.

EDV-viðurskifti

Í 2001 kannaðu vit EDV-viðurskiftini hjá stovninum. Vit vístu m.a. á, at sambært roknskaparrundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum skal verða greitt frá í roknskaparreglugerðini, *"hvussu og hvar EDV verður nýtt, og hvussu henda uppgáva er skipað"*. Víst skal vera til viðkomandi skjøl (kervisfrágreiðing og brúkarahandbók), hvussu skipanin verður nýtt, og hvørji eftirlit eru. Harafturat skal verða víst til skjalatilfar, ið vísir tøkniliga bygnaðin av EDV-skipanini, og sum vísir, hvør hevur atgongd til EDV-útgerð, forrit og skráir.

Í frágreiðing okkara í november 2001 vístu vit á, at eingin skrivlig skjalfesting av EDV-skipanunum fanst á stovninum, og at ongar brúkaravegleiðingar vóru. Stjórin greiddi í januar 2004 frá, at skjalfestingin væntandi fór at verða liðug fyrra hálvár í 2004. Partar av brúkaravegleiðingunum eru gjørdar, men farið verður ikki undir at gera restina, fyrr enn tekniska skjalfestingin er liðug.

Í februar 2003 fekk stovnurin eina rakstrarhondbók við kervisfrágreiðing. Rakstrarhondbókin verður dagførd so hvørt av netumsitaranum, sum stovnurin hevur avtalu við.

Síðani vit kannaðu EDV-viðurskiftini í 2001 eru krøvini munandi herd. 1. januar 2002 kom í gildi Ll. nr. 73 frá 8. mai 2001 "um viðgerð av persónsupplýsingum", og 27. februar 2003 kom í gildi K. nr. 28 "um trygd í samband við viðgerð av persónsupplýsingum". Sambært § 17, stk. 1, í kunngerðini skulu upplýsingarkerv, sum eru fevnd av lógini um viðgerð av persónsupplýsingum, lúka treytirnar í kunngerðini fyri 1. september 2004. Tó kann Dátueftirlitið geva loyvi til eina longri tillagingartíð, í mesta lagi 2 ár, um stovnurin kann vísa á eina tilskilaða ætlan, hvussu krøvini í kunngerðini kunnu verða lokin.

6. ÚTBÚGVING OG GRANSKING

6.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-9)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Meirnýtsla

7.11.1.17. Viðlíkahald undirvísing (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4.367 t.kr. Meirnýtslan er 194 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er ringt at fáa viðlíkahaldsútreiðslur gjørdar upp til eitt ársskifti. Í 2001 var avlopið 671 t.kr.

7.23.1.34. Eftirútbúgving og skeið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.466 t.kr. Meirnýtslan er 140 t.kr. Sambært landsstýrismanninum var greitt á heysti 2002, at játtanin 2,7 mió.kr. til eftirútbúgving og skeið fór ikki at verða nýtt í fullan mun, m.a. tí at ikki allir lærarar, sum ætlan hevði verið um, fóru í námsfrøðiliga útbúgving. Í eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin lækkað 1,3 mió.kr., men nøkur skeiðstiltøk í síðsta ársfjórðingi gjørdust dýrari, so metingin helt ikki.

7.23.3.14. Studningur til læruplass (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 14,4 mió.kr. Meirnýtslan er 198 t.kr. Sambært landsstýrismanninum komst meirnýtslan í høvuðsheitum av, at umsóknir komu inn, sum stavaðu frá árum undan 2002.

7.24.1.05. Tiltøk fyri børn og ung

Sambært roknskapinum er talan um eina meirnýtslu 1.330 t.kr. og eina meirinntøku 1.330 t.kr. Landsgrannskoðanin hevur fyrr víst á, at her verður heilt skeivt bókað. Inntøkurnar eru bókaðar skeivt, á standardkontu 65 "Flytingar úr Danmark". Roknskapartølini eru skrásett, sum var talan um eina bruttojáttan. Mettu játtanartølini eru harafturímóti skrásett sum ein nettojáttan. Talan er um mettar inntøkur og útreiðslur 0,9 mió.kr., sum eru skrásettar á standardkontu 54 ávikavist í minus og pluss.

7.24.3.01. Bókasøvn (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 13.188 t.kr. Meirnýtslan er 161 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er við lóg álagt stovninum at útvega føroyskar bøkur. Ilt er at meta um, hvussu nógv tað fer at kosta at útvega bøkurnar, og hvussu nógv skal verða gjørt við tilfarið, áðrenn tað er bókasavnsgreitt o.a. Eisini eru fleiri gjøld og tænastugjøld hækkað í rakstrarárinum.

7.24.3.10. Føroya Fornminnissavn (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 6.431 t.kr. Meirnýtslan er 184 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er talan um meirkostnað í sambandi við eina ávísa rannsókn, og eftirgjaldi av eftirløn til starvsfólk.

Minninýtsla

7.23.1.07. Ymsar felagsútreiðslur (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3.627 t.kr. Minninýtslan er 1.601 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu ikki allar ætlaðar verkætlanir framdar.

7.23.1.11. Útgerð til yrkisskúlar og hægri útbúgvingar (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 5.425 t.kr. Minninýtslan er 586 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð við eykajáttan søkt um, at tann upphædd, ið eftir meting ikki fór at verða nýtt til eftirútbúgving og skeið, kundi verða nýtt til undirvísingarútgerð, m.a. til teldur í sambandi við eftirútbúgvingina á KT økinum. Við eykajáttanarlógini fyri november 2002, sum varð endaliga samtykt 19. desember 2002, varð játtanin hækkað 1,3 mió.kr., men av tí at samtyktin kom so seint á árinum, var so at siga ógjørligt at nýta alla upphæddina. Sambært landsstýrismanninum varð umbønin um eykajáttan send Fíggjarmálaráðnum um heystið. Hevði eykajáttanin verið samtykt í november, hevði upphæddin kunna verið nýtt til útgerð, men 19. desember var hetta ikki gjørligt.

7.23.3.06. Miðnámsskúlin í Suðuroy (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3.600 t.kr. Minninýtslan er 2.728 t.kr. Sambært landsstýrismanninum søkti Vágs kommuna um at fáa meginbókasavn fyri Suðuroynna bygt sum ein part av skúlanum. Málið skuldi verða viðgjørt millum allar kommunur í Suðuroynni, og tann støðutakanin seinkaði arbeiðinum við byggifyrireikingini. Skúlin og meginbókasavnið eru ein eind, og óvissan, um meginbókasavnið skuldi verða partur av miðnámsskúlanum, gjørdi, at ikki var møguligt at fara undir at gera skipanaruppskot í 2002. Arkitektarnir kundu ikki fara undir ítøkiliga at tekna bygningin fyrr enn í januar 2003.

7.23.3.08. Fiskivinnu- og havbúnaðargranskingarmiðstøð (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2.500 t.kr. Minninýtslan er 2.397 t.kr. Løgtingið játtaði pening til at keypa ein bygning í Vestmanna. Eftir at undirlendið o.a. var kannað, varð gjørt av ikki at keypa bygningin.

7.23.5.10. Musikkskúlar (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 6.789 t.kr. Minninýtslan er 716 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er ein lønarútreiðsla 280 t.kr. av misgáum bókað í 2003. Harafturat hevur kostnaðurin fyri avloysarar verið lægri enn lønin hjá lærarunum í farloyvi.

7.23.6.12 Lista- og tónleikaskúli Føroya (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 500 t.kr. Minninýtslan er 500 t.kr. Sambært landsstýrismanninum var eingin politisk støða tikin til at fremja verkætlanina í 2002. Tað varð heldur ikki gjørt í 2003.

7.23.6.15. Fróðskaparsetur Føroya (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1 mió.kr. Minninýtslan er 933 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð ætlaða innrættanin av undirvísingarhølum ikki framd. Hølini vóru ikki tøk, tí at tað eydnaðist ikki at koma ásamt við útleigaran um leigusáttmálan.

7.24.6.12. Ítróttaanlegg (onnur játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3.067 t.kr. Minninýtslan er 607 t.kr. Sambært landsstýrismanninum gjørdust ikki øll ítróttaanlegg, ið eftir ætlan skuldu hava studning í árinum, veruleiki. Tá ið tilsøgnir verða givnar um studning til ítróttaanlegg, eru tær, við ávísum fyrivarni, bindandi í 3 ár, og fella síðani burtur, verður ikki annað gjørt av. Av tilsøgnum, ið ikki vóru endaliga avroknaðar, kunnu verða nevndar: Miðvágs Róðrarfelag, Tofta Ítróttafelag, Ítróttahøllin á Sandi og Vestmanna Ítróttafelag.

Lønarkarmur

Á høvuðskontum niðanfyri vísir roknskapurin, at farið er upp um ásetta lønarkarmin (t.kr.).

Konta	Navn	Lønarkarmur	Roknskapur	Munur
7.11.1.09.	Mentamálaráðið (rakstrarjáttan)	13.445	13.767	322
7.23.6.04.	Klaksvíkar Sjómansskúli (rakstrarjáttan)	2.118	2.184	66
7.24.1.10.	Orðabókagerð	0	35	35
7.24.3.24.	Kirkjubømúrurin (løgujáttan)	0	65	65

6.2 Vantandi reglur fyri mannagongdum á roknskaparøkinum

Í frágreiðingini í februar 2002 vístu vit á, at landsstovnar skulu hava reglugerð fyri roknskaparhaldi sínum. Reglugerðin skuldi verða góðkend í seinasta lagi 31. desember 2001.

Landsstýrismaðurin boðaði í januar 2002 frá, at Mentamálaráðið fór at góðkenna roknskaparreglugerðirnar nakað eftir ársskiftið 2002.

Í februar 2003 boðaði Mentamálaráðið frá, at arbeiðið við at góðkenna roknskaparreglugerðirnar væntandi fór at verða liðugt seinni í mánaðinum.

Í februar 2004 hevur Mentamálaráðið boðað frá, at næstan allir stovnar hava latið Mentamálaráðnum uppskot til roknskaparreglugerð, og umleið helvtin av reglugerðunum eru góðkendar.

6.3 Fólkaskúlin (GL 1996/2 10 2-1)

Í frágreiðingum til løgtingsgrannskoðararnar hava vit fleiri ferðir vístá, at lønarskipanin til læraraløn er gomul og ótíðarhóskandi. Skipanin er ikki nøktandi skjalprógvað, og eingin vegleiðing e.l. finst. Lønarstovan hevur innanhýsis eftirlit á teimum mest týðandi økjunum. Tó halda vit tað vera ein veikleika, at ongar samanskrivaðar reglur lýsa, hvørji innanhýsis eftirlit skulu verða gjørd, hvussu stemmað skal verða av, hvussu arbeiðið skal verða skjalprógvað, og hvørja ábyrgd og heimild hvør einstakur hevur. Vit hava mælt til at bøta um viðurskiftini. Í januar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið hevði valt at bíða, til nýggj lønarskipan fór at verða tikin í nýtslu.

Á vári 2000 fór Mentamálaráðið undir at menna eina forskipan til nýggju felags lønarskipanina á Gjaldstovuni. Bæði arbeiðið við lønarskipanini á Gjaldstovuni og við forskipanini til læraraløn varð nógv seinkað.

Í februar 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið í 2003 hevði brúkt nógva orku til at menna forrit til forskipanina. Ímeðan vóru nakrar avgerandi fortreytir broyttar, við tað at farið varð yvir til "ársverk". Arbeiðið er nú komið somikið langt áleiðis, at skipanin væntandi verður tikin í nýtslu komandi skúlaár.

6.4 Musikkskúlaskipanin (GL 2001/2 10 9-5)

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 69/1984 "um stuðul til musikkskúlar", broytt við Ll. nr. 67/1996.

Í seinastu frágreiðing í februar 2003 vístu vit á, at ósamsvar var ímillum § 1 í lógini, har ásett er, at landskassin letur studning, og § 5, har ásett er, at landsstýrismaðurin setir lærararnar. Heldur ikki verður lógin umsitin, sum var talan um studning úr landskassanum. Landskassin rindar allar lønarútreiðslurnar, og kommunurnar endurrinda landskassanum 50% av lønarútreiðslunum til lærararnar í mun til, hvussu nógvar tímar musikkskúlarnir í kommununum hava fingið tillutað.

Musikkskúlaskipanin er væl umsitin, og umsitingin verður neyvan bíligari ella betri, verður hon løgd út til kommunurnar. Tí mæltu vit landsstýrismanninum til at broyta lógina, soleiðis at samsvar verður ímillum praksis og allar ásetingar í lógini.

Í februar 2003 vísti landsstýrismaðurin á, at hann hevði sett ein arbeiðsbólk, ið fyri 1. apríl 2003 skuldi koma við einum tilmæli um, hvørjar tillagingar/broytingar skulu verða gjørdar í lógargrundarlagnum fyri musikkskúlaskipanina, soleiðis at samsvar verður millum lógina og fyrisitingina av lógini.

Í januar 2004 hevur Mentamálaráðið kunnað um, at nevndin, sum skal endurskoða lógina um musikkskúlar, hevur gjørt eitt fyribils uppskot um "Løgtingslóg um musikkskúlaundirvísing".

6.5 Frítíðarundirvísing (GL 2001/2 10 9-7)

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 70/1983 "um frítíðarundirvísing", broytt við Ll. nr. 124/2003 og K. nr. 6/1988 "um frítíðarvirksemi". Harafturat eru nógvar ásetingar gjørdar í rundskrivum. Í seinastu frágreiðing í februar 2003 vístu vit m.a. á:

at nógvar ásetingar viðvíkjandi frítíðarundirvísingini eru gjørdar í rundskrivi. Í oktober 2002 tók Mentamálaráðið undir við, at fleiri av rundskrivunum eiga at verða gjørd til kunngerðir.

at hóast lógin ásetir, at landskassin veitir kommunum studning, er játtanin til frítíðarundirvísing ein rakstrarjáttan. Landskassin rindar lønirnar, og kommunurnar endurrinda landskassanum fyri lønarútreiðslur til lærarar. Mannagongdin er sostatt ikki í samsvari við Ll. nr. 70/1983, har ásett er, at landskassin letur kommununum studning.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann hevði tikið stig til, at fult samsvar fór at verða millum fyrisitingarligu mannagongdirnar og lógina um frítíðarundirvísing. Frá 1. august 2003 skal Mentamálaráðið ikki sum higartil gjalda út lønir til teirra, sum undirvísa í frítíðarundirvísingini, men bert veita kommununum studning. Kommunurnar skulu so sjálvar gjalda undirvísarum løn o.a. samsýning sambært galdandi sáttmála.

Vit vístu á, at sæð út frá einum almennum sjónarmiði ivaðust vit í, um tað var nøkur góð loysn. Umsitingin av lønum í sambandi við frítíðarundirvísing verður neyvan bíligari ella betri, verður hon løgd út til kommunurnar. Vit mæltu landsstýrismanninum til at umhugsa at endurskoða lógina, soleiðis at lógin kom at samsvara við praksis.

Í mars 2004 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ein arbeiðsbólkur við umboðum úr Føroya Kommunufelag, Kommunusamskipan Føroya, Kommunudeildini í landsstýrinum og Mentamálaráðnum hevur arbeitt við at útgreina, hvussu uppgávubýtið millum land og kommunur skuldi verða eftir 1. august 2003. Niðurstøðan av hesum arbeiði var, at kommunufeløgini hildu ikki, at kommunurnar fóru at verða førar fyri at umsita økið, fyrr enn ein felags lønarskipan var fingin at virka, og fyrr enn greiða var fingin á einari millumrokningarskipan millum kommunur.

Økið er sostatt ikki lagt út til kommunurnar, men landsstýrismaðurin hevur gjørt av at broyta Ll. nr. 70/1983 "um frítíðarundirvísing", so hon er í samsvari við verandi fyrisitingarligu mannagongdir.

6.6 Landsmiðstøðin fyri Undirvísingaramboð (GL 1999/2 10 6-4)

Vit hava í 2003 kannað, um roknskaparviðurskiftini hjá Landsmiðstøðini fyri Undirvísingaramboð eru í tráð við ásetingar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið í Landsmiðstøðini er gott, men vit hava mælt til nakrar ábøtur:

at endurskoða roknskaparreglugerðina og lýsa mannagongdirnar á summum økjum,

at Mentamálaráðið viðger og góðkennir roknskaparreglugerðina,

at gera journalskipanarreglur o.l.,

at arbeiðstíðin verður skrásett m.a. vísandi til § 7 í Roknskaparkunngerðini (K. nr. 114/1996).

Í mars 2004 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at tilmælini antin eru ella verða fylgd.

6.7 Skúlabókagrunnurin (GL 2000/2 10 6-5)

Lógargrundarlagið undir Skúlabókagrunninum er Ll. nr. 36/1959 "um útgávu av skúlabókum" við seinni broytingum. Vit hava í áravís gjørt vart við, at lógargrundarlagið er ófullfíggjað og ikki dagført, og at játtanarviðurskiftini eru ógreið.

Í frágreiðingini í mars 2000 umrøddu vit, at landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum í desember 1995 hevði sett eina nevnd at gera álit viðvíkjandi uppskoti til rationaliseringar og sparingar á fólkaskúlaøkinum, sum fevndi um fólkaskúlan, semámsfrøðiliga virksemið, frítíðarundirvísingina, skúlabókaútgávu o.a. Í álitinum, sum varð latið landsstýrismanninum í februar 1996, varð mælt til at seta nevndir at endurskoða virksemið og kunngerðina fyri Skúlabókagrunnin, og at kanna Bókamiðsøluna gjøllari.

Í februar 2000 vístu vit á, at lógargrundarlagið var ófullfíggjað, var ikki dagført, og at játtanarviðurskiftini vóru ógreið.

Í januar 2001 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið á heysti 2000 hevði gjørt uppskot til nýggja lóg um útgávu av undirvísingarmiðlum. Landsstýrismaðurin helt tá, at um uppskotið varð samtykt, var møguligt at loysa trupulleikarnar.

Í november 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at lógaruppskotið í februar 2001 varð sent Føroya Lærarafelag og Yrkisfelagnum til hoyringar. Uppskotið fekk kaldliga móttøku frá feløgunum. Í samráði við tveir løgfrøðingar gjørdi Skúlabókagrunnurin stutt eftir sítt egna lógaruppskot, sum varð sent Mentamálaráðnum. Mentamálaráðið tók ikki undir við uppskotinum.

Í november 2001 vísti landsstýrismaðurin eisini á, at Mentamálaráðið hevði bíðað eftir endaligu viðgerðini av álitinum hjá Fíggjarmálaráðnum "um landsstovnar og –grunnar". Landsstýrismaðurin álegði einari innanhýsis nevnd at arbeiða víðari við málinum, soleiðis at lógaruppskot um at skipa Skúlabókagrunnin kundi verða lagt fyri Løgtingið í februar 2002. Einki slíkt lógaruppskot varð lagt fyri tingið.

Í august 2002 segði landsstýrismaðurin, at alt økið viðvíkjandi undirvísingartilfari skuldi verða umskipað, og at hann hevði sett nevnd at arbeiða við umskipanini. Landsstýrismaðurin vónaði, at arbeiðið fór ikki at taka meira enn eitt ár. Síðani skuldi lógaruppskot verða fyrireikað og lagt fyri tingið.

Í frágreiðing okkara í februar 2003 vístu vit á, at gongdin í málinum bendir á, at Mentamálaráðið/skiftandi landsstýrismenn í áravís hava skákað sær undan at loysa trupulleikarnar við at seta nevndir at kanna, gera uppskot o.a., uttan at tað førir til ítøkilig úrslit.

Í januar 2004 hevur Mentamálaráðið boðað frá, at trý lógaruppskot eru gjørd um at skipa Føroya Skúlabókagrunn, men enn hevur ikki verið møguligt at fingið eina politiska støðutakan í málinum.

6.8 Bókamiðsølan (GL 2000/2 10 6-5)

Í fleiri frágreiðingum hava vit víst á, at Bókamiðsølan tykist vera ein almennur stovnur, hvørs ognir fella til Skúlabókagrunnin, heldur Bókamiðsølan uppat við virksemi sínum. Virksemið verður tó hvørki tikið við á fíggjarlógina ella í landsroknskapin.

Í februar 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at eitt lógaruppskot var gjørt, har Bókamiðsølan varð gjørd til ein sjálvsognarstovn.

Í november 2001 segði landsstýrismaðurin, at í sambandi við at Skúlabókagrunnurin fór at verða umskipaður, helt hann tað vera ráðiligast, at øll viðurskiftini fingu eina nýggja viðgerð.

Í skrivi 19. desember 2002 vísti Fíggjarmálaráðið á, at Bókamiðsølan er ein landsstovnur, og er sostatt ogn landskassans. Víst verður á, at eingin lógarheimild er fyri, at stovnurin, sum er, ikki verður tikin við á fíggjarlógina og heldur ikki í landsroknskapin. Niðurstøðan er, at antin eigur virksemið at verða játtað á fíggjarlóg, ella eigur lógarheimild at verða veitt, soleiðis at virksemið hjá Bókamiðsøluni kann verða hildið uttan fyri fíggjarlógina.

Í desember 2002 kunnaði løgmaður um, at arbeitt verður við at fáa greiðu á formligu viðurskiftunum. Síðani verður støða tikin til lógarbroytingar, so heimild fæst fyri, at stovnurin kann liggja uttanfyri fíggjarlógina, ella skal hann verða settur á fíggjarlógina.

Í februar 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeitt hevði verið við lógaruppskoti at gera Bókamiðsøluna til sjálvsognarstovn. Partarnir í nevndini í Bókamiðsøluni, Bókadeild Føroya Lærarafelags og Skúlabókagrunnin tóku undir við uppskotinum, men felagið Føroysk Bókaforløg og Fíggjarmálaráðið tóku ikki undir við tí.

Í januar 2004 hevur Mentamálaráðið greitt frá, at skiftandi landsstýrismenn í mentamálum hava í fleiri umførum viðgjørt og umhugsað, hvør bygnaður kann tæna hesum serliga virkseminum best, og umhugsað fyrimunir og vansar, tær ymisku løgfrøðiligu skipanir hava, t.d. at skipa Bókamiðsøluna sum almennan stovn, sjálvsognarstovn ella alment partafelag. Áðrenn endalig avgerð varð tikin, varð val útskrivað 5. desember 2003.

6.9 Eftirútbúgving av yrkislærdum (GL 2000/2 10 1-2)

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina verður studningur játtaður til skeiðsluttøku hjá yrkislærdum, t.e. handverkarum, handils- og skrivstovufólki, so at tey fakliga kunnu fylgja við og varðveita yrkisførleika og kappingarføri. Játtanin hevur í fleiri ár verið um 350 t.kr.

(t.kr.)

	2002	2001	2000	1999	1998	1997
Játtan	367	357	350	350	350	350
Nýtsla	202	160	177	293	261	187
Minninýtsla	**165**	**197**	**173**	**57**	**89**	**163**

Í frágreiðing í februar 2002 vístu vit m.a. á:

- *at* játtanin ikki hevur tey eyðkenni, sum ein "rakstrarjáttan" skal hava sambært játtanarskipanini,
- *at* útreiðslurnar verða bókaðar sum "stuðul til vinnu", standardkontu 53, hóast talan er um studning til einstaklingar,
- *at* nógvir ivaspurningar eru viðvíkjandi játtan og endamáli við játtanini,
- *at* tað er óheppið at hava játtanir, sum eru so breitt og so leyst orðaðar, í 3 reglum í viðmerkingum til eina fíggjarlóg.

Í fleiri ár hevur bert umleið helmingurin av játtanini verið nýttur. Tað er helst tí, at so fá vita um játtanina. Er ætlanin at veita studning í mun til tørvin á hesum øki, so skal játtanin vera munandi hægri.

Sera misjavnt er, hvussu yrkislærd eru fyri, tá ræður um eftirútbúgving. Í summum førum rindar arbeiðsgevarin fyri at eftirútbúgva síni starvsfólk, ikki minst tí tað eisini er ein fyrimunur fyri hann sjálvan, men nógv yrkislærd, eisini innan fyri almennu umsitingina, fáa onga eftirútbúgving og gerast tí eftirbátar.

Eftir okkara tykki er ivasamt, hvat endamálið er við játtanini. Er endamálið at veita studning:

- til øll starvsfólk, sum arbeiðsgevari sendir á skeið,
- til starvsfólk, tá ið arbeiðsgevari ikki vil rinda/ikki hevur ráð at rinda, ella
- til starvsfólk, sum ikki hava ráð at rinda sjálvi o.s.fr.

Í februar 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Vinnu- og Miðnámsskúladeildin fór at viðgera játtanina og játtanarheitið í sambandi við fíggjarlógararbeiðið fyri 2003.

Í juli 2002 boðaði Mentamálaráðið frá, at teir hildu tað vera rættast at bíða við at viðgera og møguliga broyta játtanina, til arbeiðsbólkurin, sum Yrkisútbúgvingarráðið hevði sett, hevði latið úr hondum álit og uppskot til lóg um yrkisskeið (arbeiðsmarknaðarútbúgvingar). Arbeiðið fór væntandi at verða liðugt á heysti 2002. Hugsast kundi, at verandi studningsskipan annaðhvørt fór at verða tikin av ella verða partur av tí skipan, sum fór at koma í gildi við støði í álitinum.

Í februar 2003 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeiðsbólkurin, sum gjørdi lógaruppskot, var um at verða liðugur, og at uppskot fór at verða lagt fyri Løgtingið eftir ólavsøku.

Uppskot til løgtingslóg um yrkisskeið varð lagt fyri Løgtingið í november 2003. Sambært uppskotinum varð heimilað landsstýrismanninum at skipa neyðugar karmar fyri yrkisskeiðum, sum skuldi hava til endamáls:

at hjálpa einstaklingum at nøkta grundleggjandi krøv til førleika í vinnuni,

at halda viðlíka og menna verandi vinnuførleika, og

at menna og halda viðlíka ástøðiligan vinnu- og útbúgvingarførleika.

Málið fall burtur, tá ið løgtingsval varð útskrivað 5. desember 2003.

Í januar 2004 hevur Mentamálaráðið boðað frá, at verður uppskotið lagt fyri Løgtingið av nýggjum, kann roknast við, at verandi studningsskipan verður partur av skipanini um yrkisskeið.

Eftir okkara tykki, hevur landsstýrismaðurin ikki svarað teimum grundleggjandi játtanarligu spurningum, sum vit hava reist, um endamálið við játtanini.

6.10 Studningur til læruplass (GL 2003/2 10 1-3)

Í 2003 hava vit grannskoðað játtanina "Studningur til læruplass", sum Yrkisdepilin umsitur. Vit hava við stakroyndum kannað, um oyðubløðini eru fylt út og váttað, og um upphæddirnar samsvara við § 33 í Ll. nr. 94/1998 "um yrkisútbúgvingar" og K. nr. 114/2000 "um lønarendurgjald og ferðaendurgjald til læruplass". Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið í sambandi við játtanina er gott.

Vit hava tó víst á, at í einum máli hevur læruplássið søkt um kr. 28.113 í staðin fyri kr. 35.251, sum er lønin, lærlingurin hevur rætt til sambært sáttmálanum. Yrkisdepilin kannaði málið og kom fram til, at arbeiðsgevarin hevði søkt um ta upphædd, sum hann hevði goldið lærlinginum í løn. Arbeiðsgevarin hevði ikki í hyggju at rinda lærlinginum hægru lønina.

Í § 33, stk. 2, í lógini stendur, at lønin hjá lærlingum í minsta lagi skal verða tann løn, ið er ásett í sáttmálanum. Vit spurdu um mannagongdina, tá ið Yrkisdepilin veit um, at ein lærlingur ikki fær ta løn, ið er ásett í lógini. Yrkisdepilin vísir á, at stovnurin hevur onga eftirlitsskyldu í so máta.

Vit hava í mars 2004 spurt, hvørji sjónarmið landsstýrismaðurin hevur í hesum máli.

6.11 Útgerð til Yrkisskúlar (GL 2003/2 10 1-4)

Vit hava í 2003 grannskoðað játtanina "Útgerð til Yrkisskúlar" fyri m.a. at kanna, um roknskaparviðurskiftini eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið í sambandi við játtanina er frálíkt.

Játtanin verður umsitin sambært reglugerð frá Mentamálaráðnum 22. november 2001 "um felags játtan av útgerð til vinnu- og miðnámsskúlar og hægri lærustovnar".

Vit valdu nøkur skjøl burturúr fyri m.a. at kanna, um tey vóru váttað, ávíst og konterað sambært galdandi reglum, og um tey vóru bókað í røttum tíðarskeiði. Vit hava eisini kannað, um útgjøldini eru samsvarandi reglugerðini fyri játtanini. Einki var at finnast at.

6.12 Fiskivinnuskúlin (GL 2003/2 10 3-7)

Í 2003 hava vit kannað, um roknskaparviðurskiftini á Fiskivinnuskúlanum eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á skúlanum er gott, men vit hava mælt til nakrar ábøtur:

at endurskoða reglugerðina og lýsa mannagongdirnar á summum økjum,

at Mentamálaráðið viðger og góðkennir roknskaparreglugerðina,

at gera journalskipanarreglur o.l.,

at bankakontan verður skrásett í landsroknskapinum.

Eftirsíðan er roknskaparreglugerðin endurskoðað og Mentamálaráðið hevur góðkent hana. Í februar 2004 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Mentamálaráðið hevur heitt á Fiskivinnuskúlan um at gera tær ábøtur, ið Landsgrannskoðanin hevur mælt til.

6.13 Miðnámsskúlin í Suðuroy (GL 2000/2 10 3-5)

Skúlin er deild undir Føroya Studentaskúla og HF-skeiði. Í frágreiðing okkara í desember 1997 umrøddu vit fyrstu ferð, at leiðsluviðurskiftini á Miðnámsskúlanum ikki vóru formaliserað, serliga spurningurin um ábyrgd og heimild hjá deildarleiðaranum mótvegis rektaranum.

Rektarin greiddi í desember 2002 frá, at Mentamálaráðið og skúlin hava arbeitt við at gera leiðslureglugerð. Mentamálaráðið hevði gjørt eitt uppskot, sum Ráðið, rektarin, miðnámsskúlarnir og Yrkisfelagið hjá studentaskúla- og HF-lærarunum høvdu viðgjørt.

Í februar 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálaráðið og skúlaleiðslan á Føroya Studentaskúla ætlaðu at loysa spurningin í skúlaárinum.

Í mars 2004 hevur Mentamálaráðið kunnað um, at nýtt uppskot er viðgjørt saman við rektaranum og leiðaranum á Miðnámsskúlanum. Uppskotið verður nú viðgjørt í Mentamálaráðnum, og síðani verður tað latið landsstýrismanninum at góðkenna.

6.14 Yrkisskúlar og aðrir skúlar (GL 2000/2 10 3-4)

Í februar 2001 vístu vit á, at hóast Ll. nr. 106/1998 "um yrkisskúlar" kom í gildi 1. januar 1999, hevur landsstýrismaðurin ikki ásett reglur, sum álagt í § 14 í lógini. Mentamálaráðið svaraði, at ein innanhýsis arbeiðsbólkur fór at verða settur at arbeiða við málinum.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri 1999 (Lm. nr. 62/2000) heitti Løgtingið á landsstýrismannin um at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í desember 2001 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið var ikki liðugt, men at Vinnu- og Miðnámsskúladeildin hevði gjørt fastar mannagongdir fyri, hvussu fíggjarlógararbeiðið, herímillum játtan til góðkent undirvísingarvirksemi, skuldi fara fram.

Eftir var at gera almennar reglur fyri fleiri viðurskifti, so sum:

- Greiðan skilnað millum inntøkufíggjað virksemi og alment góðkent undirvísingarvirksemi, herímillum at endurskoða rundskriv um yvirskot frá eginrakstri.
- Hvussu avdráttir av lánum hjá sjálvsognarstovnum, sum landið rindar, skulu verða bókaðir.
- Hvat skal verða bókað í landsroknskapinum, og hvat skal verða hildið uttanfyri.
- Krøv viðvíkjandi at bóka á egnum teldukervi.

Landsstýrismaðurin boðaði frá, at nøkur av viðurskiftunum fóru at verða tikin upp í sambandi við, at uppskotini um roknskaparreglugerð, sum skúlarnir høvdu sent inn, fóru at verða viðgjørd í Mentamálaráðnum fyrst í 2002.

Í september 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið við at gera almennar reglur tíverri ikki var liðugt.

Lógin um yrkisskúlar hevur verið í gildi í 5 ár. Vit skrivaðu í frágreiðing okkara í februar 2003, at vit hildu ein vanda liggja í, at skiftandi landsstýrismenn ár um ár sleptu sær undan at gera lógarásettar kunngerðir.

Í mars 2004 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at hann tíverri má ásanna, at reglurnar, sum skuldu verið gjørdar sambært § 14 í lógini, ikki eru gjørdar. Mentamálaráðið arbeiðir við at gera reglur, og vónar at fáa tær lidnar í næstum.

6.15 Klaksvíkar Sjómansskúli og Føroya Sjómansskúli (GL 2000/2 10 4-5)

Sjómansskúlarnir undirvísa við støði í Ll. nr. 65/1984 "um sjómansútbúgving" v.s.b. Í oktober 2001 spurdu vit landsstýrismannin, um hann hevði ætlanir um at samskipa virksemið á sjómansskúlunum í Tórshavn og í Klaksvík, nú samlaða næmingatalið er minkandi.

Landsstýrismaðurin vísti í februar 2002 á, at 24. juli 2001 varð nýggj lóg nr. 55 "um útbúgving av manning á skipum o.ø." samtykt. Arbeitt varð við at laga útbúgvingarnar til nýggju krøvini, ið IMO og vinnulívið annars seta. Í hesum arbeiði liggur eisini ætlan um møguliga at samskipa virksemið hjá sjómansskúlunum í Tórshavn og Klaksvík.

Í februar 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlanin var, at høvuðskunngerðin fyri hesar útbúgvingar skuldi verða liðug á sumri 2003, og síðani fór spurningurin um samskipan at verða tikin upp.

Í mars 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at kunngerðirnar verða sendar til góðkenningar í apríl mánaði 2004. Spurningurin um at samskipa virksemið er tikin upp, og arbeiðið hesum viðvíkjandi verður væntandi liðugt til komandi skúlaár.

6.16 Maskinmeistaraskúlin (GL 2003/2 10 4-8)

Vit hava í 2003 kannað, um roknskaparviðurskiftini á Maskinmeistaraskúlanum eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á skúlanum er gott, men vit hava mælt til fleiri ábøtur:

at endurskoða roknskaparreglugerðina og lýsa mannagongdirnar á fleiri økjum,

at Mentamálaráðið viðger og góðkennir roknskaparreglugerðina,

at gera journalskipanarreglur o.l.,

at greiða setanarviðurskiftini hjá skúlastjóranum,

at skráseta/bóka kassafrágreiðingina oftari,

at seta eitt hámark fyri, hvussu nógvan pening skúlin kann hava liggjandi,

at goyma næmingaprotokollir líka leingi, sum annað roknskapartilfar,

at dagføra yvirlitið yvir ognir,

at taka spurningin um varandi nógva yvirtíð upp við Mentamálaráðið.

Í februar 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið hevur heitt á Maskinmeistaraskúlan um at gera tær ábøtur, ið Landsgrannskoðanin hevur mælt til. Setanarviðurskiftini hjá skúlastjóranum eru í løtuni til viðgerðar og verða væntandi liðugt viðgjørd um miðjan apríl 2004. Skúlin hevur ætlanir um at seta ein lærara afturat, fyri á tann hátt at minka um nógvu yvirtíðina.

6.17 Føroya Læraraskúli (GL 2000/2 10 4-5)

Lógargrundarlagið hjá Føroya Læraraskúla er:

- Lov nr. 52/1979 for Færøerne om læreruddannelsen, som sat i kraft ved bek. nr. 71/1984
- Ll. nr. 69/1980 "um læraraútbúgving", sum broytt við Ll. nr. 67/1996
- K. nr. 13/1990 "um námsfrøðiliga útbúgving" og
- K. nr. 26/1991 "um læraraútbúgving"

Landsstýrismaðurin greiddi í januar 2002 frá, at hann tað várið ætlaði at endurskoða lógargrundarlagið fyri læraraútbúgving og námsfrøðiútbúgving. Í september 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at arbeitt hevði verið við málinum, og at fundir høvdu verið við avvarðandi yrkisfeløg.

Í november 2003 spurdu vit landsstýrismannin, hvat var hent í málinum. Hóast áminningarskriv í februar 2004 hava vit einki svar fingið.

Viðmerkingar til fíggjarárið 2001

Á fíggjarlógini 2001 var játtanin til Læraraskúlan 11.888 t.kr. Mentamálaráðið søkti 15. juni 2001 Fíggjarnevndina um 500 t.kr. afturat eyka.

Sambært rektaranum læt Læraraskúlin 7. september 2000 Mentamálaráðnum tøl til fíggjarlógina 2001, ið vístu ein minstatørv 12.094 t.kr. Tá ið skúlin varnaðist, at hetta tal ikki varð sett á fíggjarlógina, gjørdi rektarin vart við seg munnliga, og 12. februar 2001 sendi hann Mentamálaráðnum formliga umsókn um 500 t.kr. eyka afturat.

Í oktober 2001 bóðu vit landsstýrismannin um viðmerkingar til frágreiðing rektarans. Landsstýrismaðurin svaraði í januar 2002, at ein kanning var í gongd, og at hann ikki vildi gera viðmerkingar, meðan kanningin fór fram.

Í fíggjarnevndarskjalinum 15. juni 2001 kunnaði landsstýrismaðurin í mentamálum um, at hann hevði sett eina nevnd at kanna málið. Í skrivi til landsstýrismannin 18. juni 2001 vísti løgmaður á, at Landsstýrið á ongan hátt kundi góðtaka, at játtanartrupulleikar, sum áttu at hava verið eyðsýndir fyri langari tíð síðani, gjørdust bráðfeingistrupulleikar. Um nevndina, sum landsstýrismaðurin hevði sett, helt løgmaður, at kanningararbeiðið átti at verið gjørt sum skjótast, og helst av uttanfyristandandi fólkum.

Eitt grannskoðaravirkið varð biðið um at kanna fíggjarviðurskiftini á Læraraskúlanum og at lata landsstýrismanninum eina frágreiðing. Mentamálaráðið helt, at frágreiðingin var ikki nøktandi og fylgdi ikki kanningarsetninginum. Frágreiðingin varð tí í januar 2002 send aftur til grannskoðaravirkið, saman við rokningini.

Landsstýrismaðurin ætlaði síðani, at Mentamálaráðið sjálvt skuldi gera eina kanning, sum skuldi verða liðug 1. desember 2002.

Í februar 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at kanningin varð ikki gjørd. Mentamálaráðið hevði í staðin keypt frágreiðingina, sum grannskoðaravirkið gjørdi í 2001, og við støði í henni var ætlanin at arbeiða víðari við málinum, í samstarvi við Fíggjarmálaráðið.

Í apríl 2003 hevur Fíggjarmálaráðið gjørt viðmerkingar til frágreiðingina. Fíggjarmálaráðið helt tað ikki vera neyðugt at gera nýggja kanning, vísandi til at ein nýggj kanning neyvan fór at broyta tann veruleika, at høvuðsorsøkin til meirnýtsluna á Læraraskúlanum var, at skúlin hevði ikki nøktandi fíggjarstýring, og Mentamálaráðið hevði ikki tikið nøktandi stig til at fáa tað í rættlag.

Í juni 2003 lat aðalstjórin í Mentamálaráðnum landsstýrismanninum eina frágreiðing, har hann vísir á, at hann lutvíst er samdur við niðurstøðunum hjá Fíggjarmálaráðnum, nevniliga tí partinum, sum hevur við vantandi fíggjarstýring hjá Læraraskúlanum at gera.

Í mars 2004 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at hann er kunnaður um málið, men at hann ikki hevur tikið endaliga støðu til víðari viðgerð av málinum.

Lønargrannskoðan

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at lønarumsitingin ikki í øllum førum byggir á eitt neyvt og skjalfest grundarlag, sum kann verða grannskoðað. Vit mæltu til at bøta um viðurskiftini.

Í januar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann í næstum fór at taka spurningin upp við Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum.

Í september 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at spurningurin varð viðgjørdur saman við rektaranum, men partarnir vóru ikki enn lidnir at tosa um, hvørjar mannagongdir og ásetingar vóru hóskandi. Landsstýrismaðurin boðaði eisini frá, at málið fór at verða tikið upp við Fíggjarmálaráðið, so skjótt fyrireikandi arbeiðið var gjørt, eftir ætlan á heysti 2002.

Harafturat kunnaði landsstýrismaðurin um, at í sambandi við yvirtøkuna av málsøkinum skúlamál fór spurningurin um donsku tænastumenninar á Læraraskúlanum eisini at verða tikin upp við danska Fíggjarmálaráðið. Arbeiðið fór at verða gjørt saman við Fíggjarmálaráðnum.

Avspákanartímar

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at í árunum 1993 til 2000 høvdu avspákanartímarnir ligið ímillum 1,5 – 2 fulltíðarstørv, býtt út á 8-10 lærarar. Læararnir høvdu sostatt lønarkrøv, sum ikki hevur verið skrásett í roknskapinum. Vórðu allar skyldugar lønir goldnar út, helt rektarin, at tað hevði kostað um 500 t.kr. Rektarin helt, at færri avspákanartímar fóru at verða í skúlaárinum 2001/2002.

Í september 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at avspákanartímarnir í skúlaárinum 2002/2003 ikki vóru fækkaðir, tí tað hevði ikki borið til at fingið skikkaðar lærarar at lesa allar tímarnar. Summir av lærarunum høvdu sostatt verið noyddir at lisið yvirtímar, fyri at undirvísingin kundi vera á einum haldgóðum fakligum støði.

Í mars 2004 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at í sambandi við protokollat til sáttmálan við Magistarafelagið er arbeiðsbólkur settur umboðandi Fíggjarmálaráðið/Lønardeildina, Mentamálaráðið, Magistarafelagið og Læraraskúlan at viðgera og endurskoða arbeiðstíð, arbeiðsviðurskifti og annað á Føroya Læraraskúla. Mentamálaráðið arbeiðir eisini við at innføra ársverk í allari skúlaskipanini. Ætlanin er at fáa greiðu á bæði lønarviðurskiftunum og avspákanartímunum í sambandi við hetta arbeiði.

6.18 Undirvísingarskylda hjá skúlastjórum (GL 2000/2 10 4-5)

Síðani í 2000 hava vit í frágreiðingum umrøtt undirvísingarskylduna hjá skúlastjórunum á Maskinmeistaraskúlanum, Føroya Sjómansskúla og Klaksvíkar Sjómansskúla. Vit hava víst á, at stjórarnir ikki undirvísa skylduga tímatalið. Setanarviðurskiftini hjá stjóranum á Maskinmeistaraskúlanum eru ógreið og óformlig, og bæði hann og stjórin á Føroya Sjómansskúla hava gjørt vart við, at ásetta skylduga tímatalið er ov høgt.

Í januar 2001 boðaði Mentamálaráðið frá, at arbeitt varð við málinum saman við Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum. Í september 2001 boðaði Mentamálaráðið frá, at málið var tengt at sáttmálasamráðingunum við avvarðandi yrkisfeløg. Mentamálaráðið fór saman við Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum at viðgera spurningin, soleiðis at eitt lægri skyldugt undirvísingartímatal kundi verða sett í gildi frá skúlaárinum 2002/03.

Tíðarætlanin helt ikki. Í september 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at málið væntandi fór at verða loyst innan fyri stutta tíð.

Í januar 2004 hevur Mentamálaráðið kunnað um, at rundskriv um undirvísingarskyldu hjá stjórum/rektarum á vinnu- og miðnámsskúlunum er gjørt. Uppskot til rundskrivið verður nú kannað innanhýsis av løgfrøðingi og fíggjarfrøðingi, og síðani verður tað sent Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum til ummælis. Kunning um rundskrivið verður send skúlunum, so skjótt viðgerðin er liðug. Ætlanin er, at rundskrivið skal verða sett í gildi 1. august 2004.

6.19 Útbúgvingarstuðul og -lán (GL 2000/2 10 9-6)

Stuðulsstovnurin umsitur studning og lán til fólk í útbúgving og krevur lánini innaftur. Lógargrundarlagið er Ll. nr. 45/1999 "um útbúgvingarstuðulsskipan". Við heimild í lógini eru 4 kunngerðir lýstar, sum áseta neyvari reglur á økinum.

Roknskaparreglur/innanhýsiseftirlit

Í frágreiðing í november 2000 vístu vit á, at eingin roknskaparreglugerð var á stovninum. Í november 2001 kunnaði Stuðulsstovnurin um, at reglugerð sambært roknskaparrundskrivinum var gjørd og send Mentamálaráðnum at góðkenna. Í juni 2003 góðkendi Mentamálaráðið roknskaparreglugerðina.

Í november 2000 vístu vit eisini á, at ongar samanskrivaðar reglur ella starvslýsingar lýstu, hvørji innanhýsiseftirlit skuldu verða gjørd. Í november 2001 kunnaði Stuðulsstovnurin um, at arbeiðið við hesum spurningi væntandi varð liðugt í næstum. Í oktober 2002 kunnaði Stuðulsstovnurin um, at arbeiðið var ikki liðugt.

Í februar 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið fer at verða liðugt á vári 2004.

Journalviðurskifti

Í november 2000 vístu vit m.a. á tørvin á einari journalskipan til mál, ið ikki eru persónsmál. Í oktober 2002 kunnaði leiðarin um, at stovnurin arbeiddi við at lúka tey krøv, ið Landsskjalasavnið setir sambært galdandi lóg/kunngerð. Ein journalskipan varð tikin í nýtslu í juli 2003. Sambært landsstýrismanninum er journalvegleiðingin ikki endaliga liðug, og er tí ikki latin Landsskjalasavninum til góðkenningar.

Edv-skipanin

Umsitingin av stuðli og lánum er knýtt at edv-skipanini á stovninum. Skipanin er sjálvvirkandi á nógvum týðandi økjum, tað veri seg at rokna út, gjalda út og bóka studnings- og lánsveitingar, renturokna, skráseta inngjøld, rokna út afturgjaldsupphæddir, senda áminningarskriv um eftirstøður o.s.fr.

Í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum 1. februar 2001 um roknskaparreglugerðir eru m.a. ásett ávís krøv til edv-skipanir. Edv-skipanin á Stuðulsstovnurin varð tikin í nýtslu í august 1993, og hon lýkur ikki øll krøv, sum eru sett til dokumentatión, brúkaravegleiðingar, brúkararættindi o.a. Váðameting er ikki gjørd, eingin neyðætlan finst, og ongar reglur eru um logg. Back-up verður tó tikið hvønn dag, og veitarin hevur eitt avrit av telduforritinum.

Eingin skrivlig avtala er gjørd við veitaran um menning og viðlíkahald av skipanini, og stovnurin er bundin at einum fólki hjá edv-veitaranum. Stuðulsstovnurin er greiður yvir veikleikarnar.

Í 2002 kravfesti stovnurin eina nýggja telduskipan. Í desember 2002 varð sáttmáli undirskrivaður við teldufyritøku um at menna hesa telduskipan. Í februar 2004 kunnaði landsstýrismaðurin um, at væntandi fór fyrri parturin av telduskipanini – studningsparturin – at verða tikin í nýtslu á sumri 2004 og seinni parturin – lánsparturin – eitt ár seinni. Ábøtur á verandi skipan verða tí ikki raðfestar høgt.

Innheintan av eftirstøðum

Lánsskuldin er góðar 62 mió.kr. Talan er um umleið 3.000 lán. "Vanligu" eftirstøðurnar eru um 7 mió.kr. Fleiri hava ikki goldið, hóast tey hava fingið fleiri rykkjarar, og tí eru umleið 600 lán fallin til gjaldingar í síni heild, svarandi til um 12 mió.kr. Umleið 400 lántakarar búgva í Føroyum (8 mió.kr.), og umleið 200 lántakarar (4 mió.kr.) búgva uttanfyri Føroyar, einamest í Danmark.

Í tíðarskeiðinum 1995–2000 sendi Stuðulsstovnurin ongar rykkjarar. Eftirsíðan eru rykkjarar sendir. Sambært § 8 í lógini um útbúgvingarstuðul er síðani 1999 heimilað Toll- og Skattstovu Føroya at krevja inn skuld, ið stavar frá Stuðulsstovninum. Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið var ætlanin við hesi lógarbroyting at effektivisera innkrevjingina av eftirstøðunum, soleiðis at Toll- og Skattstovan fekk heimild at krevja lánsskuldina aftur eftir somu reglum, sum galdandi eru fyri innkrevjingina av persónsskatti í skattalógini.

Trupulleikar vóru á Innkrevjingardeildini, og ikki fyrr enn á einum fundi í oktober 2001 varð avtalað, hvussu innheintingarmannagongdin skuldi vera, og hvørjar upplýsingar Stuðulsstovnurin skuldi lata Toll- og Skattstovu Føroya. Eini 40-50 innheintingarmál vórðu í desember 2001 latin Innkrevjingardeildini eftir hesum leisti.

Í apríl 2002 vórðu innheintingarmálini latin Stuðulsstovninum aftur. Toll- og Skattstovan boðaði Stuðulsstovninum frá, at allar upplýsingar millum lánsskipanina á Stuðulsstovninum og innkrevjingarskipanina á Innkrevjingardeildini um innheintan av eftirstøðum skuldu fara fram elektroniskt um alnótina.

Við árslok 2002 kunnaðu vit okkum um gongdina í verkætlanini at tillaga lánsskipanina á Stuðulsstovninum til eina elektroniska samskiftisloysn, sum skal sampakka við innkrevjingarskipanina á Toll- og Skattstovu Føroya. Samskiftið í málinum var óskipað og óformligt, ógreitt var, hvør var leiðari á verkætlanini, og ilt var at siga, hvørjar arbeiðsuppgávur, hvønn myndugleika og hvørja ábyrgd hvør luttakari í verkætlanini hevði. Eingin frá Innkrevjingardeildini hevði sett seg inn í lánsskipanina á Stuðulsstovninum, og málið var merkt av ivamálum um m.a. fyrning.

Vit mæltu Stuðulsstovninum til nágreiniliga at kunna Mentamálaráðið/landsstýrismannin um trupulleikarnar, so at Mentamálaráðið og Fíggjarmálaráðið kundu loysa ivamálini og finna eina hóskandi og greiða mannagongd, sum tryggjaði, at tað sum skjótast varð farið undir eina effektiva innheintan av eftirstøðum, bæði í og uttanfyri Føroyar.

Í februar 2004 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at í august 2003 varð avtala undirskrivað ímillum Stuðulsstovnin og Toll- og Skattstovu Føroya um at heinta inn eftirstøður. 5. november 2003 vórðu tey fyrstu krøvini send Toll- og Skattstovu Føroya til innheintingar, og 20. november 2003 komu fyrstu inngjøldini. Komandi mánaðirnar fer Stuðulsstovnurin at halda áfram at senda krøv til teirra, sum búgva í Føroyum.

Viðvíkjandi lestrarskuld hjá teimum, ið búgva uttanlands, hevur Stuðulsstovnurin biðið Mentamálaráðið og Fíggjarmálaráðið um fund, fyri at finna eina loysn á hesum spurningi.

6.20 Føroya Landsbókasavn (GL 2003/2 11 2-12)

Í 2003 hava vit kannað, um roknskaparviðurskiftini á Føroya Landsbókssavni eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Harafturat hava vit framt lønargrannskoðan og skjalagrannskoðan. Samanumtikið halda vit, at innaneftirlitið á Landsbókasavninum er gott, men vit hava mælt til nakrar ábøtur, m.a.:

at endurskoða reglugerðina og lýsa mannagongdirnar á summum økjum

at taka spurningin um langtíðarleigu upp við Mentamálaráðið

at fáa greiðu á, um bøkurnar skulu verða tryggjaðar

Í februar 2004 hevur Mentamálaráðið boðað frá, at spurningurin um langtíðarleigu verður tikin upp við Føroya Landsbókasavn fyri endaliga at fáa loyst málið. Harafturat hevur Føroya Landsbókasavn í samráð við Mentamálaráðið arbeitt víðari við spurninginum um at tryggja bøkurnar. Sambært Fíggjarmálaráðnum koma bøkurnar undir hugtakið leysafæ, ið ikki skal verða tryggjað.

6.21 Listasavn Føroya (GL 2002/2 11 2-8)

Fyrivarni og viðmerkingar frá roknskapargrannskoðanini

Grannskoðaravirkið Rasmussen & Weihe hevur grannskoðað roknskapin fyri 2002. Eins og árini frammanundan tekur grannskoðarin fyrivarni fyri, hvussu roknskapurin er býttur upp. Grannskoðarin vísir á, at landið rindar flestu føstu útreiðslurnar, og at eingin formlig avtala er, sum sigur, hvussu roknskaparliga býtið ímillum landið og sjálveigandi partin skal vera. Nevndin ger av, hvussu býtið skal vera, og verður tað víst í einari notu í roknskapinum. Grannskoðarin ger vart við, at hann ikki hevur grannskoðað hesa uppgerð. Í grannskoðanarfrágreiðingini heitir hann á nevndina um at fáa viðurskiftini viðvíkjandi býtinum av ársúrslitinum í rættlag, og at føra avgerðina inn í fundarbókina.

Grannskoðarin vísir eisini á, at skjøl verða ikki altíð váttað av stjóra ella heimildarfólki. Hann mælir til, at tað altíð verður gjørt. Grannskoðaranum kunnugt hevur stovnurin í umbúna at gera eina virkisgongd fyri øll týðandi virkisøki hjá stovninum, og grannskoðarin mælir til, at tað verður framt skjótast gjørligt. Í sambandi við at stovnurin ætlar at betra fíggjarstýringina, mælir grannskoðarin til, at skjølini verða betur skipað, og at frágreiðingar verða lagdar við teimum skjølum, har tað er neyðugt at útgreina, hvør inntøkan/útreiðslan er.

Játtanar- og roknskaparviðurskifti

Í skrivi 4. februar 2004 til Landsgrannskoðanina boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann ongar viðmerkingar hevði til roknskapin og grannskoðanarfrágreiðingina hjá Listasavninum fyri 2002.

Í skrivi 28. februar 2004 til landsstýrismannin undraðust vit á, at landsstýrismaðurin als ongar viðmerkingar hevði, vísandi til fyrivarnið í átekningini og til viðmerkingarnar í grannskoðanarfrágreiðingini, og vit bóðu landsstýrismannin svara nøkrum spurningum.

Vit vístu m.a. á, at longu í januar 1997 gjørdi Gjaldstovan vart við, at:

"Ongar formligar avtalur fyriliggja í sambandi við, at Listasavn Føroya verður tikið við á játtanarlóg við einari rakstrarætlan. Gjaldstovan heldur, at tað er eitt ógvuliga álvarsligt mál, at henda formliga avtala vantar. Tað, sum Gjaldstovan serliga hugsar um, er, hvørji viðurskifti eru tikin við á fíggjarlógini, og hvørji ikki."

Sambært Gjaldstovuni er tað Mentamálaráðið, ið skal fáa eina slíka formliga avtalu í lag og góðkenna hana.

Í løgtingsfíggjarlógini er høvuðskonta 7.24.3.22. "Listasøvn" ein rakstrarjáttan. Sambært viðmerkingunum verður Listasavn Føroya rikið við rakstrarjáttan á løgtingsfíggjarlógini og við egnum inntøkum av framsýningum og kaffistovu.

Í fíggjarlógini 2002 er talan um mettar útreiðslur 2.045 t.kr. og mettar inntøkur 242 t.kr. Ikki sæst, hvussu komið er fram til hesi játtanartøl. Sambært landsroknskapinum 2002 eru inntøkurnar 127 t.kr. Sambært eksterna roknskapinum eru samlaðu inntøkurnar um 1 mió.kr.

Vit duga ikki at skilja samanhangið ímillum Landsroknskapin og eksterna roknskapin. Eksterni roknskapurin er býttur upp í ein "sjálvsognarpart", har allar inntøkurnar og bert nakrar útreiðslur eru, og ein "almennan part", har talan bara er um útreiðslur, studningin á fíggjarlógini, og nakrar salderingar mótvegis sjálvsognarpartinum.

Við árslok 2002 vóru aktivini í roknskapinum ein bygningur og innbúgv 18,9 mió.kr., tøkur peningur 635 t.kr. og harafturat skuldarar, goymsla o.a. 384 t.kr. Eisini er talan um lán í bygninginum, sum er niðurgoldið til 953 t.kr.

Landið rindar rentur og avdráttir av láninum av játtanini á fíggjarlógini. Avdrátturin verður síðani "góðskrivaður" eginognini.

Sjálvsognarstovnur ella landsstovnur

Upprunaliga varð Listasavn Føroya sett á stovn sambært løgtingssamtykt 10. januar 1948. Sambært samtyktini er fíggjarliga støðið undir savninum árlig tilskot frá Løgtinginum, umframt gávur og atgongupeningur.

Listasavn Føroya er sostatt stovnað áðrenn "Lov. nr. 137 fra 23. marts 1948 Om Færøernes Hjemmestyre" fekk gildi 1. apríl 1948, har m.a. "museer" er sermál.

Í einum skrivi í mars 1982 frá nevndunum í Listafelag Føroya, Listasavni Føroya og Listaskálanum til landsstýrið verður sett fram uppskot um at leggja Listasavn Føroya og Listaskálan saman til ein nýggjan sjálveigandi stovn.

Á landsstýrisfundi 7. apríl 1989 samtykti Landsstýrið at góðkenna viðtøkurnar fyri nýggja stovnin Listasavn Føroya, í sambandi at Listasavn Føroya og Listaskálin vórðu løgd saman.

31. mai 2002 samtykti nevndin í Listasavni Føroya nýggjar viðtøkur. Viðtøkurnar vórðu góðkendar av landsstýrismanninum 4. november 2002.

Okkara gjøgnumgongd av skjølum í málinum geva ábendingar um, at sjálvsognarskipanin bert er formlig. Tað er framvegis Landsstýrið, ið hevur ábyrgd av og umsjón við Listasavni Føroya, og raksturin verður goldin við játtan á fíggjarlógini.

Sambært § 11 í viðtøkunum *"verður avgerð um at taka stovnin av tikin av stýrinum, eftir tilsøgn frá landsstýrismanninum.*

Til at skipa fyri avtøkuni verður ein 3-manna avtøkunevnd sett. Stýrið velur tveir limir til avtøkunevndina og landsstýrismaðurin velur ein.

Áðrenn avtøkunevndin setir í verk tiltøk viðvíkjandi bygningum útgerð og øðrum virðum hjá stovninum, skal landsstýrismaðurin góðkenna hesi tiltøk.

Tá ið fulnaður er fingin fyri øllum rættarkrøvum, avger landsstýrismaðurin, hvat eitt møguligt avlop skal nýtast til."

Í "Áliti frá Fíggjarmálaráðnum í november 2001 um landsstovnar og –grunnar" er m.a. umrøtt, hvat hugtakið "sjálvsognarstovnur" fevnir um. Í løgfrøðiligari merking er ein sjálvsognarstovnur "ein, sum eigur seg sjálvan", og sum er stovnaður á privatrættarligum grundarlagi. Tað merkir, at landið eigur ikki stovnin, og kann ikki við lóggávu taka stovnin av, ella ráða yvir ognunum, uttan at koma í stríð við ognarrættin hjá stovninum, sum er tryggjaður í grundlógini § 73. Høvuðseyðkennini fyri ein sjálvsognarstovn er:

- stovnurin skal hava eitt endamál,
- stovnurin skal hava kapital,
- stovnurin skal hava sjálvstøðuga leiðslu, sum er leys av stovnarum, og
- kapitalurin má ikki kunna verða fluttur aftur til stovnararnar.

Sambært viðtøkunum hevur landsstýrismaðurin stóra ávirkan á leiðsluna. Hann skal góðkenna eina avgerð um at taka stovnin av, og gera av, hvat eitt møguligt avlop skal verða nýtt til.

Eftir okkara tykki er ivasamt, um talan er um ein veruligan sjálvsognarstovn. Vit hava tí mælt landsstýrismanninum til at biðja Fíggjarmálaráðið meta um, hvørt Listasavn Føroya er ein veruligur sjálvsognarstovnur.

Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Í mars 2004 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at hann veit um trupulleikarnar, sum grannskoðarin hevur vísst á, og at arbeitt verður við at loysa teir:

- arbeitt verður við at gera roknskaparreglugerð og innanhýsis mannagongdir á Listasavni Føroya,
- ein miðvís skráseting av listarverkunum er sett í verk,
- uppbýtið av roknskapinum í ein almennan part og ein sjálvsognarpart skal verða endurskoðað, tí *"rættast er nokk at meta Listasavn Føroya sum ein sjálvsognarstovn, ið fær stuðul til keyp av listaverkum, rakstur o.a."*.

Sambært landsstýrismanninum verður hetta arbeiði væntandi liðugt á vári.

6.22 Mentanargrunnur landsins (GL 2001/2 11 9-3)

Í frágreiðing í desember 2002 vístu vit enn einaferð á, at Mentanargrunnurin rindar studning til bókaútgávu og útgávu av fløgum o.a. beinleiðis inn á bankakontu hjá umsøkjara, uttan um skattaskipanina. Vit gjørdu aftur vart við, at henda mannagongd neyvan er í tráð við ásetingarnar í § 60 í skattalógini um A-inntøku.

Vit vístu eisini á, at Toll- og Skattstovu Føroya 31. august 2000, í einum skrivi til Mentamálaráðið í øðrum máli, m.a. gjørdi vart við:

- at studningur, veittur av einum almennum grunni, er A-inntøka. "Ásetingin er greið, og ikki er nakar møguleika at tulka sær undan hesi reglu",
- at studningurin verður at meta sum A-inntøka, óansæð um treytir verða settar um, at studningurin bert skal verða nýttur til ávísar útreiðslur, eitt nú tilfar ella leigu av atelier, ella um studningurin eisini kann verða nýttur til dagliga livikostnaðin o.l.,
- at sambært § 62, stk. 1, í skattalógini kann landsstýrismaðurin gera av, at ein ávís inntøka, ella ávíst slag av inntøku, sum kemur undir § 60, stk. 1, ikki skal vera A-inntøka.

Vísandi til skrivið frá Toll- og Skattstovu Føroya spurdu vit í desember 2002, um Mentanargrunnurin hevur hildið ásetingarnar í § 60, stk. 1, nr. 6, í skattalógini.

Í januar 2003 bað Mentanargrunnurin Stýrið hjá Toll- og Skattstovu Føroya góðtaka mannagongdina síðani 1948, vísandi til, at skattur ongantíð hevur verið goldin av studningi,

sum grunnurin hevur latið, tó við tí broyting, at grunnurin hvørt ár letur Toll- og Skattstovu Føroya yvirlit yvir, hvør hevur fingið studning. Mentanargrunnurin hevur ikki fingið nakað svar frá Toll- og Skattstovu Føroya.

Í skrivi til Landsgrannskoðanina 16. desember 2003 vísir grunnurin m.a. á, at:

- studningur bert verður goldin, um nevndin hevur vissu fyri, at verkætlanin verður framd, og at umsøkjarin skjalfestir útreiðslurnar,
- at nevndin í januar 2003 samtykti at geva Toll- og Skattstovu Føroya yvirlit yvir, hvør hevur fingið studning,
- skiftandi landsstýrismenn í mentamálum hava góðtikið mannagongdina, og sostatt í verki gjørt av sambært § 62, stk. 1, at studningurin ikki er A-inntøka.

Vísandi til gongdina í málinum heldur Landsgrannskoðanin seg ikki hava fingið nøktandi svar uppá spurningin, um studningsveitingarnar úr grunninum altíð eru í tráð við § 60 í skattalógini. Landsstýrismaðurin hevur mótvegis Løgtinginum m.a. ábyrgdina av, at lógir verða hildnar, og tí hava vit lagt spurningin til landsstýrismannin til støðutakan.

Í mars 2004 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hann fer at taka málið upp við Mentanargrunnin við tí fyri eyga at beina allan iva av vegnum.

6.23 Stuðul til mentan og ítrótt (GL 2000/2 11 9-1)

Studningur til feløg

Í frágreiðingini í februar 2003 varð greitt frá, at Landsgrannskoðanin hevði kunnað seg neyvari um umsitingina av fleiri studningsjáttanum, sum Mentamálaráðið fyrisitur, og har studningur serliga verður veittur feløgum.

Vit vístu m.a. á, at fleiri feløg/stovnar kunnu fáa studning frá fleiri studningsjáttanum til somu endamál. Í nógvum førum letur Mentamálaráðið øðrum upp í hendi at umsita studning, sum er játtaður á fíggjarlógini, t.d. Leikpalli Føroya, ÍSF, Føroya Skótaráð, Norrøna felagnum o.ø. Mentamálaráðið hevur ikki ásett leiðreglur ella treytir fyri, hvussu hesi feløg skulu umsita studningin, t.d. reglur um fíggjarætlan, eftirlit, roknskaparhald og grannskoðan.

Í februar 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið fór at taka stig til at gera mannagongdir, tá studningur verður latin øðrum upp í hendi at umsita.

Í februar 2004 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Mentamálaráðið er ikki liðugt við hetta arbeiði, og væntandi verður tað ikki liðugt fyrr enn móti sumri 2004. Landsstýrismaðurin vísir tó á, at øll feløg, ið umsita studning vegna Mentamálaráðið, lata inn grannskoðaðan ársroknskap, har til ber hjá Mentamálaráðnum at hava eftirlit við stuðlinum.

Alment um umsiting av studningsjáttanum

Í frágreiðingini til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2002 vístu vit á, at umsitingin av studningi til mentanarendamál sum heild tyktist at vera fløkt og óskipað. Í ávísan mun er talan um fleirfaldað málsviðgerð av somu umsóknum til sama endamál. Eftir okkara tykki er tørvur á einari sanering/upprudding viðvíkjandi studningsgrundarlagi/-lóggávu og studningsumsiting, so endamál, treytir o.a. verða greiðari, og tað slepst undan dupultarbeiði o.s.fr.

Í februar 2004 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið seinasta heyst læt gera uppskot til løgtingslóg um studning til list og annað mentanarligt virksemi. Uppskotið hevur verið til hoyringar m.a. hjá Fíggjarmálaráðnum, men Fíggjarmálaráðið er ikki komið við nøkrum viðmerkingum.

Sambært uppskotinum fær landsstýrismaðurin heimild til at lata studning til ymisk listarlig og mentanarlig endamál. Harafturat eru ásetingar um umsóknir, treytir fyri stuðli o.a. Studningur til ítrótt er ikki partur av hesum uppskoti. Landsstýrismaðurin væntar, at ein serlig

studningslóg verður gjørd til ítrótt, í sambandi við at ein almennur ítróttapolitikkur nú verður orðaður.

6.24 Løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum (GL 2000/2 10 1-2)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit samskiftið við landsstýrismannin í mentamálum um, hvørjir stovnar, deildir o.t. viðgera persónsupplýsingar og koma undir Ll. nr. 73/2001 "um viðgerð av persónsupplýsingum".

Eftirsíðan er kunngerð lýst um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum. Har verður sagt í § 17, stk. 2, at Dátueftirlitið kann í serligum føri geva loyvi til eina longri tillagingartíð enn nevnt í stk. 1, tó í mesta lagi 2 ár, og bert um víst kann verða á tilskilaða ætlan fyri, hvussu krøvini í kunngerðini kunnu verða lokin. Sambært landsstýrismanninum fer Mentamálaráðið á vári 2004, at tryggja sær, at stovnar, sum Mentamálaráðið varðar av, sum koma undir persónsdátalógina, antin lúka treytirnar 1. september 2004 ella eru so mikið áleiðis komnir at lúka treytirnar, at Dátueftirlitið vil geva teimum longri skotbrá.

7. OLJUMÁL o.a.

7.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-9)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Minninýtsla:

Allir stovnar/høvuðskontur hava eina minninýtslu. Niðanfyri verður greitt frá summum teirra.

9.11.1.31. Oljumálaráðið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 9,24 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin lækkað 500 t.kr. Minninýtslan er 762 t.kr. Sambært landsstýrismanninum hava rakstrarútreiðslurnar verið lægri, enn mett varð frammanundan. Minninýtslan á somu undirkontu var í 2001 um 1,3 mió.kr.

9.30.1.01. Stuðul til umhvørvisverndartiltøk

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1,7 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin lækkað 200 t.kr. Minninýtslan er 105 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vóru ikki skikkaðar umsóknir til alla játtanina, og onkur verkætlan varð bíligari enn væntað.

Annað:

9.30.3.01. Lánsafturgjald

Einki var játtað á fíggjarlógini. Útreiðslurnar vóru 6.537 t.kr. og inntøkurnar 5.490 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er ein rentutilskriving, um 3,4 mió.kr., sum átti at verið gjørd í 1999, løgd afturat vanligu rentutilskrivingini í 2002. Tí er rentutilskrivingin á láninum størri enn inngjaldið.

Veðhaldslánið hjá IRF verður bókað á hetta stovnsnummar. Høvuðskontan er í 2002 flutt til grein 9, tí virksemið hjá IRF verður roknað sum umhvørvismál.

8. ALMANNAMÁL

8.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-9)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Meirnýtsla:

Vísandi til landsroknskapin, er meirnýtsla á fleiri kontum, hóast talan er um fleiri eykajáttanir í árinum:

(t.kr.)

Høvuðskonta	Játtan	Roknskapur	*Meirnýtsla*
Almannastovan (rakstrarjáttan)	31.481	31.749	*268*
Hjálpartólamiðstøðin (rakstrarjáttan)	4.234	4.243	*9*
Barnaforsorg (lógarbundin játtan)	32.710	34.041	*1.331*
Stuðul til uppihaldspening (lógarbundin játtan)	6.000	6.963	*963*
Serforsorg (rakstrarjáttan)	90.771	91.449	*678*
Eldrarøkt (rakstrarjáttan)	211.433	212.167	*734*
Ansingarsamsýning (lógarbundin játtan)	7.600	7.852	*252*
Serflutningsskipan landsins	456	565	*109*
Vanlig forsorg (lógarbundin játtan)	108.818	115.134	*6.316*
Umsorganararbeiði (lógarbundin játtan)	6.000	6.054	*54*
Tilsamans	499.503	510.217	*10.714*

8.21.1.04. Almannastovan (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 31,5 mió.kr. Meirnýtslan er 268 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga settar til 30,7 mió.kr. netto. Á eykajáttanarlógini fyri november 2002, sum varð samtykt 19. desember 2002, varð játtanin hækkað 760 t.kr. Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið hevði Almannastovan havt fleiri stórar óvæntaðar útreiðslur í 2002, m.a. eina stóra hækking í postgjaldinum og harumframt eitt sakarmál, so Almannastovan hevði mett meirnýtsluna til 1,8 mió.kr. Almannastovuni varð álagt at spara restina, um 1 mió.kr.

Postgjøldini hækkaðu longu 15. oktober 2001, og Landsgrannskoðanin hevur tí ilt við at skilja, at hækkaðu postgjøldini koma óvart á síðst í 2002. Sakarmálið, sipað verður til, varð avgreitt fyrst í apríl 2002. Almannastovan rindaði samanlagt 160 t.kr. í endurgjaldi og sakarmálskostnaði.

Landsgrannskoðanin hevur í skrivi til landsstýrismannin eisini víst á, at umbønin um eykajáttan til hesar útreiðslur kom so seint í árinum, at útreiðslurnar, sum játtanin var ætlað til, vóru longu hildnar. Sambært § 43, stk. 2, í stýrisskipanarlógini má eingin útreiðsla verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður.

Landsstýrismaðurin hevur í november 2003 boðað frá, at hann er samdur í sjónarmiðunum. Almannastovan átti nógv fyrr at gjørt vart við, at játtanin fór ikki at halda, so stundir høvdu verið at sett neyðug tiltøk í verk fyri at halda játtanina, ella at biðið um eykajáttan við fyrstu eykajáttanarlóg í 2002.

8.21.3.01. Barnaforsorg (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 32,7 mió.kr. Meirnýtslan er 1,3 mió.kr.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga settar til 28,2 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri august 2002 varð játtanin hækkað 500 t.kr. til meirútreiðslur av, at kunngerð "um samsýning til fosturforeldur" varð broytt.

Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin hækkað 4 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið *"vísir framrokning av undirkontu 02. "Tilmæli frá barnaverndarnevndini v.m.", at mett ársnýtsla fyri barnaforsorg verður 4 mió.kr. hægri enn játtanin. Almannastovan vísir á, at hetta økið hevur verið vaksandi tey seinastu árini. Almannastovan er komin eftir, at nakrar útreiðslur viðv. brekaðum børnum eru ávístar av hesi kontu. Hetta verður nú kannað. Eisini er Trivnaðarmálaráðið farið undir at kanna, hvar útreiðslurnar hjá barnaverndarnevndini stava frá."*

Sambært landsstýrismanninum er torført at meta um, hvussu stórar útreiðslurnar verða, ið stava frá avgerðum hjá barnaverndarnevndum, av tí at flestu rokningarnar frá kommununum koma ikki til Almannastovuna fyrr enn seint á árinum.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur. Niðanfyri verður vískt á tær kontur, har talan er um ávikavist meir- og minniútreiðslur.

Meirútreiðslur:

- Fríplass 933 t.kr.
- Tilmæli frá barnaverndarnevndum o.a. 471 t.kr.

Minniútreiðslur:

- Tilnevndi løgfrøðingurin 73 t.kr.

8.21.3.05. Stuðul til uppihaldspening (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 5,2 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin hækkað 800 t.kr. Meirnýtslan er 963 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum verður studningur goldin út í juni og í desember. Vanliga er upphæddin, sum verður goldin út í juni, størri enn hon, sum verður goldin út í desember, men í 2002 var øðrvísi. Útgjaldið í desember var 57% av samlaðu útreiðslunum.

8.21.6.04. Eldrarøkt (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 211,4 mió.kr. Meirnýtslan er 734 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur. Niðanfyri verður vískt á tær kontur, har talan er um ávikavist meir- og minniútreiðslur.

Meirútreiðslur:

- Vistarheim 299 t.kr.
- Heimarøktin 1.153 t.kr.
- Heilsusystrar 373 t.kr.

Minniútreiðslur:

- Røktarheim 347 t.kr.
- Eldrarøkt í Sandoynni 744 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 204,6 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri februar 2002-2 varð játtanin til Heimarøktina lækkað 300 t.kr.

Á eykajáttanarlógini fyri august 2002 varð játtanin til Heimarøktina hækkað 1,4 mió.kr. Peningurin skuldi nýtast til samdøgursrøkt frá 1. oktober 2002 fyri alt landið.

Landsstýrismaðurin hevur í november 2003 kunnað um, at samdøgursrøktin ikki kom at virka í 2002, tí samráðingarnar millum Sjúkrarøktarfelagið og Fíggjarmálaráðið um viðbøtur í sambandi við samdøgursrøkt vóru ikki lidnar í 2002. Tí hava ongar útreiðslur verið í 2002.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina fyri november 2002, sum varð samtykt 19. desember 2002, fór Heimarøktin við ársenda at hava 5,7 mió.kr. í meirnýtslu, um eingi tiltøk vórðu sett í verk. Játtanin til Heimarøktina varð hækkað 4,9 mió.kr.; 0,8 mió.kr. til sáttmálabundnar lønarhækkingar, og 4,1 mió.kr. til meirnýtslu. Tað, sum restaði í, skuldi Heimarøktin spara við at tálma nýtsluna, uttan at tað skuldi fáa beinleiðis avleiðingar fyri brúkararnar.

Landsgrannskoðanin hevur í skrivi til landsstýrismannin víst á, at umbønin um eykajáttan til hesar útreiðslur kom so seint í árinum, at útreiðslurnar, sum játtanin var ætlað til, vóru longu hildnar. Sambært § 43, stk. 2, í stýrisskipanarlógini má eingin útreiðsla verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður.

Landsstýrismaðurin hevur í november 2003 kunnað um, at umbønin um eykajáttan til Heimarøktina ikki varð send aðalráðnum fyrr enn 11. oktober 2002, og at hann hevur átalað, at fráboðanin um meirnýtslu kom so seint. Ein møguleiki hevði verið at biðið um eykajáttan beinanvegin við fíggjarnevndarskjali, fyri at boða Løgtinginum frá so tíðliga sum gjørligt. Landsstýrismaðurin valdi heldur at kanna, hvussu nógv kundi verða táttað í fyri at avmarka meirnýtsluna, áðrenn ein umbøn varð send Løgtinginum. Umbønin um eykajáttan varð send Fíggjarmálaráðnum 18. november 2002, og varð løgd fyri Løgtingið 29. november 2002.

Sambært landsstýrismanninum vaks talið á brúkarum meira enn væntað, fleiri "tungir" brúkarar komu í skipanina, og talið á sambýlum vaks meira, enn lagt varð upp fyri í fíggjarætlanini.

8.21.6.10. Ansingarsamsýning (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 7,6 mió.kr. Meirnýtslan er 252 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 7,9 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin lækkað 300 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var miðal útreiðslan um mánaðin fyrstu 11 mánaðirnar um 600 t.kr., og hildið varð, at tað eisini fór at verða galdandi fyri desember. Í desember 2002 vórðu útreiðslurnar 300 t.kr. hægri enn miðalupphæddirnar fyri hinar mánaðirnar, og er tað orsøkin til, at metingarnar ikki hildu.

8.21.6.17. Serflutningsskipan Landsins

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 456 t.kr. Meirnýtslan er 109 t.kr. Sambært landsstýrismanninum komu rokningarnar ov seint til Almannamálaráðið, og eisini vóru tær størri, enn mett varð frammanundan. Ein rokning var fyri desember 2001. Almannamálaráðið hevur boðað Serflutningsskipanini frá, at umráðandi er, at bókað verður á rætt tíðarskeið.

8.21.7.01. Vanlig forsorg (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 108,8 mió.kr. Meirútreiðslurnar eru 6,3 mió.kr. netto. Hóast ongan lønarkarm eru 13,2 mió.kr. nýttar til lønir.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 105,2 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin hækkað 3,6 mió.kr. Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

(mió.kr.)

	F-lóg	Eyk-lóg	Játtan	R.skapur	Frávik
Fyribils hjálp § 9	15,3	1,3	16,6	16,1	+0,5
Varandi veiting § 13	1,7	0,4	2,1	2,1	-
Stakútreiðslur § 15	2,5	0,3	2,8	2,8	-
Meirútreiðslur brekað barn § 17	21,7	5,6	27,3	27,7	-0,4
Endurbúgving § 18	17,5	0,2	17,7	18,3	-0,6
Hjálparamboð o.a. § 18	25,5	5,6	31,1	37,2	-6,1
Arbeiðsloysisforsorg § 9,2	21,0	-10,0	11,0	10,8	+0,2
Hjálp til viðgerð § 16	0,0	0,2	0,2	0,1	+0,1
Tilsamans	**105,2**	**3,6**	**108,8**	**115,1**	**-6,3**

Minninýtsla:

8.21.1.13. Vanlukkutryggingarráðið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 471 t.kr. Minninýtslan er 246 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er játtanin helst ov stór.

8.21.3.07. Føroya Barnaheim (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 5,8 mió.kr. Minninýtslan er 245 t.kr. Sambært landsstýrismanninum minkaði virksemið á Føroya Barnaheimi mest sum niður í einki í 2001. Eina tíð valdaði ivi um, hvørt og í hvønn mun virksemið á heiminum skuldi verða tikið uppaftur. Avgerðin fall ikki fyrr enn á vári 2002. Verulig gongd kom ikki á fyrr enn á heysti 2002, tí søkt skuldi verða eftir starvsfólki, og onnur viðurskifti skuldu eisini verða fingin upp á pláss.

8.2.13.16. Felagið Barnabati

Einki er brúkt av játtanini 50 t.kr. Sambært landsstýrismanninum hevur felagið ikki verið virkið.

8.21.6.02. Bústovnar, serforsorg (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4,7 mió.kr. Minninýtslan er 2 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum var ætlanin at útbyggja/keypa høli, men av ymiskum orsøkum kom hetta í drag.

8.21.6.12. Stuðulsskipan fyri vaksin (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.180 t.kr. Minninýtslan er 266 t.kr. Upprunaliga var eingin peningur játtaður á fíggjarlógini. Á eykajáttanarlógini fyri februar 2002-2 vórðu játtaðar 1.340 t.kr. Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið er endamálið við verkætlanini at geva brúkaranum eitt tilboð við góðari røkt og stuðli til ein innihaldsríkan gerandisdag á so sjálvstøðugum stigi sum gjørligt.

Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin lækkað 160 t.kr.

8.21.8.05. Fólkapensjón (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 354,5 mió.kr. Minninýtslan er 801 t.kr. Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 335 mió.kr.

Á eykajáttanarlógini fyri februar 2002-2 varð játtanin hækkað 25,5 mió.kr. Viðbótin hjá fólkapensjónistum varð hækkað 400 kr. um mánaðin, og markið fyri hvussu nógva inntøku

teir kunnu forvinna, uttan at mótroknað verður í viðbótunum, varð hækkað úr 22.300 kr. upp í 44.500 kr.

Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtan lækkað 6 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið *"vísir Almannastovan á, at tá ið simuleringar vórðu gjørdar fyri at rokna útreiðslurnar til lógarbroytingina, varð inntøkugrundarlagið fyri desember 2001 nýtt. Eisini verður víst á, at møguligt er, at fólkapensjónistarnir eru farnir meira út á arbeiðsmarknaðin nú, og skuldi tað merkt, at pensjónsútgjaldið verður minni."*

8.21.8.05. Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 194,8 mió.kr. Minninýtslan er 2,6 mió.kr. Hóast ongan lønarkarm, eru 8,7 mió.kr. nýttar til lønir.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 198,7 mió.kr. Á eykajáttanarlógini fyri februar 2002-2 varð játtanin lækkað 1.040 t.kr.

Á eykajáttanarlógini fyri november 2002 varð játtanin lækkað 2,8 mió.kr. netto, vísandi til skeivar metingar, og býtið ímillum hægstu og lægstu frítíðarpensjón varð munandi broytt.

8.21.8.13. Viðbót til ávísar pensjónistar (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 17 mió.kr. Minninýtslan er 935 t.kr. Sambært landsstýrismanninum boðaði Almannastovan frá, at ein minninýtsla 600 t.kr. kom at verða, men av misgáum varð játtanin ikki broytt á eykajáttanarlógini fyri november 2002.

Annað:

8.21.3.04. Barnapeningur veittur í forskoti (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini er ein útreiðslujáttan 9,5 mió.kr. og ein inntøkujáttan 9,4 mió.kr. Sambært landsroknskapinum vísir útreiðslujáttanin –34 t.kr., og einki roknskapartal stendur út fyri inntøkujáttanini. Sostatt tykist talan vera um munandi frávik.

Sambært frágreiðingini frá landsstýrismanninum í juni 2003 *"vísir roknskapurin eina inntøku uppá kr. 33.744,- ella frávik uppá 134%. Flytingar á hesi kontu eru sera óregluligar, so tað er sera ringt at siga nakað um gongdina frammanundan. Játtanareftirlitið hjá Almannastovuni hevur í størri mun lagt dent á vandan at fara út um givnu játtan, og í minni mun um minninýtslu. Hetta serliga tá talan er um so smá tøl sum á hesi kontu. So hóast talan er um eitt frávik uppá 134%, so er her talan um eina útreiðslujáttan uppá kr. 100.000,-, sum í staðin verður ein inntøka uppá kr. 33.744,-."*

Eftir okkara tykki er frágreiðingin í juni 2003 frá landsstýrismanninum um hesi frávik burturvið.

Vit hava fleiri ferðir fyrr vístá, at høvuðsatvoldin til munin er, at útgreiningin í landsroknskapinum er nettotøl, meðan sundurgreiningin á fíggjarlógini er bruttotøl. Sambært landsbókhaldinum eru 9,947 mió.kr. bókaðar sum forskotsrindan av barnapeningi (útgjald) og 9,981 mió.kr. sum afturrindan av barnapeningi (inngjald). Í løgtingsfíggjarlógini 2003 er roknað við nettotølum.

Landsstýrismaðurin ásannar í november 2003, at frágreiðingin ikki er nøktandi. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004 er játtanarmannagongdin broytt. Talan er nú um eina netto útreiðslujáttan.

Lønarkarmur

Á høvuðskontunum niðanfyri vísir roknskapurin, at farið er upp um ásetta lønarkarmin.

(t.kr.)

Konta	Navn	Lønarkarmur	Roknskapur	*Munur*
8.21.3.01.	Barnaforsorg (lógarbundin játtan)	3.010	3.679	*669*
8.21.7.01.	Vanlig forsorg (lógarbundin játtan)	0	13.247	*13.247*
8.21.8.05.	Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan)	0	8.699	*8.699*

Vit hava fleiri ferðir fyrr vísst á, at hóast eingin lønarkarmur hevur verið játtaður til barnaforsorg, vanliga forsorg og fólka- og fyritíðarpensjón, verða lønarútreiðslur bókaðar á hesar játtanir. Í 2002 er lønarkarmur ásettur til barnaforsorg.

Eingin lønarkarmur er á játtanini til vanliga forsorg og fyritíðarpensjón. Samanlagt eru lønarútreiðslurnar um 22 mió.kr. Talan er m.a. um lønarútreiðslur til stuðulsfólk, og í ávísum førum er talan um stovnslíknandi tiltøk. Vit halda tað vera misvísandi og skeivt framhaldandi at bóka slíkar lønarútreiðslur á hesar kontur. Í viðmerkingunum til fíggjarlógina fær Løgtingið at vita, at talan er um *"tilskot til einstaklingar",* og í játtanarskipanini er ásett, at lønarútreiðslur kunnu ikki verða játtaðar undir játtanarslagnum "lógarbundin játtan".

Viðvíkjandi fyritíðarpensjón eru viðurskiftini viðvíkjandi vantandi lønarkarmi komin í rættlag í 2003. Við heimild í Ll. nr. 98 frá 18. desember 2002 "um broyting í lóg um almenna forsorg" varð 1. januar 2003 sett á stovn 'Stuðulsfólkaskipan fyri vaksin', ið er partur av Heimarøktini og Serforsorgini. Í løgtingsfíggjarlógini fyri 2003 eru 10,7 mió.kr. játtaðar á nýggja høvuðskontu "Stuðulsskipan fyri vaksin", og er høvuðskonta "Fyritíðarpensjón" lækkað samsvarandi.

8.2 Almannastovan (GL 2002/2 07 1-2)

Í mars 2003 grannskoðaðu vit roknskaparviðurskiftini á Almannastovuni og kunnaðu okkum neyvari um, í hvønn mun viðurskiftini, sum vórðu umrødd í frágreiðing latin løgtingsgrannskoðarunum í februar 2003, eftirsíðan eru komin í rættlag.

Roknskaparreglugerð

Vit hava fleiri ferðir vísst á, at eingin reglugerð er fyri, hvussu roknskaparhaldið skal verða fyriskipað. Í oktober 2001 sendi Almannastovan Almannamálaráðnum uppskot til roknskaparreglugerð.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannamálaráðið var ikki liðugt at viðgera roknskaparreglugerðina. Hann vónaði, at roknskaparreglugerðin kundi verða góðkend fyri árslok 2002.

Í august 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at roknskaparreglugerðin væntandi fór at verða góðkend á sumri 2003.

Reglugerðin er ikki góðkend. Almannastovan er farin undir at endurskoða roknskaparreglugerðina, sum eftir ætlan verður liðug á vári 2004.

Ferðaforskot

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at í august 2002 vóru fleiri ferðaforskot, sum ikki vóru avroknað sambært galdandi reglum.

Í mars 2003 komu vit aftur fram á nøkur forskot, sum ikki vóru gjørd upp. Almannastjórin boðaði frá, at viðurskiftini skuldu verða komin í rættlag fyri 1. mai 2003.

Fartelefonir

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at starvsfólkini í dagliga arbeiði sínum nýta 21 fartelefonir. Sambært almannastjóranum hevði Almannastovan ikki tryggjað, at reglurnar fyri fartelefonir vórðu hildnar. Eftir 1. januar 2002 fór ein neyvari kanning at verða gjørd av nýtsluni av øllum fartelefonum.

Í apríl 2003 kunnaði almannastjórin um, at starvsfólk nú vátta rokningarnar, og tey eru kunnað um rundskrivini um nýtslu av fartelefon í almennari tænastu.

Langtíðarleiga

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit, at Almannastovan, í stríð við ásetingarnar í játtanarskipanini um fíggjarliga langtíðarleigu, hevði sáttmála um at leiga 7 kopimaskinur.

Í august 2003 boðaði landsstýrsmaðurin frá, at sáttmálin gongur út í august 2003, og tí verður einki gjørt við málið. Landsstýrismaður kunnaði samstundis um, at hann vildi kanna, um aðrir stovnar hava langtíðar leigusáttmálar, ið ikki lúka krøvini í játtanarskipanini.

Yvirlit yvir ognir

Almannastovan gjørdi í 1991 yvirlit yvir ognir. Yvirlitið er bert lutvíst dagført síðani. Vit hava fleiri ferðir mælt til at dagføra yvirlitið.

Í august 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann fór at biðja Almannastovuna gera mannagongdir, sum tryggjaðu, at ognaryvirlitið javnan verður dagført.

Skuldarar

Almannastovan hevur ongar vøru- og tænastuskuldarar, men hevur skuldarar, ið stava frá ov nógv útgoldnum almannaveitingum, ella tá veitingar eru goldnar út av óróttum:

(t.kr.)

Skuldarar	**31.01.03**	**Eldri enn 1 ár**
Almannapensjónir	2.183.225	1.924.020
Barnaforsorg	13.157	-
Ansingarsamsýning	265.185	7.172
Vanlig forsorg	17.033	17.033
Tilsamans	2.478.600	1.948.225

Spurdur, hvørjar mannagongdirnar eru fyri at krevja inn skuld, svaraði almannastjórin í apríl 2003, at Almannastovan í næstum fór at kanna møguleikarnar fyri at fáa skuldina goldna aftur. Almannastovan hevur gjørt avtalu við fleiri skuldarar.

Í august 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann fór at taka spurningin um innkrevjing upp við Almannastovuna.

Tryggingarviðurskifti

Stovnurin hevur tryggjað innbúgv og EDV-útgerð. Vit hava mælt til, at tryggingarviðurskiftini verða gjøgnumgingin í samráð við Almannamálaráðið, samsvarandi teimum reglum Fíggjarmálaráðið hevur ásett.

8.3 EDV-viðurskifti á Almannastovuni (GL 2002/2 07 1-2)

Inngangur

VFS-skipanin á Almannastovuni er ein journal-, málsviðgerðar-, útrokningar- og útgjaldsskipan, ið varð tikin í nýtslu 1. januar 2000.

Skipanin verður nýtt til at gjalda út fólkapensjón, fyritíðarpensjón, forsorgarveitingar, barnaforsorgarveitingar o.a. Árliga verða um 700 mió.kr. goldnar út um VFS-skipanina.

Vit gjøgnumgingu skipanina í 2000 við støði í FSR-grannskoðanarvegleiðing nr. 14, "Vejledning om revision i virksomheder, som anvender edb".

Í 2000 vóru ongar serstakar reglur ásettar um KT-trygd í landsumsitingini.

Síðani eru reglur ásettar í:

- Roknskaparrundskrivinum, serliga í pkt. 8 og 10.
- Ll. nr. 73 frá 8. mai 2001 "um viðgerð av persónsupplýsingum", serliga í § 31, stk. 3.
- K. nr. 28 frá 27. februar 2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum", ið nærri greinar ítøkilig krøv til trygdartiltøk eftir § 31, stk. 3, í Persónsupplýsingarlógini.
- Felags KT-trygdarpolitikki hjá landsumsitingini. Talan er um eitt regluverk, ið KT-forum hevur ment í samsvari við ISO 17799. Væntandi verður regluverkið sett í gildið í næstum.
- EDV-trygdarpolitikki hjá Føroya Gjaldstovu, ið ásetir krøv til stovnar, ið samskifta við búskaparskipanir landsins.

Í K. nr. 28 frá 27. februar 2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum" setti landsstýrismaðurin í lógarmálum neyvari reglur um trygdartiltøk, at stovnar skulu skjalfesta ásetingar um:

- Trygdarmál/-strategi,
- Váðameting,
- Trygdarskoðan minst eina ferð um árið,
- Trygdarbrot og frávik,
- Reglur um myndugleika- og ábyrgdarbýti fyri nýtslu av upplýsingarkervinum,
- Nýtslurættindi hjá starvsfólkum,
- Tagnarskyldu,
- Fysiska trygd,
- Tryggjan av trúnaðarupplýsingum, atgongd, sonnum upplýsingum, ikki loyvdari nýtslu (loggar), samskifti o.a.

Í sambandi við grannskoðanina í 2000 løgdu vit høvuðsdentin á at kanna generella tryggleikan í og rundan um EDV-skipanina. Í frágreiðing latin landsstýrismanninum í juli 2000 vístu vit á, at EDV-viðurskiftini á Almannastovuni ikki vóru nóg trygg, og vit mæltu til, at ábøtur vórðu gjørdar.

Í september 2000 vísti landsstýrismaðurin til eina verkætlan, har lýst varð, hvussu ætlanin var at bøta um viðurskiftini. Vit hava síðani havt skrivligt samskifti við landsstýrismannin um, hvørji tiltøk eru sett í verk, og hvussu gongst við arbeiðinum.

Í januar/februar 2003 høvdu vit fundir við leiðsluna á Almannastovuni, og í seinastu frágreiðing kunnaðu vit um støðuna í mun til tilmæli okkara í frágreiðingini frá juli 2000.

Vit hava eftirsíðan havt fundir við almannastjóran og leiðaran á EDV-deildini á Almannastovuni fyri at kunna okkum um, hvussu støðan er í dag. Eisini hava vit vitja

økisdeildirnar hjá Almannastovuni. Vit eru kunnað um, at Almannastovan arbeiðir við at bøta um EDV-trygdina á stovninum, og at dagføra journalpartin í VFS-skipanini.

Niðanfyri hava vit greitt frá, hvussu støðan er í dag:

I Funktiónsskilnaður á EDV-deildini

Í juli 2000 varð mælt til at gera greiðar reglur fyri ábyrgd og heimild hjá starvsfólkunum á EDV-deildini.

Ábyrgdarøkini eru partvís lýst, men Almannastovan hevur ikki gjørt sær eina greiða mynd av, hvørjar EDV-uppgávur ikki kunnu verða røktar av sama fólki. Ongar skrivaðar reglur eru fyri tí.

Á EDV-deildini á Almannastovuni eru 2 EDV-fólk. Tey hava hvør sín lista yvir dagligar, vikuligar og mánaðarligar uppgávur. Almannastjórin hevur greitt frá, at hesir listar tryggja funktiónsskilnað, tí starvsfólkini hava fingið boð um, at tey einans mugu røkja uppgávurnar á sínum egna lista.

Í seinastu frágreiðing gjørdu vit vart við, at vit ikki hildu viðurskiftini vera nøktandi.

Framvegis er eingin skrivlig lýsing gjørd yvir, hvørjar uppgávur á EDV-deildini ikki kunnu verða røktar av sama fólki.

II Førleiki á EDV-deildini

Í juli 2000 varð mælt til, at hóskandi útbúgving varð bjóðað starvsfólkunum á EDV-deildini, serliga til at umsita brúkarar og at logga.

Í januar 2003 kunnaði almannastjórin um, at starvsfólkini høvdu verið á hóskandi eftirútbúgvingum, og eftirútbúgvingin av starvsfólkunum fór at halda fram.

Eingin skrivlig lýsing sigur, hvønn førleika EDV-starvsfólk á Almannastovuni skulu hava, og eingin skrivlig ætlan er, sum sigur, hvussu EDV-førleikin á Almannastovuni skal verða mentur og hildin viðlíka.

III Eftirlit og reglur fyri at logga

Í juli 2000 varð mælt til at bøta um eftirlitið við feilum og misnýtslu, herímillum lýsa loggmøguleikar og áseta reglur fyri at logga.

Almannastjórin hevur greitt frá, at ongar skrivaðar reglur eru fyri, hvat skal verða loggað, hvør skal gjøgnumganga loggin, og hvussu loggurin skal verða viðgjørdur o.t.

Sambært § 14, stk. 2, í K. nr. 28/2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum". skal verða skrásett, verður óheimilað roynt at nýta upplýsingarkervið.

Framvegis eru ongar skrivligar reglur um at logga, og hvussu loggurin skal verða nýttur.

IV Sáttmálaviðurskifti

Í juli 2000 varð mælt til at allýsa tørvin á veitingum frá høvuðsveitaranum av EDV-tænastum, og síðani fáa sáttmálaviðurskiftini í rættlag. Almannastovan er heft at hesum veitara, bæði til at reka, menna og broyta skipanina.

Í januar 2003 greiddi almannastjórin frá, at eingin sáttmáli var gjørdur, men at eftir ætlan fór sáttmáli at verða skrivaður undir fyrst í 2003, bar tað til fíggjarliga.

Vit hava síðani fingið avrit av einum sáttmála millum veitaran og Almannastovuna. Í høvuðsheitum er talan um sáttmála, ið veitarin hevur orðað. Vit hava ikki gjøgnumgingið sáttmálan.

V Broytingarmannagongd

Í juli 2000 varð mælt til, at gera reglur fyri, hvussu farast skal fram, verða broytingar gjørdar í skipanini. Reglurnar skulu tryggja, at broytingar fara fram undir skipaðum viðurskiftum, at skjalfesting verður útvegað, og at krøv verða sett til skjalfestingina.

Í januar 2003 greiddi almannastjórin frá, at ongar skrivaðar reglur eru fyri, hvussu broytingar í VFS-skipanini skulu verða gjørdar.

Stovnurin hevur framvegis ikki eina skrivliga broytingarmannagongd.

Vit halda ikki viðurskiftini vera nøktandi.

VI Javnan skifta atlát

Í juli 2000 varð mælt til, at VFS-skipanin varð broytt, so hvør brúkari javnan skuldi skifta atlát. Sambært veitaranum kann verandi skipan ikki noyða fólk at skifta atlát. Almannastjórin hevur greitt frá, at onnur trygdartiltøk eru ikki sett í verk, so sum at áleggja starvsfólkunum javnan at skifta atlát í VFS, ella at kanna eftir um tað verður gjørt.

Almannastjórin hevur í februar 2003 kunnað um, *"at skipanin verður broytt, tá Almannastovan hevur fingið fíggjarligan møguleika at uppgradera skipanina, og verður tað væntandi í 2003."*

Í seinastu frágreiðing kunnaðu vit um, at eftir okkara tykki vóru viðurskiftini ikki trygg, og vit mæltu til at seta onnur tiltøk í verk.

Onnur tiltøk eru framvegis ikki sett í verk. Vit eru kunnað um, at ætlanin er at dagføra journalpartin í skipanini, og tá kann journalparturin av skipanini tvinga brúkararnar javnan at skifta atlát.

VII Brúkararættindi/Funktiónsskilnaður

Í juli 2000 varð mælt til at gera greiðar reglur fyri at umsita brúkararættindi. Hetta fyri at tryggja dátur og skipan og at fyribyrgja misnýtslu.

Skrivaðar reglur eru ikki fyri, hvørji EDV-rættindi tey ymisku størvini skulu hava, og hvussu brúkararættindi skulu verða umsitin, t.d. um at rættindini javnan skulu verða kannað.

Í seinastu frágreiðing kunnaðu vit um, at vit hildu ikki viðurskiftini vera nøktandi.

Vit hava í 2003/2004 vitjað á veitingardeildini og økisdeildunum hjá Almannastovuni, har vit m.a. kannaðu atgongdirnar og rættindini hjá starvsfólkunum í VFS-skipanini. Niðurstøðan eftir kanningina var, at:

- Rættindini hjá starvsfólkunum í skipanini eru ikki lýst.
- Starvsfólk á økisdeildunum kunnu broyta útgjaldsupphæddir, ið aðrar deildir hava ábyrgdina av.
- Starvsfólk kunnu gjalda út pensjónir og aðrar veitingar, uttan at skipanin krevur, at annar persónur skal leysgeva gjaldið.
- Starvsfólk á økisdeildunum kunnu broyta inntøkuskrásetingarnar hjá pensjónistum, og harvið hækka ella lækka pensjónsveitingar.
- Starvsfólk á økisdeildunum kunnu broyta kontunummarið hjá øllum viðskiftafólkum, uttan at tað kemur á nakran eftirlitslista.

M.a. vísandi til § 16, stk. 2, í roknskaparkunngerðini um skilnað millum skrásetingina og gjaldingina, og til neyvari ásetingar í roknskaparrundskrivi, er eftir okkara tykki talan um sera grundleggjandi veikleikar í trygdini í VFS-skipanini og innanhýsis eftirlitinum á Almannastovuni.

Vit halda hesi viðurskifti als ikki vera nøktandi.

Almannastovan arbeiðir við at uppstiga/dagføra journalpartin í VFS-skipanini, og í tí sambandinum verða reglur um brúkararættindi gjørdar. Vit hava lisið eitt uppskot um reglur

fyri brúkararættindi. Í uppskotinum eru ongar ásetingar um, hvussu roknskaparligur funktiónsskilnaður skal verða tryggjaður í skipanini.

VIII Uttanhýsis samskiftislinjur

Eingin skrivlig lýsing er av uttanhýsis samskiftislinjunum. Í 2000 varð mælt til at gjøgnumganga tær, fyri at tryggja Almannastovuna ímóti óynsktari atgongd.

Í januar 2003 kunnaði almannastjórin um, at ein brandmúrur er settur upp, men eingi skrivlig krøv eru til, hvussu brandmúrurin skal verða umsitin. T.d. verður ikki kannað, um óheimilað samskifti fer fram, og eingin skrivlig avtala er við veitaran um brandmúrin.

Framvegis eru ikki skrivlig krøv sett til, hvussu brandmúrurin skal verða umsitin. Eisini eru vit kunnað um, at brandmúrurin skrivar allar hendingar í ein logg, men Almannastovan hevur ikki nakað forrit at lesa og greina loggin.

Sambært EDV-leiðaranum á Almannastovuni verða høvuðsteldurnar hjá Almannastovuni fluttar í høli hjá Landsapotekaranum, og eftirsíðan fer Landsapotekarin at umsita uttanhýsissamskiftið við skrivstovuna hjá Almannastovuni í Jónas Broncksgøtu.

IX Fysisk trygd

Í juli 2000 varð mælt til at hugsa um tørvin á fyribyrgjandi tiltøkum í maskinrúminum, og at meta um tørvin á einari neyðætlan.

Kotulás er sett á maskinrúmið. Atgongdin er avmarkað til 4 fólk, umframt náttarvaktina.

Í januar 2003 kunnaði almannastjórin um, at neyðætlan er gjørd.

Í februar 2003 fingu vit avrit av einum skjali, ið ber heitið "neyðætlan". Eftir okkara tykki er talan um eitt sera leyst orðað upprit um, hvat kann verða gjørt, virka teldurnar ikki. Vit halda ikki, at skjalið er vert at nevna neyðætlan.

Arbeiðið at menna eina veruliga neyðætlan er ikki farið í gongd, og eingin skrivlig mannagongd er fyri, hvussu dátur skulu verða endurskaptar, fyri at tryggja framhaldandi rakstur.

Á fundi við EDV-leiðaran á Almannastovuni vórðu vit kunnað um, at Almannastovan, við trygdini í huga, m.a. arbeiðir við at flyta høvuðsteldurnar í eitt maskinrúm hjá Landsapotekaranum, og at ætlanin er at brongla samskiftið við økisdeildirnar hjá Almannastovuni. EDV-leiðarin á Almannastovuni kunnaði um, at Landsapotekarin hevur sett ymisk fysisk trygdartiltøk í verk, og at høvuðsteldurnar hjá Almannastovuni verða fevndar av hesum tiltøkum.

X Skjalfesta skipan og mannagongdir

Í juli 2000 varð mælt til sum skjótast at greina krøvini til at skjalfesta skipan og mannagongdir, at savna og skipa skjalfestingina á Almannastovuni, og at gera reglur fyri at varðveita og dagføra hana.

Í januar 2003 greiddi almannastjórin frá, at eingi skrivlig krøv eru sett til at skjalfesta skipan og mannagongdir. Ávíst tilfar er savnað á Almannastovuni, men einki yvirlit er yvir hesa skjalfesting, og ongar skrivaðar reglur eru fyri, hvussu skjalfestingin skal verða skipað, varðveitt og dagførd. Eisini hevur almannastjórin kunnað um, at av fíggjarligum ávum kann Almannastovan ikki fáa neyðuga førleikan til at seta krøv til skjalfestingina.

Í februar 2004 kunnaði EDV-leiðarin á Almannastovuni um, at arbeiðið at samla og skipa skjalfestingar er ikki farið í gongd.

Í dag eru alsamt fleiri krøv til skipaðar skjalfestingar, vísandi til

- Pkt. 10 í roknskaparrundskrivinum,
- § 31, stk. 3, í Ll. nr. 73 frá 8. mai 2001 "um viðgerð av persónsupplýsingum",
- § 16, í K. nr. 28/2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum".

XI Trygdaravrit

Í juli 2000 varð mælt til at gera skrivligar reglur fyri mannagongdum í sambandi við trygdaravrit.

Í januar 2003 kunnaði almannastjórin um, at ongar skrivligar reglur eru, men trygdaravrit verða dagliga tikin, og tey verða goymd á øðrum stað.

Í seinastu frágreiðing boðaðu vit frá, at vit hildu ikki viðurskiftini vera nøktandi.

Eingin skrivlig lýsing er av innihaldinum í trygdaravritunum, og ongar reglur er fyri, hvussu ofta avrit skulu verða tikin. Trygdaravritini vóru ikki longur goymd aðra staðni enn á Almannastovuni.

Vit eru kunnað um, at mannagongdirnar verða broyttar í sambandi við, at teldurnar verða fluttar til Landsapotekaran.

XII EDV-politikkur/stevnumið

Í juli 2000 varð mælt til, at Almannamálaráðið í samstarvi við Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovuna orðaði ein EDV-politikk viðvíkjandi menning av lokalskipanum á stovnum undir ráðnum, herímillum eisini á Almannastovuni.

Í september 2000 vísti landsstýrismaðurin til eina verkætlan, har ítøkiligur EDV-politikkur skuldi verða gjørdur fyri árslok 2000, men í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at eingin EDV-politikkur var orðaður enn.

Í juli 2000 mælti Landsgrannskoðanin til, at Almannastovan ikki fór víðari við at gera sáttmála um menning av forsorgar-, dagpeninga- og alimentatiónsskipan, fyrr enn ein ítøkilig kravfesting var viðgjørd ímillum Almannamálaráðið, Almannastovuna, Fíggjarmálaráðið og Føroya Gjaldstovu, har eisini alternativir møguleikar vórðu viðgjørdir.

Í september 2002 var fundur millum umboð frá Almannamálaráðnum, Almannastovuni og Føroya Gjaldstovu, Har varð avtalað at heita á veitaran um at gera eina kravfesting, sum viðgjørdi, hvørt nýggja dagpeningaskipanin skuldi verða ment í VFS-skipanini ella í nýggju lønarskipanini hjá Føroya Gjaldstovu. Kravfestingin varð tó ikki gjørd.

Hóast eingin EDV-politikkur er orðaður, og uttan at aðrir møguleikar eru kannaðir, varð gjørt av á fundi millum almannastjóran og Almannamálaráðið 7. januar 2003 at byggja VFS-skipanina út, so hon eisini fevndi um nýggja dagpeningaskipan. Sambært almannastjóranum er avgerðin grundað á, at veitarin, sum eisini er veitari til lønarskipanina hjá Gjaldstovuni, helt tað vera skilagott at menna skipanina í VFS, um tað ikki var í stríð við langtíðarætlanir hjá landsumsitingini, um at skipanir skulu samstarva í størri mun.

Í samráð við Almannamálaráðið varð av fíggjarligum grundum gjørt av at sleppa ætlanini um ítøkiliga kravfesting. Sambært almannastjóranum varð eingin fundarfrágreiðing skrivað, og einki skrivligt finst um avgerðina.

Okkum vitandi hevur einki samskifti verið við Fíggjarmálaráðið um avgerðina 7. januar 2003.

Í skrivinum 20. juni 2003 vísir Gjaldstovan á 10 týðandi viðurskifti, ið eiga at verða viðgjørd, tá nýggjar EDV-skipanir verða gjørdar. Eitt av punktunum er, at verandi skipanir eiga at verða endurnýttar, t.d. debitorskipan og navnaskipan.

Eftir okkara áskoðan vanta felags skrivligar langtíðarætlanir og EDV-stevnumið, sum fevna um allar týðandi útgjaldsskipanir, hjá øllum aðalráðunum.

XIII Loyvi til egnar búskaparskipanir

VFS-skipanin varð ment í 1997-1999 og tikin í nýtslu 1. januar 2000. Í 1999 vísti Landsgrannskoðanin á, at Almannamálaráðið og Almannastovan fóru undir at menna skipanina uttan fyrst at søkja Fíggjarmálaráðið um loyvi sambært § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini.

Í skrivi 20. desember 2002 til Gjaldstovuna spyr almannastjórin, *"hvat tilfar skal fáast til vega fyri at Gjaldstovan kann góðkenna EDV-skipan Almannastovunnar"*

Í skrivi 20. juni 2003 vísir Gjaldstovan m.a. á, *"at trupulleikin í málinum er, at Almannastovan fyri fleiri árum síðani hevur gjørt og sett í verk eina skipan uttan at hava tikið Gjaldstovuna/Fíggjarmálaráðið við í málið"* og *"at byrjað var á skeivum grundarlagi, og tí varð loysnin uttan iva ein onnur, um Almannastovan hevði fylgt ásetingunum í § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini"*. Harafturat kunnar Gjaldstovan um, at hon ikki hevur arbeiðsorku at skipa fyri, tí sum skal til, fyri at skipanirnar hjá Almannastovuni skulu verða góðkendar, og *"at tað er høpisleyst at skula inn so nógv ár eftir, at góðkenna nakað, tí úrslitið vildi verið eitt annað, um formliga varð rætt atborið."*

XIV Niðurstøða

Eftir seinastu fundirnar við almannastjóran í januar 2003 hildu vit samanumtikið, at Almannastovan og Almannamálaráðið hava bøtt um viðurskiftini á summum økjum, men á týðandi økjum vóru ikki framdar nøktandi ábøtur samsvarandi tilmælum okkara frá juli 2000.

Frammanfyri hava vit víst á, at fleiri reglur um KT-trygd nú eru ásettar, og sostatt eru krøvini til KT-trygd økt munandi síðani 2000. Hóast tiltøk eru sett í verk at bøta um nøkur viðurskifti, er í dag nógv longri á mál enn í 2000.

Vit halda framvegis, at skipanin er ikki nóg trygg, og vit halda tað verða lítið sannlíkt, at Almannastovan lýkur allar treytirnar í § 31, stk. 3, í lógini um viðgerð av persónsupplýsingum og kunngerðini um trygdartiltøk.

8.4 Almannapensjónir (GL 2001/2 07 2 -6)

8.4.1 Gongdin higartil

Pensjónsútreiðslur verða hildnar við heimild í Ll. nr. 48/1999 "um almannapensjónir o.a.", ið kom í gildi 1. januar 2000.

Longu í frágreiðing okkara til landsstýrismannin í juli 2000 gjørdu vit vart við, at í fleiri førum er ógreitt, hvussu ásetingarnar í §§ 21-23, sum fevna um árliga pensjónsásetan, umrokning, eftirrokning, aftur- og eftirgjald, skulu verða tulkaðar. Tí bar ikki til hjá okkum í øllum førum at kanna, um pensjónirnar, sum goldnar vóru út, samsvaraðu við galdandi lóggávu. Almannamálaráðið hevði ikki latið Almannastovuni nakra leiðbeining, og leiðslan á Almannastovuni hevði ikki gjørt nakra innanhýsis leiðbeining, hvussu §§ 21-23 skulu verða tulkaðar.

Vit vístu á, at § 21 hevði sera stóran umsitingarligan týdning, og eisini stóran fíggjarligan týdning fyri pensjónistin. Eftirsum stórur ivi var um tulkingina, og eftirsum vit harafturat høvdu staðfest, at stórur munur var á praksis hjá málsviðgerunum, heittu vit í juli 2000 á landsstýrismannin um at taka neyðug stig til at greiða viðurskiftini, og eisini umhugsa at endurskoða lóggávuna, so tað greitt gekk fram av lóg og viðmerkingum, hvat tað var, Løgtingið hevði samtykt.

Í frágreiðing okkara, ið varð latin løgtingsgrannskoðarunum í mars 2001, vórðu ivamál viðvíkjandi § 21 umrødd, og kunnað varð um, at almannastjórin hevði boðað frá, at hann fór at taka spurningarnar upp við Almannamálaráðið, hvørt tørvur var á lógarbroyting fyri at greiða reglurnar.

Í skrivi í juli 2002 til Almannamálaráðið helt Kærustovnurin, at økið er í so ógreitt lógarregulerað. Bæði Almannastovan, Kærustovnurin og Kærunevndin í almannamálum hava brúkt nógva orku at finna fram til, hvussu reglurnar eiga og kunna verða umsitnar. Kærustovnurin helt tað enn vera so mong ivamál, at antin eigur lógarásetingin at verða endurskoðað, ella eigur kunngerð/vegleiðing at verða gjørd, hvussu ein eftirrokning skal fara fram, úr enda í annan.

Landsgrannskoðanin fór í august 2002 undir eina gjøgnumgongd av pensjónsútgjaldingum. Í fyrsta umfari kunnaðu vit okkum um broytingar í lógum og fyriskipanum, mannagongdum, roknskapar- og eftirlitsskipanum o.ø. Vit høvdu eisini fundir við Almannastovuna, har vit kunnaðu okkum um viðurskiftini. Vit komu fram á, at Almannastovan helt seg hava so stórar trupulleikar av at umsita ásetingarnar í § 21 í pensjónslógini, at partar av hesum arbeiði varð ikki gjørt í 2002, hóast tað í § 21, stk. 6, er ásett, at pensjónin skal verða eftirroknað, tá ið inntøkan er álíknað. Vit mæltu í september 2002 landsstýrismanninum til at kunna seg neyvari um málið og at boða frá, hvørji stig hann fór at taka fyri at fáa viðurskiftini í rættlag.

Landsstýrismaðurin kunnaði í februar 2003 um, at sambært Almannastovuni vóru 154 mál um eftirrokning og afturgjald viðvíkjandi 2001. Almannastovan var í januar 2003 farin í holt við at senda skriv um eftirrokningarnar sambært § 21, stk. 6.

8.4.2 Grannskoðan í 2003

Í 2003 hava vit grannskoðað umsitingina av almannapensjónum, frá tí at umsókn kemur inn, til pensjónin verður goldin út, og hvussu pensjónir, ið vórðu goldnar út í 2001, vórðu eftirroknaðar.

Fyrsta pensjónsásetanin (§ 20, stk. 4)

Sambært § 20, stk. 4, verður fyrsta pensjónsútrokningin grundað á væntaða inntøku, um inntøkan verður broytt varandi aftaná pensjónstillutan. Almannastovan samanber inntøkuupplýsingar í umsóknarblaðnum við inntøkurnar í fyribilsskattaskránni hjá Toll- og Skattstovu Føroya. Út frá tí verður eitt mett inntøkugrundarlag skrásett í skipanini. Í einum máli var inntøka á 34 t.kr. ikki skrásett. Sambært Almannastovuni verður inntøka ikki skrásett, ávirkar hon ikki pensjónsútrokningina.

Vit halda tað hava týdning at skráseta allar inntøkur. Smáar inntøkur kunnu samanlagt ávirka pensjónina, og mánaðarliga útgjaldsfráboðanin vísir ikki rætt inntøkugrundarlag, verða ikki allar inntøkur skrásettar. Tað finst eingin skrivlig mannagongd fyri, hvussu fyrsta pensjónsásetanin skal verða framd, og hvørji skjalprógv skulu verða kravd.

Almannastovan arbeiðir við at gera innanhýsis leiðbeiningar.

Dagslistar

Veitingardeildin nýtir dagslistar til at hava eftirlit við broytingum í pensjónsmálum.

Ongar skrivligar reglur eru formliga settar í gildi, hvussu dagslistarnir skulu verða kannaðir og varðveittir. Skrásetingarnar á dagslistunum fevna ikki um broytingar í kontunumrum og inntøkuskrásetingum hjá pensjónistum, og tískil er einki eftirlit við hesum viðurskiftum.

Almannastovan arbeiðir við at menna eftirlitið við dagslistum.

Einstakar pensjónsumrokningar (§ 21, stk. 2-4)

Sambært § 21, stk. 2-4, verður pensjónin umroknað í árinum, verður inntøkan varandi broytt, t.d. í sambandi við at pensjónistur gevst at arbeiða. Pensjónin verður tá ásett í mun til væntaða inntøku í framtíðini.

Almannastovan tulkar ásetingina í § 21, stk. 2, sum at pensjónisturin hevur skyldu til at kunna Almannastovuna um inntøkubroytingar. Tað verður umsitið soleiðis, at pensjónisturin ringir ella skrivar til Almannastovuna og kunnar um broyttu inntøkuna. Síðani verður inntøkan skrásett í VFS-skipanini.

Eingin skrivlig mannagongd er fyri, hvussu ein umrokning skal verða framd, og hvørji skjalprógv verða kravd.

Almannastovan arbeiðir við at gera innanhýsis leiðbeiningar.

Árliga pensjónsásetanin (§ 21, stk. 1)

Eftir áheitan fær Almannastovan upplýsingar frá Elektron/Toll- og Skatt um álíknaðar inntøkur undanfarna ár. Vanliga verða upplýsingar lisnar inn um 1. apríl og síðani tríggjar ferðir afturat, fyri at fáa inntøkur við, sum verða álíknaðar seinni. Út frá hesum inntøkugrundarlagi, sum er skattskyldug inntøka við ávísum frávikum ásett í § 20, verður pensjónin ásett frá næsta mánaði. Vit hava áður vístá, at við at rokna frá "næsta mánaði" verða ikki allir pensjónistar viðgjørdir eins.

Í frágreiðing okkara til landsstýrismannin í juli 2000 gjørdu vit vart við, at Almannastovan framvegis ikki hevur nakra skrivliga lýsing av, hvørjar inntøkuupplýsingar frá Toll og Skatt meint verður við. Ongar reglur eru fyri mannagongdini í sambandi við innlesing av inntøkum, nær og hvussu ofta lisið verður inn, og hvussu arbeiðið verður skjalprógvað.

Almannastjórin boðaði í februar 2001 frá, at arbeitt verður við málinum, og at dokumentatiónin í framtíðini fer at verða meira fullfíggjað.

Í 2003 var trupulleikin, at tann á Almannastovuni, ið vanliga hevði hetta arbeiðið um hendi, var farin úr starvi. Tí var tað sera trupult at finna fram til, hvussu arbeiðið var gjørt í 2002 og 2003. Vit vístu í 2003 á, at flytingin frá Toll- og Skatt til Almannastovuna av upplýsingum um inntøku, maskinellu og manuellu broytingarnar, kanningar o.a., sum síðani skulu fara fram, eru sera týðandi partar av útrokningunum av pensjónum. Tí hevur tað stóran týdning, at nágreiniligar skrivligar mannagongdir eru fyri, nær og hvussu arbeiðið verður gjørt, hvør skal gera tað, og hvussu tað skal verða skjalprógvað.

Sambært deildarleiðaranum á veitingardeildini er ætlanin at skjalprógva inntøkuinnlesingarnar í 2004.

Almannastovan arbeiðir við at gera innanhýsis leiðbeiningar.

Eftirrokning, eftir-/afturgjald (§ 21, stk. 5-6)

Sambært § 21, stk. 5, *"verður pensjón ásett sambært stk. 2-4 og sambært § 20, stk. 4, eftirroknað eftir inntøkuni viðkomandi ár, tá inntøkan er álíknað."*

Í § 20, stk. 6, er ásett, at *"Vísir eftirrokningin sambært stk. 5, at ein pensjónistur hevur fingið lægri veiting, enn hann við álíknaðu inntøkuni sum grundarlagi hevði havt rætt til, verður avlopsupphæddin útgoldin. Hevur ein pensjónistur fingið hægri veiting, verður ov nógv útgoldna upphæddin kravd aftur."*

EDV-skipanin á Almannastovuni kann skriva út lista yvir tey pensjónsmál, har Almannastovan hevur tøppað inn eina metta inntøku. Hesin listi verður vanliga skrivaður út, tá nýggjar inntøkuupplýsingar verða lisnar inn í skipanina frá Toll- og Skattstovuni. Málsviðgerin gjøgnumgongur listan og roknar síðani út, um pensjónistur hevur fingið ov lítið ella ov nógv goldið í pensjón.

Eingin skrivlig mannagongd sigur, hvussu listarnir skulu verða skrivaðir út, gjøgnumgingnir og hvørji skjalprógv skulu verða varðveitt.

Almannastovan arbeiðir við at gera innanhýsis leiðbeiningar.

Avrundan av inntøkugrundarlagi (§ 20, stk. 6)

Sambært § 20, stk. 6, verður inntøka rundað av niðureftir til næstu upphædd, ið kann verða býtt við 100. Undir grannskoðanini hava vit staðfest, at inntøkan verður ikki rundað av, tá ið pensjónir verða roknaðar út. Talan er ikki um stórar upphæddir hjá pensjónistinum, men tað verður ikki umsitið sambært lógini.

Afturgjald vegna ikki hildna upplýsingarskyldu (§ 23)

Umsiting á Almannastovuni

Sambært § 22 hava pensjónistar skyldu at boða Almannastovuni frá broytingum, sum kunnu hava við sær, at veiting skal verða lækkað ella fella burtur. Verður upplýsingarskyldan ikki hildin, ella hevur pensjónisturin móti betri vitan av órøttum fingið veiting, skal hann ella deyðsbúgv hansara sambært § 23 gjalda aftur ta upphædd, sum er fingin av órøttum.

Tá nýggjar inntøkuupplýsingar eru lisnar inn í VFS-skipanina á Almannastovuni, verður ein "munarlisti" skrivaður út, ið vísir munin ímillum inntøkuupplýsingarnar, ið vórðu skrásettar í skipanini, og inntøkuupplýsingarnar frá Toll og Skattstovuni.

Almannastovan kannar listan fyri at finna fram til, hvørjir pensjónistar ikki hava hildið upplýsingarskylduna, soleiðis at afturgjaldskrav kann verða sett fram.

Eingin skrivlig mannagongd er um, hvussu listin skal verða skrivaður út, gjøgnumgingin, og hvørji skjalprógv skulu verða varðveitt.

Almannastovan arbeiðir við at gera innanhýsis leiðbeiningar.

Kærunevndaravgerðir

Ásetingin í § 22- 23 er tann sama, sum var í gomlu fólka- og avlamispensjónslógini í § 25-26.

Á umsóknarblaðnum um fólkapensjón er ein teigur, har pensjónisturin skrivar undir, at *"eg eri kunnað/-ur um, at eg eftir pensjónslógini havi skyldu at boða frá einihvørjari broyting í persónligum og fíggjarligum viðurskiftum, ið kunnu ætlast at hava við sær, at pensjónin lækkar ella fellur burtur".*

Við játtanarskrivinum um pensjónina er lagt við vegleiðing um upplýsingarskyldu. Á mánaðarliga kontuavritinum til pensjónistin stendur ein frágreiðing á baksíðuni um upplýsingarskylduna.

Í praksisyvirlitinum 1997 frá Kærunevndini í Almannamálum verður víst til eina avgerð – j.nr. 7020-077 – har pensjónistur hevur havt inntøku í tíðarskeiðinum 1. november 1994 - 30. november 1995, sum ikki var fráboðað Almannastovuni, og pensjónin tí varð roknað út á skeivum grundarlag.

Kærunevndin ásannaði, at pensjónisturin, í sambandi við at hann fekk pensjón játtaða, varð vegleiddur um fráboðanarskylduna, soleiðis at tað mátti verða lagt til grund, at pensjónin varð móttikin ímóti betri vitan, og afturgjaldskrav tí kundi verða sett fram eftir §§ 25 og 26 í fólkapensjónslógini.

Í einari avgerð – j.nr. 7020-100/96 – hevði ein pensjónistur inntøku í tíðarskeiðinum 10. august 1995 og árið út, sum ikki varð fráboðað Almannastovuni. Pensjónin hevði tí verið roknað á skeivum grundarlagi. Almannastovan setti fram krav um afturgjald av ov nógv útgoldnari pensjón.

Kærunevndin staðfesti avgerðina hjá Almannastovuni, og vísti til, at pensjónistur sambært § 25 hevur skyldu til at boða Almannastovuni frá, verður inntøkan broytt meira enn bara fyribils. Kærunevndin vísir harafturat til § 26, at hevur pensjónisturin ikki boðað frá inntøkuni, hevur hann skyldu at gjalda ov nógv útgoldnu pensjónina aftur.

Í praksisyvirlitinum 1998-1999 verður víst til eina avgerð – j.nr. 98A03-0080 – har pensjónisturin ikki hevur kunnað Almannastovuna um røttu inntøkuna. Kærunevndin staðfesti, at kærarin varð kunnaður um upplýsingar- og afturgjaldsskylduna, og Almannastovan hevði tí heimild til at krevja ov nógv útgoldna pensjón aftur.

Í einum øðrum máli – j.nr. 98A03-0053 – høvdu tveir fólkapensjónistar ikki boðað Almannastovuni frá broyttu sosialu støðu teirra, tá teir gingu saman í hjúnalag, og tí høvdu teir skyldu til at rinda ov nógv fingna fólkapensjón aftur. Kærunevndin legði til grund, at hóast tað var skjalprógvað, at kærararnir høvdu fingið vegleiðing um upplýsingarskyldu, høvdu teir kortini ikki boðað Almannastovuni frá um hjúnalagið.

Í fleiri kærunevndaravgerðum í 2002 og 2003 hevur Kærunevndin gjørt av antin at strika afturgjaldskravið ella at vísa málið til nýggja viðgerð á Almannastovuna, vísandi til at Almannastovan hevur prógvbyrðuna fyri, at pensjónin er fingin av óróttum og móti betri vitan. Undir nýggju viðgerðini skal Almannastovan sambært Kærunevndini tryggja sær, at støða verður tikin til:

- varð pensjónin móttikin av óróttum, og um so var, fyri hvat tíðarskeið,
- varð tann av óróttum fingna pensjónin móttikin móti betri vitan, og um so var hví,
- vórðu mest grundleggjandi reglurnar fyri málsviðgerð, so sum partshoyring og grundgeving fylgdar.

Sostatt tykist, sum at Kærunevndin hevur broytt siðvenju í mun til avgerðir sambært gomlu pensjónslógini. Nú tykist tað ikki vera nóg mikið, at pensjónisturin hevur ikki hildið upplýsingarskylduna sambært § 22. Almannastovan hevur sambært Kærunevndini *"prógvbyrðuna fyri, at pensjónistur hevur verið illvarin um rætt sín til útgoldna pensjón."*

8.4.3 Serlig persónlig viðbót

Í § 7, stk. 2, í Ll. nr. 107 frá 22. desember 1999 "um áseting og javning av almannaveitingum" er ásett:

> *"Pensjónistur, sum er giftur við ikki-pensjónisti, sum áðrenn 1. januar 2000 fekk eina hægri grundupphædd, varðveitir rættin til hesa upphædd, so leingi sum hjúnafelagin ikki er pensjónistur. Munurin millum ta grundupphædd, pensjónisturin hevði rætt til sambært lóg nr. 105 frá 29. desember 1998 um áseting og javning av almannaveitingum og hesi lóg, verður útgoldin sum persónlig viðbót. Tá talan er um fyritíðarpensjónistar, verður viðbótin inntøkujavnað samsvarandi reglunum í § 19 í lógini um almannapensjónir."*

Henda skiftisregla kom, tí sambært øðrum ásetingum í Ll. nr. 107/1999 hevði pensjónistur, ið var giftur við ikki-pensjónisti, fingið minni enn eftir Ll. nr. 105/1998, tí teir eftir gomlu lógini fingu pensjón sum stakir. Pensjónistarnir, ið eru fevndir av § 7, stk. 2, fingu tí eina serliga persónliga viðbót ("skiftisupphædd") kr. 10.272,00 um árið, svarandi til kr. 856,00 um mánaðin.

§ 2 í Ll. nr. 107/1999 ásetir, at grundupphæddin til fólka- og fyritíðarpensjón verður ikki javnað. Sambært Ll. nr. 26 frá 21. mars 2002 "um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum" verður greinin broytt, so at grundupphæddin til fyritíðarpensjónistar verður javnað frá 1. januar 2002.

Eftir okkara tykki átti "skiftisupphæddin" til fyritíðarpensjónistar 1. januar 2002 at verið 732 kr. ístaðin fyri 856 kr., og í 2003 585 kr. ístaðin fyri 856 kr. Sostatt er ov nógv goldið út í 2002 og 2003. Almannastovan hevur í februar 2004 boðað frá, at hon er samd við okkum.

8.4.4 Grannskoðan av einstøkum málum

Vit kannaðu 23 mál viðvíkjandi eftirrokning av pensjónum fyri 2001. Í 8 málum var eftir okkara tykki ivi um, hvørt málini skuldu verða viðgjørd sambært § 21, stk. 5, ella sambært § 22-23. Í fleiri málum var notatskyldan ikki hildin. Í ongum av málunum vóru hoyringarskriv send, áðrenn inntøkubroyting fór fram. Vit hava fingið viðmerkingar frá Almannastovuni.

Í fleiri førum eru vit ikki samd í teirra tulkingum, nær og hvussu umrokning og eftirrokning skal fara fram sambært § 21-23.

8.4.5 Viðmerkingar frá Kærunevndini

Í skrivi frá 3. apríl 2003 frá Føroya Kærustovni til landsstýrismannin í almannamálum verður sagt soleiðis um málsviðgerðina í 2002:

"Í frágreiðingini fyri 2001 varð nevnt, at trupulleikar vóru við viðgerðini av málum um umrokning og afturgjald av ov nógv útgoldnum pensjónum. Á hesum øki er lítið og einki broytt í 2002. Hesi mál geva tí enn tyngjandi úrslit fyri Almannastovuna, tí meginparturin av avgerðunum á hesum øki verða broyttar av Kærunevndini. Lógarásetingarnar um umrokning og afturgjalding av ov nógv útgoldnari pensjón eru eftir okkara tykki sera mangulfullar, og enn vanta kunngerðir og vegleiðingar, sum kundu givið Almannastovuni og Kærunevndini í almannamálum eitt betri grundarlag at tikið støðu út frá. Eftir okkara tykki hevði tó verið best við einari endurskoðan av nevndu lógarreglum.

Í 2001 varð eisini víst á, at tað verður ov lítil uppsøkjandi málsviðgerð gjørd á Almannastovuni, og í flestu førum er ikki partshoyrt, áðrenn noktandi avgerð verður tikin. Hendan støða er einki broytt í 2002. Tí eru mál ikki nøktandi upplýst. Aftur í 2002 hava vit í fleiri málum sæð, at ivasamt er, hvussu Almannastovan yvirheldur noteringsskylduna.

Fyri materiella partin av málsviðgerðini sýnist størsti trupulleikan at vera manglandi kunngerðir og vegleiðingar á nærri øllum økjum. Viðgerðin er tí oftani grundað á sjálvskaptar siðvenjur, har metingin eftir lógini er avskorin (skøn under regel). Slík viðgerð førir oftani við sær, at ein avgerð verður tilsíðissett, tí neyðug atlit eru ikki tikin til umstøðurnar í tí ítøkiliga málinum. Hetta sæst eisini aftur í stóra viðhaldsprosentinum, sum vísir, at Kærunevndin hevur mett, at sjálv avgerðin, sum Almannastovan hevur tikið, var skeiv. Í hesum sambandi kann nevnast, at í 2001 varð víst á, at serliga átrokandi er at fáa reglur fyri tyngjandi økini í § 18, stk. 5, í forsorgarlógini t.v.s. viðgerð av bústaðarbroytingum, stuðul til avlamisbil, hjálpartól v.m., kunngerðir til nýggju dagpeningalógina og almannapensjónslógina. Einki sæst at vera hent á hesum økjum.

Mangulin uppá reglur tyngir arbeiðið á Almannastovuni og arbeiðið í Kærunevndini í almannamálum munandi. Hetta merkist kanska serliga væl hjá Almannastovuni, tí Almannastovan av hesum í ov stóran mun má tulka seg til siðvenjur út frá ítøkiligum avgerðum hjá Kærunevndini.

Tølini fyri 2002 sýna, at viðgerðartíðin fyri kærur á Almannastovuni er á góðari leið, men at bæði materiella og formliga málsviðgerðin hjá Almannastovuni ikki er heilt nøktandi. Mett verður, at gerð av kunngerðum og vegleiðingum kann bøta um materiellu viðgerðina, og at ein førleikamenning av málsviðgerunum kann geva eina formliga rættari viðgerð av málunum."

8.4.6 Viðmerkingar hjá Almannastovuni

Í skrivi 5. februar 2004 til Almannamálaráðið um uppskot til lógarbroytingar í §§ 20-21 í almannapensjónslógini greiðir Almannastovan m.a. frá:

"Viðmerkjast skal, at Almannastovan als ikki er samd í seinastu avgerðunum hjá Kærunevndini viðvíkjandi eftirrokning av pensjónum. Hvørki tá talan er um eftirrokning sambært stk. 5 og 6 ella í sambandi við vantandi fráboðan sambært §§ 22-23 (skylda at boða frá hækking í inntøku).

Í løtuni liggja nakað o.u. 40 mál, sum eru eftirrokningarkrøv ella krøv, sum koma av, at pensjónistar ikki hava hildið fráboðanarskylduna – summi krøv eru rættiliga stór.

Óvissan í umsitingini er stór um, hvat gerast skal. Talan er ikki um so nógv um pening – o.u. 400.000 kr. tilsamans. Spurningurin er meira prinsippiellur. Fyribils eru hesi krøv ikki send út – hetta orsakað av seinastu kæruavgerðunum.

Í heila tikið hava avgerðir hjá Kærunevndini og ivaspurningar frá Landsgrannskoðaranum og ósemja millum fakfólk yvirhøvur um tulkingina av lógargreinunum skapt stóran iva í umsitingini við eftirfylgjandi partvísum handlingslammilsi.

Mett verður ikki, at tað er rætt at sleppa nøkrum av omanfyri nevndu krøvum. Almannastovan ynskir tó ikki at broyta uppgerðina eftir seinastu kæruavgerðunum, tí vit meta avgerðirnar at vera ímóti lógini og ætlanum við henni.

Heitt verður á Almannamálaráðið at koma við ráðum um, hvat gerast skal, herundir eventuelt rættarmál. Hetta hastar, tí krøvini mugu ikki verða ov gomul".

Eftir øllum at døma ætlaði Almannastovan ikki at fylgja avgerðunum hjá Kærunevndini, ið eru endaligar sambært § 1, stk. 6, í Ll. nr. 47 frá 23. mars 1993 "um kærunevnd í almannamálum.

Landsstýrismaðurin hevur í mars 2004 boðað frá, at Almannamálaráðið og Almannastovan hava eftirsíðan havt fund um málið. Niðurstøðan var, at Almannastovan altíð skal fylgja avgerðum hjá kærustovninum. Almanna- og Heilsumálaráðið fer at taka stig til broyta § 21, og fer helst at mæla til at strika eftirrokningina sambært § 21, stk. 5 og 6.

8.5 Ansingarsamsýning (GL 2002/2 07 3-7)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit grannskoðan av útreiðslunum til "ansingarsamsýning", ið verða hildnar við heimild í Ll. nr. 64 frá 5. juni 1984 "um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima", broytt við Ll. nr. 52 frá 28. apríl 2000. Niðanfyri verður kunnað um, hvat eftirsíðan er hent.

Vantandi ásetan av reglum

Sambært § 2, stk. 3, í Ll. nr. 64/1984 *"setir landsstýrismaðurin nærri reglur fyri, hvussu hendan lóg verður umsitin."* Hóast liðin eru 20 ár, síðan lógin kom í gildi, og tað í lógini er álagt landsstýrismanninum at áseta reglur, hevur landsstýrismaðurin enn ongar reglur sett. Í november 2002 spurdu vit, nær viðurskiftini fóru at koma í rættlag.

Í september 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann ikki visti, hví kunngerðin ikki var gjørd fyrr, men arbeiðið er farið í gongd.

Okkum vitandi er eingin kunngerð lýst enn.

Samsýningarupphædd

Vit vístu á, at eftir okkara tykki átti upphæddin til ansingarsamsýning í 2000 at verið kr. 7.332 um mánaðin. Almannastovan hevði í 2000 rindað kr. 7.172 um mánaðin, tí Almannastovan hevði ikki roknað sjúkrakassaviðbótina kr. 160 um mánaðin við. Spurdur, svaraði almannastjórin, at Almannastovan ikki helt, at sjúkrakassaviðbótin skuldi verða tikin við.

Vit høvdu ilt við at skilja svarið, vísandi til at Løgtingið í viðmerkingunum til Ll. nr. 52/2000 "um broyting í løgtingslóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima" varð kunnað um, at ansingarsamsýningin svaraði til kr. 7.332,00 um mánaðin. Í november 2002 bóðu vit landsstýrismannin um hansara sjónarmið.

Í desember 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann í samráð við Almannastovuna var komin til ta niðurstøðu, at rætta upphæddin var kr. 7.332, og ikki kr. 7.172. Sambært landsstýrismanninum var Almannastovan í ferð við at rinda út írestandi upphæddina til tey fólkini, ið hava fingið ov lítið goldið út í 2000.

Endurskoðað lóggávu

Í viðmerkingunum til Ll. nr. 52/2000 "um broyting í løgtingslóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima", sum varð løgd fyri tingið 4. mars 2000, verður Løgtingið kunnað um, at *"landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum ætlar at endurskoða lógina í síni heild seinni í ár, so møguligar lógarbroytingar fáa gildi frá ár 2001."*

Enn er eingin endurskoðað lóg løgd fyri tingið. Í november 2002 spurdu vit landsstýrismannin, hvørjar ætlanir eru á hesum øki.

Í september 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann hevði verið noyddur at raðfesta summi lógarøki fram um onnur, og lógin um ansingarsamsýning hevði ikki fremstu raðfesting.

Sambært landsstýrismanninum vóru ikki ítøkiligar ætlanir um at endurskoða lógina í 2003, *"men í sambandi við, at eldraøkið verður lagt út til kommununar at umsita 1. januar 2005, verður øll lóggáva á eldraøkinum endurskoðað, harímillum eisini lógin um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima."*

Málsviðgerð

Málsviðgerðin fer fram sambært leiðbeinandi innanhýsis reglum frá 1990. Vit kannaðu, um málsviðgerðin var í tráð við ásetingar í lógini og innanhýsis reglur.

Í einum máli komu vit fram á, at fráboðan var komin frá røktarheimi um, at tann óhjálpni hevði fingið fast búpláss á heiminum. Hóast hesa fráboðan steðgaði Almannastovan ikki ansingarsamsýningini, ið varð goldin út hvønn mánað í 2 ár og 8 mánaðir. Tá ið Almannastovan varnaðist mistakið, varð samsýningin steðgað, og ansarin varð kravdur eftir um 240 t.kr.

Sambært almannastjóranum hevur málsviðgerin ábyrgdina av, at ein samsýning verður steðgað, tá ið tílíkar fráboðanir koma. Vit halda, at Almannastovan, t.d. í samstarvi við Heimarøktina, kundi regluliga kannað, um fólkini framvegis búgva heima.

Í september 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at mannagongdirnar á Almannastovuni ikki altíð verða fylgdar. Almannastjórin hevur álagt veitingardeildini á Almannastovuni at fylgja mannagongdunum.

8.6 Forsorgarútreiðslur

Í seinastu frágreiðing í februar 2003 vístu vit á, at sambært frágreiðing okkara í februar 2002, var tørvur á at bøta um viðurskiftini á fleiri økjum. Niðanfyri verður kunnað um, hvat eftirsíðan er hent.

Kirkjuskattur

Vit umrøddu, at framvegis verður kirkjuskattur ikki tikin við í útrokningina, tá ið nettodagpeninga- og nettoarbeiðsloysishámarkið verður roknað út, og verður heldur ikki tikin við í útrokningina av nettoendurgjaldi fyri mista arbeiðsinntøku.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann fór at taka stig til at broyta vegleiðingina, ið ásetir útrokningarháttin, 1. januar 2003, soleiðis at kirkjuskattur fer at verða tikin við í útrokningina.

Í mars 2004 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at einki er hent í málinum.

Treytir fyri hjálp sambært § 10

Vit umrøddu, at vit hildu tað vera ivasamt, um Almannastovan hevur heimild til at treyta sær, at fólk skulu prógva, at tey søkja arbeiði. Í januar 2002 grundgóvu vit neyvari fyri okkara sjónarmiði og bóðu landsstýrismannin um hansara sjónarmið.

Í oktober 2002 svaraði landsstýrismaðurin, at hann helt neyðugu heimildina vera í § 10 í forsorgarlógini.

Í januar 2004 bóðu vit aftur landsstýrismannin um at grundgeva fyri sínum sjónarmiði. Vit hava einki svar fingið.

Forsorgarveitingar sambært § 17

Vit umrøddu ivasomu heimildina í § 17 at veita endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku. Longu í 1993 gjørdu vit vart við okkara sjónarmið, at endurgjald fyri inntøkumiss var ikki í tráð við lógina.

Í frágreiðingini vístu vit eisini á, at inntøkugrundarlagið at rokna út mista arbeiðsinntøku tyktist tilvildarligt, og víst varð á fleiri dømi.

2. mai 2003 samtykti Løgtingið at broyta forsorgarlógina, so stuðul kann verða veittur sum endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku. Í lógini verður heimilað landsstýrismanninum í kunngerð at áseta neyvari reglur um útreiðslur til ávísar viðgerðir og um endurgjald fyri inntøkumiss.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, nær hesar reglur fóru at verða ásettar. Vit hava einki svar fingið.

Í frágreiðingini vístu vit eisini á nógv ógreið viðurskifti, m.a. vantandi heimild til at veita eina fasta upphædd til eykaútreiðslur uttan skjalprógv, og vantandi heimild at áseta minstamark fyri stuðul. Landsstýrismaðurin ætlaði at kanna viðurskiftini neyvari í 2002.

Í oktober 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at enn var eingin endalig niðurstøða gjørd í hesum máli.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, um Almannamálaráðið nú er komið til eina endaliga niðurstøðu. Vit hava einki svar fingið.

Forsorgarveitingar sambært § 18 – endurbúgving

Vantandi reglur fyri endurbúgving

Vit vístu enn einaferð á, at hóast meira enn 10 ár eru liðin, síðani vit fyrstu ferð heittu á Landsstýrið um at áseta reglur sambært § 18, stk. 6, í forsorgarlógini, eru tær ikki enn gjørdar.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri 1999 (Lm. nr. 62/2000), sum varð samtykt 24. apríl 2001, átalaði Løgtingið, at hesin trupulleiki ikki var loystur, hóast hann hevði verið umrøddur í frágreiðingum í áravís.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri 2000 (Lm. nr. 85/2001), sum varð samtykt 12. mars 2002, átalaði Løgtingið aftur, at neyvari reglur framvegis ikki vóru gjørdar fyri veitingum eftir § 18 í forsorgarlógini.

Í februar 2002 vísti landsstýrismaðurin á, at *"orka er ikki til staðar í løtuni til at gera nýggja forsorgarlóg, og tí er ætlanin at gera ávísar broytingar ella vantandi kunngerðir á økinum ístaðin. Kunnast skal eisini um, at ein leiðbeining um vard størv er sett í gildi."*

Í oktober 2002 greiddi landsstýrismaðurin frá, at eitt uppskot til vegleiðandi reglur um endurbúgving sambært § 18 í forsorgarlógini fór at verða sent til hoyringar seinast í árinum.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat eftirsíðan var hent í málinum, og nær neyvari reglur fyri endurbúgving fóru at verða ásettar. Vit hava einki svar fingið.

ALV-skúlin

Hóast tað fyri nógvum árum síðani varð staðfest, at eingin lógarheimild var í almannalóggávuni at rinda fyri undirvísing á ALV-skúlanum, tí skúlin mátti haldast at hoyra undir undirvísingarverkið, varð framhaldandi rindað fyri undirvísing á ALV-skúlanum vísandi til § 18 í forsorgarlógini. Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2003 er ALV-skúlin settur á serskilda høvuðskontu við játtanarslagnum rakstrarjáttan.

Í august 2001 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannamálaráðið var í ferð við at manna ein arbeiðsbólk við umboðum úr Mentamálaráðnum, Almannamálaráðnum, Almannastovuni og ALV-stýrinum. Hesin arbeiðsbólkur skuldi, helst í 2001, koma við einum tilmæli um framtíðina hjá ALV-skúlanum. Álitið varð latið landsstýrismanninum 20. mars 2002.

Í oktober 2002 greiddi landsstýrismaðurin frá, at samráðingar vóru tiknar upp við Mentamálaráðið um framtíð skúlans.

Í januar 2004 bóðu vit landsstýrismannin um at kunna okkum um úrslitið av samráðingunum við Mentamálaráðið. Vit hava einki svar fingið.

Kontering av forsorgarveitingum

Vit greiddu frá, at vit til fánýtis øll nítiárini hava víst á, at konteringarnar eru alt ov tilvildarligar, helst tí at eingin konteringarleiðbeining finst. Hóast fleiri ætlanir er einki hent.

Í oktober 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann tíverri má staðfesta, at eingin konteringarleiðbeining var gjørd á forsorgarøkinum; men arbeiðið fór at verða raðfest høgt, so vegleiðingin væntandi fór at verða liðug innanfyri hálvt ár.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat eftirsíðan var hent í málinum. Vit hava einki svar fingið.

8.7 Barnaforsorgarútreiðslur (GL 2002/2 07 3-3)

Í seinastu frágreiðing í februar 2003 vístu vit á, at sambært frágreiðing okkara í februar 2002 var tørvur á at bøta um viðurskiftini á fleiri økjum. Niðanfyri verður kunnað um, hvat síðani er hent.

Útreiðslur hildnar av kommunum

Barnaforsorgarlógin ásetir, at í kommunum við fleiri enn 2.000 íbúgvum tekur býráðið, ella nevnd sett av býráðnum, vegna Landsstýrið avgerð um fyribyrgjandi tiltøk eftir § 22, stk. 2 og 3. Sambært § 43 í barnaforsorgarlógini verða hesar útreiðslur goldnar av landskassanum. Í 2000 var endurgjaldið til kommunur um 25 mió.kr., svarandi til umleið 80% av barnaforsorgarútreiðslunum.

Vit vístu á, at eftir okkara tykki var kontuskipanin á Almannastovuni til barnaforsorgarútreiðslur ikki nóg góð. Tórshavnar og Klaksvíkar kommunur hava onga konteringarleiðbeining, og tí er vandi fyri, at konteringin ikki verður einsháttað. Í lógini stendur einki um, hvørt kommunurnar skulu hava endurgjald, tilskot ella acontogjøld. Eisini vístu vit á, at roknskapirnir og grannskoðanin hjá Tórshavnar og Klaksvíkar kommunum vóru ikki einsháttað, konteringarnar samsvaraðu ikki við kontuskipanina á Almannastovuni, og ongar reglur vóru fyri umsiting, journalviðurskifti, roknskap ella grannskoðan o.a.

Landsstýrismaðurin í almannamálum hevur mótvegis Løgtinginum ábyrgdina av, at útreiðslurnar sambært barnaforsorgarlógini eru rættar, eisini tær, sum kommunurnar umsita, og at umsitingin fer fram á lógligan hátt. Almannastjórin hevur ábyrgd mótvegis landsstýrismanninum av rættleikanum av útreiðslunum. Einki stendur í barnaforsorgarlógini um, at Almannastovan skal hava eftirlit við umsitingini hjá kommununum.

Í oktober 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almannamálaráðið hevði gjørt uppskot til uppgerð við støði í uppgerðini, sum Tórshavnar kommuna nýtir. Ætlanin er, at kommunurnar hvørt ár skulu senda Almannastovuni uppgerðina, soleiðis at Almannastovan fær møguleika fyri at gera hagtøl og virksemisyvirlit. Sambært landsstýrismanninum skuldi tað loyst ein part av trupulleikanum, so landsstýrismaðurin kann fylgja við, um kommunurnar umsita barnaforsorgarútreiðslur á lógligan hátt.

Landsstýrismaðurin kunnaði eisini um, at hann arbeiðir við at tilevna eina nýggja barnaverndarlóg. Sambært landsstýrismanninum er tó ringt at siga, nær lógaruppskotið verður liðugt viðgjørt, tí politisk semja er ikki um, hvørt økið skal verða landsuppgáva ella kommunaluppgáva burturav.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat var hent í málinum. Vit hava einki svar fingið.

Tiltøk sambært § 22, stk. 2 og 3

Vit vístu á, at Almannastovan hevur ongar reglur, ið lýsa, hvørji tiltøk talan kann verða um. Sambært Almannastovuni var ætlanin at gera greiðar vegleiðingar til barnaverndirnar, eisini viðvíkjandi tiltøkum sambært § 22. Vegleiðingarnar skuldu verða lidnar medio 2002.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannastovan hevði ikki havt orku at gera vegleiðingarnar.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat var hent í málinum. Vit hava einki svar fingið.

Tørvsmeting sambært § 22, stk. 2 og 3

Í sambandi við grannskoðanina staðfestu vit, at eingin fíggjarlig tørvsmeting varð gjørd, áðrenn tiltøk vórðu sett í verk eftir § 22, stk. 2 og 3, og at eingi skjalprógv vóru fyri fíggjar- og ognarviðurskiftum. Almannastovan ásannaði í januar 2002, at henda siðvenja var beinleiðis í andsøgn til ásetingina í § 22. Almannastovan fór at gera innanhýsis reglur, og eftir ætlan skuldu reglurnar verða lidnar í mars 2002.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannastovan í næstum fór at gera leiðbeinandi reglur.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat var hent í málinum. Vit hava einki svar fingið.

Spælistovur

Tórshavnar og Klaksvíkar kommunur hava sokallaðar spælistovur/stuðulsstovur. Í 1991 umrøddu vit fyrstu ferð stovnslíknandi tiltøk eftir § 22. Eftir drúgt brævaskifti við Almannastovuna/Landsstýrið og "Socialministeriet" var niðurstøðan, at § 22 ikki heimilar stovnsrakstri. Almannastovan segði seg í januar 2002 vera samda við okkum í, at tað er sera ivasamt, um heimild er fyri hesum útreiðslum eftir § 22. Almannastovan fór at taka spurningin upp við Tórshavnar og Klaksvíkar kommunur.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannastovan hevði havt fund við Tórshavnar og Klaksvíkar kommunur fyri at staðfesta, hvørjar útreiðslur kunnu verða rindaðar sambært barnaforsorgarlógini. Arbeiðið var ikki liðugt.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat var hent í málinum. Vit hava einki svar fingið.

Útgjald og útrokning av pleygulønum o.a.

Í frágreiðing í februar 2002 vístu vit á nógvar villur, í sambandi við at Almannastovan hevur roknað og goldið út pleygulønir o.a. Í juni 2002 spurdu vit landsstýrismannin, hvat var hent í málinum, og um viðurskiftini vóru komin í rættlag.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at *"Almannastovan er farin í holt við at gera eina leiðbeining, sum eisini viðger útrokning og útgjald av samsýning til fosturforeldur."* Eftir svarinum at døma var óvist, um Almannastovan hevði rættað villurnar.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin um gongdina í málinum. Vit hava einki svar fingið.

Eftirlitsspor og málsviðgerð

Vit vístu á, at eftir okkara tykki luku skrásetingarnar av samsýningum o.a. ikki ásetingarnar í § 11 í roknskaparkunngerðini um eftirlitssporið. Í januar 2002 segði Almannastovan seg vera samda við okkum og segði, at øll barnaforsorgarmál fóru at verða skrásett umaftur í journalskipanini.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannastovan var í ferð við at umskráseta málini.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvussu langt arbeiðið við at umskráseta málini var komið. Vit hava einki svar fingið.

Útreiðslur samsvarandi tørvi

Vit vístu á, at í einum máli hevði Almannastovan í apríl 2000 gjørt av at rinda eftirstøðu fyri ravmagn, olju og sjúkrakassa. Almannastovan hevði roknað veitingina út samsvarandi ásetingunum í § 9 í forsorgarlógini, og hevði veitt eina ávísa upphædd í 4 mánaðir. Líkt var til, at Almannastovan hevði blandað forsorgar- og barnaforsorgarlógina saman. Eftir okkara tykki heimilar hvørki § 22 ella onnur grein í barnaforsorgarlógini fíggjarliga hjálp eftir tørvi.

Í desember 2001 bóðu vit landsstýrismannin um eina frágreiðing. Vit fingu einki svar.

Í juni 2002 bóðu vit aftur landsstýrismannin um eina frágreiðing. Vit fingu einki svar.

Í januar 2004 bóðu vit enn einaferð landsstýrismannin um eina frágreiðing. Vit hava einki svar fingið.

Virksemi/hagtøl

Í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg er einki virksemisyvirlit í viðmerkingunum til játtanina til barnaforsorgarútreiðslur. Eftir øllum at døma er eingin skipað skráseting av hagtølum fyri virksemið. Vit vístu á dømi um hagtøl í hinum norðurlondunum. Sambært almannastjóranum skuldi Almannastovan í 2002 fara undir at útvega og savna inn dátur, soleiðis at neyðug hagtøl kunnu verða gjørd.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at í sambandi við umskrásetingina av málunum, verða leitiorð sett inn í skipanina, so gjørligt verður at gera hagtøl.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, um hetta arbeiði var liðugt. Vit hava einki svar fingið.

8.8 Samdøgursstovnurin Rókin (GL 2000/2 07 3-5)

Vit hava í mars 2003 grannskoðað roknskaparviðurskiftini á samdøgursstovninum "Rókini".

Lógargrundarlag

Stovnurin er settur á stovn sambært § 32, stk. 1, í barnaforsorgarlógini. Sambært § 32, stk. 2, *"ásetir landsstýrismaðurin nærri reglur um virksemið á slíkum stovnum v.m."* Hesar reglur eru ásettar í §§ 13-17 í K. nr. 62 frá 1. apríl 1993 "um dagstovnar, dagrøkt og samdøgursstovnar fyri børn og ung."

Sambært kunngerðini er Almannastovan eftirlitsmyndugleiki. Í sambandi við bygnaðarbroytingarnar í almannaverkinum tók Almannamálaráðið 1. juli 1998 yvir eftirlitið.

Kunngerðin er ikki broytt, og hon er sostatt at kalla meira villleiðandi enn vegleiðandi.

Í september 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannamálaráðið í rúma tíð hevði arbeitt við at gera eina nýggja barnaverndarlóg, sum eftir ætlanin skuldi fáa gildi 1. januar 2004. Í tí sambandinum skulu neyvari reglur verða ásettar í kunngerð, millum annað reglur um virksemið hjá samdøgursstovnum. Almannamálaráðið helt, at kunngerðir við heimild í galdandi barnaforsorgarlóg ikki skuldu broytast, fyrr enn støða var tikin til nýggja barnaverndarlóg.

Landsstýrismaðurin legði afturat, at verður uppskotið til nýggja barnaverndarlóg ikki samtykt, verður neyðugt at K. nr. 62/1993 verður broytt og dagført.

Virksemi

Stovnurin virkar sambært viðtøkum frá 27. januar 1999. Sambært § 1 er endamál stovnsins *"at hava umsorgan fyri, menna og menta børn og ung – í tryggum viðurskiftum á uppalingarligan fullgóðan hátt – í aldrinum 7 til 18 ár."*

Sambært uppskoti til løgtingsfíggjarlóg fyri 2003 var játtanin upprunaliga 3.808 t.kr. Sambært broytingaruppskoti frá meirilutanum í Fíggjarnevndini varð játtanin hækkað við 1.200 t.kr., *"tí nýtt tilboð til børn í aldrinum 14-18 ár verður sett á stovn á samdøgursstovninum Rókini"*.

Landsstýrismaðurin kunnaði í juni 2003 um, at játtanin skuldi verða nýtt til børn og ung, sum vóru eldri enn tann aldursbólkur, sum vanliga er á Rókini.

Lummapeningur

Sambært leiðaranum rindar stovnurin børnunum lummapening. Vit hava fingið avrit av teimum satsum, goldið verður út eftir. Talan er helst um danskar satsir frá mitt í 90-árunum. Eingin heimild er í barnaforsorgarlógini at áseta gjald ella at rinda børnum á samdøgursstovnum lummapening.

Í mars 2003 spurdu vit landsstýrismannin, hvørjar ætlanirnar vóru á hesum øki.

Í juni 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ætlanin var at áseta neyvari reglur um lummapening í kunngerð, tá ið lógaruppskotið um barnavernd væntandi fór at koma í gildi 1. januar 2004.

Vit hava gjørt vart við, at vit hava ilt við at skilja hetta svar, sum má haldast at vera uttanumtos í mun til spurningin um at rinda lummapening uttan lógarheimild.

8.9 Dagpeningaútreiðslur (GL 2000/2 07 3-6)

Í 2003 hava vit grannskoðað umsitingina av sjúkradagpeningi og kunnað okkum neyvari um, í hvønn mun viðurskiftini eru komin í rættlag, sum vórðu umrødd í frágreiðingini latin løgtingsgrannskoðarunum í februar 2002.

8.9.1 Vantandi kunngerðir og leiðbeiningar frá Almannamálaráðnum

Hóast tað í sjúkradagpeningalógini Ll. nr. 74/2001 " um dagpening vegna sjúku v.m." er álagt landsstýrismanninum at áseta reglur sambært § 2, stk. 2, § 15, stk. 2, og § 24, stk. 2, eru ongar reglur ásettar.

Í januar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almanna- og Heilsumálaráðið var í ferð við at broyta lógina, og hesum sambandi fóru tey at gera neyvari reglur og kunngerðir. Eftir ætlan skuldi arbeiðið verða liðugt á vári 2002.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, *"at væntandi verða flestu kunngerðir og vegleiðandi reglur til dagpeningalógina lidnar í 2002."*

Í juni 2003 kunnaði táverandi leiðarin á veitingardeildini um, at ongar kunngerðir ella vegleiðingar vóru komnar frá landsstýrismanninum, og heldur ikki hevði Almannastovan fingið nakað uppskot til kunngerðir ella vegleiðingar til viðmerkingar. Vit hava í mars 2004 spurt landsstýrismannin, nær lógarkravdu kunngerðirnar fara at verða lidnar.

8.9.2 Journalviðurskifti

Landsgrannskoðanin hevur áður vístá, at innkomin og útfarin postur á dagpeningadeildini verður ikki journaliseraður. Landsstýrismaðurin boðaði í november 2002 frá, at frá 1. januar 2003 fóru øll dagpeningamál at verða journaliserað.

Undir vitjan okkara á veitingardeildini í juni 2003 varð m.a. kunnað um, at innkomin og útfarin postur viðvíkjandi sjúkradagpeningi ikki enn varð journaliseraður, men at Almannastovan hevði fyrireikað eina arbeiðsgongd.

Fulltrúin í dagpeningamálum visti í oktober 2003 einki um, at ein tílík arbeiðsgongd varð fyrireikað. Vit hava í mars 2004 spurt landsstýrismannin, hvørjar ætlanir eru viðvíkjandi journalviðurskiftunum.

8.9.3 Játtanarskriv

Í játtanarskrivinum til umsøkjaran verður ikki víst til lógarheimild, ella hvussu komið er fram til dagpeningaupphæddina, og kunnað verður ikki um kærumøguleika. Eftir okkara tykki er tað ikki í samsvari við §§ 23-24 í fyrisitingarlógini.

Í november 2003 kunnaði leiðarin á veitingardeildini um, at hann var samdur og fór at broyta viðurskiftini.

8.9.4 Uppritabløð og skjalprógv fyri útrokningum

Vit hava víst á, at eftir okkara tykki eru upplýsingarnar í uppritabløðunum ikki nøktandi. Uppritabløðini geva ikki innlit í, hvussu málsviðgerarnir hava roknað dagpeningaupphæddina, og váttað verður ikki altíð í uppritabløðunum, um inntøkuviðurskiftini eru kannað. Vit hava mælt til, at útrokningarnar verða skjalprógvaðar, so eitt eftirlitsspor finst í málinum, sum eisini kann vera við til at tryggja, at allar umsóknir verða viðgjørdar eins.

Í juni 2003 kunnaði táverandi leiðarin á veitingardeildini um, at tað var óvist, um útrokningin av dagpeningaupphæddini verður skjalprógvað í uppritabløðunum. Undir grannskoðanin hava vit staðfest, at útrokningarnar vóru ikki nøktandi skjalprógvaðar í nøkrum av teimum 12 málunum, sum vit tilvildarliga valdu út.

Í november 2003 kunnaði leiðarin á veitingardeildini um, at tey frá januar 2004 ætla at nýta eitt rokniark, ið seinni fer at verða knýtt til journalskipanina, og sum fer at verða partur av uppritabløðunum.

8.9.5 Inntøkugrundarlagið

Í 1999 vístu vit á, at Almannastovan, áðrenn miðalinntøkan verður roknað út, dregur frídagar og halgidagar, sum liggja gerandisdagar, frá teimum 5 vikunum, sum inntøkugrundarlagið skal verða roknað út eftir. Eru t.d. jól, nýggjár ella páskir í 5-viku tíðarskeiðinum, verða frídagarnir drignir frá, áðrenn miðalinntøkan verður roknað út. Sama ger seg galdandi við verkfalsdøgum. Vit hildu hetta ikki vera rættan útrokningarhátt, og vístu á, at dagpeningaveitingarnar í hesum førum verða ov høgar.

Við skrivi 1. november 2002 gav landsstýrismaðurin Almannastovuni boð um at broyta útrokningarháttin. Vit hava við stakroyndum staðfest, at útrokningin er farin fram samsvarandi boðunum.

8.9.6 Útrokning av dagpeningi

Í 1999 vístu vit á, at Almannastovan rindar fyri halgi- og frídagar í útgjaldingartíðarskeiðinum, samstundis sum frídagarnir verða drignir frá inntøkutíðarskeiðinum, áðrenn miðalinntøkan verður roknað út. Soleiðis verða dagpeningaveitingarnar ov høgar.

Við skrivi 1. november 2002 gav landsstýrismaðurin Almannastovuni boð um ikki at rinda dagpening fyri halgidagar, sum liggja gerandisdagar. Vit hava við stakroyndum staðfest, at útrokning er farin fram samsvarandi boðunum.

8.9.7 Inntøkugrundarlagið og aðrar inntøkur í dagpeningatíðarskeiðinum

Sambært § 8 í dagpeningalógini verður dagpeningaveitingin vanliga ásett út frá miðalinntøkuni seinastu 5 vikurnar fyri sjúkrafráveruna. Í ongum av teimum 12 tilvildarliga valdu málunum, vit grannskoðaðu, eru skjalprógv fyri, at inntøkuviðurskiftini eru kannað.

Sambært § 9, stk. 5, skal Almannastovan mótrokna í dagpeningaupphæddini, fer viðkomandi við øðrum regluligum útgjaldingum, undantikið almennari hjálp, upp um vanligu arbeiðsinntøku sína. Í 7 av teimum 12 tilvildarliga valdu málunum eru eingi skjalprógv fyri, at inntøkuviðurskiftini í útgjaldingartíðarskeiðinum eru kannað.

Vit hava í mars 2004 mælt landsstýrismanninum til at taka støða til, í hvønn mun inntøkukanningar skulu verða gjørdar.

8.9.8 Útrokningargrundarlag sambært § 8, stk. 3

Sambært § 8, stk. 3, *"kann, í einari arbeiðssetan við skiftandi arbeiðstíðum ella inntøkum, eitt longri og meira umboðandi tíðarskeið ásetast sum útrokningargrundarlag, enn tað í stk. 1 nevnda."*

Í november 2003 kunnaði fulltrúin á veitingardeildini um, at tað er umsøkjarin, sum skal gera vart við, um hann vil nýta møguleikan í § 8, stk. 3. Vit vístu á, at sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið, er tað Almannastovan, ið kann nýta eitt annað útrokningargrundarlag.

Almannastjórin hevur í februar 2004 kunnað um, at Almannastovan ikki heldur tað vera nakað krav, at Almannastovan skal nýta eitt longri útrokningargrundarlag enn tær 5 vikurnar, ið er praksis í dag. Almannastjórin heldur tað vera upp til umsøkjaran at gera vart við, um hann vil nýta eitt annað útrokningargrundarlag enn tær 5 vikurnar.

Vit hava vístá, at Almannastovan umsitur lógina, og tí er tað Almannastovan, sum hevur ábyrgdina av, at eitt longri og meira umboðandi tíðarskeið verður nýtt sum útrokningargrundarlag. Vit hava í mars 2004 biðið landsstýrismannin um hansara sjónarmið.

8.9.9 Dagpeningahámark

Sambært § 9, stk. 2, er dagpeningaveitingin í mesta lagi 80% av lønini, sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, íroknað viðbøtur.

Nýtt dagpeningahámark er roknað eftir sáttmálanum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Arbeiðarafeløgini 1. mai 2003. Vit hava við stakroyndum staðfest, at nýggja dagpeningaupphæddin er rætt roknað.

8.9.10 Innkrevjing frá arbeiðsgevarum

Við Ll. nr. 66 frá 2. mai 2003 varð § 20, stk. 2, í dagpeningalógini broytt og nýtt stk. 3 sett inn:

> *Stk. 2. Arbeiðsgevarin afturrindar landskassanum tær útreiðslur, ið standast av, at Almannastovan rindar 1. og 2. fráverudag sambært hesi lóg, tó undantikið í teimum førum, har eingin arbeiðsgevari er. Almannastovan krevur inn peningin frá arbeiðsgevaranum.*
>
> *Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um afturrindan av útreiðslum, og hvussu peningurin verður kravdur inn, sambært stk. 2.*

Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett hesar reglur. Vit hava í mars 2004 spurt landsstýrismannin, nær reglurnar verða ásettar.

8.9.11 Málsviðgerð í sambandi við sjálvbodna trygging

Sambært § 12, stk. 2, verður dagpeningur í mesta lagi veittur í 40 vikur í einum 12 mánaða skeiði.

Hevur sjálvboðin tryggjaður brúkt dagpeningarættin sambært § 12, stk. 2, skal hann sambært § 13, stk. 2, prógva, at hann hevur verið arbeiðsførur í minst 5 vikur eftir seinastu sjúkramelding, áðrenn hann aftur er vorðin sjúkrameldaður.

"Prógv" sambært § 13, stk. 2, tulkar Almannastovan soleiðis, at tryggjaði skal skriva undir eina váttan um, at hann hevur verið arbeiðsførur í 5 vikur eftir seinastu sjúkramelding. Vit halda ikki hesa mannagongd vera nøktandi, men vit halda, at avgerð átti at verið tikin út frá læknaligum upplýsingum.

Í februar 2002 vísti landsstýrismaðurin á, at í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar skuldu verða gjørdar á vári 2002, fóru viðurskiftini í sambandi við sjálvbodna trygging eisini at verða tikin upp.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at vegna vantandi arbeiðsorku var einki hent í málinum, men viðurskiftini fóru at verða tikin upp í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar eftir ætlan fóru at verða gjørdar lidnar síðst í 2002.

Landsgrannskoðanini kunnugt, eru kunngerðir og leiðbeiningar ikki lidnar. Vit hava í mars 2004 spurt landsstýrismannin, nær kunngerðir og leiðbeiningar fara at verða lidnar.

8.9.12 Gjald til sjálvbodnu tryggingina

Sambært § 21 *"verða gjøld til sjálvbodnu tryggingina eftir nærri reglum ásett av landsstýrismanninum fyri eitt ár í senn. Gjøldini verða ásett í mun til støddina av tryggjaða dagpeninginum, soleiðis at tey samlaðu inngjøldini verða mett at rinda 2/5 (40%) av útreiðslunum av sjálvbodnu tryggingunum sambært kap. 7."*

Gjaldið er seinast ásett í K. nr. 159 frá 6. desember 1995 "um gjald til sjálvbodnu dagpeningatryggingina" við heimild í "Lovbekendtgørelse nr. 102 af 2. marts 1988 om lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel". Lógarkunngerðin er farin úr gildi 1. juni 2001 sambært § 30, stk. 2, í Ll. nr. 74/2001.

Sostatt hevur gjaldið í 8 ár ikki verið javnað samsvarandi lógini. Eisini er gjaldið kravt inn í nærum 3 ár uttan neyðuga heimild.

Í februar 2002 vísti landsstýrismaðurin á, at í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar skuldu verða gjørdar á vári 2002, fóru eisini viðurskiftini viðvíkjandi sjálvbodnu tryggingini at verða tikin upp.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at vegna vantandi arbeiðsorku var einki hent í málinum, men viðurskiftini fóru at verða tikin upp í sambandi við, at kunngerðir og leiðbeiningar eftir ætlan fóru at verða gjørdar lidnar síðst í 2002.

Landsgrannskoðanini kunnugt, eru kunngerðir og leiðbeiningar ikki lidnar. Vit hava í mars 2004 spurt landsstýrismannin, nær lógarkravda kunngerðin fer at verða liðug.

8.9.13 Upptøkutreytir og strikan úr skipanini

Sambært § 15, stk. 2, í sjúkradagpeningalógini er álagt landsstýrismanninum at áseta neyvari reglur fyri sjálvbodnu tryggingina.

Hóast vit fleiri ferðir í skrivum og í grannskoðanarfrágreiðingum hava gjørt vart við, at landsstýrismaðurin sum skjótast átti at ásett neyvari reglur um treytir/rættindi, bæði í sambandi við upptøku í og strikan úr skipanini, eru ongar reglur gjørdar.

Í februar 2002 vísti landsstýrismaðurin á, at hesi viðurskifti fóru at verða tikin upp, í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar skuldu verða gjørdar á vári 2002.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at vegna vantandi arbeiðsorku var einki hent í málinum, men viðurskiftini fóru at verða tikin upp í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar eftir ætlan fóru at verða gjørdar lidnar síðst í 2002.

Landsgrannskoðanini kunnugt, eru kunngerðir og leiðbeiningar ikki lidnar. Vit hava í mars 2004 spurt landsstýrismannin, nær lógarkravda kunngerðin fer at verða liðug.

8.9.14 EDV-skipanin

Almannastovan nýtir eina gamla EDV-skipan, ið er lagað til málsviðgerðina. Funktiónsskilnaður vantar í skipanini. Leiðarin tekur sær av at áseta dagpeningahámark o.a. í skipanini. Málsviðgerin skrásetir sjálvur stamdátur, so sum p-tal, kontunummar o.a., og sami málsviðgeri tøppar inn útgjaldingartíðarskeið og inntøkugrundarlag. Eingin brúkaravegleiðing tryggjar, at brúkararnir nýta skipanina rætt og eins. Landsstýrismaðurin boðaði í februar 2002 frá, at arbeitt verður við at rinda veitingarnar um VFS-skipanina á Almannastovuni.

Landsstýrismaðurin kunnaði í november 2002 um, at alt tað fyrireikandi EDV-arbeiðið var gjørt. Arbeiðið var tó fyribils steðgað, tí *"kannað verður í løtuni, um dagpeningaøkið kann verða lagt inn í FSL-skipanina á Føroya Gjaldstovu."*

Uttan at aðrir møguleikar vórðu kannaðir, varð gjørt av á fundi millum almannastjóran og Almannamálaráðið 7. januar 2003 at byggja VFS-skipanina út, so hon eisini fevndi um nýggja dagpeningaskipan. Sambært almannastjóranum varð avgerðin grundað á, at veitarin, sum eisini er veitari til lønarskipanina hjá Gjaldstovuni, helt tað vera skilagott at menna skipanina í VFS.

Í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2004 hevði Almannastovan biðið Almannamálaráðið seta 10 mió.kr. av til EDV yvir 3 ár, m.a. fyri at dagpeningur kann verða lagdur yvir í VFS. Í juni 2003 kunnaði almannastjórin um, at fær Almannastovan í 2004 játtan til EDV, fer hon at ganga gjøllari ígjøgnum uppskotið til kravfesting av nýggju dagpeningaskipanini, ið veitarin hevur gjørt. Sambært viðmerkingunum til uppskotið til løgtingsfíggjarlóg 2004, ið datt burtur, tá val varð útskrivað 5. desember 2003, vóru 2 mió.kr. ætlaðar til eina nýggja útgjaldingarskipan til dagpening. Í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg 2004, sum varð lagt fram 25. mars 2004, er eingin upphædd sett av til EDV.

Vit hava í mars 2004 spurt landsstýrismannin, hvørjar ætlanir eru viðvíkjandi EDV-skipanini.

8.9.15 Innaneftirlit og innanhýsis reglur

Innaneftirlit

Vit hava í oktober 2003 kunnað okkum neyvari um, hvussu mannagongdirnar eru viðvíkjandi útgjaldi, t.d. hvørjar útskriftir eru, hvat verður kannað áðrenn og aftaná at goldið verður út, hvør ger arbeiðið, og hvussu tað verður skjalprógvað. Í einari frágreiðing til landsstýrismannin hava vit greitt neyvari frá hesum mannagongdum.

Um 1 mió.kr. verða goldnar út um vikuna. Einasta eftirlitið við teimum upplýsingum, ið verða skrásettir í dagpeningaskipanini, er, at fulltrúin á Almannastovuni hvørja viku kannar, um upphæddin til at gjalda út er um 1 mió.kr.

Vit hava staðfest, at ongar útskriftir finnast til at kanna nýstovnað mál og broytingar í bankakontunumrum. Heldur ikki verða dagslistar skrivaðir út. Tískil er einki eftirlit.

Eftir okkara tykki, er tað als ikki nøktandi, at einki innanhýsis eftirlit er við dagpeningaútgjaldingum.

Vit hava áður í grannskoðanarfrágreiðingum mælt til eina meira skipaða nýtslu av dagslistunum, so tað t.d. sæst, hvør hevur kannað hvat og nær, at øll vita, hvussu listarnir skulu verða nýttir, og at summir listar verða gjørdir til ávís eftirlit. Nøkur fyribrigdi áttu altíð at verið kannað, t.d. broytt bankakontunummur og nýggj mál. Eisini áttu við stakroyndum mál at verið vald út hjá málsviðgerunum fyri at tryggja eina einsháttaða málsviðgerð.

Almannastjórin hevur í februar 2004 kunnað um, at arbeiðið við innanhýsis eftirliti á dagpeningaøkinum í løtuni verður skipað á veitingardeildini.

Innanhýsis reglur

Í januar 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, *"at í sambandi við nýggju lógina verður farið undir at gera leiðbeiningar/vegleiðingar fyri dagpeningaøkið. Farið verður undir hetta arbeiði so skjótt, sum lógin er viðtikin, og í hesum sambandi verður spurningurin um eftirlit og innanhýsisreglur eisini tikin við."*

Í skrivi í oktober 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá *"at Almanna- og Heilsumálaráðið hevur sett sum mál, at reglur um innanhýsis eftirlit verða gjørdar áðrenn árslenda."*

Í juni 2002 spurdu vit landsstýrismannin, hvat var hent í málinum, og nær viðurskiftini fóru at koma í rættlag, men vit fingu einki svar.

Vit hava í mars 2004 spurt landsstýrismannin, hvat eftirsíðan er hent í málinum.

8.10 Barnapeningur veittur í forskoti (GL 2000/2 07 2-5)

Í seinastu frágreiðing í februar 2003 vístu vit á, at sambært frágreiðing okkara í februar 2002 var tørvur á at bøta um viðurskiftini á fleiri økjum. Niðanfyri verður kunnað um, hvat eftirsíðan er hent.

Lógargrundarlag

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 71 frá 20. mai 1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl." seinast broytt við Ll. nr. 6 frá 25. januar 2001.

Journalviðurskifti

Vit vístu aftur á vantandi journalisering, og at journaluppritabløð, har greitt verður frá gongdini í málinum, ikki verða nýtt.

Í oktober 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at arbeitt verður við málinum.

Í mars 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at einki er hent í málinum.

Málsgongd og útgjald

Málsviðgerin kannar útrokningina og rættar, er okkurt skeivt, men viðgerðin verður ikki váttað við átekning á útskriftina. Í flestu førum verður útskriftin ikki goymd. Vit vístu á, at mannagongdin krevur nógva arbeiðsorku og kundi verið gjørd einfaldari.

Landsgrannskoðanin hevur áður í grannskoðanarfrágreiðingum mælt til, at tað á dagslistunum sæst, hvør hevur kannað hvat og nær. Í hesum førinum er tað sama fólkið, sum ger alt arbeiðið. Í februar 2002 boðaði Almannastovan frá, at verandi skipan fór at verða løgd niður í 2002, og at Almannastovan í longri tíð hevði arbeitt við at broyta bygnaðin. Í nýggja bygnaðinum verður persónsskilnaður millum skráseting og útgjalding.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at eingin nýggj skipan var gjørd, og at nýggi bygnaðurin eftir ætlan fór at virka fyri 1. januar 2003.

Í mars 2004 boðar landsstýrismaðurin frá, at ætlanin er, at funktiónsskilnaður skal verða eftir 1. mars 2004.

Innheintan av barnapeningi

Eftirstøður

Vit vístu á, at broytingarnar í eftirstøðunum ikki samsvaraðu við munin ímillum afturrindan og forskotsrindan. Í februar 2002 boðaði Almannastovan frá, at hon var farin undir at kanna hetta ósamsvar.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at kanningin var ikki liðug.

Í mars 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at einki er hent í málinum.

Innheintan av krøvum uttanfyri Norðurlond

Vit vístu á, at barnapeningur verður ikki heintaður inn uttanfyri Norðurlond, hóast tað sambært konventiónum kann lata seg gera. Almannastovan vísti í februar 2002 á, at sambært § 7, stk. 3, í "Bekendtgørelse nr. 433 af 17. desember 1965 om inddrivelse af underholdsbidrag i henhold til den af De Forenede Nationer vedtagne konvention af 20. juni 1956", er tað Almannastovan, sum kann biðja um, at krøv verða kravd inn í útlondum. Hinvegin er tað Toll- og Skattstova Føroya, sum skrásetir krøvini. Fundur hevur verið millum partarnar fyri at fáa eina greiða mannagongd fyri, hvussu krøvini kunnu verða kravd inn.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at einki kom burturúr fundinum, og tí er einki broytt.

Í mars 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at einki er hent í málinum, men at *"Almannastovan í løtuni er við at taka støðu til, hvat skal henda í málunum uttan fyri Norðurlond."*

Eftirgeving og fyrning

Vit vístu á, at barnapeningur ongantíð er eftirgivin. Fylgt verður ikki við, um krøv fyrnast. Vit mæltu til at fremja neyðugar tekniskar broytingar, so til bar at skráseta aldur og aðrar upplýsingar, sum skuldu til, fyri at ein effektiv innheintan og mótrokning kundi verða gjørd. Síðani verður neyðugt at gjøgnumganga krøvini og finna fram til, hvørji krøv eru fyrnað. Almannastovan var samd við okkum og boðaði í februar 2002 frá, at fundur hevði verið við Toll- og Skattstovu Føroya, har gjørt varð av at kanna krøvini.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannastovan hevði ikki tikið lut í nakrari kanning hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

Í mars 2004 boðar landsstýrismaðurin frá, at einki er hent í málinum, men at *"Almannastovan í løtuni er við at taka støðu til, hvat skal henda í teimum viðkomandi málunum."*

Frágreiðing um ábøtur

Vit umrøddu eina frágreiðing frá 1996 frá "Kommunedata" um mannagongdirnar á Almannastovuni og á Føroya Gjaldstovu. Har varð mælt til, at útgjalding og innheintan av barnapeningi varð samlað á einum stað, og mælt varð til at samskipa dátumannagongdirnar í EDV-skipanunum, fyri at forða fyri dupultarbeiði.

Toll- og Skattstova Føroya, ið hevur tikið yvir innheintanina, kunnaði í november 2001 um, at eingin roynd sást vera gjørd at samskipa arbeiðið millum innheintanina og Almannastovuna, men at fundur var avtalaður við Almannastovuna um at viðgera spurningarnar.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at einki var hent í málinum.

Í mars 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ongi stig eru tikin til at betra um støðuna. Sambært landsstýrismanninum *"liggur eingin sosial tørvsmeting aftanfyri umsitingina av útgjaldi og innheintan av barnapeningi og stuðli til uppihaldspening. Viðv. avgerð um at strika eftirstøðu, so er hetta eisini ein vanlig uppgáva hjá innkrevjingarmyndugleikanum. Ásetingin av barnagjaldi er burturav eitt danskt málsøki. Tí er spurningurin, um Almannastovan er rætti myndugleikin at umsita eina slíka útgjalds- og innkrevjingarskipan. Hetta varð longu ávíst í einari frágreiðing frá Kommunedata í 1996, sum Føroya Gjaldstova bílegði. Tað einasta, sum síðani er hent, er at innkrevjingin er flutt frá Gjaldstovuni til Toll og Skatt."*

Landsstýrismaðurin boðaði eisini frá, at hann umhugsar at taka málið upp við Fíggjarmálaráðið, um møguliga at broyta lóggávuna "um útgjald og innheintan av barnapeningi" og skipanina viðvíkjandi stuðli til uppihaldspening, við tí fyri eyga at lætta um umsitingina av tí parti av fyrisitingini, sum føroyskir myndugleikar varða av.

Sambært landsstýrismanninum er umsitingin av hesum øki á Almannastovuni ikki nøktandi, og hann vil taka hetta málið upp við Almannastovuna í næstum.

8.11 Stuðul til uppihaldspening (GL 2001/2 07 5-2)

Í seinastu frágreiðing frá februar 2003 vístu vit á, at tørvur var á at bøta um viðurskiftini á fleiri økjum. Niðanfyri verður kunnað um, hvat síðani er hent.

Journalviðurskifti

Í frágreiðingini vístu vit aftur á vantandi journalisering, og at journaluppritabløð, har greitt verður frá gongdini í málunum, ikki verða nýtt.

Í oktober 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at arbeitt verður við málinum.

Í mars 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at síðani juli 2003 er allur innkomin og útfarin postur skrásettar í journalskipanini, og uppritabløð verða nýtt.

Málsgongdin

Vit vístu á, at persónsskilnaður er ikki millum skráseting og útgjald. Í februar 2002 boðaði Almannastovan frá, at í longri tíð hevur verið arbeitt við at broyta bygnaðin. Í nýggja bygnaðinum verður persónsskilnaður millum skráseting og gjalding.

Í oktober 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at nýggi bygnaðurin var ikki enn komin at virka, men at viðurskiftini fóru at vera komin endaliga upp á pláss fyri 1. januar 2003.

Í mars 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at síðani juli 2003 hevur skilnaður verið millum skráseting og útgjald, og fulltrúar eftirhyggja dagslistar.

Tvørrandi samskipan

Vit vístu á tvørrandi samskipan millum tríggjar fyrisitingar, ið umsita forskotsrindan, innheintan av barnapeningi og stuðul til uppihaldspening. Almannastovan kunnaði í februar 2002 um, at hon í 2002 fór at taka spurningin upp við Toll- og Skattstovu Føroya, fyri at fáa arbeiðið meira samskipað.

Í oktober 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at einki var hent í málinum.

Í mars 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann umhugsar at taka málið upp við Fíggjarmálaráðið, um møguliga at broyta lóggávuna "um útgjald og innheintan av barnapeningi" og skipanina viðvíkjandi stuðli til uppihaldspening, við tí fyri eyga at lætta um umsitingina av tí parti av fyrisitingini, sum føroyskir myndugleikar varða av.

8.12 Hjálpartólamiðstøðin (GL 2000/2 07 4-8)

Í 2003 hava vit grannskoðað roknskaparviðurskiftini á Hjálpartólamiðstøðini og kunnað okkum neyvari um, í hvønn mun viðurskifti, ið umrødd vórðu í frágreiðing latin løgtingsgrannskoðarunum í mars 2001, eftirsíðan eru komin í rættlag.

8.12.1 Bygnaður/starvsfólk

Í februar 2001 greiddi almannastjórin frá, at ein prosjektbólkur var settur, ið skuldi gera uppskot til framtíðarbygnaðin á Almannastovuni. Ætlanin var at samskipa og endurskoða virksemið hjá Hjálpartólamiðstøðini, serpedagográðgevarunum og § 18-deildini á Almannastovuni fyri m.a. at fáa skjótari málsviðgerð á Hjálpartólamiðstøðini. Henda ætlan var av ongum, og í desember 2003 kunnaði leiðarin um, at ætlanin var at seta ein arbeiðsbólk í 2004 at endurskoða bygnaðin og virksemið.

Sambært viðmerkingunum til uppskot til løgtingsfíggjarlóg 2004, sum datt burtur, tá val varð útskrivað 5. desember 2003, skal umsitingin av smærri hjálpartólum verða flutt til eina "Økisterapi" við tilknýti til Heimarøktina, og ætlanin var, at økisterapeutar skuldu fáa ein týdningarmiklan leiklut í nýskipanini á hjálpartólaøkinum. Í desember 2003 kunnaði leiðarin um, at ein fundur hevði verið millum almannastjóran og stjóran á Heimarøktini/Serforsorgini. Gjørt varð av at útseta málið, til nýtt landsstýri var skipað.

8.12.2 Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglugerð

Í februar 2001 kunnaði almannastjórin um, at Hjálpartólamiðstøðin var biðin um at gera uppskot til roknskaparreglugerð, og skuldi hon verða liðug medio 2001.

Í desember 2003 kunnaði leiðarin á HTM um, at roknskaparreglugerðin ikki enn var góðkend. Almannastovan var farin undir at endurskoða allar roknskaparreglugerðirnar, og fór væntandi at verða liðug á vári 2004. Sambært leiðaranum eigur eitt ávíst arbeiði at verða gjørt fyri at menna roknskaparreglugerðina hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Bókhald

Síðani januar 2003 hevur Hjálpartólamiðstøðin sjálv bókað í FSL-skipanini á Gjaldstovuni. Vit halda tað vera óheppið fyri innaneftirlitið, at stovnurin hevur atgongd til at bóka og leysgeva gjaldingar uttan at hava eina roknskaparreglugerð, sum er góðkend sambært galdandi reglum.

Roknskapargóðkenning

Stovnsleiðarin skal hvønn mánað góðkenna roknskapin mótvegis aðalráðnum, og honum er álagt at hava eftirlit við, at tær ásettu mannagongdirnar verða hildnar.

Almannastjórin boðaði í februar 2001 frá, at Hjálpartólamiðstøðin var biðin um beinanvegin at fara undir eina skipaða eftirlits- og góðkenningarmannagongd, sum skuldi verða staðfest í roknskaparreglugerðini.

Mannagongdin hevur ikki verið nøktandi, og vit hava mælt til at fáa góðkenningarmannagongdina í eina fasta legu í framtíðini.

Ognaryvirlit

Vit hava mælt til at menna ognaryvirlitið samsvarandi ásetingunum í pkt. 9 í roknskaparrundskrivinum.

Upplýsingar og samskifti

Vit hava mælt til at menna roknskaparreglugerðina samsvarandi ásetingunum í pkt. 7 og 8 í roknskaparrundskrivinum um trygdaravrit av framleiðsludátum og forritum.

8.12.3 Umsiting av útreiðslum

Lógar-/umsitingarútreiðslur

Sakkøn hjálp og flutningsútreiðslur eru bókaðar sum lógarbundnar útreiðslur. Vit halda, at talan er um umsitingarútreiðslur.

Langtíðarleiga

Stovnurin hevur leigað eina kopimaskinu, eftir øllum at døma í stríð við ásetingarnar um langtíðarleigu í játtanarskipanini.

Tryggingarviðurskifti

Vit hava mælt til at gjøgnumganga tryggingarviðurskiftini í samráð við Almannastovuna og Almannamálaráðið fyri at tryggja, at reglurnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum verða hildnar, og í tí sambandinum eisini at taka upp spurningin um biltryggingar.

8.12.4 Fíggjarstøða

Ferðaforskot

Í mars 2003 var saldan á ferðaforskotskontuni kr. 3.819. Talan var um ferðaforskot frá juli – desember 2002. Í desember 2003 var støðan óbroytt. Vit hava mælt til at fáa viðurskiftini í rættlag og fylgja teimum treytum og mannagongdum, sum Føroya Gjaldstova hevur ásett.

8.12.5 EDV-skipanir/KT-trygd

Sambært roknskaparrundskrivinum skal í roknskaparreglugerðini verða greitt frá um journalviðurskifti og um egnar búskaparskipanir.

Goymsluskipanin og journalskipanin eru ikki umrøddar í roknskaparreglugerðini. Eftir okkara tykki hava hesar skipanir stóran týdning sum búskaparskipanir, og áttu helst at verið lýstar sambært krøvunum í pkt 10.1 um egnar EDV-skipanir. Í roknskaparreglugerðini er heldur ikki lýst, hvussu innannetið er skipað. Vit hava mælt til at greiða gjøllari frá í roknskaparreglugerðini um KT-skipanir og um KT-trygd.

Saman við leiðaranum hava vit gingið í gjøgnum nakrar spurningar um EDV-trygd og EDV-rakstur á stovninum. Í flestu førum eru ongar skrivligar mannagongdir ella reglur, og vit hava mælt til at menna KT-trygdina á stovninum samsvarandi alment viðurkendum EDV-trygdarvegleiðingum. Í tí sambandinum hava vit víst á, at Vinnumálaráðið (KT-forum) arbeiðir við at seta í verk ein almennan KT-trygdarpolitikk við støði í ISO 17799, og í K. nr. 28/2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum" eru ásetingar um trygdina.

8.12.6 Fyrisiting av vørugoymslu o.a.

Vit hava mælt til at dagføra og bøta um mannagongdirnar, frá tí at umsókn kemur inn, til hjálpartól verða keypt og síðani útflýggjað.

Hjálpartól, ið eru lænt út fyri 2002, eru ikki skrásett í goymsluskipanini. Sambært leiðaranum er tað vónleyst at skráseta tey, av tí at tey í mongum førum ikki vita, hvar hjálpartólini eru. Vit hava mælt Hjálpartólamiðstøðini til at samstarva við Heimarøktina fyri at fáa skrásett hjálpartól, ið eru lænt út.

8.12.7 Lán/stuðul til at keypa avlamisbilar

Umsiting

Vísandi til § 18, stk. 5, í forsorgarlógini veitir Almannastovan/Hjálpartólamiðstøðin studningslán til avlamisbilar, sum er rentufrítt og skal verða rindað aftur yvir 6 ár. Til vinnubil verður veitt kr. 40.000 í láni, til umlættingarbil kr. 30.000 og til kassabilar kr. 42.500. Restin av keypsprísinum verður latin sum stuðul, ið verður niðurskrivaður yvir 6 ár.

Toll- og Skattstovan, Norðoya øki, skrásetir lánini í einari bókhaldsskipan, og málini verða síðani send til hvørt øki sær, sum tekur sær av innkrevjingini. Í mars 2003 kunnaði Toll- og Skattstovan um, at øll tey "gomlu" lánini nú vóru skrásett.

Inngjaldingar verða bókaðar á høvuðskontu 8.21.7.01. "Vanlig forsorg", undirkontu 06 "Hjálparamboð". Almannastovan fær framvegis ongan lista frá Toll- og Skattstovuni yvir, hvørjar inngjaldingar talan er um, og fær heldur ongan eftirstøðulista. Almannastovan hevur tí ikki nøktandi grundarlag fyri at kunna vátta rættleikan av roknskapinum. Vit hava mælt til at kanna viðurskiftini og áseta eitt greitt ábyrgdar- og heimildarbýti ímillum Almannastovuna og Toll- og Skattstovuna.

Heimildarspurningar

Vit hava fleiri ferðir víst á, at vit halda tað er sera ivasamt, um Hjálpartólamiðstøðin hevur heimild at veita stuðul til hjálpartól við afturgjaldsskyldu.

Við Ll. nr. 177/1997 "um broyting í lóg um almenna forsorg", við gildiskomu 1. januar 1998, varð eftir síðsta pkt. í § 18, stk. 6, *"Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om ydelser efter stk. 1-5"* sett: *"íroknað reglur um egingjald og nær stuðul til hjálpartól kann veitast sum lán."* Í viðmerkingunum til uppskotið um broyting stendur: *"Hetta er eisini ein neyvari orðing, har heimildin til at áseta egingjald, og at stuðul til hjálpartól kann veitast sum lán, beinleiðis verður nevnd."*

Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett reglur fyri egingjaldi, ella nær stuðul kann verða veittur sum lán. Landsstýrismaðurin vísti í september 2002 á, at heimildarspurningurin verður

viðgjørdur, *"nú ætlanir eru um at gera nýggja forsorgarlóg"*. Landsstýrismaðurin harmaðist um støðuna og staðfesti, at reglur sambært § 18, stk. 6, í forsorgarlógini ikki vóru ásettar.

Okkum kunnugt er støðan óbroytt, og framvegis eru ongar reglur ásettar um egingjald/lán, hóast meira enn seks ár eru liðin síðani lógarbroytingina í 1997. Vit hava enn einaferð mælt til at fáa viðurskiftini í rættlag.

8.12.8 Vektgjald (vegskattur)

Umsiting

Vísandi til § 18, stk. 5, í forsorgarlógini veitir Almannastovan/Hjálpartólamiðstøðin studning til vektgjald til avlamisbilar. Á Bileftirlitinum verður Hjálpartólamiðstøðin skrásett sum gjaldari av vektgjaldinum, og fær rokningarnar.

Heimildarspurningar

14. mars 2002 samtykti Løgtingið at strika § 12 í Ll. nr. 38/1982, soleiðis at avlamisbilar nú skulu gjalda vektgjald. Sambært viðmerkingunum til lógarbroytingina verður ikki talan um øktar útreiðslur fyri brúkaran, tí Hjálpartólamiðstøðin fer at rinda vektgjaldið sum stuðul, vísandi til § 18, stk. 5, í forsorgarlógini. Sambært viðmerkingunum er talan um 21 bilar, ið ikki rinda vektgjald.

Í skrivi 29. november 2002 boðar Almannamálaráðið Almannastovuni frá, at *"full heimild er at játta vektgjald í sambandi við játtanina av avlamisbili eftir § 18 í forsorgarlógini."* Eftir okkara tykki finst eingin í slík heimild í § 18 í forsorgarlógini. Vit hava í februar 2004 biðið landsstýrismannin um grundgeving fyri sjónarmiðinum hjá Almannamálaráðnum.

8.12.9 Skrásetingargjald

Sambært § 9 í Ll. nr. 175/1992 "um skrásetingargjald á motorakførum o.ø." við seinni broytingum, var einki skrásetingargjald á avlamisakførum. Í lógini vóru ongar treytir/áseting-ar um at rinda skrásetingargjald av avlamisakførum. Í játtanarskrivum til umsøkjarar setti Fíggjarmálaráðið ávísar treytir, t.d. hámark fyri virðisgrundarlagi og í ávísum førum krav um afturrindan. Fíggjarmálaráðið ásannaði, at eingin heimild var at áseta tílíkar treytir, og 1. februar 2001 samtykti Løgtingið at strika § 9. Síðani er stuðul til avlamisvognar bert veittur vísandi til forsorgarlógina.

8.12.10 Lán til bústaðarbroytingar

Umsiting

Vísandi til § 18, stk. 5, í forsorgarlógini veitir Hjálpartólamiðstøðin/Almannastovan stuðul til at broyta bústað, í teimum førum tá tað verður mett neyðugt, fyri at eldri, brekað, umframt brekað børn kunnu vera verandi í heimunum. Stuðulin verður veittur heilt ella lutvíst við afturgjaldsskyldu.

Í frágreiðing í november 2000 umrøddu vit m.a., at sambært vegleiðandi reglum hjá Almannastovuni er eingin afturgjaldsskylda, um stuðulin er minni enn 30 t.kr. Er stuðulin meira enn 30 t.kr., men minni enn 50 t.kr., verður stuðulin omanfyri 30 t.kr. veittur sum lán við afturgjaldsskyldu, men einki verður tinglýst. Verður samlaði stuðulin meira enn 50 t.kr., verður stuðulin omanfyri 30 t.kr. tinglýstur sum lán í ognini.

Er talan um afturgjaldsskyldu, verður í skuldarbrævinum ásett, at veitingin, sum ikki er rentuberandi, skal gjaldast aftur, tá ið Almannastovan krevur tað, tá ið ognin skiftir eigara, tá ið úttøka verður gjørd í ognini, ella tá ið onnur viðurskifti eru, sum ávirka afturgjaldsskylduna sambært §§ 23 og 24 í forsorgarlógini.

Hjálpartólamiðstøðin ger skuldarbræv klárt til tinglesingar og sendir tað til Almannastovuna, sum letur tað víðari til tinglesingar. Hjálpartólamiðstøðin fær síðani originalin aftur.

Í frágreiðing okkara í mars 2001 til løgtingsgrannskoðararnar kunnaðu vit um, at hesi lán vórðu ikki skrásett á Almannastovuni, hvørki tá ið talan var um tinglýsta skuld ella ikki tinglýsta skuld. Hjálpartólamiðstøðin fekk heldur onga fráboðan, um fólk rindaðu aftur ella ikki. Ongar reglur vóru um, nær og hvussu málini skuldu verða tikin upp til neyvari kanningar, ella um afturgjald í sambandi við andlát ella eigaraskifti. Tað var ógreitt, hvørt tað er Almannastovan ella Hjálpartólamiðstøðin, ið skal taka sær av hesum arbeiði.

Í februar 2001 vísti almannastjórin á, at Almannastovan fór at taka støðu til mannagongdina, tá Almannamálaráðið hevði tikið støðu til heimildarspurningarnar.

Í desember 2003 kunnaði leiðarin um, at støðan var óbroytt. Leiðarin kunnaði eisini um, at á heysti 2000 hevði § 18-nevndin broytt siðvenju, so at upphæddirnar nevndar frammanfyri ikki vórðu nýttar longur. Upphæddirnar verða ásettar út frá einari meting í hvørjum føri sær, og hevur broytta siðvenjan havt við sær, at nær um alt nú verður latið uttan afturgjaldsskyldu.

Í februar 2004 hava vit biðið landsstýrismannin um grundgeving fyri broyttu siðvenjuni, og spurt, hvørjar ætlanir eru við lánunum, ið longu eru tinglýst, og um talan kann verða um at rinda pening aftur.

Heimildarspurningar, bústaðarbroytingar til eldri og brekað

Fyri 1. juli 1992 var eingin heimild í føroysku almannalóggávuni at veita afturgjaldsskyldugar veitingar til bústaðarbroytingar. Heimildin varð fingin til vega við lóg nr. 393 frá 20. mai 1992 "Lov om ændringer af forskellige love for Færøerne om sociale ydelser". Talan var um broyting í forsorgar-, barnaforsorgar-, fólkapensjóns- og avlamispensjónslógini. Við kunngerð frá 24. mars 1993 nr. 43 "um afturgjaldsskyldu viðvíkjandi útreiðslum til egnan bústað" vórðu neyvari reglur settar við heimild í somu lóg.

Tað tykist, sum lógarbroytingin smb. lóg nr. 393/1992 og K. nr. 43/1993 eru einastu heimildir at rinda stuðul við afturgjaldsskyldu til bústaðarbroytingar.

Hesar reglur hava einki við § 18, stk. 5, í forsorgarlógini at gera. Helst hevur ongantíð verið ætlanin, at § 18, stk. 5, skuldi fevna um stuðul til bústaðarbroytingar, eisini vísandi til viðmerkingarnar til "lov nr. 718/1987", tá ið § 18, stk. 5, fekk ta orðing, sum hon nú hevur.

Landsstýrismaðurin vísti í september 2002 á, at *"hetta eru eisini viðurskifti, sum skulu viðgerast í sambandi við nýggju forsorgarlógina".* Annars vísti landsstýrismaðurin á, at Kærunevndin ongantíð er komin til ta niðurstøðu, at heimild ikki er at veita stuðul til bústaðarbroytingar eftir § 18, stk. 5, í forsorgarlógini. Eftir svarinum at døma hevði landsstýrismaðurin ongar ætlanir um at greiða heimildarspurningarnar í verandi lóg. Okkum kunnugt er einki síðani hent í málinum.

Heimildarspurningar, bústaðarbroytingar til pensjónistar

Sambært § 12, stk. 2, í almannapensjónslógini *"kann avgerð takast um, at persónlig viðbót eftir stk. 1 viðvíkjandi útreiðslum til egnan bústað, skal gjaldast aftur. Afturgjaldskravið kann avskrivast, tá tað innan fyri eitt rímiligt áramál aftaná, at kravið er sett fram, verður mett, at eingin fíggjarligur møguleiki er fyri at fremja kravið."*

Landsstýrismaðurin hevur ásett í § 7 í K. nr. 8 frá 11. februar 2000 "um persónliga viðbót", at tá ið persónlig viðbót verður veitt til útreiðslur til egnan bústað, verður hon treytað av, at ein afturgjaldsskipan verður gjørd.

Vit hava víst á, at landsstýrismaðurin ikki við kunngerð kann avmarka lógarásett rættindini hjá pensjónistum uttan við heimild í galdandi lóg. Kunngerðin er heldur ikki í tráð við viðmerkingarnar til lógina.

Landsstýrismaðurin boðaði í september 2002 frá, at hann var vísur í, at heimildin var til staðar. Landsgrannskoðanin var ikki nøgd við svarið, tí landsstýrismaðurin grundgav ikki fyri sínum sjónarmiðum.

Sambært § 7, stk. 3, í K. nr. 8/2000 verða treytirnar fyri afturgjaldi settar í aðrari kunngerð. Hesar treytir eru ikki ásettar.

Heimildarspurningar, bústaðarbroytingar hjá foreldrum at brekaðum børnum

Vísandi til § 18, stk. 5, í forsorgarlógini hevur Almannastovan/Hjálpartólamiðstøðin síðani 1988 veitt rentufrí lán til bústaðarbroytingar hjá foreldrum at brekaðum børnum. Ein treyt er, at lánið verður tinglýst í ognini hjá foreldrunum, og at lánið er avdráttarfrítt til barnið er 15 ár. Tá verður støða tikin til afturgjaldsskipan, um barnið fær pensjón alla aðra inntøku.

Tá ið barnið hevur fylt 15 ár, og hevur fingið avlamispensjón, hevur Almannastovan í fleiri førum hvønn mánað hildið aftur 20% av pensjónini, sum afturgjald av láninum til bústaðarbroytingina hjá foreldrunum. Í frágreiðing okkara til landsstýrismannin í februar 2001 hildu vit tað vera ivasamt, um henda mannagongd var lóglig.

Landsstýrismaðurin boðaði í september 2002 frá, at hann eisini ivaðist í, um mannagongdin var lóglig, og at hann fór at taka spurningin upp við Almannastovuna. Okkum kunnugt er einki hent í málinum.

8.12.11 Alment um heimildarspurningar

Í februar 2001 sendu vit landsstýrismanninum frágreiðing um grannskoðan av Hjálpartólamiðstøðini. Saman við frágreiðingini sendu vit eitt notat, har vit neyvari greinaðu út frammanfyri umrøddu heimildarspurningar.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsrokskapin fyri fíggjarárið 1999 (Lm. nr. 62/2000), sum varð samtykt 24. apríl 2001, mælti Løgtingið landsstýrismanninum til at greiða ivamálini um lánsveitingar og umsiting av lánum.

Í mai 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almanna- og Heilsumálaráðið í samráð við Almannastovuna fór at greiða heimildarspurningin, og fór at arbeiða víðari við at fáa vantandi reglugerðir gjørdar.

Í august 2001 spurdu vit, hvat var hent í málinum, og nær arbeiðið fór at verða liðugt. Landsstýrismaðurin svaraði í september 2001, *"at viljin er til staðar, men Almanna- og Heilsumálaráðið hevur ikki enn fingið fleiri starvsfólk, millum annað til at arbeiða við hesum máli."*

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2000 (Lm. nr. 85/2001), sum varð samtykt 12. mars 2002, vísti Løgtingið á, at fleiri av trupulleikunum á almannaøkinum hava verið umrøddir í frágreiðingum í áravís. Løgtingið átalaði, at landsstýrismaðurin ár um ár vísti á, at trupulleikarnir væntandi fóru at verða loystir um stutta tíð, uttan at talið á óloystum málum tó minkaði.

Landsstýrismaðurin vísti í september 2002 á, at arbeitt varð við nýggjari lóggávu, har heimildarspurningurin fór at verða viðgjørdur. Landsstýrismaðurin harmaðist um støðuna og staðfesti, at reglur sambært § 18, stk. 6, í forsorgarlógini ikki vóru ásettar.

Eftir øllum at døma hevur landsstýrismaðurin ikki enn tikið stig til at greiða heimildarspurningarnar.

8.13 Heimarøktin (GL 2002/2 07 4-12)

Vit hava í 2003 grannskoðað roknskapar- og lønarviðurskiftini í Heimarøktini, og hava í hesum sambandi vitjað á økisskrivstovunum í Runavík og í Miðvági, á Eldrarøktini í Sandoynni, og á Meginskrivstovuni, sum er felags skrivstova hjá leiðsluni á Serforsorgini/Heimarøktini.

Heimarøktin fevnir um heima-/heilsuhjálparar, heimasjúkrarøktarfrøðingar og heilsusystrar. Stjórin á Heimarøktini er eisini stjóri á Serforsorgini. Ein økisleiðari er settur fyri hvørt øki. Hann er leiðari hjá heima-/heilsuhjálparunum og heimasjúkrarøktarfrøðingunum í økinum. Á Sandoynni er ein leiðari á samskipaðu eldrarøktina í oynni. Ein fakligur leiðari er settur fyri heilsusystrarnar.

Í frágreiðing til stjóran á Heimarøktini og landsstýrismannin í mars 2004 hava vit greitt neyvari frá úrslitinum av grannskoðanini, og hava mælt til fleiri ábøtur.

8.13.1 Roknskaparviðurskifti og onnur viðurskifti

Roknskaparreglugerðir o.a.

Vit hava í 2003 kannað, um roknskaparviðurskiftini eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir, og vit hava mælt til fleiri ábøtur:

at gera serskildar roknskaparreglugerðir fyri øll økini og lýsa arbeiðsuppgávurnar betur,

at lýsa mannagongdirnar viðvíkjandi inntøkum betur,

at greiða frá um journalskipanarreglur, trygdaravrit o.t.,

at stemma fíggjarstøðuna betur av og rætta feilir,

at gjøgnumganga tryggingarviðurskiftini,

at halda ásetingarnar um fíggjarliga langtíðarleigu,

at dagføra og menna ognaryvirlitini í serligari EDV-skipan á Gjaldstovuni.

Vørugoymsla

Sambært stjóranum á Heimarøktini var ætlanin í 2000 at gera eina roynd í Eysturoynni og Sandoynni at finna fram til skipan at hava eftirlit við, hvat fer inn og út av goymsluni, og at fáa rætta tilfarið til rætta brúkaran. Tá skipanin var roynd, skuldi hon verða sett í verk í hinum økjunum eisini. Ætlanin varð ongantíð sett í verk.

Í mars 2004 hava vit spurt landsstýrismannin, hvørjar ætlanir eru á hesum øki.

8.13.2 Gjald fyri umlætting

Ymiskt er, hvat pensjónistar gjalda, eru teir til umlætting á ellisheimi ella á eldrasambýli. Sambært K. nr. 127/2003 "um áseting og javning av almannaveitingum" skal pensjónistur, er hann á ellisheimi, gjalda kr. 103,83 um samdøgrið frá 43. degi. Sambært K. nr. 71/1998 "um eldrasambýli" skal hann, er hann á eldrasambýli, gjalda kr. 90,00 um samdøgrið frá 1. degi.

Meirilutin í Trivnaðarnevndini broytti § 9 í uppskotinum til Ll. nr. 108/1999 "um uppihald á stovni o.l.", og javnsetti gjaldið hjá fyritíðar- og fólkapensjónistum við umlætting á øllum almennum stovnum at galda frá 43. degi.

Fer ein pensjónistur, ið rindar fyri heimahjálp, til umlættingar á einum eldrasambýli, rindar hann frá 1. degi 90 kr. um samdøgrið, umframt fult tímatal fyri heimahjálp, t.e. 26 tímar um mánaðin, uttan mun til hvussu nógvar tímar hann frammanundan rindaði fyri heimahjálp. Ein pensjónistur, ið t.d. rindar hægsta tímasats fyri heimahjálp, og er til umlættingar á eldrasambýli í 6 vikur, rindar samanlagt kr. 5.457, sum er:

- kr. 1.677 fyri heimahjálp, og
- kr. 3.780 fyri uppihald.

Fer sami pensjónistur til umlættingar á ellisheimi í 6 vikur rindar hann kr. 0.

Í mars 2004 hava vit spurt landsstýrismannin, hvørjar ætlanir eru um at broyta kunngerðina um eldrasambýli samsvarandi § 9 í Ll. nr. 108/1999.

8.13.3 Gjald fyri heimahjálp

Kunngerðin

Í kunngerðini "um heimahjálp" er ikki ásett, hvørjar inntøkur inntøkugrundarlagið skal fevna um, hvussu gjøldini skulu verða eftirroknað og hvussu gjøldini skulu verða javnað. Í kunngerðini er heldur einki ásett um kærumøguleika.

Vit hava mælt landsstýrismanninum til at umhugsa at endurskoða kunngerðina og møguliga broyta hana, í sambandi við at umsitingin av brúkaragjøldum verður endurskoðað.

Vit hava kannað mannagongdina, og hava mælt til fleiri ábøtur:

at kunna pensjónistin skrivliga um gjaldið/frádráttin fyri heimahjálp, og hvussu tað er roknað út,

at lýsa mannagongdina, tá gjald fyri heimarøkt skal verða ásett,

at endurskoða mannagongdina í øllum økjunum viðvíkjandi tímaskráseting,

at áseta reglur fyri, hvussu Heimarøktin skal eftirkanna og skjalprógva, um pensjónistarnir hava goldið fyri rætt tímatal,

at endurskoða mannagongdirnar í sambandi við eftirliti við, um inntøkugrundarlagið verður broytt, hvussu gjøldini skulu verða eftirroknað, og hvussu tað skal verða skjalprógvað,

at endurskoða allar mannagongdir fyri, hvussu Almannastovan kunnar Meginskrivstovuna, tá inntøkuskrásetingar hjá pensjónistum í VFS-skipanini verða broyttar,

at endurskoða allar mannagongdir fyri samskifti við Almannastovuna, í sambandi við árligar inntøkuinnlesingar í VFS-skipanina, pensjónsásetanir og eftirrokningar eftir almannapensjónslógini,

at kunna pensjónistin skrivliga, verður gjaldið fyri heimahjálp broytt,

at skipa eitt eftirlit við pensjónistum, har ongar inntøkuupplýsingar eru skrásettar í VFS-skipanini, tí teir bert ynskja at fáa grundupphædd.

Atgongd til VFS-skipanina

Síðani 16. februar 2004 hevur málsviðgerin ikki havt atgongd til VFS-skipanina frá hølunum á Meginskrivstovuni. Í mars 2004 hava vit spurt landsstýrismannin, hvørjar ætlanir eru á hesum øki.

Aðrar viðmerkingar

Síðani 1994 hava vit í grannskoðanarfrágreiðingum víst á, at mannagongdin í sambandi við brúkaragjøld er óneyðuga tung og arbeiðskrevjandi. Hon hevur við sær dupultinntøppingar og nógvar vandar fyri feilum av manuellum samanteljingum, útrokningum, yvirflytingum av tølum o.ø.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri 1995-1998 (Lm. nr. 53/1999), sum varð samtykt 3. mai 2000, átalaði Løgtingið, at einki var gjørt fyri at bøta um hesi viðurskifti.

Í februar 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at viðurskiftini máttu koma uppá pláss so skjótt sum gjørligt. Kannast mátti, um umsitingin av brúkaragjøldum kundi verða gjørd í nýggju forskipanini til lønarskipanina, áðrenn endalig avgerð kundi verða tikin, hvat skuldi verða gjørt við trupulleikan.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeitt verður við at fáa forskipanina setta í verk. Landsstýrismaðurin helt tað ikki vera ráðiligt at fara undir spurningin um brúkaragjald, fyrr enn forskipanin varð liðug, og hann vildi tá venda aftur til spurningin.

Í mars 2004 hava vit spurt landsstýrismannin, hvørjar ætlanir eru um at bøta um umsitingina av brúkaragjøldum.

8.13.4 Bíðilisti

Tá ið vit vitjaðu økini á heysti 2003, vóru í Eysturoynni 22 pensjónistar á bíðilista fyri at fáa heimahjálp, í Vágum vóru 20 pensjónistar á bíðilista, eingin í Sandoynni. Økini føra bíðilistarnir við blýanti á einum pappíri. Ongar reglur er fyri, hvussu bíðilistin skal verða førdur. Umsøkjararnir verða bert kunnaðir munnliga um, at teir ikki hava fingið játtað heimarøkt, og at teir eru settir á bíðilista.

Vit halda ikki mannagongdina vera nógv væl umhugsaða, og hava mælt til at áseta skrivligar reglur fyri, hvussu mannagongdin skal verða. Vísandi til fyrisitingarlógina hava vit mælt til, at umsøkjarar verða kunnaðir skrivliga.

8.13.5 Stevnumið fyri Heimarøktina

Landsstýrismanninum er álagt at áseta stevnumiðini fyri Heimarøktina sambært rundskrivi "um Heimarøktina" 1. september 1997. Enn eru stevnumiðini ikki ásett.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannamálaráðið og Heimarøktin í næstum fara at umrøða spurningin.

Í mars 2004 hava vit spurt landsstýrismannin, hvat er hent í málinum.

8.13.6 Arbeiðsreglugerð

Rundskrivið "um Heimarøktina" áleggur leiðaranum at skipa fyri arbeiðsreglugerðum, ið skulu lýsa, hvussu dagliga arbeiðið í Heimarøktini skal verður lagt til rættis og útint.

Í februar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at spurningurin fór at verða tikin upp á vári 2002.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið við arbeiðsreglugerðum var farið í gongd, og fór at verða liðugt um einar 6 mánaðir.

Í mars 2004 hava vit spurt landsstýrismannin, hvat síðani er hent í málinum.

8.13.7 Ársfrágreiðing

Sambært rundskrivinum "um Heimarøktina" skal leiðarin skriva eina ársfrágreiðing. Eingin ársfrágreiðing er givin út, síðani rundskrivið kom í gildi 1. september 1997.

Í november 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at heldur eingin ársfrágreiðing fór at verða gjørd fyri 2001. Sambært landsstýrismanninum var ikki orka at gera frágreiðingar. Nógvar – meira týðandi – uppgávur lógu á láni, sum vórðu raðfestar framum ársfrágreiðingina.

Í mars 2004 hava vit spurt landsstýrismannin, hvat er hent í málinum.

8.13.8 Lønarumsiting

Lønarskipanir

Tvær lønarskipanir verða nýttar. VaktPlan-skipanin er ein forskipan, har økisskrivstovurnar skráseta tímar. Síðani savnar Meginskrivstovan skrásetingarnar og lesur tær inn í eina útgjaldsskipan, ið er á einari HP-3000 teldu í Almannamálaráðnum.

Lønarumsiting í økjunum

Vit hava kannað mannagongdirnar, og hava mælt til fleiri ábøtur:

at menna ein møguleika at skráseta samlað tímatal í VaktPlan-skipanini. - Av tí at heimahjálparar arbeiða skiftandi tíðir, og ofta fleiri smá tíðarskeið hvønn dag, er tað ikki gjørligt at nýta ráðleggingarmøguleikarnar í skipanini. Tískil er tað sera tíðarkrevjandi at skráseta tímarnar,

at taka støðu til, um sama fólkið bæði kann skráseta og kanna skrásetingarnar,

at gera skrivligar reglur fyri, hvørjar upplýsingar lønmóttakarar skulu hava hvønn mánað,

at kanna, hvørjar mannagongdir eru hóskandi og góðar, og síðani at samskipa og lýsa tær skrivliga, so øll økini umsita á skilabesta hátt.

Lønarumsiting á Meginskrivstovuni

Vit hava kannað mannagongdirnar, og hava mælt til fleiri ábøtur:

at gera skrivligar mannagongdir um setanir og lønarumsitingina,

at menna mannagongdirnar, so eftirlit verður við, at økini hava kannað og góðkent tímaskrásetingarnar,

at áseta skrivligar reglur fyri, hvussu flytingar millum skipanir skulu verða skjalprógvaðar,

at at gjøgnumganga allar lønartalvur í skipanini fyri at tryggja, at satsirnir eru rættir,

at at gera skrivligar mannagongdir fyri, hvussu satsir skulu verða broyttir, eftirkannaðir og góðkendir í skipanini,

at savna, journalisera, og gera skrivligt yvirlit yvir allar galdandi lønarásetingar, og síðani dagføra málini, so hvørt nýggjar lønarásetingar koma í gildi ella fara úr gildi,

at tryggja, at allir lønmóttakarar eru fluttir á rætt lønarstig 1. mars 1999 og 1. mars 2000,

at menna vegleiðingina fyri at avgreiða endaligu lønarútgjaldingarnar,

at gera skrivligar reglur fyri, hvussu eftirlit við lønargjaldingum skal verða skjalprógvað, váttað og varðveitt.

Øll 3 starvsfólkini, ið umsita lønir á Meginskrivstovuni, hava atgongd til at broyta satsir í gomlu lønarskipanini. Vit hava áður í grannskoðanarfrágreiðingum víst á, at funktiónsskilnaður vantar.

Í VaktPlan-skipanini eru fleiri grunddátur og parametur, ið tulka lønarsáttmálar. Vit hava mælt til at kanna viðurskiftini gjøllari og taka støðu til, um mannagongdirnar er hóskandi og tryggar.

Gjøgnumgongd av lønarmálum

Vit gjøgnumgingu 3 tilvildarliga vald lønarmál í hvørjum av teimum trimum økjunum. Í øllum málunum vóru tímaskrásetingarnar rættar, í einum máli var lønarstigið ikki rætt. Ymiskt er, hvussu tímauppgerðir verða váttaðar, helst tí eingin føst mannagongd er ásett. Vísandi til tað, sum stendur frammanfyri, hava vit mælt til at ein føst mannagongd verður ásett.

8.13.9 Serligar viðmerkingar um Vága/Norðstreymoyar øki

Vit hava mælt til:

at stemma forskotskassan av mótvegis bókhaldinum,

at stemma peningastovnskonturnar av mótvegis bókhaldinum,

at reglugerð verður gjørd fyri gávukontur, og at ásett verður, hvør hevur ábyrgdina av teimum.

8.13.10 Serligar viðmerkingar um Eldrarøktina í Sandoynni

Vit hava mælt til:

at stemma peningastovnskonturnar av mótvegis bókhaldinum,

at reglugerð verður gjørd fyri gávukontur, og at ásett verður, hvør hevur ábyrgdina av teimum.

Lán til kommunurnar

Byggikostnaðurin fyri bygningarnar í Skálavík, Skopun, og á Sandi var um 40 mió.kr. Landskassin rindaði 90%. Kommunurnar 10%. Tó varð ein eftirstøða, ið summar kommunur ikki vóru førar fyri at gjalda. Í tí sambandinum veitti landskassin lán á t.kr. 550 til kommunurnar í Sandoynni sambært Ll. nr. 52 frá 20 mai 1996 "um ymsar eykajáttanir fyri fíggjarárið 1996".

Í mars 2004 hava vit spurt landsstýrismannin, hvar lánið er skrásett, og um kommunurnar hava rindað lánið aftur.

Tryggingarviðurskifti

Bygningarnir í Skálavík, Skopun og á Sandi eru ogn hjá kommununum í Sandoynni. Sambært økisleiðaranum eru húsini/føstu ognirnar tryggjað.

Í mars 2004 spurdu vit landsstýrismannin, um ognirnar koma undir ásetingarnar í rundskrivinum 1. januar 2003 frá Fíggjarmálaráðnum "um tryggingarviðurskifti landsins".

Bóking av gjaldi fyri heimahjálp

Inntøkurnar fyri heimahjálp verða ikki inntøkuførdar á kontu undir Eldrarøktina í Sandoynni, men á kontu undir Heimarøktini, hóast stjórin á Heimarøktini í november 2000 kunnaði um, at inntøkurnar fóru at verða inntøkuførdar á røttum stað.

Í mars 2004 hava vit spurt landsstýrismannin, nær viðurskiftini koma í rættlag.

Langtíðarleiga

Í november 2003 greiddi økisleiðarin frá, at eldrarøktin í Sandoynni hevði ikki hildið ásetingarnar í játtanarskipanini um fíggjarliga langtíðarleigu. Vit hava mælt til at fáa viðurskiftini í rættlag.

8.14 Serforsorgin (GL 2002/2 07 4-11)

Vit hava í 2003 grannskoðað roknskapar- og lønarviðurskiftini á Serforsorgini, og hava í tí sambandinum vitjað bústovnar, sambýlir og Meginskrivstovuna, sum er felags skrivstova hjá leiðsluni á Serforsorgini/Heimarøktini.

Serforsorgin er stovnur undir Almanna- og Heilsumálaráðnum. Stjórin á Serforsorgini er eisini stjóri á Heimarøktini. Ein leiðari er settur á hvørjum stovni.

Í einari frágreiðing til stjóran á Serforsorgini og landsstýrismannin í mars 2004 hava vit nærri greitt frá úrslitinum av grannskoðanini, og vit hava mælt til fleiri ábøtur.

8.14.1 Roknskaparviðurskifti og onnur viðurskifti

Roknskaparreglugerð

Eftir okkara tykki eru arbeiðsuppgávurnar ikki væl greinaðar og lýstar í roknskaparreglugerðini. Í fleiri førum er ikki greitt, hvørji starvsfólk hava ábyrgdina av arbeiðsuppgávunum, og í roknskaparreglugerðini eru ikki í nóg stóran mun tikin fyrilit fyri, at roknskaparligu arbeiðsuppgávurnar hjá stovnunum eru ymiskar.

Vit hava í 2003 kannað, um roknskaparviðurskiftini eru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir, og vit hava mælt til fleiri ábøtur:

- *at* gera eina roknskaparreglugerð fyri hvønn bústovn/sambýli/verkstað sær, og at lýsa arbeiðsuppgávurnar betur,
- *at* lýsa mannagongdirnar viðvíkjandi inntøkum betur,
- *at* greiða frá um journalskipanarreglur, trygdaravrit o.t.,
- *at* stemma fíggjarstøðuna betur av og rætta fleiri feilir,
- *at* lýsa mannagongdirnar viðvíkjandi vørugoymslum hjá verkstøðum,
- *at* gjøgnumganga tryggingarviðurskifti,
- *at* halda ásetingar um fíggjarliga langtíðarleigu,
- *at* dagføra og menna ognaryvirlit í serligar EDV-skipan á Gjaldstovuni.

Roknskapar- og grannskoðanarviðurskifti hjá búfólkum í sambýlum

Í einum sambýli vóru roknskapir hjá búfólkum ikki settir upp og grannskoðaðir frá tí at stovnurin varð tikin í nýtslu í 2002. Vit hava mælt til, at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

8.14.2 Kunngerðir/rundskriv

Lógir, kunngerðir og reglugerðir viðvíkjandi búfólki í sambýlum eru ógreiðar. Almanna- og Heilsumálaráðið hevur síðani 1998 haft ætlanir um gera skipanina greiðari fyri allar partar, ikki minst fyri starvsfólkini, og at áseta neyvari reglur fyri, hvussu peningurin hjá búfólkunum skal verða umsitin.

1. juli 1998 varð Serforsorgin fyrisitingarliga flutt frá Almannastovuni til Almanna- og Heilsumálaráðið. Síðani 1. apríl 1999 hevur felags leiðsla verið fyri Serforsorgina og Heimarøktina. Í kunngerðum og rundskrivum verður tó framvegis víst til Almannastovuna sum eftirlitsmyndugleika.

Í august 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at eftir ætlan fóru kunngerðir fyri bústovnar og sambýlir at verða gjørdar um heystið 2001.

Í februar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeitt verður við at rætta kunngerðir og rundskriv, og at Almanna- og Heilsumálaráðið var í ferð við at leggja seinastu hond á kunngerðina um vardar verkstaðir og aðrar fyriskipanir, og eftir ætlan fór arbeiðið at verða liðugt heilt skjótt.

Í februar 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið væntandi fór at verða liðugt á vári 2003.

Í mars 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat eftirsíðan er hent í málinum.

8.14.3 Javnan av upphæddum til persónligan tørv o.a.

Sambært § 13, í K. nr. 64 frá 1. apríl 1993 "um upphæddir til persónligan tørv og gjald fyri vaksin, sum búgva á stovnum", javnar Almannastovan hvørt ár upphæddirnar til persónligan tørv og gjald fyri uppihald á stovnum á sama hátt, sum almannaveitingar annars verða javnførdar. Landsstýrismaðurin kunnaði í februar 2002 um, at upphæddirnar fyri 2001 og 2002 vóru javnaðar, og rundskriv varð sent Serforsorgini.

Í februar 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ætlanin var at gera eina nýggja og greiðari kunngerð.

Í mars 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat er hent í málinum.

8.14.4 Stuðul frá Happadráttargrunninum

Vit hava fleiri ferðir í grannskoðanarfrágreiðingum víst á, at tørvur er á at seta greiðar og einsháttaðar reglur fyri stuðli úr Happadráttargrunninum, tá ið grunnurin t.d. letur studning til verkstøð.

Í februar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at umhugsað verður at taka grunnin í síni heild upp til viðgerðar.

Í februar 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at orka hevur ikki verið at gera nakað við málið. Hann vísti á, at avgerð skal verða tikin um framtíðar skipanina av Happadráttargrunninum, sum landsstýrismaðurin í lógarmálum varðar av.

Í mars 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat er hent í málinum.

8.14.5 Lønarumsiting

Eftirlit og góðkenning av tímaskrásetingum

Hvør stovnur hevur "einans" ábyrgdina av at skráseta tímarnar, sum síðani verða latnir Meginskrivstovuni, sum hevur ábyrgdina av lønarútrokningum og lønarútgjaldingum.

Vit kunnaðu okkum um dagligu lønarumsitingina á stovnunum, herímillum hvussu arbeiðstíðin verður skrásett og tøppað, hvørjar útskriftir verða gjørdar, hvørjar innanhýsis eftirlitsskipanir tryggja, at allar lønir verða skrásettar rætt o.a.

Stovnarnir kanna skrásettu tímarnar ymiskt. Ongar skrivligar reglur ella vegleiðingar eru fyri, hvussu eftirlitini skulu verða skipað.

Vit hava mælt til at taka støðu til, hvørji eftirlit skulu verða við skráseting av arbeiðstíð og lønarútgjaldingum/lønarseðlum, herímillum hvussu eftirlitini skulu verða skjalprógvað.

Viðvíkjandi lønarskipanini sum heild og lønarumsitingini á Meginskrivstovuni verður vístt til okkara tilmæli frá mars 2004 um grannskoðan av Heimarøktini.

Gjøgnumgongd av lønarmálum

Vit kannaðu 15 lønarmál. Í øllum málum vóru lønarstigini røtt. Í einum máli var tímaskrásetingin ikki røtt, og í einum máli var avspákingarsaldan ikki røtt. Ymiskt er, hvussu tímauppgerðir verða váttaðar, helst tí eingin føst mannagongd er ásett. Vit hava mælt til at gera eina fasta mannagongd.

8.15 Útreiðslur viðv. føroyingum á stovni í Danmark o.a. (GL 2002/2 07 4-11)

Í seinastu frágreiðing í februar 2003 umrøddu vit grannskoðanina av útreiðslum viðvíkjandi føroyingum á stovni í Danmark o.a.

Føroyingar á stovnum í Danmark

Útreiðslurnar til føroyingar á stovnum í Danmark vóru 16,8 mió.kr. í 2001 og 19 mió.kr. í 2002. Landið hevur endurrindað hesar útreiðslur síðani 1988. Talan er eini 30 fólk, flest eldri. Lógargrundarlagið er lóg nr. 719/1987 "om udlægning af særforsorgen m.v. på Færøerne".

Sambært K. nr. 888/1986 frá "Socialministeren" kann Almannastovan senda fólk *"med vidtgående fysiske eller psykiske handicap"* á stovnar í Danmark.

Serforsorgin varð 1. juli 1998 fyrisitingarliga flutt frá Almannastovuni til Almanna- og Heilsumálaráðið. Í kunngerðum og rundskrivum verður tó framvegis víst til Almannastovuna.

Í januar 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann sum skjótast fór at heita á "Socialministeriet" um at broyta kunngerðina.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat var hent í málinum. Vit hava einki svar fingið.

Endurgjald av pensjón til føroyingar á stovnum í Danmark

Í 2001 og 2002 endurrindaði landið um 1,1 mió.kr. árliga fyri pensjónsútreiðslur. Talan er um 10 fólk, hóast umleið 30 fólk eru á stovni í Danmark. Sambært viðmerkingunum til lóg nr. 315 frá 17. mai 1995 "om sociale ydelser på Færøerne" endurrindar landskassin donskum kommunum pensjónsútreiðslur fyri føroyingar á stovni í Danmark.

Landsstýrismaðurin boðaði frá í januar 2003, at hann helt heldur ikki, at viðmerkingar til eitt danskt lógaruppskot var eitt haldgott grundarlag at játta pening á løgtingsfíggjarlógini. Hann fór tí at útvega sær neyðuga lógarheimild.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismanninum, hvat er hent í málinum. Vit hava einki svar fingið.

Sambært § 54 í lóg nr. 217 frá 16. mai 1984 "Lov om social pension" við seinni broytingum:

> *"fastsætter Socialministeren efter aftale med Færøernes landsstyre regler om afholdelse af udgifter til pension efter denne lov til personer, der på foranledning af færøske sociale myndigheder får ophold i Danmark, og om afholdelse af udgifter til pension til personer, der fra Danmark får ophold på Færøerne formidlet af danske sociale myndigheder."*

Reglurnar eru ikki ásettar.

Í januar 2003 kunnaði landsstýrismaðurin um, at samráðingar vóru farnar í gongd millum "Socialministeriet" og Almannamálaráðið um at áseta reglurnar.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismanninum, hvat er hent í málinum. Vit hava einki svar fingið.

Ferðaútreiðslur til viðskiftafólk og avvarðandi

Sambært skjali A í lóg nr. 717 frá 18. november 1987 "om tilskud til Færøernes Hjemmestyre på det sociale område" skal landskassin frá 1. januar 1988 rinda ferðaútreiðslur til føroyingar á stovni í Danmark og avvarðandi teirra.

11 fólk fingu í 2001 endurrindað ferðaútreiðslur, 71 t.kr., til og úr Danmark. Í 2002 vóru útreiðslurnar 59 t.kr. Ongar reglur eru fyri, hvussu játtanin skal verða umsitin, t.d. um skjalprógv, og hvussu oftani um árið viðskiftafólk kunnu ferðast.

Í mai 2002 mæltu vit Serforsorgini til at seta neyvari reglur.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, um reglur eru ásettar. Vit hava einki svar fingið.

Viðbót til uttanhýsis viðskiftafólk

Sambært skjali A í lóg nr. 717 frá 18. november 1987 "om tilskud til Færøernes Hjemmestyre på det sociale område" skal landskassin frá 1. januar 1988 rinda útreiðslur viðvíkjandi "klienter under ekstern forsorg".

Talan er um viðbót til foreldur, ið heima forsyrgja barni/børnum við víðfevndum likamligum ella sálarligum breki. Viðbótin verður veitt fyri eykaútreiðslur og stríð, ið stendst av brekinum. Almannastovan ger av, hvør skal hava viðbót, og gevur Serforsorgini boð um at rinda upphæddina. Í 2001 var viðbótin kr. 2.000 um mánaðin fyri hvørt barnið. Rindað varð fyri 11 børn, tilsamans 264 t.kr. Í 2002 vóru útreiðslurnar eisini 264 t.kr.

Sambært § 17 í forsorgarlógini kann hjálp verða veitt til meirútreiðslur hjá foreldrum at brekaðum børnum. Vit duga ikki at síggja, hví viðbótin skal verða rindað foreldrum at júst hesum 11 børnunum, og um henda veiting sampakkar við § 17.

Í fylgiskjølum til løgtingsfíggjarlógaruppskotið fyri 1992 vísti Almannastovan m.a. á, *"at henda játtan er ein leivd frá tíðini í donsku umsitingini, og finst hon ikki aðrastaðni."* Vit hava víst á, at eingin heimild er í almannalóggávuni at rinda hesar útreiðslur.

Í januar 2003 segði landsstýrismaðurin seg vera samdan við okkum. Hann fór tí at útvega sær neyðuga lógarheimild.

Í januar 2004 spurdu vit landsstýrismannin, hvat eftirsíðan er hent í málinum. Vit hava einki svar fingið.

8.16 Ellis- og røktarheim o.a. (GL 2004/2 07 4 – 14)

Ein stórur partur av útreiðslunum innan fyri almannamál fer til rakstur av sjálvsognarstovnum, sum hava sínar egnu roknskapir, ið verða grannskoðaðir av løggildum ella skrásettum grannskoðarum.

Játtanar og roknskapartøl (t.kr)

	Kontunr. á fíggjarlóg	Stovnar	Játtanarslag	Játtan 2002	Roknskapur 2002
1	8.21.3.07./20	Føroya Barnaheim	Rakstrarjáttan	5.823	5.578
2	8.21.6.04./20	Ellis- og røktarheim	Rakstrarjáttan	102.491	102.144
3	8.21.6.04./21	Tórshavnar Privata Vistarheim	Rakstrarjáttan	4.235	4.534
4	8.21.6.01./20	Serforsorgarstovnar (partur)	Rakstrarjáttan	10.244	9.733
	Tilsamans			**122.793**	**121.989**

Almannamálaráðið umsitur játtanina til Føroya Barnaheim. Serforsorgin/Heimarøktin umsitur játtanirnar til ellis- og røktarheim, vistarheim og ymiskar serforsorgarstovnar.

Vanliga játtanarmannagongdin er, at stovnarnir søkja um og fáa tillutað eina játtan, og hon verður vanliga rindað við ávegis mánaðargjøldum.

Vísa endaligu roknskapartølini, at útreiðslurnar hava verið lægri enn ávegisgjøldini, rinda stovnarnir munin aftur. Hava útreiðslurnar verið hægri enn ávegisgjøldini, rindar landið vanliga stovnunum munin.

Vit hava samanborið roknskapartølini í landsroknskapinum við eksternu roknskapirnar, og niðanfyri hava vit greitt frá okkara viðmerkingum.

Føroya Barnaheim

Sambært landsroknskapinum eru útreiðslurnar 622 kr. hægri enn grannskoðaði roknskapurin vísir.

Eysturoyar Ellis- og Røktarheim

Sambært landsroknskapinum eru útreiðslurnar 146 kr. lægri enn grannskoðaði roknskapurin vísir.

Norðoya Ellis- og Vistarheim

Í landsroknskapinum eru bókaðar kr. 66.676 á kontu 1180: "Endurgjald fyri lønir", sum ikki eru í grannskoðaða roknskapinum.

Tórshavnar Privata Vistarheim

Landsroknskapurin vísir kr. 5.500 minni enn grannskoðaði roknskapurin. Talan er um eina eftirbóking, ið ikki er í grannskoðaða roknskapinum.

Søla og keyp av ognum

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit, at Vistarheimið í 2000 keypti eitt grundøki (5.778 m^2) í Livulág í Tórshavn fyri 1.351 t.kr. Keypið varð fíggjað við 551 t.kr. kontant, og 800 t.kr. í láni úr Føroya Sparikassa. Sambært grannskoðanarprotokollini fyri 2001 er ætlanin at byggja nýtt vistarheim.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannamálaráðið ongan leiklut hevði í byggiætlanini. Almannamálaráðið boðaði í 2000 Vistarheiminum frá, at peningur er ikki tøkur til verkætlanina innanfyri fíggjarkarmin, landsstýrismaðurin hevur at ráða yvir.

Sambært roknskapinum 2002 hevur Vistarheimið selt heimið og jørðina við Toftavatn fyri 4 mió.kr. Keypari er Runavíkar kommuna, sum fekk 2 mió.kr. sum stuðul av játtanini 8.21.6.16. "Eldrasambýli". Bókaða virðið á ognunum í roknskapinum var kr. 2,4 mió.kr. Sostatt er ein roknskaparligur "vinningur" av søluni kr. 1,6 mió.kr.

Vistarheimið hevur í 2002 keypt eini hús í Torfinsgøtu, Tórshavn, fyri 2,6 mió.kr. Keypið er fíggjað við 2 mió.kr. kontant og 600 t.kr. í láni úr Føroya Sparikassa.

Í februar 2004 spurdu vit, um landsstýrismaðurin/aðalráðið hevur góðkent keypið. Vit hava einki svar fingið enn.

Gjaldføri

Í seinastu frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar umrøddu vit, at endaliga avrokningin av rakstrarstudninginum fyri 2001 vísti eina minninýtslu 0,9 mió.kr., sum Vistarheimið skuldi rinda aftur. Vistarheimið hevði ongan tøkan pening við árslok 2001. Øll tey seinnu mongu árini er ein partur av rakstrarstudninginum nýttur til at afturrinda ov nógv goldnan rakstrarstudning frá árinum fyri. Sostatt hevur Vistarheimið skumpað eitt gjaldførishall framman fyri sær.

Í november 2002 boðaði Landsstýrismaðurin frá, at hann hevði heitt á stjóran í Heimarøktini/ Serforsorgini um at finna út av, hvat atvoldin var til gjaldførishallið.

Grannskoðarin gjørdi eina gjaldførisfrágreiðing fyri árini 1992 – 2001. Sambært grannskoðaranum er gjaldførishallið íkomið fyri 1991, men hann hevur ikki roknskapartilfar longur aftur enn til 1990. Grannskoðarin ger vart við, at stovnurin hevur roknskapartilfar heilt aftur til byrjanina.

Sostatt er framvegis ógreitt, hvat atvoldin er til gjaldførishallið. Í februar 2004 hava vit mælt landsstýrismanninum til at finna fram til eina frágreiðing.

Gjaldførishall/minninýtsla stovnsins í fíggjarárinum 2002 var kr. 776.671. Á fundi í januar 2003 millum umboð frá Vistarheiminum, Heimarøktini/Serforsorgini og grannskoðaran varð umrøtt, at stovnurin kundi afturrinda upphæddina við peninginum, sum Vistarheimið fekk fyri heimið í Runavík.

Eingin endalig niðurstøða ella avtala varð gjørd á fundinum. Í skrivi til Almanna- og Heilsumálaráðið hevur Heimarøktin/Serforsorgin eftirsíðan víst á, at ognin í Runavík, sum upprunaliga varð goldin við peningi úr landskassanum, nú er seld Runavíkar kommunu fyri 4 mió.kr. Kommunan fekk 2 mió.kr. sum stuðul frá landskassanum til at fíggja keypið. Tí verður spurningurin settur, um Vistarheimið kann gjalda skuld til landskassan við peningi frá sølu av ognum, sum landið hevur goldið og "eigur". Í februar 2004 hava vit spurt, hvørji sjónarmið landsstýrismaðurin hevur. Vit hava einki svar fingið enn.

Vistarheimið rindaði í februar 2003 minninýtsluna í 2002 kr. 777.671 til Føroya Gjaldstovu.

8.17 Viðmerkingar

Í seinastu frágreiðing greiddu vit frá, at síðani miðskeiðis í nítiárunum hava skiftandi landsstýrismenn í almanna- og heilsumálum boðað frá, at teir hava arbeitt við nýggjari lóggávu, og at øll almannalóggáva fór at verða lagað til føroysk nútíðarviðurskifti innan fyri stutta tíð.

Undir samráðingunum við donsku stjórnina í november 1994 varð avtalað, at Landsstýrið í seinastu lagi ultimo 1995 skuldi leggja fyri tingið uppskot til løgtingslógir á øllum almanna- og heilsuøkinum.

17. mai 1995 kom í gildi "Lov om sociale ydelser på Færøerne" og "Lov om sundhedsvæsenet på Færøerne". Talan er um rammulógir, sum áleggja/heimila heimastýrinum at lóggeva á almanna- og heilsuøkinum. Sambært rammulógunum verða gomlu donsku almanna- og heilsulógirnar í gildi, til nýggjar løgtingslógir loysa tær av.

Undir samráðingunum við donsku stjórnina í november 1995 varð nýggj avtala gjørd. M.a. varð avtalað:

- *at* uppskot um nýggja pensjónslóg skuldi verða lagt fyri tingið í seinasta lagi ultimo 1995,
- *at* uppskot um nýggja forsorgar-/barnaforsorgarlóg skuldi verða lagt fyri tingið í seinasta lagi ultimo 1996,
- *at* uppskot um nýggja dagpeningalóg skuldi verða lagt fyri tingið í seinasta lagi í 1997,
- *at* uppskot um nýggja sjúkratryggingarlóg skuldi verða lagt fyri tingið í seinasta lagi ultimo 1996, og
- *at* uppskot um nýggja lóg fyri kommunulækna- og skúlalæknaskipanina skuldi verða lagt fyri tingið í seinasta lagi í 1997.

Sambært avtaluni *"bekræfter landsstyret, at der vil blive fremsat forslag um udfyldende lovgivning vedrørende social- og sundhedsområdet i henhold til vedlagte tidsplan. Det er landsstyrets ansvar at sikre gennemførelsen af denne lovgivning i Lagtinget til ikrafttrædelse senest ved udgangen af lagtingssamlingen 1996/97."*

Í avtaluni við donsku stjórnina í juni 1998 vórðu tíðarfreistirnar aftur broyttar.

Í frágreiðing frá Landsgrannskoðanini í desember 1997 varð m.a. víst á, at so at siga somu trupulleikar høvdu ár um ár verið umrøddir í frágreiðingunum. Hildið varð, at tað neyvan tænti nøkrum endamáli framhaldandi at gera djúptøkna grannskoðan og atfinningarsamar grannskoðanarfrágreiðingar, fyrr enn munandi ábøtur vórðu gjørdar.

Í frágreiðing um almannamál, sum landsstýrismaðurin legði fyri tingið til aðalorðaskiftis 16. apríl 1999, varð kunnað um, *"at Landsstýrið hevur sett sær fyri at gera nýggja lóggávu, sum skal loysa galdandi donsku forsorgarlógina og donsku barnaforsorgarlógina av, eins og kunngerðir til lóggávu og fyrisiting. Fyrireikingarnar til lóggávuna á almannaøkinum, sum Landsstýrið skjýtur upp*

fær felags heitið trivnaðarlóggávan, eru farnar í gongd, og verður forsorgarlógin og barnaforsorgarlógin eftir ætlan løgd fyri tingið í heyst." Landsstýrismaðurin kunnaði í desember 1999 um, at ætlanin var at seta alt árið 2000 av til at gera nýggja forsorgar- og barnaforsorgarlóg. Í hesum sambandi vóru eisini ætlanir um at gera greiðar reglur og neyðugar kunngerðir, sum vanta á næstan øllum forsorgarøkinum, eisini viðvíkjandi endurbúgving.

Í mai 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, *"at ætlanin er at gera nakrar justeringar, tí orka er ikki í løtuni til at fara í gongd við at gera nýggja forsorgarlóg."* Sambært viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina 2003 var ætlanin at nýta 500 t.kr. til nýggja forsorgarlóg. Sambært viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina 2004, ið datt burtur, tá val varð útskrivað 5. desember 2003, er fyrireikingararbeiðið til eina nýggja forsorgarlóg byrjað.

Í almennu viðmerkingunum til uppskotið til løgtingslóg "um uppihald á stovni o.l." boðaði landsstýrismaðurin í desember 1999 frá, at *"landsstýrismaðurin ætlar at kanna, um ein heilt nýggj skipan í staðin skuldi setast í verk viðvíkjandi gjaldi á stovni, har pensjónistarnir skuldu varðveita pensjónina, men ístaðin rinda fyri uppihaldið. Ætlanin er at leggja eitt uppskot fyri Løgtingið til støðutakan, so skipanin kann koma at virka frá ár 2001."*

Í almennu viðmerkingunum til uppskotið til løgtingslóg "um broyting í løgtingslóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima" boðaði landsstýrismaðurin í mars 2000 frá, at *"Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum ætlar at endurskoða lógina í síni heild seinni í ár, so møguligar lógarbroytingar fáa gildi frá ár 2001."*

Í sambandi við arbeiðið við "Hvítubók" á vári í 1999 segði landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, *"at føroysk løgtingslóg á sjúkrakassaøkinum verður løgd fyri Løgtingið í tingsetuni 1999-2000."* Í februar 2002 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið varð byrjað í 2000, men var steðgað upp. Ætlanin var at taka arbeiðið upp aftur í 2002 og gera lógaruppskotið liðugt.

Hvørki nýggj sjúkratryggingarlóg, forsorgarlóg, lógaruppskot um at varðveita pensjónina við uppihald á stovni ella endurskoðað lóg um ansingarsamsýning er løgd fyri tingið. Bert smáar broytingar eru framdar í forsorgarlógini, og ongar kunngerðir eru gjørdar. Uppskot til løgtingslóg um barnavernd (barnaforsorgarlóg) varð lagt fyri tingið 31. oktober 2003, men datt burtur, tá val varð útskrivað 5. desember 2003.

Í 2000 og 2001 komu í gildi ávikavist føroysk pensjónslóg og føroysk dagpeningalóg. Vit hava í frágreiðingum víst á nógv ivamál og vantandi kunngerðir. Eisini hevur Føroya Kærustovnur fleiri ferðir, seinast í skrivi 3. apríl 2003 til landsstýrismannin, m.a. gjørt vart við ta óhepnu støðu, sum enn ræður, við vantandi kunngerðum og vegleiðandi reglum hjá Almannastovuni at ganga eftir. Kærunevndin vísir eisini á, at tá ið nýggja pensjónslógin varð sett í gildi, vórðu ongar reglur gjørdar. Sami trupulleiki var viðvíkjandi dagpeningalógini. Í mongum førum vóru heldur ongar kunngerðir gjørdar fyri tær, sum vóru farnar úr gildi.

Kærunevndin broytti meginpartin av kærdu avgerðunum í 2002 viðvíkjandi umrokning og afturgjaldi av ov nógv útgoldnum pensjónum. Sambært Kærunevndini eru lógarásetingarnar sera ófullfíggjaður, og best hevði verið at endurskoða tær. *"Mangulin uppá reglur tyngir arbeiðið á Almannastovuni og arbeiðið í Kærunevndini munandi. Hetta merkist kanska serliga væl hjá Almannastovuni, tí Almannastovan av hesum í ov stóran mun má tulka seg til siðvenjur út frá ítøkiligum avgerðum hjá Kærunevndini."*

Vit hava fyrr í grannskoðanarfrágreiðingum, fyrstu ferð í 1990, víst á, at kalla ongar reglur, so sum kunngerðir, eru fyri ta meira ítøkiligu umsitingina av almannalóggávuni, heldur ikki á økjum, har landsstýrið sambært lóg hevur skyldu at gera reglur. Tað hevur m.a. fört við sær, at óvissa hevur valdað viðvíkjandi rættarstøðuni, og sostatt hevur rættartrygdin ikki verið nóg góð. Tó gjørdi Almannastovan í 1989 á fyrsta sinni vegleiðandi innanhýsis reglur á ávísum økjum, men hildið var ikki, at tær vóru nøktandi.

Í seinastu frágreiðing í februar 2003 gjørdu vit vart við, at vit hildu ein stóran vanda liggja í, at skiftandi landsstýrismenn sleppa sær undan at gera kunngerðir og loysa trupulleikar í verandi lóggávu, við ár um ár at skjóta seg inn undir, at arbeitt verður við heilt nýggjari lóggávu á økinum. Við at gera nýggjar lógir, uttan at loysa grundleggjandi trupulleikar í verandi lóggávu, verða bert nakrir trupulleikar loystir, meðan aðrir trupulleikar verða skaptir. Pensjónslógin og dagpeningalógin eru ræðandi dømi.

Í januar 2003 skrivaði landsstýrismaðurin í almannamálum: *"Undirritaði og aðrir undanfarnir landsstýrismenn hava víst á, at tað harmar okkum, at tað eru so fáar kunngerðir og leiðbeiningar gjørdar á almannaøkinum. Undirritaði ivast ikki í, at viljin til at fáa hesar reglur gjørdar hevur verið til staðar. Tað hevði munandi lætt um bæði hjá landsstýrismanninum, borgarunum, umsitingini og kærustovnum, hvørt lóggávan var nútímansgjørd, og nærri reglur vóru gjørdar á øllum økjum.*

Sum Landsgrannskoðanini ivaleyst kunnugt, so er almanna- og heilsuøkið frá 1. januar 2003 býtt sundur í tvey ráð. Vónandi fer hetta at bøta um arbeiðsbyrðuna, so betri stundir verða til hetta arbeiðið."

Landsstýrismaðurin boðaði eisini frá, at hann vildi virka fyri, í so stóran mun sum gjørligt, at fáa bøtt um viðurskiftini.

Í september 2003 helt landsstýrismaðurin, at uttan iva vóru fleiri grundir til, at arbeiðið ikki er gjørt. Millum annað eru stórar broytingar farnar fram í umsitingini á almannaøkinum, og ov lítil arbeiðsorka hevur verið til at gera allar tær kunngerðir, sum lógirnar áleggja landsstýrismanninum at gera. Landsstýrismaðurin sigur tó, at tað alla tíðina verður arbeitt við at áseta vantandi reglur og harvið bøta um rættartrygd borgarans.

Eins og í seinastu frágreiðing vilja vit gera vart við, at eftir okkara tykki er lógargrundarlagið sum heild eitt tað størsta vandamálið í umsitingini. Á fleiri málsøkjum er lógargrundarlagið ófullfíggjað. Hóast tað í nógvum lógum er álagt landsstýrismanninum at seta neyvari reglur, verða tær ikki settar.

Landsgrannskoðanin kann bert staðfesta, at í 2003 eru eingin av vantandi lógarkravdu kunngerðunum á almannaøkinum lýst.

9. HEILSU- OG ÍBÚÐARMÁL

9.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-9)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Meirnýtsla

8.20.3.04. Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 260,1 mió.kr. Meirnýtslan er 3 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum hevur Landssjúkrahúsið í 2002 m.a. havt óvæntaðar útreiðslur um 1,5 mió.kr., sum stava frá einum kærumáli um barnsburðarendurgjald fyri árið 2001.

Á eykajáttanarlógini fyri november 2002, sum varð samtykt 19. desember 2002, varð játtanin hækkað um 12,5 mió.kr., 6 mió.kr. vísandi til lønarsamráðingarnar og 6,5 mió.kr., tí lønarútreiðslurnar vórðu hægri, enn mett var. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður víst á, at orsakirnar til lønarvøksturin *"eru í høvuðsheitum broytingar í starvsaldri, óvæntaðar útreiðslur til sakarmál og lønarregulering aftur í tíðina, øktar lønarútreiðslur í sambandi við dialysuviðgerð og vanlig óvissa í sambandi við upplæring, sjúku, setanir og uppsagnir".*

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at táið ein eykajáttanarlóg verður samtykt so seint í árinum, eru útreiðslurnar longu hildnar. Sambært § 43, stk. 2, í stýrisskipanarlógini má eingin útreiðsla verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður.

8.20.3.10. Klaksvíkar Sjúkrahús (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 46,5 mió.kr. Meirnýtslan er 234 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum hevur Heimarøktin og Serforsorgin vegna sparingar skorið játtanina 77 t.kr. niður til Norðoya Røktarheim, ið hevur felagsrakstur við sjúkrahúsið.

8.20.3.15. Suðuroyar Sjúkrahús (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 32,8 mió.kr. Meirnýtslan er 402 t.kr. Farið er upp um lønarkarmin 1,060 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum hevur Heimarøktin og Serforsorgin vegna sparingar skorið játtanina 190 t.kr. niður til Suðuroyar Ellis- og Røktarheim, ið hevur felagsrakstur við sjúkrahúsið.

8.20.3.17. Eftirlønir innan heilsuverkið (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 7,9 mió.kr. Meirnýtslan er 104 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stavar meirnýtslan frá rættingum fyri roknskaparárini 2000 og 2001.

8.20.3.20. Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 80,6 mió.kr. Meirnýtslan er 1,5 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er meirnýtslan í veruleikanum 5,1 mió.kr. Ein tekniskur feilur í roknskaparskipanini við ársskiftið hevur gjørt, at rokningar fyri 3,6 mió.kr. eru farnar á skeivt fíggjarár, og eru útreiðsluførdar í 2003.

Á fíggjarlógini 2002 vóru útreiðslurnar upprunaliga settar til 60 mió.kr. Sambært landsroknskapinum vóru útreiðslurnar í 2000 70,8 mió.kr. Á seinnu eykajáttanarlógini fyri februar 2002 varð játtanin hækkað 470 t.kr. vegna ein umsitingarligan feil í upprunaligu játtanini.

Við fíggjarnevndarskjali 11. november 2002 søkti landsstýrismaðurin Fíggjarnevndina um at hækka játtanina 20 mió.kr. Samstundis var neyðugt við størri játtan til flutning og uppihald og til rakstrarútreiðslur til Sjúklingahotellið Tórshavn. Talið á sjúklingum, sum verða sendir uttanlands fyri at fáa viðgerð, er nógv økt, m.a. tí at fleiri møguleikar eru fyri at fáa serviðgerðir, sum ikki kunnu verða gjørdar í føroyska sjúkrahúsverkinum. Fíggjarnevndin samtykti 12. november 2002 at ganga umsóknini á møti.

Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin til meirnýtsluna, at ringt er at gera fíggjarætlan fyri kontuna. Ein einstøk viðgerð kann vera dýr, og rokningarnar koma ikki regluliga og ofta seint. Størsti parturin av útreiðslunum í 2002 eru gjøld til Ríkissjúkrahúsið 40,2 mió.kr., í mun til fíggjarætlanina 37 mió.kr.

Landsgrannskoðanin hevur vístá, at tá ein so stór umbøn um eykajáttan kemur so seint á árinum, eru partar av útreiðslunum, sum játtanin var ætlað til, longu hildnar. Sambært § 43, stk. 2, í stýrisskipanarlógini má eingin útreiðsla verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður.

Minninýtsla

8.22.1.01. Rentustudningur til húsabygging (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 580 t.kr. til stuðul. Minninýtslan er 94 t.kr. Sambært landsstýrismanninum eru kontur gjørdar upp og rentustudningurin afturgoldin, av tí at samansparingin hevur ikki verið nýtt sambært endamálinum við lógini. Sambært Húsalánsgrunninum hava 780 kontur fingið 3% í rentustudningi. Í 2002 var góðskrivaður rentustudningur 850 t.kr. og afturgoldin rentustudningur var 364 t.kr.

Lønarkarmur

Á høvuðskontum niðanfyri vísir roknskapurin, at farið er upp um ásetta lønarkarmin.

(t.kr.)

Konta	Navn	Lønarkarmur	Roknskapur	*Munur*
8.20.3.15.	Suðuroyar Sjúkrahús (rakstrarjáttan)	35.099	36.159	*1.060*
8.20.3.20.	Serviðgerð uttanlands	5.335	5.904	*569*

9.2 Blákrossheimið (GL 1996/2 08 4-1)

Vantandi ásetan av reglum

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2000 vístu vit á, at hóast tað í lógini var álagt landsstýrismanninum, sambært § 2, stk. 3, í Ll. nr. 89 frá 4. juni 1996 "um Sjúkrahúsverk Føroya", at seta reglur fyri, hvørjir serligir stovnar hoyra undir sjúkrahúsverkið og tess virki, so eru ongar reglur.

Landsstýrismaðurin boðaði í august 2001 frá, *"at talan er um eitt mál, sum hevur verið ein politisk diskussión í nógv ár. Almanna- og Heilsumálaráðið arbeiðir ikki í løtuni við hesum máli."*

Tá ið tað í lógini er álagt landsstýrismanninum at áseta reglur, spurdu vit aftur í desember 2001 landsstýrismannin, nær reglurnar fóru at verða gjørdar. Landsstýrismaðurin svaraði í februar 2002, at tað fór at verða tikið upp, men at enn var støða ikki tikin til, um Blákrossheimið fór at verða ein av stovnunum.

Vit vístu síðani á, at í viðmerkingunum til § 2, stk. 3, í uppskoti til løgtingslóg um Sjúkrahúsverk Føroya (Lm. nr. 104/1995) stendur m.a.:

Teir stovnar, sum í framtíðini kunnu koma at hoyra undir sjúkrahúsverkið, eru t.d. stovnar fyri rúsevnismisnýtarar og stovnar til eftirbata (rekreatión). Landsstýrið fer at áseta nærri reglur fyri hesar stovnar.

Landsstýrismaðurin boðaði í oktober 2002 frá, at hann ikki hevði havt møguleika at seta seg inn í júst hetta málið. Hann fór at taka málið sum heild upp, og fór sjálvandi at skipa fyri, at allar lógarásetingar á hansara øki fóru at verða fylgdar, og at vantandi reglugerðir fóru at verða gjørdar. Tó var ilt var siga, hvørt umsitingin megnaði at fáa arbeiðið gjørt í 2002.

Landsstýrismaðurin hevur í februar 2004 kunnað um, at einki nýtt er hent í málinum.

9.3 Heilbrigdið (GL 1996/2 08 4-1)

Viðmerkingar frá roknskapargrannskoðanini

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2000 vístu vit á, at sambært grannskoðanarprotokollini fyri 1998

- var ivasamt, um fleiri ágóðar og lønarforskot, tilsamans kr 34.595, høvdu fult virði, og at
- goldnar vóru um 70.000 kr. í koyripeningi fyri at koyra rusk, vaskiklæði, breyð og sjúklingar. Sambært grannskoðanarprotokollini varð *"verulig frásøgn eftir reglum Toll- og Skattstovunnar ikki førd, men er upplýst, at kilometurpeningurin verður goldin út sb. avlesing av kilometurteljara á bilinum."*

Í august 2001 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann hevði sent skriv til roknskapargrannskoðaran og biðið um eina frágreiðing. Í februar 2002 boðaði hann frá, at hann hevði ikki fingið svar frá roknskapargrannskoðaranum, og í oktober 2002 boðaði hann frá, at hann tíverri framvegis ikki hevði fingið svar frá roknskapargrannskoðaranum. Landsstýrismaðurin skuldi alt fyri eitt taka málið upp, og vildi tryggja sær, at málið fór at verða loyst áðrenn desember mánað 2002.

Í februar 2004 hevur landsstýrismaðurin boðað frá,

- at ymiskir ágóðar og lønarforskot stava partvíst frá forskotum, og partvíst frá einum mistaki, ið sambandi við eina lønarútgjalding. Sambært landsstýrismanninum verður peningurin hildin aftur í lønini hjá starvsfólkinum. Í sambandi við at stovnurin frá 1. januar 2003 kom undir almennu roknskaparreglurnar, arbeiðir aðalráðið við at fáa roknskaparviðurskiftini hjá Heilbrigdi endaliga uppá pláss,
- at viðvíkjandi koyripeningi er roknskapargrannskoðarin ikki førur fyri at greiða frá, hví reglurnar hjá Toll- og Skattstovu ikki verða fylgdar. Grannskoðarin kann bert staðfesta, og gera vart við tað. Landsstýrismaðurin leggur afturat, at stovnurin hevur keypt bil, soleiðis at væntandi verður eingin koyripeningur goldin í framtíðini.

Vantandi ásetan av reglum

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2000 vístu vit á, at hóast tað í lógini er álagt landsstýrismanninum at áseta reglur fyri, hvørjir serligir stovnar hoyra undir sjúkrahúsverkið og tess virki, sambært § 2, stk. 3, í Ll. nr. 89 frá 4. juni 1996 "um Sjúkrahúsverk Føroya", eru ongar reglur.

Landsstýrismaðurin boðaði í august 2001 frá, *"at talan er um eitt mál, sum hevur verið ein politisk diskussión í nógv ár. Almanna- og Heilsumálaráðið arbeiðir ikki í løtuni við hesum máli."*

Tá ið tað í lógini er álagt landsstýrismanninum at áseta reglur, spurdu vit aftur í desember 2001 landsstýrismannin, nær reglurnar fóru at verða gjørdar. Landsstýrismaðurin svaraði í februar 2002, at tað fór at verða tikið upp, men at enn var støða ikki tikin til, um Heilbrigdið fór at verða ein av stovnunum.

Vit vístu síðani á, at í viðmerkingunum til § 2, stk. 3, í uppskoti til løgtingslóg um Sjúkrahúsverk Føroya (Lm. nr. 104/1995) stendur m.a.:

> *Teir stovnar, sum í framtíðini kunnu koma at hoyra undir sjúkrahúsverkið, eru t.d. stovnar fyri rúsevnismisnýtarar og stovnar til eftirbata (rekreatión). Landsstýrið fer at áseta nærri reglur fyri hesar stovnar.*

Landsstýrismaðurin boðaði í oktober 2002 frá, at hann ikki hevði havt møguleika at seta seg inn í júst hetta málið. Hann fór at taka málið sum heild upp, og fór sjálvandi at skipa fyri, at allar lógarásetingar á hansara øki fóru at verða fylgdar, og at vantandi reglugerðir fóru at verða gjørdar. Tó var ilt at siga, hvørt umsitingin megnaði at fáa arbeiðið gjørt í 2002.

Landsstýrismaðurin hevur í februar 2004 kunnað um, at einki nýtt er hent í málinum.

9.4 Kommunulækna- og skúlalæknaskipanin (GL 2001/2 08 4-2)

Kommunulæknaskipanin

Lógargrundarlagið undir kommunulæknaskipanini er Ll. nr. 28 frá 23. apríl 1999, ið varð sett í gildi 1. juli 1999. Hóast tað í lógini smb. § 6, stk. 2, § 7, stk. 2, og § 8, stk. 2, er álagt landsstýrismanninum at áseta reglur, eru ongar reglur gjørdar.

Í august 2001 boðaði Landsstýrismaðurin frá, at eitt uppskot fór at verða tilevnað og sent til hoyringar, og at samráðingar skuldu verða partanna millum um uppskotið. Hvussu langa tíð tað fór at taka, visti landsstýrismaðurin ikki at siga.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeitt varð við lógarbroytingum, og tí hevði hann gjørt av at bíða við at áseta reglur.

Í februar 2004 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at aðalráðið er farið undir at áseta reglurnar við einari kunngerð. Aðalráðið bíðar í løtuni eftir upplýsingum frá Kommunufelag Føroya. Tá tær eru fingnar til vega, verður kunngerðin gjørd liðugt, og send avvarðandi myndugleikum og feløgum til hoyringar.

Skúlalæknaskipanin

Skúlalæknaskipanin var partur av rammuavtaluni við donsku stjórnina frá 1995, og sambært avtaluni hevði heimastýrið skyldu til at gera føroyska lóg á økinum í seinasta lagi í 1997. Sambært frágreiðing frá Almannamálaráðnum í 1999 "Lýsing og niðurstøða av málsøkinum hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum" var ætlanin at gera eina lóg, sum líktist tí donsku um "forebyggende foranstaltninger for børn og unge", og at leggja uppskot til løgtingslóg fyri Løgtingið í tingsetuni 1999-2000. Landsstýrismaðurin boðaði í august 2001 frá, at ætlanin var at leggja eitt lógaruppskot fyri tingið so skjótt sum til bar.

Lógaruppskot "um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung" varð lagt fyri tingið 4. mars 2002. Uppskotið kom ikki aftur úr nevnd, áðrenn Løgtingið fór heim undan løgtingsvalinum 30. apríl 2002. Landsstýrismaðurin boðaði í november 2002 frá, at hann hevði biðið umsitingina endurskoða lógaruppskotið.

Landsstýrismaðurin hevur í februar 2004 kunnað um, at endurskoðaða lógaruppskotið varð sent til hoyringar í januar 2003 og aftur í oktober 2003. Lógaruppskotið var ikki búgvið at leggja fyri Løgtingið, áðrenn val varð útskrivað í desember 2003. Landsstýrismaðurin hevur í januar 2004 heitt á umsitingina um at endurskoða lógaruppskotið.

Í Føroyum eru 11 læknadømi. Ein skúlalækni eigur at vera í hvørjum læknadømi. Kommunulæknarnir røkja summi av hesum størvum.

Skúlalæknin fær mánaðarløn, ávíst gjald fyri hvønn næming í 1. til 9. flokki í skúlalæknaøkinum, sum hann hevur umsjón við. Lønar- og setanarviðurskifti hava verið ásett samsvarandi galdandi skúlalæknasáttmála millum "Kommunernes Landsforening" og "Den alm. Danske Lægeforening". Gjøldini eru hækkað samsvarandi broytingum í Danmark.

Í 2000 fingu 6 kommunulæknar, ið høvdu umsjón við umleið 2.300 næmingum, útgjald úr skipanini. 6.900 næmingar vóru í 1.–9. flokki í skúlaárinum 2000/01.

Landsstýrismaðurin hevur í februar 2004 kunnað um, at skúlalæknaskipanin í løtuni virkar í Vágum, Eysturoy og Suðuroyar norðraru helvt.

Eingin føroyskur sáttmáli er gjørdur, og tí hevur Kommunulæknafelagið noktað limum sínum at taka á seg leys størv í skipanini. Teir fáu kommunulæknar, sum enn eru í skipanini, fáa tó loyvi at halda fram.

Í august 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ætlanin var at samráðast um lønar- og sáttmálaviðurskiftini, tá ið nýggja lógin varð samtykt.

Í november 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at henda støða framvegis var galdandi.

Í februar 2004 kunaði landsstýrismaðurin um, at av tí at gjørt er av at gera eina nýggja lóg, eru ongar ætlanir um at fremja samráðingar eftir galdandi skipan.

9.5 Sjúkrakassar (GL 2001/2 08 3-1)

Vantandi ásetan av reglum

Sambært § 22, stk. 2-4, í sjúkratryggingarlógini kann Landsstýrið áseta neyvari reglur um ávís viðurskifti, og sambært § 25 er álagt Landsstýrinum at áseta neyvari reglur fyri eftirliti við rindan av limagjaldi.

Í februar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeitt verður við at gera nýggja lóggávu, og eftir ætlan fór støða at verða tikin til, um slíkar reglur skuldu vera í nýggju lógini. Eftir hesum at døma vóru ongar ætlanir um at áseta reglur sambært galdandi lóg.

Í september 2002 vísti landsstýrismaðurin á, at støðan var óbroytt, og at arbeitt varð við nýggjari lóggávu.

Í februar 2004 vísti landsstýrismaðurin á eina frágreiðing frá Familju- og Heilsumálaráðnum til landsstýrismannin við uppskoti um at broyta m.a. inngjaldingarháttin fyri limagjald. Eftir svarinum at døma, verður ikki arbeitt við at áseta nakrar reglur, hóast tað er álagt landsstýrismannin sambært § 25 í verandi lóg.

Í mars 2004 kunnar landsstýrismaðurin um, hann ætlar at broyta sjúkratryggingarlógina. Ætlanin er at niðurleggja teir 11 sjúkrakassarnar, og í staðin seta á stovn ein sjúkrakassa fyri alt landið. Tað hevði millum annað gjørt, at limagjaldið og tænastan hevði verið eins um alt landið.

Harafturat verður farið undir at broyta Ll. nr. 115 frá 21. mai 1993 "um útreiðslur sjúkrakassanna til heilivág og afturbering landskassans", fyri at avmarka útreiðslurnar hjá sjúkrakassunum.

Fær hann undirtøku í Landsstýrinum at fremja broytingarnar, fer landsstýrismaðurin beinanvegin undir at tilevna nýggja sjúkratryggingarlóg í samstarvi við Meginfelag Sjúkrakassa Føroya. Bæði uppskotini skulu verða gjørd samstundis, og tey verða eftir ætlan løgd fyri Løgtingið í komandi tingsetu.

Ábyrgdar- og arbeiðsbýti

Í sjúkratryggingarlógini verður víst til Almannastovuna sum eftirlitsmyndugleika, og Almannastovan er nevnd 36 ferðir í lógini í sambandi við eftirlit, góðkenning av høvuðsviðtøkum, roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftum o.a.

Vit spurdu í oktober 2001 landsstýrismannin, hvussu ábyrgdar- og arbeiðsbýtið var millum Almannastovuna og Almannamálaráðið, og hvønn leiklut Almannastovan/almannastjórin hevði. Landsstýrismaðurin vísti í februar 2002 á, at Almannastovan hevði eftirlit við sjúkrakassunum og roknaði út studningin, meðan Almannamálaráðið hevði ræðisrættin. Vit hildu ikki svarið vera nøktandi, og hava síðani fleiri ferðir til fánýtis sett landsstýrismanninum spurningin.

Í mars 2004 kunnar landsstýrismaðurin um, at hann ætlar at broyta sjúkratryggingarlógina. Ætlanin er at flyta eftirlitsuppgávuna frá Almannastovuni til Almanna- og Heilsumálaráðið.

Eftirlit, grannskoðan o.a.

Sambært § 32 í sjúkratryggingarlógini hevur Almannastovan eftirlit við sjúkrakassunum, og sambært § 35, stk. 7, *"skal der med passende mellemrum ved Almannastovans foranstaltning foretages en indgående lokalrevision i enhver sygekasse, herunder undersøgelse af kassens regnskabsvæsen og øvrige virksomhed. Ved samme lejlighed skal der ydes kasserne regnskabsmæssig og anden vejledning. Den nærmere ordning af denne revision fastsættes af Almannastovan."*

Almannastovan grannskoðar regluliga sjúkrakassarnar, men arbeiðið verður ikki skjalprógvað, og eingin grannskoðanarfrágreiðing verður gjørd. Almannastovan hevur ikki ásett neyvari reglur fyri grannskoðanina smb. § 35, stk. 7.

Tá ið sjúkratryggingarlógin áleggur Almannastovuni at útinna grannskoðan og seta neyvar reglur, er støðan eftir okkara tykki ikki nøktandi. Vit spurdu landsstýrismannin, hvørjar ætlanir vóru um at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í februar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at *"byrjað varð at arbeiða við at gera nýggja lóg um sjúkrakassar í 2000. Arbeiðið steðgaði upp, men ætlanin er at taka arbeiðið upp aftur í hesum árinum og gera lógaruppskotið liðugt. Í hesum sambandi verður tikið stig til hetta framyvir."*

í september 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann hevði ikki ætlanir um fremja broytingar sambært verandi lóggávu, men ætlaði at nýta orkuna til nýggja lóggávu á økinum.

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2003 vístu vit á, at hóast landsstýrismaðurin er vitandi um, at ein eftirlitsstovnur á hansara øki ikki hevur sett reglur sambært § 35 í sjúkratryggingarlógini, og ikki skjalprógvar sítt arbeiði, hevur hann ongi tiltøk sett í verk.

Í februar 2004 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at eingin broyting er í málinum.

Jarðarferðarhjálpin

Sambært § 20 í sjúkratryggingarlógini skal sjúkrakassin veita jarðarferðarhjálp. Hjálpin er 1. juli 1996 sett til 3.500 kr. Sambært § 20, stk. 1, *"er jarðarferðarhjálpin 3.500 kr., ið skal regulerast hvønn 1. juli, um prístalið gevur 100 kr. meira enn seinastu regulering."*

Sambært Almannastovuni er hjálpin 1. juli 2000 broytt til kr. 3.600. Vit spurdu landsstýrismannin, hvussu komið var fram til hesa upphædd. Landsstýrismaðurin svaraði í februar 2002, at í fleiri ár var einki prístal, og tí varð upphæddin ikki javnað hesi árini.

Í september 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at tað tíverri ikki var rætt, tá ið hann í februar 2002 hevði sagt, at *"orsøkin til manglandi regulering skyldast vantandi prístal."* Landsstýrismaðurin vísti á, at sambært Meginfelag Sjúkrakassa Føroya varð jarðarferðarhjálpin prístalsviðgjørd í sama mun sum í hinum ríkispartinum, sambært § 22, stk. 1, í "Høvuðssamtykt fyri føroysku sjúkrakassarnar".

Vit spurdu síðani, um landsstýrismaðurin helt eina høvuðssamtykt hava gildi fram um eina løgtingslóg.

Í desember 2002 greiddi landsstýrismaðurin frá, at eftir at hava kannað málið neyvari, var hann komin til ta niðurstøðu, at prístalið, ið verður nevnt í sjúkratryggingarlógini, er tað føroyska prístalið. Landsstýrismaðurin hevði í tí sambandinum heitt á Hagstovu Føroya um at meta um, hvussu javningin skuldi havt verið í tíðarskeiðinum 1. juli 1998 til 1. juli 2002.

Familju- og Heilsumálaráðið sendi 10. desember 2003 út umfarsskriv um jarðarferðarhjálp, har jarðarferðarhjálpin 1. juli 1997 – 1. juli 2003 er javnað sambært brúkaraprístalinum hjá Hagstovu Føroya.

10. SJÁLVSTÝRISMÁL/LØGMÁL

10.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl (GL 2003/1 04 1-9)

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Meirnýtsla

Á ongari játtan á hesum málsøki er talan um meirnýtslu burtursæð frá Føroya Kærustovni, sum hevur eina evarska lítla meirnýtslu.

Minninýtsla

At kalla allir stovnar/høvuðskontur hava minninýtslu. Niðanfyri verður greitt frá nøkrum teirra.

10.11.1.01. Sjálvstýrisfyrisitingin (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4.939 t.kr. Minninýtslan er 700 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð grundlógarráðstevnan, sum skuldi vera í 2002, útsett til januar 2003.

10.14.2.01. Dátueftirlitið/Skrásetingareftirlitið (Rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 987 t.kr. Minninýtslan er 229 t.kr. Sambært landsstýrismanninum fór Dátueftirlitið ikki til verka beinanvegin, sum lógin um persónsupplýsingar kom í gildi 1. januar 2002. Eisini gjørdist raksturin bíligari, tí at Dátueftirlitið fekk innivist hjá Løgmálaráðnum í Tinganesi.

Lønarkarmur

Á høvuðskontum niðanfyri vísir roknskapurin, at farið er upp um ásetta lønarkarmin.

(t.kr.)

Konta	Navn	Lønarkarmur	Roknskapur	*Munur*
10.14.1.01.	Ymsar útreiðslur (rakstrarjáttan)	394	912	*518*
10.14.2.04.	Landsfólkayvirlitið (rakstrarjáttan)	408	598	*190*

Sambært landsstýrismanninum er farið upp um lønarkarmin til "ymsar útreiðslur, tí upphæddin, sum varð játtað í 2002, av misgáum ikki varð útgreinað á standardkontu 11 "Lønir v.m."

Sambært landsstýrismanninum er munurin viðvíkjandi "Landsfólkayvirlitinum" ímkomin í sambandi við, at stovnurin varð fluttur undir nýstovnaða Løgmálaráðið. Ein partur av lønarútreiðslunum átti at verið tilskrivaðar Løgmálaráðnum.

10.2 Roknskaparviðurskifti hjá kommununum (GL 1996/2 02 3-1)

Í november 2002 vístu vit á, at sambært § 47 í Ll. nr. 87/2000 "um kommunustýri" kann landsstýrismaðurin *"áseta nærri reglur um kontuskipan, fíggjarætlan, bókhald, ársroknskap, grannskoðan og avgerðir um viðmerkingar til grannskoðanina og tílíkt."* Vit spurdu, hvørjar reglur vóru galdandi, og um landsstýrismaðurin helt tær vera nøktandi.

Í februar 2003 greiddi Løgmálaráðið/Innanríkisdeildin frá, at leiðbeining viðvíkjandi uppseting av kommunalum fíggjarætlanum og roknskapum varð send kommunum seinast í nítiárunum, og er leiðbeiningin galdandi enn. Innanríkisdeildin heldur, at roknskaparskipanin er ikki nøktandi. Nakrar kommunur hava laga skipanirnar eftir egnum tørvi, og til ber ikki at samanbera roknskapir ímillum kommunur, og ímillum land og kommunur. Ein verkætlan var sett í gongd at endurskoða roknskaparverkið hjá kommununum. Við heimild í § 47 í kommunustýrislógini var ætlanin at áseta neyvari og nøktandi reglur á økinum.

Í mars 2004 hevur Innlendismálaráðið boðað frá, at arbeiðið varð ikki sett í gongd, tí val varð útskrivað. Ætlanin er at taka arbeiðið upp í næstum, tá støða er tikin til arbeiðssetningin.

10.3 Hin føroyski happadrátturin (GL 2001/2 02 1-1)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2002 vístu vit á, at seinastu 10 árini hevur nettovinningurin av Happadráttinum í miðal verið um 1,4 mió.kr. og fyrisitingarútreiðslurnar 0,9 mió.kr. Sostatt hevur árliga yvirskotið í miðal ligið um 0,5 mió.kr. Seinastu árini eru færri seðlar seldir, og m.a. tí er yvirskotið minkandi og var í 2000 einans 21 t.kr. Yvirskotið í 2001 og 2002 var ávikavist 207 t.kr. og 171 t.kr. Heldur gongdin áfram, er vandi fyri, at Happadrátturin kemur at geva undirskot.

Í februar 2002 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann hevði sett ein arbeiðsbólk at endurskoða veddingarlógina, og at evna til uppskot um framtíðar veddingarskipan.

Í februar 2003 greiddi Løgmálaráðið frá, at arbeiðið hevði ligið stilt, tí umboð Løgmálaráðsins í nevndini var farið í annað starv. Kunnað varð eisini um, at arbeiðið at endurskoða veddingarlóggávuna fór at verða tikið upp aftur á vári 2003.

Í desember 2003 greiddi Løgmálaráðið frá, at tey høvdu ætlað, at arbeiðið skuldi verið byrjað aftur um várið 2003. Av tí at ráðið hevði fingið fleiri aðrar uppgávur álagdar, var arbeiðið at endurskoða spælilóggávuna ikki tikið uppaftur. Tað verða gjørt, so skjótt orka er.

10.4 Ítróttavedding (GL 2001/2 02 1-1)

Í seinastu frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar 25. februar 2003 greiddu vit frá grannskoðan okkara av høvuðskontu 10.14.3.07. "Ítróttavedding".

Sambært § 11 í Ll. nr. 34/1999 um "Ítróttavedding v.m." skal Landsstýrið flyta peningin til Sp/f Ítróttavedding. Eftir at sett er av til fyrisiting, skal felagið sambært § 9, stk. 1, býta peningin soleiðis:

- 60% til ítróttaendamál (ÍSF),
- 20% til barna- og ungdómsendamál (FUR),
- 20% til landsstýrismannin í mentamálum at stuðla ymiskum barna- og ungdómsarbeiði.

Í frágreiðingini vístu vit á, at í nógvum førum verður hesin studningur ikki samskipaður við aðrar studningsjáttanir av sama slag. Burtursæð frá Jólamerkjagrunninum er í flestu førum talan um studningsjáttanir, ið Mentamálaráðið varðar av, og á s. 75-79 í frágreiðingini, vórðu nakrar av hesum játtanum umrøddar.

Samanumtikið var niðurstøða okkara, at á hesum eins og á øðrum málsøkjum kunnu fleiri stovnar/feløg fáa studning til somu endamál frá fleiri studningsjáttanum. Í ávísan mun er talan um fleirfaldaða málsviðgerð av somu umsóknum til sama endamál. Umsitingin av studningi er fløkt, óskipað og merkt av tvørrandi heimild at áseta greið og einsháttað krøv til málsviðgerð og útgjalding. Eftir okkara tykki er tørvur á at bøta um studningsgrundarlagið/-lóggávuna og studningsumsitingina, so at endamál og treytir o.a. verða greiðari, og fyri at sleppa undan dupultarbeiði.

Niðanfyri hava vit umrøtt viðmerkingarnar í seinastu frágreiðing og samskiftið um spurningarnar, sum vit eftirsíðan hava havt við Løgmálaráðið.

Vit hava eisini sent Mentamálaráðnum spurningarnar til kunningar og viðmerkingar.

Hví partafelag

"Finansstyrelsen flytir veddingarpeningin til Løgmálaráðið/Gjaldstovuna, sum sendir peningin víðari til Sp/f Ítróttavedding. Sp/f Ítróttavedding flytir síðani peningin, frádrigið umsitingarútreiðslur, til:

1. *Mentamálaráðið, ið játtar studning til feløg og einstaklingar,*
2. *ÍSF, ið býtir partar av peninginum út til undirliggjandi feløg,*
3. *FUR, ið býtir partar av peninginum út til undirliggjandi feløg.*

Vit ivast í, um nøkur meining er í, at studningurin fer um eitt partafelag, og m.a. verður nýttur til at fíggja umsitingina av partafelagnum."

Innlendismálaráðið heldur, at verður bara hugt eftir, hvussu mest fæst burturúr yvirskotinum peningaliga, er Innlendismálaráðið ikki ósamt við Landsgrannskoðanini. Tann mest avgerandi spurningurin er tó: hvat heldur Løgtingið um henda spurning. Innlendismálaráðið vísir á, at spurningurin, um tað fyrisitingarliga er ynskiligt ella hóskandi at hava eitt slíkt partafelag sum millumlið, og aðrir spurningar, eru sjálvsagdir at taka upp, verður veddingarlógin aftur tikin til viðgerðar.

Hví hava tveir landsstýrismenn ábyrgdina

"Eftir okkara tykki er tað lítið skilagott, at 2 landsstýrismenn/aðalráð hava ábyrgd av veddingarpengunum. Tá ið Mentamálaráðið sjálvt umsitur ein part av pengunum, og hinir partarnir fara til endamál, sum hoyra undir Mentamálaráðið, hevði tað verið greiðari, um Mentamálaráðið hevði alla ábyrgdina."

Innlendismálaráðið heldur tað ikki av løgfrøðiligum orsøkum vera hóskandi at býta málsøkið viðvíkjandi burturlutan sundur, soleiðis at ítróttavedding verður flutt til Mentamálaráðið.

Mentamálaráðið tekur undir við sjónarmiðinum hjá Landsgrannskoðanini. Sum er umsitur Løgmálaráðið eisini lógirnar um happadrátt og eydnuspøl, men Mentamálaráðið heldur, at skal nakað verða flutt til Mentamálaráðið, so eigur tað bert at verða ítróttaveddingin. Frammanundan gevur Mentamálaráðið kringvarpum loyvi til eydnuspøl sambært Kringvarpslógini.

Gjøllari reglur um roknskap og grannskoðan ikki ásettar

"Sum víst á frammanfyri, er í § 7 B í donsku veddingarlógini ásett, at "Det enkelte ressortministerium og hjemmestyrene fastsætter nærmere regler om regnskabsaflæggelse og revision med hensyn til midler, som efter §§ 6 B-6 I fordeles til private organisationer." Í Danmark hevur t.d. Undervisningsministeriet í Bek. nr. 15/1999 "om regnskabsaflæggelse for og revision af tilskud til støtte af ungdomsformål" sett krøv um m.a. fyrisitingargrannskoðan (forvaltningsrevision). Fyrisitingargrannskoðan er tann "fíggjarligi kritiski" parturin av grannskoðanini, og fevnir um metingar av, um ein stovnur/felag hevur loyst sínar uppgávur á ein sparnan og virknan hátt, og um úrslitini svara til endamál og fyritreytir fyri játtanunum.

Okkum kunnugt hevur føroyska heimastýrið ikki ásett "nærmere regler om regnskabsaflæggelse og revision," hóast tað er ásett í nevndu ríkislóg. Løgtingið setti ongar tílíkar reglur í Ll. nr. 34/1999 "um Ítróttavedding v.m.", og heldur ikki er heimilað/álagt landsstýrismanninum at áseta tílíkar reglur. Eftir okkara tykki er hetta ikki nøktandi. Tað áliggur vanliga landsstýrismanni í rímiligan mun at føra eftirlit og seta reglur. Ein landsstýrismaður hevur mótvegis Løgtinginum ábyrgdina av, at ein játtan á fíggjarlógini, eisini tær sum meginfeløg o.o. umsita, verður umsitin rætt, og at umsitingin fer fram á lógligan hátt."

Innlendismálaráðið heldur, at slíkar reglur áttu av verið gjørdar fyri Føroyar, men orkan í føroysku fyrisitingini er avmarkað, og neyðugt er politiskt at raðfesta, hvørji mál verða hildin at vera mest átrokandi.

Arbeiðsbólkur bøta um studningslóggávu og studningsumsiting

"Sum neyvari lýst í frágreiðing okkara undir Løgmansfyrisitingini "Alment um studningslóggávu og studningsumsiting", hevur løgmaður heitt á Fíggjarmálaráðið um at seta ein arbeiðsbólk við starvsfólki úr miðfyrisitingini at bøta um studningslóggávu og studningsumsiting. Vit hava mælt til, at arbeiðsbólkurin eisini fær litið upp í hendi at viðgera trupulleikarnar viðvíkjandi lóggávu og umsiting av veddingarpeninginum."

Hvørki Innlendismálaráðið ella Mentamálaráðið kenna til henda arbeiðsbólk ella hava tikið lut í hesum arbeiði.

Arbeiðsbólkur endurskoða veddingarlógina

"Løgmálaráðið hevur í februar 2003 víst á, at arbeiðsbólkurin, ið settur er at endurskoða veddingarlógina, skal gera eitt uppskot til eina føroyska landsveddingarskipan. Tað merkir sostatt, at støða eisini skal verða tikin til málið um Ítróttavedding."

Sum víst á frammanfyri, setti undanfarni landsstýrismaður ein arbeiðsbólk at endurskoða veddingaskipanina og eydnuspølini í Føroyum. Arbeiðið hevur ligið stilt í skjótt tvey ár, m.a tí at fulltrúin, sum arbeiddi við málinum, fór í annað starv, og tí landsstýrismaðurin raðfesti at nýta arbeiðsorkuna í ráðnum til annað arbeiði.

Mentamálaráðið hevur kunnað um, at tey einki kenna til henda arbeiðsbólk ella nakað ítøkiligt um ætlanirnar um eina føroyska landsveddingarskipan. Mentamálaráðið vísir eisini á, at stutt fyri at løgtingsval varð útskrivað í desember 2003 varð, eitt uppskot lagt fram um broytingar í lógini um ítróttavedding, men tað var bert ein teknisk broyting samsvarandi broytingum í donsku veddingarlógini.